FRÁGREIÐING

latin

LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

FEBRUAR 2003

1. INNGANGUR 5

2. FÍGGJARMÁL 7

2.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2001/1 04 1-8) 7
2.1.1 FÍGGJARMÁL 7
2.1.2 § 20 INNTØKUR 7
2.2 FÍGGJARLÓGARMANNAGONGD (GL 1996/1 01-1) 9
2.2.1 TILKNÝTI TIL FÍGGJARLÓG, LANDSROKNSKAP O.A. 9
2.2.2 JÁTTANARSKIPANIN 10
2.3 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI (GL 2000/1 01-9) 11
2.3.1 FRAMLØGA AV LANDSROKNSKAPINUM 11
2.3.2 ROKNSKAPARREGLUGERÐIR (GL 1997/1 01-5) 11
2.3.3 SAMSKIPAN AV ROKNSKAPARREGLUM (GL 2001/1 01-9) 11
2.3.4 OGNARYVIRLIT (GL 2001/1 01-9) 11
2.3.5 TRYGGINGARVIÐURSKIFTI (GL 2001/1 01-9) 12
2.3.6 BÚSKAPARSKIPANIR LANDSINS (GL 2001/1 01-9) 12
2.3.7 LØNARUMSITING Á GJALDSTOVUNI (GL 1998/2 03 1-10) 14
2.3.8 EDV-TRYGD Á GJALDSTOVUNI (GL 1997/2 03 1-6) 15
2.4 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (GL 2001/2 03 1-12) 15
2.5 FÍGGJARSTØÐAN 2001 16
2.5.1 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 16
2.5.2 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI O.A. 17
2.5.3 HØVUÐSTØL 18
2.5.4 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (GL 2001/3 01 2-3) 20
2.5.5 ÁOGN (GL 2001/3 01 3-6) 22
2.5.6 TØKUR PENINGUR (GL 2001/3 01 4-3) 24
2.5.7 SKULD (GL 2000/3 02 2-2) 25
2.6 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM O.A. 26
2.6.1 ROKNSKAPAR- OG TRYGDARREGLUR (GL 1996/2 04 0-2) 26
2.6.2 SYSTEMGRANNSKOÐAN O.A. (GL 1996/2 04 0-2) 27
2.6.3 STOVNSRAKSTUR (GL 2000/2 04 1-2) 28
2.6.4 KASSAEFTIRLIT (GL 2000/2 04 0-8) 28
2.6.5 EDV-SKRÁIR (GL 2000/2 04 1-2) 29
2.6.6 INNKREVJING (GL 2001/2 04 9-1) 30
2.6.7 INNFLUTNINGSGJØLD (GL 2001/2 04 5-7) 32
2.6.8 RENTUSKATTUR (GL 2000/2 04 4-2) 33
2.6.9 FRAMLEIÐSLUAVGJALD (GL 1999/2 04 6-6) 33
2.6.10 TRYGDARGRUNNURIN (GL 1998/2 09 1-2) 34

3. LØGMANSFYRISITINGIN 37

3.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2001/1 04 1-8) 37
3.2 LØGMANSSKRIVSTOVAN (GL 1998/2 02 9-2) 37
3.3 SAMSÝNING O.A. TIL LANDSSTÝRISMENN (GL 1998/2 02 9-2) 37
3.4 SENDISTOVAN Í KEYPMANNAHAVN (GL 2000/2 02 2-4) 39
3.5 ALMENT UM STUÐULSLÓGGÁVU OG STUÐULSUMSITING (GL 1998/2 02 9-2) 40

4. FISKIVINNA 41

4.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2001/1 04 1-8) 41
4.2 FISKIVEIÐIEFTIRLIT/TYRLUTÆNASTA (GL 2000/2 14 2-2) 42
4.3 LØNJAVNINGARSTOVAN (GL 2000/2 14 4-5) 43
4.4 FISKIVINNUROYNDIR (GL 2000/2 14 1-3) 46

5. VINNUMÁL O.A. 47

5.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2001/1 04 1-8) 47
5.2 ROKNSKAPARREGLUGERÐIR 48
5.3 VANTANDI STJÓRNAN AV KUNNINGARTRYGD (GL 2001/1 02 0-2) 49
5.4 BILEFTIRLIT FØROYA (GL 2000/2 16 9-5) 51
5.5 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (GL 1997/2 08 2-1) 52
5.6 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (GL 2000/2 03 9-9) 53
5.7 ENDURGJALDSGRUNNUR ALIVINNUNNAR (GL 1998/2 15 3-2) 54
5.8 TYRLUTÆNASTAN (GL 1998/2 15 3-2) 54

6. ÚTBÚGVING OG GRANSKING O.A. 57

6.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2001/1 04 1-8) 57
6.2 VANTANDI REGLUR FYRI MANNAGONGDUM Á ROKNSKAPARØKINUM 59
6.3 FÓLKASKÚLIN (GL 1996/2 10 2-1) 59
6.4 "STUÐUL TIL NÆMINGAHEIM" (GL 2000/2 10 1-2) 59
6.5 EFTIRÚTBÚGVING AV YRKISLÆRDUM (GL 2000/2 10 1-2) 59
6.6 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (GL 2001/2 10 9-5) 60
6.7 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (GL 2001/2 10 9-7) 60
6.8 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI OG FØROYA SJÓMANSSKÚLI (GL 2000/2 10 4-5) 62
6.9 FØROYA LÆRARASKÚLI (GL 2000/2 10 4-5) 62
6.10 UNDIRVÍSINGARSKYLDA HJÁ SKÚLASTJÓRUM (GL 2000/2 10 4-5) 64
6.11 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (GL 1996/2 10 4-1) 65
6.12 ALMANNA- OG HEILSUSKÚLI FØROYA (GL 1996/2 10 4-7) 65
6.13 MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY (GL 2000/2 10 3-5) 66
6.14 YRKISSKÚLAR OG AÐRIR SKÚLAR (GL 2000/2 10 3-4) 67
6.15 SKÚLABÓKAGRUNNURIN (GL 2000/2 10 6-5) 68
6.16 BÓKAMIÐSØLAN (GL 2000/2 10 6-5) 69
6.17 ÚTBÚGVINGARSTUÐUL OG -LÁN (GL 2000/2 10 9-6) 69
6.18 FØROYA LANDSBÓKASAVN (GL 1998/2 11 2-7) 71
6.19 FØROYA LANDSSKJALASAVN (GL 1998/2 11 2-7) 73
6.20 FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN (GL 1998/2 11 2-7) 74
6.21 LØGTINGSLÓG UM VIÐGERÐ AV PERSÓNSUPPLÝSINGUM 75
6.22 STUÐUL TIL MENTAN OG ÍTRÓTT (GL 2000/2 11 9-1) 75

7. OLJUMÁL O.A. 81

7.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2001/1 04 1-8) 81
7.2 UMHVØRVI (GL 1997/2 8 2-1) 81

8. ALMANNA- OG HEILSUMÁL 83

8.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2001/1 04 1-8) 83
8.2 TRIVNAÐARMÁLARÁÐIÐ (GL 2001/2 08 1-1) 87
8.3 UMSITING AV STUÐULSJÁTTANUM (GL 2000/2 07 5-1) 90
8.4 ALMANNASTOVAN (GL 2002 / 2 07 1-2) 91
8.5 ALMANNAPENSJÓNIR (GL 2001/2 07 2 -6) 96
8.6 STUÐUL TIL UMSORGANARARBEIÐI FYRI PENSJÓNISTAR (GL 2002/ 2 07 2-7) 97
8.7 ANSINGARSAMSÝNING (GL 2002/2 07 3-7) 100
8.8 FORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2002/2 07 3-4) 101
8.9 BARNAFORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2002/2 07 3-3) 104
8.10 DAGPENINGAÚTREIÐSLUR (GL 2000/2 07 3-6) 106
8.11 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (GL 2000/2 07 2-5) 111
8.12 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (GL 2001/2 07 5-2) 112
8.13 BARNAGJALD TIL EINSAMALLAR UPPIHALDARAR (GL 2002/2 07 3-8) 113
8.14 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (GL 2000/2 07 4-8) 114
8.15 HEIMARØKTIN (GL 2002/2 07 4–12) 117
8.16 SERFORSORGIN (GL 2002/2 07 4–11) 119
8.17 STUÐULSFÓLKAØKIÐ (GL 1998/2 07 4-7) 121
8.18 ÚTREIÐSLUR VIÐV. FØROYINGUM Á STOVNI Í DANMARK O.A. (GL 2002/2 07 4-11) 123
8.19 ELLIS- OG RØKTARHEIM O.A. (GL 2002/2 07 4-13) 124
8.20 BLÁKROSSHEIMIÐ (GL 1996/2 08 4-1) 125
8.21 HEILBRIGDIÐ (GL 1996/2 08 4-1) 126
8.22 KOMMUNULÆKNA- OG SKÚLALÆKNASKIPANIN (GL 2001/2 08 4-2) 127
8.23 SJÚKRAKASSAR (GL 2001/2 08 3-1) 128
8.24 VIÐMERKINGAR 130

9. SJÁLVSTÝRISMÁL/LØGMÁL 133

9.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2001/1 04 1-8) 133
9.2 SJÁLVSTÝRISFYRISITINGIN (GL 2001/2 02 1-1) 133
9.3 "HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN" 133
9.4 "ÍTRÓTTARVEDDING" (GL 2001/2 10 1-1) 133
9.5 "POLITISKT VIRKSEMI OG UPPLÝSING" (GL 2001/2 02 1-1) 140
9.6 EFTIRKANNAN AV LÓGARUPPSKOTUM OG KUNNGERÐUM (GL 1998/2 02 9-2) 141
9.7 LØGTINGSLÓG UM VIÐGERÐ AV PERSÓNSUPPLÝSINGUM (GL 2001/1 02 – 2) 142

1. INNGANGUR

Henda frágreiðing verður latin løgtingsgrannskoðarunum vísandi til § 12 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." Í lógini er ásett, at áðrenn frágreiðingin verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri landsstýrismannin til viðmerkingar, uttan so at brævaskifti áður hevur verið um tey mál, sum umrødd eru í frágreiðingini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu verða tiknar við í frágreiðingina.

Sambært lógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- *at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- *at* eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- *at* roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- *at* hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um,
- *at* roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Fyri hvørt málsøki verður í frágreiðingini víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um frávik-/meirnýtslu, og vit hava víst á, har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava eisini tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Í frágreiðingini verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini á stovnum og skipanum á hvørjum málsøki sær. Seinasta frágreiðing, ið varð latin løgtingsgrannskoðarunum, er frá februar 2002. Í frágreiðingini verður eisini víst á, í hvønn mun viðurskifti, ið tá vórðu umrødd, eru komin í rættlag.

Tórshavn, 25. februar 2003

Leivur Harryson

2. FÍGGJARMÁL

2.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2001/1 04 1-8)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

2.1.1 Fíggjarmál

3.15.1.04. Toll- og Skattstova Føroya (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 53 mió.kr. Meirnýtslan er 546 t.kr. Í sambandi við eitt rættarmál móti p/f Elektron (mvg-málið) kom ein advokatrokning 440 t.kr. í des. 2001. Sambært landsstýrismanninum kom rokningin so seint, at hann hevði ongan møguleika at fáa eykajáttan.

Farið er upp um lønarkarmin 1.476 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð virksemið víðkað í sambandi við fyrireiking av kolvetnisskattalóggávu. Harafturat tapti stovnurin eitt rættarmál, og skuldi gjalda eykaløn til 2 starvsfólk fleiri ár aftur í tíðina.

3.15.2.01. Hagstova Føroya (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5,5 mió.kr. Meirnýtslan er 182 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð prístalsverkætlanin dýrari, enn roknað varð við.

3.18.1.01. Tænastumannaeftirlønir (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 10,9 mió.kr. Meirnýtslan er 358 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fekk ein tænastumaður, ið ikki hevði nátt eftirlønaraldur, rætt til eftirløn, og ein tænastumaður fekk við dómi rætt til eftirløn fleiri ár aftur í tíðina. Eisini eru feilbókingar.

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at sera torført er at ætla nágreiniliga um útreiðslurnar í einum fíggjarári. Einki yvirlit er yvir tænastumenn, sum eru í starvi, og ymiskt er, nær teir velja at fara úr starvi. Heldur ikki kann verða lagt upp fyri, um tænastumenn fella frá, og eftirsitandi hjúnafelagi og børn sostatt fáa rætt til eftirløn.

3.18.3.01. Burðarfarloyvi (rakstrarjáttan)

Farið er uppum ásetta lønarkarmin 453 t.kr.

2.1.2 § 20 Inntøkur

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2001.

	20.52.1 Skattainntøkur (mió.kr.)	Játtanin	Roknskapur	Meir-/minni
01	Vanligur landsskattur	1.250,0	1.284,1	34,1
06	Kolvetnisskattur, persónar	-	17,4	17,4
07	Felagsskattur	100,0	129,0	29,0
10	Vinningsbýtisskattur	55,0	59,3	4,3
13	Avgjald av kapitaleftirlønum	10,0	10,1	0,1
19	Rentuskattur	42,0	47,9	5,9
25	Arvaavgjald	3,0	2,9	-0,1
	Tilsamans	**1460,0**	**1550,7**	**90,7**

Størstu frávikini eru "vanligur landsskattur" og "rentuskattur", sum eru ávikavist 34,1 og 29 mió.kr. hægri enn ætlað frammanundan. Harumframt er eitt frávik 17,4 mió.kr. viðv. "kolvetnisskattur, persónar". Av røttum áttu tær 17,4 mió.kr. at verið bókaðar undir høvuðskontu "vanligur landsskattur", tí mettu inntøkurnar vóru við á hesi høvuðskontu. Høvuðskonta 20.52.1.06 "kolvetnisskattur, persónar" var als ikki við á fíggjarlógini.

	20.52.2 Avgjøld og tollur (mió.kr.)	Játtan	Roknskapur	Meir-/minni
01	Meirvirðisgjald	890,0	836,1	-53,9
04	Tollavgjald	25,0	28,9	3,9
07	Punktgjald	175,0	159,3	-15,7
10	Lønhæddargjald	10,0	10,7	0,7
13	Brennioljugjald	65,0	63,1	-1,9
16	Framleiðsluavgjald	15,0	16,3	1,3
19	Skrásetingargjald	70,0	77,7	7,7
22	Vegskattur (vektgjald)	40,0	41,7	1,7
25	Ferðaavgjald	9,0	9,9	0,9
28	Umhvørvisavgjald á smyrjiolju	2,5	2,5	-
	Tilsamans	**1.301,5**	**1.246,2**	**-55,3**

Størstu frávikini eru "meirvirðisgjald" og "punktgjald", sum eru ávikavist 53,9 og 15,7 mió.kr. lægri enn ætlað frammanundan.

	20.52.3 Ymiskar inntøkur (mió.kr.)	Játtan	Roknskapur	Meir-/minni
01	Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992	80,8	80,8	-
10	Aðrar inntøkur	3,1	9,5	6,4
	Tilsamans	**83,9**	**90,3**	**6,4**

Á fíggjarlógini varð útlutan úr Fíggingargrunninum mett til 40 mió.kr. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina verður sagt, at Føroya Banki seinastu árini hevur inntøkuført stórar upphæddir, ið áður hava verið settar av móti tapi av skuldarum, og at í framtíðini kann ikki verða roknað við tílíkum inntøkum.

Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin hækkað til 80,8 mió.kr., tí avroknningin til landskassan frá Føroya Banka var 40,8 mió.kr. hægri, enn roknað varð við á fíggjarlógini.

	20.52.3.10 Aðrar inntøkur (t.kr.)	Játtan	Roknskapur	meir-/minni
01	Loyvisgjald	50	23	-27
02	Skeinkiloyvi, avgjald	65	140	75
04	Navnaprógv	10	15	5
05	Bøtur	185	795	610
06	Happadrátturin, avgjald	200	-	-200
07	Burturlutingargjald	1.000	819	-181
09	Løggilding av el-innleggjarum, avgjald	70	89	19
10	Avgjald av vinningi v/sølu av virðisbrøvum	1.500	3.272	1.772
11	Víddargjald	-	2.107	2.107
60	Óvanligar inntøkur	-	2.190	2.190
	Tilsamans	**3.080**	**9.450**	**6.370**

Størstu frávikini eru "óvanligar inntøkur" og "Víddargjald". Víddargjald er eitt gjald, sum oljufeløgini gjalda fyri øki, tey hava fingið tillutað. Undirkonta 60 "óvanligar inntøkur" verður nýtt til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða bókaðar aðrastaðni.

2.2 Fíggjarlógarmannagongd (GL 1996/1 01-1)

2.2.1 Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap o.a.

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava í áravís gjørt vart við, at virksemið hjá fleiri almennum stovnum/grunnum er ikki við á fíggjarlógini. Grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan eru ikki hildnar. Á s. 9-11 í frágreiðing okkara, sum varð latin løgtingsgrannskoðarunum 22. februar 2002, verður í stuttum kunnað um viðurskiftini.

Í 1998 tók løgmaður málið upp og heitti í mars 1999 á landsstýrismannin í fíggjarmálum um at seta ein arbeiðsbólk at greiða ivaspurningarnar. Arbeiðsbólkurin skuldi verða liðugur við arbeiði sítt fyri árslok 1999.

Í februar 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tað hevði ikki eydnast honum at manna arbeiðsbólkin. Í samráð við løgmann hevði landsstýrismaðurin tí gjørt av at biðja fólk í umsitingini gera arbeiðið.

Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið var ikki liðugt. Ein arbeiðs- og tíðarætlan varð gjørd, og eftir ætlan skuldi arbeiðið verða liðugt fyri summarfrítíðina 2001. Teir grunnar/stovnar, ið áttu at standa á fíggjarlógini, skuldu verða settir á fíggjarlógina fyri 2002.

Arbeiðið varð nakað seinkað, men í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti".

Niðurstøðan í álitinum er, at tað er í stríð við stýrisskipanarlógina, tá ið fleiri landsstovnar og –grunnar ikki verða tiknir við á fíggjarlóg og í landsroknskapin. Tá ið roknskapirnir hjá hesum grunnum/stovnum heldur ikki verða lagdir fyri Løgtingið, er tað eisini í stríð við stýrisskipanarlógina.

Álitið vísir á, hvussu trupulleikarnir kunnu verða loystir. Fyri flestu landsstovnar og –grunnar merkir tað, at alt virksemið verður at taka við á fíggjarlógina og í landsroknskapin. Tó er møguligt í heilt serligum førum at hava landsvirksemi uttanfyri fíggjarlógina. Í slíkum førum skal roknskapurin tó altíð verða lagdur fyri Løgtingið sambært § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini.

Í uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) vórðu niðurstøðurnar í álitinum frá Fíggjarmálaráðnum umrøddar, og Løgtingið samtykti 12. mars 2002 at heita á løgmann um at síggja til, at stýrisskipanarlógin í framtíðini verður hildin, soleiðis:

at allir stovnar/grunnar, sum skulu við á fíggjarlógina, verða tiknir við í fíggjarlógina 2003,

at allir almennir roknskapir, sum sambært § 45, stk. 4, skulu verða lagdir fyri tingið, verða lagdir fyri tingið fyri 1. juli 2002, galdandi fyri roknskapir frá fíggjarárinum 2001.

Í skrivi 6. juni 2002 spurdi Landsgrannskoðanin løgmann, hvørji stig hann hevði tikið. Í svarskrivi sínum 13. juni 2002 vísti løgmaður á, at álitið frá Fíggjarmálaráðnum varð gjøgnumgingið og umrøtt á fundi 29. november 2001 millum løgmansstjóran og aðalstjórarnar. Harafturat varð álitið lagt fram og gjøgnumgingið á landsstýrisfundi 11. desember 2001. Har varð avrátt at gera neyðugar broytingar samsvarandi álitinum. Í einum yvirliti, sum var lagt við svarskrivi løgmans, vísir løgmaður á stovnar/grunnar, sum skulu við á fíggjarlógina 2003.

Í skrivi til løgmann 15. november 2002 gjørdu vit vart við, at eingin av hesum stovnum/-grunnum vóru við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003, og at heldur eingin lógarbroyting var samtykt, sum heimilaði, at virksemið hjá ávísum stovnum/grunnum, vísandi til heilt serligar umstøður, varð hildið uttanfyri fíggjarlógina. Vit vístu á, at okkum kunnugt vórðu ikki allir roknskapir lagdir fyri tingið samsvarandi ásetingunum í stýrisskipanarlógini. Heitt varð á løgmann um at kunna seg neyvari um hesi viðurskifti.

Í skrivi 12. desember 2002 boðaði løgmaður frá, at hann als ikki helt støðuna vera nøktandi. Tað var serliga harmiligt, tá ið Fíggjarmálaráðið sjálvt longu í november 2001 hevði gjørt vart við, at tað var í stríð við stýrisskipanarlógina, at fleiri landsstovnar og grunnar ikki vóru tiknir við á fíggjarlóg og í landsroknskap. Fyri at hetta álvarsmál ikki skuldi fara aftur við borðinum, varð tað tikið upp á landsstýrisfundi í desember 2001. Har varð gjørt av, at hvør landsstýrismaður beinanvegin skuldi gjøgnumganga landsstovnar á sínum øki, gera neyðugar broytingar samsvarandi álitinum og greiða møguligar ivaspurningar í samráð við Fíggjarmálaráðið. Og tá ið løgmaður í juni 2002 skrivliga hevði mint landsstýrismenn á málið, helt hann seg hava alla grund til at halda, at teir fóru at greiða viðurskiftini uttan drál.

Við skrivinum 12. desember 2002 er eitt yvirlit yvir, hvussu arbeitt verður við at finna fram til, um landsstovnar/-grunnar skulu við á fíggjarlógina, ella hava lógarheimild at liggja uttanfyri. Arbeiðsbólkar arbeiða við heimildarspurningunum. Sambært Løgmálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum miða arbeiðsbólkarnir ímóti at fáa viðurskiftini hjá summum grunnum endaliga avgreidd í hesi tingsetuni. Viðurskiftini hjá øðrum grunnum verða eftir ætlan liðug at avgreiða á ólavsøku 2003. Løgmaður hevur tikið hesa arbeiðsætlan til eftirtektar. Tá ið hugsað verður um tey serliga truplu viðurskifti, tá ið talan er um grunnar, sum eisini arbeiðsmarknaðurin varðar av, heldur løgmaður seg hava tikið stig til at loysa hetta álvarsmál forsvarliga.

2.2.2 Játtanarskipanin

Á heysti 1999 var nógv samskifti millum Landsgrannskoðanina, umsitingina hjá Løgtinginum og Fíggjarmálaráðið um fleiri grundleggjandi ivamál við verandi játtanarskipan. Semja var um, at tað var bráðneyðugt at broyta játtanarskipanina á ávísum økjum, soleiðis at endurskoðaðar reglur kundu koma í gildi frá 2000. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum handaði síðani Fíggjarnevndini bráðfeingis endurskoðaðu reglurnar at viðgera. Fíggjarnevndin tók undir við teimum, og tær vórðu tiknar við í "dagførdu" fíggjarlógina.

Í januar 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Fíggjarmálaráðið ætlaði í 2000 enn einaferð at fara ígjøgnum skipanina, fyri at gera sítt til at fáa greiðu á ivaspurningunum, sum Landsgrannskoðanin og umsitingin hjá Løgtinginum høvdu víst á.

Í februar 2001 segði landsstýrismaðurin, at Fíggjarmálaráðið hevði ikki í 2000 gjøgnumgingið játtanarskipanina úr enda í annan, men hevði á fundi saman við løgfrøðingum hjá Løgtinginum viðgjørt, um rættari hevði verið at gjørt játtanarskipanina til lóg. Komið varð ikki til nakra niðurstøðu, og løgfrøðingarnir vóru heldur ikki á einum máli, men vístu á, at tað var upp til landsumsitingina at gera av.

Í játtanarskipanini í fíggjarlógaruppskotinum 2002 eru smærri broytingar gjørdar:

- Lønarkarmur: Eru góðar grundgevingar fyri tí, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva landsstýrismanni at fara upp um ásetta lønarkarmin.
- Lógarbundin játtan: Lønarútreiðslur kunnu ikki verða játtaðar undir hesum játtanarslag.
- Hugtakið "fíggjarlig langtíðarleiga" er neyvari greinað.

Vísandi til broytingina at lønarútreiðslur ikki kunnu verða játtaðar undir játtanarslagnum "lógarbundin játtan", hevur landsstýrismaðurin eftirsíðan víst á, at í ávísum førum koma lønir fyri á lógarbundnum játtanum. Tí eigur orðingin at verða broytt.

Fíggjarmálaráðið boðaði í januar 2002 frá, at í 2002 fór at verða arbeitt við at dagføra játtanarskipanina og loysa ivamálini, ið eftir vóru. Landsstýrismaðurin hevur í desember 2002 greitt frá, at tíðarætlanin helt ikki. Eitt forum umboðandi fíggjarfulltrúarnar í aðalráðunum arbeiðir nú við at dagføra játtanarskipanina. Miðað verður ímóti, at arbeiðið verður liðugt á vári 2003.

2.3 Roknskaparviðurskifti (GL 2000/1 01-9)

2.3.1 Framløga av landsroknskapinum

Sambært § 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini og sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan juni mánað er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár. Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2001 varð lagdur fyri Løgtingið 31. mai 2002.

Sambært § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini skulu reglurnar í stk. 1-3 eisini verða nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

2.3.2 Roknskaparreglugerðir (GL 1997/1 01-5)

Við heimild í § 3 í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." ásetti Landsstýrið neyvari reglur fyri roknskaparhaldi landsins í K. nr. 114/1996 "um roknskaparverk landsins o.a." Kunngerðin kom í gildi 1. januar 1997.

Í grannskoðanarfrágreiðingini frá desember 1997 vístu vit á, at tá ið umsitingin í Landsstýrinum var umskipað, varð neyðugt at dagføra/broyta kunngerðina, og í tí sambandinum áttu ávísar ásetingar eisini at verið endurskoðaðar. Kunngerðin er ikki broytt.

Í § 5, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 og í § 4, stk. 2, í K. nr. 114/1996 er álagt landsumsitingini og landsstovnunum at hava reglugerð fyri sínum roknskaparhaldi. Í februar 2001 sendi Fíggjarmálaráðið út rundskriv við vegleiðing til roknskaparreglugerðir. Sambært rundskrivinum skulu allar roknskaparreglugerðirnar vera góðkendar í seinasta lagi 31. desember 2001. Ikki allir stovnar hava fingið síni viðurskifti í rættlag.

Sambært punkt 1.1. í rundskrivinum, skal stovnsleiðarin lata Føroya Gjaldstovu og roknskapargrannskoðanini reglugerðina til kunningar. Gjaldstovan hevur kunnað okkum um, at tey einans hava fingið 23 reglugerðir til kunningar. Fleiri aðalráð hava ikki enn góðkent allar reglugerðir.

2.3.3 Samskipan av roknskaparreglum (GL 2001/1 01-9)

Sambært § 3, stk. 2, í K. nr. 114/1996 "um roknskaparverk landsins o.a." skulu øll uppskot til lógir, kunngerðir og rundskriv, sum viðvíkja landsins roknskaparverki, verða løgd fyri Fíggjar- og búskapardeildina, Føroya Gjaldstovu, at góðkenna.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at ásetingin ofta ikki verður fylgd. Gjaldstovan hevur vístá, at tað førir til óskil á roknskaparøkinum og er við til at bróta niður tað, sum er bygt upp.

Í rundskrivi nr. 2 frá Løgmansskrivstovuni 6. mars 2002 "um lógaruppskot o.a. at leggja fyri Løgtingið" er nú álagt, at lógaruppskot, sum viðvíkja landsins roknskaparverki, skulu verða løgd fyri Føroya Gjaldstovu at góðkenna.

2.3.4 Ognaryvirlit (GL 2001/1 01-9)

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovnunum vera eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 um roknskaparreglugerðir eru

ásetingar um, hvat sum minstakrav skal verða skrásett, og hvussu skrásett skal verða. Vit hava fleiri ferðir vístá, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Í desember 2002 hevur Fíggjarmálaráðið sent út skriv til allar stovnsleiðarar um at skráseta almennar ognir. Í skrivinum stendur, at skjøtil nú verður settur á verkætlanina at fáa skrásett ognirnar hjá landinum. Settur verður ein bólkur við umboðum frá Landsverkfrøðinginum, Sjúkrahúsverkinum og Gjaldstovuni at leggja arbeiðið til rættis. Farið verður undir skrásetingararbeiðið í mars 2003.

2.3.5 Tryggingarviðurskifti (GL 2001/1 01-9)

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 vístu vit á, at tryggingarviðurskiftini hjá almennum stovnum vóru ógreið, og at ymiskt var, hvat tryggjað varð, hvat tryggjað varð ímóti, tryggingarupphæddir o.a. Talan er um eitt mál, sum Landsgrannskoðanin hevur gjørt vart við síðani 1992. Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin fyri 1999 (Lm. nr. 62/2000) átalaði Løgtingið 24. apríl 2001, at málið hevði drigið út í næstan 10 ár.

- 6. desember 2002 varð "Rundskriv um tryggingarviðurskifti landsins" sent øllum aðalráðunum. Rundskrivið fevnir um stovnar o.o., sum koma undir játtanarsløgini rakstrarjáttan, løgujáttan og landsfyritøka. Í rundskrivinum er m.a. ásett, at tryggingar bert eiga at verða teknaðar:
- um tað er ásett í lóggávu, t.d. í ferðslulógini
- fyri starvsfólk, ið eru í arbeiðsørindum uttanlands
- um trygging er kravd í sambandi við leigu-, byggi- og arbeiðssáttmálar
- fyri fasta ogn við sjálvsábyrgd

Rundskrivið ásetir eisini, at Fíggjarmálaráðið ger heildarsáttmálar við tryggingarfeløg um tær tryggingar, sum landið fer at tekna hjá tryggingarfeløgum. Rundskrivið kom í gildi 1. januar 2003.

2.3.6 Búskaparskipanir landsins (GL 2001/1 01-9)

Egnar búskaparskipanir

Sambært roknskaparkunngerðini hava allir stovnar skyldu at nýta búskaparskipan landsins. Sambært § 4, stk. 5, kann Fíggjar- og búskapardeildin, eftir umsókn, loyva stovnum við serligum tørvi at nýta sína egnu búskaparskipan heilt ella lutvíst. Loyvið er tó treytað av, at skipanin lýkur tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri búskaparskipan landsins.

Vit hava áður vístá, at í fleiri førum verða ásetingarnar ikki hildnar, hóast talan er um stórar og umfatandi skipanir, t.d. nýggja edv-skipanin á Almannastovuni, nýggja innkrevjingarskipanin og nýggja bókhaldsskipanin hjá Trygdargrunninum og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Vantandi samskipan og stýring hava helst fört til ov nógvar "egnar búskaparskipanir", m.a. tí at stovnar ofta halda seg hava ein heilt serligan tørv. Fleiri broytingar og tillagingar verða helst gjørdar t.d. í edv-skipanunum á Almannastovuni og í innkrevjingarskipanini, uttan at Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan frammanundan fær nakað at vita.

Vit hava spurt landsstýrismannin, hvussu hann ætlar at tryggja sær, at Fíggjarmálaráðið/-Gjaldstovan fær betri tamarhald á útbygging og nýgerð av "egnum búskaparskipanum". Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 boðað frá, at Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan miða ímóti, at stórur partur av nýggju loysnunum verða tiknar við undir búskaparskipan landsins.

Í dag eru nógvar og fløktar skipanir, sum ikki hanga nóg væl saman. Fleiri stovnar/grunnar umsita uppgávur, sum helst í størri mun kundu verið samskipaðar. T.d. er eitt ótal av stovnum, grunnum, deildum o.l., sum hvør sær umsita lønir. 4 fyrisitingarligar eindir umsita dagpening

vegna sjúku og barnsburð: Lønjavningarstovan, Almannastovan, Vanlukkutryggingin og ALS. Almannastovan, ALS og Lønjavningarstovan umsita veitingar vegna vantandi arbeiðsinntøku. Almannastovan og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin umsita pensjónir, og haraftur umsita Fíggjarmálaráðið, Mentamálaráðið, Almannamálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Postverkið tænastumannapensjónir. Hóast talan er um lutfalsliga smáar eindir, nýta almennir stovnar/grunnar nógvar ymiskar edv-skipanir til at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán o.a. Tá ið uppgávurnar eru so spjaddar, er ofta torført at manna størv við fólki, sum hevur førleika og neyðugar royndir, "soðið verður ov tunt".

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at tilgongdin seinnu árini hevur effektiviserað samlaðu almennu umsitingina, t.v.s. gjørt hana bíligari og betri. Tørvur er á at endurnýggja fleiri búskaparskipanir. Fer hetta arbeiði ikki fram sum liður í eini yvirskipaðari heildarætlan, har eisini bygnaðurin verður endurskoðaður, verður peningur og starvsfólkaorka ikki nýtt á skynsaman hátt.

Hølisviðurskifti / smáar umsitingareindir

Landsumsitingin, landsstovnar og grunnar húsast ymsastaðni í landinum. Landið eigur summar bygningar, men nógv høli verða leigað. Ofta eru høli útvegað, sum ikki hóska. Tey eru eftirsíðan umbygd fyri nógvan pening, uttan tó at fáa bestu loysnina. Aðalráð og stovnar hava í summum førum samskipað eina loysn av hølistørvinum, men í nógvum førum hevur tilvildin rátt.

Fyri at ein almennur stovnur skal virka, eru ávís umsitingarlig minstukrøv. Stovnurin skal hava samskiftismøguleikar bæði innanhýsis og uttanhýsis, og tí er neyðugt at hava telefon, telefax, teldur, net, printarar, kopimaskinu, teldupostsamskifti, firewall, journalskipan o.s.fr. Stovnurin má tí hava starvsfólk, sum hevur ávísan kunnleika til at keypa, halda viðlíka, reka og menna telduskipanir, umsita net, KT-trygd o.t. Stovnurin má eisini hava starvsfólk, sum hava kunnleika til innanhýsis játtanar-, roknskapar-, journal-, starvsfólkaviðurskifti o.a.m. Smærri stovnar, sum húsast einsamallir og hava sína egnu fyrisiting, eru tí sera dýrir at umsita, og binda óneyðuga nógva starvsfólkaorku til at loysa lutfalsliga sera smáar umsitingaruppgávur.

Tá ið eindirnar eru so smáar, verða stovnarnir ofta hart raktir, tá ið starvsfólk skifta arbeiði. Tað kann hava við sær vantandi siðvenju og vantandi upplæring av nýggjum starvsfólkum, sum tí ikki verða nóg dugnalig. Nýtir ein slíkur stovnur dugnalig/yvirkvalifiserað fólk at loysa smáar/óneyðugar umsitingaruppgávur, er tað, sæð frá einum heildarsjónarmiði, uppaftur verri, tí hesi starvsfólk høvdu kunnað gjørt stóra nyttu, har veruligur tørvur er á teirra evnum og dugnaskapi.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at tað kundi verið vert at kanna, um tað ikki hevði loyst seg at savna stovnar/grunnar og fyrisitingar í størri eindir í nýmótans umsitingarbygningum, møguliga saman við kommunalum fyrisitingum, fyri at effektivisera umsitingaruppgávurnar og loysa starvsfólkaorku til tær grundleggjandi uppgávurnar.

Trygdarkrøv

Sambært løgmanni hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum ábyrgdina av, at tað almenna hevur ein yvirskipaðan kunningartøkni- og trygdarpolitikk. Stovnar og landsstýrismenn skulu tí ikki hvør í sínum lagi seta yvirskipað krøv til KT-trygd, men taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri teir karmar, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett.

Sambært løgmanni skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava eftirlit við, at krøvini verða hildin. Lúka brúkarar ikki krøvini, antin tí teir ikki gera neyðugar íløgur í útgerð/forrit, ella tí teir ikki fylgja ásettum mannagongdum, eigur Fíggjarmálaráðið at nokta teimum atgongd til búskaparskipanir landsins.

1. mars 2002 sendi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum øllum aðalráðum skriv um tey krøv innan KT-trygd og -tøkni, sum galda á hansara øki. Landsstýrismaðurin vísir til eitt skjal, har Gjaldstovan hevur greinað út tey krøv, sum galda fyri búskaparskipanir landsins. Eisini hevur landsstýrismaðurin givið Gjaldstovuni heimild at boða frá neyðugum broytingum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vísir á, at av tí at yvirskipaðu krøvini ikki eru orðað, kann Fíggjarmálaráðið ikki svarað fyri, at krøvini í skrivinum liggja innan fyri yvirskipaðu trygdarkarmarnar. Fíggjarmálaráðið hevur eitt umboð í KT-forum, sum í løtuni arbeiðir við at gera uppskot til yvirskipaðan trygdarpolitikk.

2.3.7 Lønarumsiting á Gjaldstovuni (GL 1998/2 03 1-10)

Lønarstovan á Gjaldstovuni umsitur og rindar út lønir hjá nógvum landsstovnum. Í sambandi við lønargrannskoðanina, sum vit hava gjørt á stovnunum, hava vit eisini kannað, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmála, flokking, stig o.a. Einki var at finnast at.

Góðkenning av lønargrundarkortum

Eina ferð um árið sendir lønarstovan á Gjaldstovuni øllum stovnsleiðarum lønargrundarkortini hjá starvsfólkunum at góðkenna. Stovnsleiðarin skal kanna, um samsvar er millum formligu setanarviðurskiftini og tær í lønarskipanini skrásettu upplýsingar, herímillum starvsbólkur, lønartalva, aldursviðbót og lønarbrøkur. 20 stovnsleiðarar góðkendu ikki lønargrundarkortini í 2001. Vit hava mælt Gjaldstovuni til at seta í verk eina mannagongd, sum tryggjar, at viðurskiftini verða kannað so hvørt, og at avvarðandi aðalráð verða kunnað um úrslitið.

Lønarútreiðslur stemmaðar av við Toll- og Skattstovu Føroya

Eina ferð um árið rindar Gjaldstovan Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Trygdargrunninum kravdu gjøldini. Tá stemmar Lønarstovan á Gjaldstovuni lønarútgjaldingarnar av við yvirlit frá Toll- og Skattstovu Føroya. Lønarstovan skjalprógvar hesar avstemmanir.

Nýggj lønarskipan

Í juni 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein felags lønarskipan eftir ætlan skuldi verða tikin í nýtslu um ársskiftið 2001/2002, og á vári 2004 skuldu allar almennar lønir, og aðrar gjaldingar, ið verða handfarnar sum løn, uttan undantak, verða avgreiddar um hesa skipan. Í ávísum førum kunnu egnar forskipanir verða nýttar í sambandi við t.d. útbúgvingarstuðul o.l. Uppgávan í framtíðini hjá Gjaldstovuni verður sostatt ikki at skráseta lønir; tað skulu aðalráðini/stovnarnir gera. Landsgrannskoðanin ivast í, um tað er skilagott at miðfirra lønarumsitingina, og vit hava mælt til at kanna fyrimunir og vansar við eini felags umsiting av lønum o.l. hjá øllum landsstovnum/-grunnum, og hjá sjálvsognarstovnum o.l., sum fáa stuðul ella inntøkur sambært lóg.

Landsstýrismaður kunnaði í august 2002 um, at lønarverkætlanin var nógv seinkað, m.a. tí at hon stoytti saman við, at nýggja FSL-skipanin varð tikin í nýtslu um ársskiftið 2001/02. Øll fólkini, sum byrjaðu í verkætlanini, vóru farin í onnur størv. Landsstýrismaðurin vísti á, at hóast lønarskipanin ikki er ein av teimum stóru almennu skipanunum, og hóast Gjaldstovan hevur staðið fyri størri edv-verkætlanum, so vísir hetta dømi, hvussu nógv krevst at menna nýggjar skipanir, og hvussu viðbrekin ein stovnur, sum Gjaldstovan er.

Í desember 2002 varð nýggja felags lønarskipanin so smátt tikin í nýtslu. Eftir ætlan skulu allir skrásettir løntakarar í gomlu lønarskipanini hjá Gjaldstovuni verða stovnaðir í nýggju skipanini í mars/apríl 2003. Síðani verður farið undir at leggja tær miðfirraðu EDV-lønarskipanirnar um.

2.3.8 Edv-trygd á Gjaldstovuni (GL 1997/2 03 1-6)

Í 1997 fóru Landsgrannskoðanin og Gjaldstovan, saman við serkønari grannskoðarahjálp, undir at gjøgnumganga edv-trygdina, við støði í krøvum og grannskoðanarvegleiðingum.

Í frágreiðing í juli 1998 vístu vit á, at á fleiri týðandi økjum var edv-trygdin ikki nøktandi. Mælt varð til at seta í verk tiltøk fyri at bøta um trygdina, og at seta í verk ein skjalprógvaðan trygdarpolitikk, sum skuldi verða útgreinaður og skipaður við nágreiniligum trygdarreglugerðum.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 vístu vit á, at komið var ikki á mál at seta í verk ein skjalprógvaðan trygdarpolitikk, í tann mun mælt varð til. Leiðslan á Gjaldstovuni helt trygdina á telduøkinum vera á høgum støði, og gjørdi vart við, at uppgávan varð raðfest høgt innan teir fíggjarligu karmar, stovnurin hevði.

Í 2001 gjøgnumgingu vit aftur saman við serkønari grannskoðarahjálp edv-trygdina, m.a. við støði í frágreiðingini í 1998, og í september 2001 varð ein fyribils frágreiðing latin Gjaldstovuni. Niðurstøðan var, at hóast ábøtur, var edv-trygdin ikki nóg góð samanumtikið. Henda niðurstøða er serliga grundað á ta hóttan, sum kemur frá tí opna alnetinum. Í juli 2002 varð ein endaliga frágreiðing latin landsstýrismanninum.

Landsstýrismaðurin kunnaði í september 2002 um, at Gjaldstovan hevði tikið í nýtslu eina nýggja útgávu av Oracle Applications og ein nýggjan Oracle-dátugrunn, og hevði harafturat sett í verk fleiri tiltøk, sum skuldu loysa teir vansar, sum frágreiðingin hevði peikað á.

Landsstýrismaður segði seg taka spurningin um edv-trygd í sera stórum álvara. Gjaldstovan er farin inn í eina skipaða tilgongd, og saman við serfrøðingum er hon farin undir at gera eina váðameting. Síðani er ætlanin at halda fram at greina allan edv-trygdarspurningin. Ætlanin er eisini at keypa eina nýggja edv-maskinu, so Gjaldstovan m.a. fór at verða før fyri at skilja sundur test- og framleiðsluumhvørvið.

2.4 Fíggjarmálaráðið (GL 2001/2 03 1-12)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðanina av Fíggjarmálaráðnum. Umframt høvuðskontu til rakstur av Fíggjarmálaráðnum, umsitur Fíggjarmálaráðið m.a. høvuðskontu "Landsins ognir", sum fevnir um 3 undirkontur.

Landsins ognir

Oljugoymslur

Størsta inntøkan er á undirkontu 20 "Oljugoymslur o.a." Inntøkan 1,2 mió.kr hevur verið óbroytt seinastu 25 árini. Fíggjarmálaráðið hevur greitt frá, at í fleiri umførum er avtala gjørd við oljufelag, um árliga at rinda hesa upphædd fyri at leiga og halda viðlíka oljugoymslurnar. Oljugoymslurnar, sum eru frá krígsárunum, eru ikki í so góðum standi, og oljufeløgini hava ikki áhugað at keypa tær. Fyrst í 2001 varð ein nýggj avtala gjørd, galdandi í 5 ár, har oljufelagið bant seg til at gjalda 1,2 mió.kr. um árið fyri at leiga oljugoymslurnar móti at halda tær við líka og hava tilbúgving klára.

Leiga av hangari

Inntøkurnar á undirkontu 22 "Leiga av økjum, uppsitaraavgjald o.a." stava m.a. frá leigu av hangarinum á flogvøllinum. Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í apríl 1994 umrøddu vit m.a. grunnin til flogferðslu, har vit vístu á, at størsta nýtslan úr grunninum var farin til at gera hangar, tilsamans knappar 60 mió.kr. Vit vístu eisini á, at hangarurin varð leigaður út, men tað tyktist ikki, sum nakað leigugjald varð kravt inn.

Í mai 1998 gjørdi Fíggjarmálaráðið nýggjan leigusáttmála við flogfelagið, galdandi frá 1. januar 1997, um at rinda 200 t.kr. um árið fyri at leiga hangarin. Leigugjøld fyri árini 1997 og

1998 eru goldin í 2001, og tí eru inntøkurnar á undirkontu 22 nógv hægri, enn roknað varð við á fíggjarlógini.

Árini 1990 til 1996 er eingin leiga goldin. Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at bert ein ikki dagfestur og ikki undirskrivaður leigusáttmáli var at finna. Ætlanin er at kanna viðurskiftini neyvari.

Fíggjarmálaráðið hevur avtalað við Føroya Gjaldstovu, at Gjaldstovan í framtíðini skal senda flogfelagnum rokning fyri hangarleigu.

Trygging av hangari

Í § 6 í nýggja sáttmálanum við flogfelagið um at leiga hangarin stendur, at leigarin hevur alla ábyrgd av útbúnaði og viðlíkahaldi av bygningum uttan og innan og ber kostnaðin. Í § 7 stendur, at leigarin bruna-, storm-, og vatnskaðatryggjar húsini og útbúnað.

Vit hava víst á, at Landsverkfrøðingurin av játtanini "Flogferðsla" hevur goldið trygging fyri hangarin fyri árini 1997, 1998 og 1999 tilsamans kr. 437.936.

Sambært landsstýrismanninum hevur flogfelagið í 2002 endurgoldið landskassanum tryggingargjøldini fyri árini 1998 og 1999. Flogfelagið hevur víst á, at fær felagið krav um at rinda tryggingargjaldið fyri 1997, sum er kr. 149.978, vil felagið hava eina løgfrøðiliga staðfesting av kravinum. Fíggjarmálaráðið fer at viðgera spurningin saman við Løgmálaráðnum.

Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík (løgujáttan) (GL 2002/2 03 1-13)

Í desember 2001 keypti Fíggjarmálaráðið ein handils- og virkisbygning í Klaksvík. Bygningurin skuldi hýsa kolvetnisskattadeildini og tí virksemi, sum Toll- og Skattstovan hevur í Norðoyggjum. Eisini annað alment virksemi í Norðoyggjum, m.a. hjá Almannastovuni og Bileftirlitinum, skuldi halda til í bygninginum.

Á eykajáttanarlóg fyri november 2001 vórðu játtaðar 5,8 mió.kr. til at keypa bygningin. Eisini vórðu 200 t.kr. játtaðar til útbúnað. Í desember 2001 keypti Fíggjarmálaráðið bygningin fyri 5,7 mió.kr.

Vit hava kannað skjølini í málinum. Ognarviðurskiftini eru í lagi. Sambært skeytinum, stendur bygningurin á leigugrund, og leigusáttmáli er við Klaksvíkar kommunu. Vit hava eisini kannað bókføringina. Einki var at finnast at.

2.5 Fíggjarstøðan 2001

2.5.1 Góðkenningarmannagongdir

Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini er álagt stovnsleiðarum mánaðarliga at góðkenna játtanarroknskapin mótvegis aðalráðunum.

Greinaroknskapurin

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálaráðnum. Greinaroknskapurin skal verða góðkendur í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok. Grundarlagið undir góðkenningini er greinaroknskapur og góðkenningarskjal.

Greinaroknskapurin er ein samandráttur av øllum játtanarroknskapum undir eini grein. Aðalstjórarnir skulu vegna landsstýrismannin m.a. vátta: at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, herímillum at allar peningastovnskontur, sum aðalráðini og stovnarnir undir aðalráðunum hava ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum; at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp; at samsvar er millum búskapar-

skipan landsins og egnar búskaparskipanir, og at alt er stemmað av, sum ásett í roknskaparreglugerðunum hjá aðalráðunum og stovnunum undir ráðunum.

Á góðkenningarskjalinum skulu aðalstjórarnir kunna Fíggjarmálaráðið um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningarskjølum og møguligum fylgiskjølum. Henda skipan er eisini við til at tryggja, at gjørt verður vart við møguligar feilir og munir, og at teir verða rættaðir so hvørt. Fyri fíggjarárið 2001 hava Almanna- og Heilsumálaráðið, Mentamálaráðið og Vinnumálaráðið ikki hildið hesar reglur. Í 2002 hava Mentamálaráðið og Oljumálaráðið ikki hildið reglurnar, men hava tó góðkent greinaroknskapin einstakar mánaðir.

Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapurin. Stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað. Eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, skal vera kunnað um tey á góðkenningarskjalinum.

Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningaroyðubløðum og møguligum fylgiskjølum, og skrásetir, so hvørt stovnarnir hava sent inn oyðubløðini. Talan er um 479 stovnsnummur í landsroknskapinum 2001. Góðkenningarskjøl fyri 50 stovnsnummur eru ikki send inn, og av teimum varðar Fiskimálaráðið av 36.

Á summum góðkenningarskjølum eru viðmerkingar. Sambært Gjaldstovuni eru flestu viðmerkingarnar um mál av lítlum týdningi. Í onkrum føri er talan um tíðaravmarkanarfeilir, tí Gjaldstovan og stovnar við egnari búskaparskipan nýta ymiskan uppgerðarhátt. Í góðkenningarskjølunum fyri "Innkrevjing", "Vanligur landsskattur", "Stuðul til rentuútreiðslur" og "Stuðul til dupult húsarhald" hava stovnsleiðararnir viðmerkt, at samsvar er ikki millum egnar roknskaparskipanir og landsbókhaldið.

2.5.2 Avstemman av fíggjarstøðuni o.a.

Gjaldstovan menti í 2001 eina skipan við kekklistum, ið verða fyltir út í sambandi við at mánaðarroknskapirnir verða gjørdir. Ein kekklisti er fyri roknskaparhaldið og ein fyri EDV-økið. Ábyrgdarfólk á økjunum vátta, at avstemmanir/eftirlit eru gjørd. Liggja mál óavgreidd, skal verða víst á, hvat verður gjørt fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, og nær tey eftir ætlan fara at koma í rættlag.

Áðrenn mánaðarroknskapirnir verða sendir stovnunum, gjøgnumgongur Gjaldstovan allar kekklistar og fíggjarstøður hjá stovnunum. Stovnsleiðslurnar verða gjørdar varugar við viðurskifti, ið skulu verða fingin í rættlag. Við hesi mannagongd er "ruddað upp" í nógvum gomlum munum, og skipanin við kekklistum hevur havt við sær, at nógvar feilbókingar og munir verða kannaðir og rættaðir so hvørt. Avstemmanararbeiðið í dag er miðvíst og væl skipað, og leiðslan raðfestir arbeiðið høgt. Í sambandi við gjøgnumgongdina av roknskaparpostum í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum hava vit í stóran mun bygt á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Samanumtikið er Gjaldstovan komin til ta niðurstøðu, at Gjaldstovan átti at boðið seg fram at kontera og skráseta fyri summar stovnar, sum sjálvir skráseta í búskaparskipan landsins, fyri at "dygdin" í skrásetingunum kann verða betri, og tær røttu standardroknskaparkonturnar verða brúktar. Harafturat kundi Gjaldstovan hjálpt stovnunum at stemma av millumrokningarkonturnar á fíggjarstøðunum.

Við árslok 2001 vóru fleiri fíggjarpostar, sum ikki stemmaðu. Vit hava kannað tær avstemmanir, sum vórðu gjørdar fram til november mánað í 2002 og hava staðfest, at í flestu førum eru viðurskiftini eftirsíðan rættað. Gjaldstovan vísir tó á nøkur viðurskifti, sum ikki eru komin í rættlag:

- hjá fleiri stovnum eru saldur á millumrokningarkontum, sum eiga at stemma við mánaðarskifti,
- millumrokningarkontur hjá "Stuðul til rentuútreiðslur" og "Stuðul til flutning og dupult húsarhald" hava ikki stemmað í 2002,
- ein tíðaravmarkað skuld hjá Landssjúkrahúsinum frá 2001 er framvegis ikki heilt útreiðsluførd,
- persónsskatta- og felagsskattaskipanirnar í 2002 hava ikki stemmað við landsbókhaldið. Frá 1984 til 2001 er munur ímillum hvørt skattaár. Gjaldstovan kemur til ta niðurstøðu, at avstemmanargrundarlagið er ikki nóg gott,
- millumrokningar á fíggjarstøðuni hjá Innkrevjingarskipanini hava ikki stemmað, síðani henda skipan varð sett í verk. Í landsroknskapinum á s. 335 undir "Serligar viðmerkingar til roknskapin fyri 2001" hevur Gjaldstovan víst á, at sambært Toll- og Skattstovu Føroya stemmar saldan ikki millum innkrevjingarskipanina og búskaparskipan landsins, og 31. desember 2001 vóru 9,2 mió.kr. bókaðar á millumrokningum,
- áognin á fíggjarstøðuni hjá "vinningsbýtisskattur" vísir eina kreditsaldu uml. 6,6 mió.kr.,
- ósemja er millum Fíggjarmálaráðið og Landsbanka Føroya um uppskot Landsbankans um býti av yvirskoti bankans fyri roknskaparárið 2001. Fíggjarmálaráðið hevur givið Landsbankanum boð um at rinda landskassanum uml. 11,1 mió.kr. av yvirskotinum. Landsbankin hevur rindað uml. 5,5 mió.kr. Restin av upphæddini er skrásett sum tíðaravmarkað áogn í landsroknskapinum. Fíggjarmálaráðið hevur í januar 2003 boðað frá, at tað hevur givið Gjaldstovuni boð um at rykkja eftir peninginum. Landsbankin hevur í skrivi 29. januar 2003 boðað Gjaldstovuni frá, at Landsbankin viðurkennir seg ikki at skylda peningin, tí bankin heldur, at sambært landsbankalógini hevur Fíggjarmálaráðið ikki einsamalt heimild at áseta býtið av yvirskotinum.

2.5.3 Høvuðstøl

Fleiri landsstovnar/grunnar eru ikki við í fíggjarstøðuni. Tað hevur verið ávísur ivi um, hvørjir stovnar/grunnar eru at rokna sum ogn landskassans, og hvørjir eru sjálvsognarstovnar.

Í áliti frá Fíggjarmálaráðnum "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti" frá november 2001 hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at fíggjarstøðan í landsroknskapinum eigur at fevna um eginogn/ogn og skuld hjá øllum landsstovnum/-grunnum, eisini um virksemið liggur uttanfyri fíggjarlógina og játtanarroknskapin. Roknskapirnir eiga at verða tiknir við sum fylgiskjøl til landsroknskapin.

Í fylgiskjølunum til álitið frá Fíggjarmálaráðnum verður víst á 13 landsstovnar/-grunnar, sum eiga at verða tiknir við í landsroknskapin og á fíggjarstøðuna. Fíggjarmálaráðið hevur síðani víst á, at 3 aðrir grunnar/stovnar eisini eru fevndir av niðurstøðunum í álitinum.

Fyri at kunna nærri um, hvørjir grunnar/stovnar talan er um, hava vit í talvuni niðanfyri tikið samanum høvuðstølini í fíggjarstøðuni hjá hesum 16 stovnum/grunnum. Harafturat eru 6 eksternir grunnar, sum eru við í landsroknskapinum sum fylgiskjøl, men ikki við í fíggjarstøðuni:

(mió.kr.)	Aktiv					Passiv		
	Virðis-brøv	Útlán	Áogn o.a.	Tøkur pen-ingur	Til-sam-ans	Skuld	Egin-ogn	Til-sam-ans
Eksternir grunnar:								
Vinnuframagrunnurin	-	-	1	45	46	-	41	41
Forskotsgrunnur Fiskiflotans	-	-	17	5	22	-	22	22
Endurgjaldsgrunnur Alivinnunnar	-	-	-	14	14	-	14	14
Mentanargrunnur Landsins	-	-	-	5	5	-	5	5
Granskingargrunnurin	-	-	4	-	4	5	4	9
Grunnur ætlaður brekaðum	-	-	-	1	1	-	1	1
Eksternir grunnar, tilsamans	**-**	**-**	**22**	**70**	**92**	**5**	**87**	**92**
Aðrir grunnar/stovnar:								
Føroya Realkredittstovnur	60	535	17	3	615	81	534	615
Arbeiðsloysisskipanin	285	-	3	95	383	8	375	383
Húsalánsgrunnurin	-	256	37	72	365	28	337	365
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin	194	-	34	36	264	1	263	264
Jarðargrunnurin	-	103	-	70	173	2	171	173
Landsbankin, netto	-	-	-	130	130	-	130	130
Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin	-	61	-	6	67	1	66	67
Trygdargrunnurin	-	-	-	59	59	-	59	59
Íbúðagrunnurin	-	5	13	10	28	14	14	28
Frítíðargrunnurin	-	-	-	13	13	-	13	13
Sjálvsognarstovnurin Sambýlir	-	-	9	2	11	6	5	11
Fróðskaparsetur Føroya	-	-	4	1	5	2	3	5
Grunnur f. Vakstrarhús/grønmetisfr.	-	-	-	4	4	-	4	4
Bókamiðsølan	-	-	2	2	4	3	1	4
Brandskúlin	-	-	1	-	1	-	1	1
Jólamerkjagrunnurin	-	-	-	1	1	-	1	1
Aðrir grunnar/stovnar, tilsamans	**539**	**960**	**120**	**504**	**2.123**	**146**	**1.977**	**2.123**
Grunnar/stovnar, tilsamans	**539**	**960**	**142**	**574**	**2.215**	**151**	**2.064**	**2.215**

Av talvuni sæst, at grunnarnir tilsamans hava eina eginogn 2.064 mió. Av hesum eru kr. 530 mió.kr. í virðisbrøvum og 574 mió.kr. er tøkur peningur. Útlán eru 960 mió.kr.

Á talvuni niðanfyri hava vit í 1. talraði ein samandrátt av fíggjarstøðuni við árslok 2001, soleiðis sum hon er sett upp á s. 8 og 9 í landsroknskapinum. Í 2. talraði er ein samanteljing av fíggjarstøðuni hjá omanfyri nevndu grunnum/stovnum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

(mió.kr.)	Fíggjarstøðan í landsroknskap-inum	Grunnar/stovnar, sum ikki eru við í landsroknskapinum	Tilsamans
Aktiv			
Kapitalinnskot	1.452	-	1.452
Virðisbrøv	271	539	810
Útlán	365	960	1.325
Áogn o.a.	568	142	710
Tøkur peningur	2.639	574	3.213
Aktiv, tilsamans	**5.295**	**2.215**	**7.510**
Passiv			
Skuld	5.169	151	5.320
Útjavningarkonta/eginogn	126	2.064	2.190
Passiv, tilsamans	**5.295**	**2.215**	**7.510**

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við á fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir fíggjarpostar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir postinum "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Grunnar/stovnar, sum ikki eru við í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum, hava eina "eginogn" uml. 2 mia.kr. Uml. 1 mia.kr. er tøkur peningur/virðisbrøv, og uml. 1 mia.kr. er útlán.

Umboð fyri fleiri av teimum 16 grunnunum/stovnunum, ið ikki eru við í landsroknskapinum, hava boðað frá, at tey eru ikki samd í niðurstøðunum í álitinum hjá Fíggjarmálaráðnum. Eftir teirra áskoðan eru fleiri grunnar/stovnar sjálvsognarstovnar og tí ikki ogn landskassans. Sum víst á frammanfyri arbeiða Løgmálaráðið, Fíggjarmálaráðið og ymiskir arbeiðsbólkar við at greiða ivaspurningarnar um m.a. ognarrætt og tilknýtið til landsroknskapin í framtíðini.

2.5.4 Fíggjarligur útbúnaður (GL 2001/3 01 2-3)

Kapitalogn í landsfyritøkum

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	1.451.833	1.266.788	1.196.858

Roknskaparposturin fevnir um 2 grunnar; Fíggingargrunnurin frá 1992 og Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins. Kapitalognin svarar til "eginognina" hjá hesum grunnum (t.kr.):

Fíggingargrunnurin frá 1992	1.442.000
Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins	9.833
	1.451.833

Sambært endaliga roknskapinum hjá Fíggingargrunninum er eginognin uml. 5,8 mió.kr. lægri, enn roknað varð við í landsroknskapinum.

Til 1998 var samsvar millum "eginognina" í ársroknskapinum hjá Postverki Føroya og í landsroknskapinum. Í 1999 varð Postverkið tikið við á fíggjarlógina sum landsfyritøka. Í landsroknskapinum verða íløgur útreiðsluførdar, men í roknskapinum hjá Postverki Føroya verða tær aktiveraðar og avskrivaðar yvir nøkur ár. Tí er munur í millum hesar báðar roknskapir. Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins er skrásettur sum "internur grunnur". Í landsroknskapinum 2001 eru *"aktiv og passiv hjá postverkinum ikki tikin við í landsins fíggjarstøðu.*

"Eginpeningurin" hjá postverkinum er tikin við undir kapitalinnskot." Sambært landsstýrismanninum fer Gjaldstovan at taka stig til, at eisini fíggjarstøðan hjá Postverkinum verður tikin við í landsroknskapin 2002.

Vit hava áður víst á, at tað er torført at síggja, um kapitalognin hjá øllum landsfyritøkum er við í roknskaparpostinum "kapitalinnskot í landsfyritøkum". Eingin allýsing finst av hugtakinum "landsfyritøka", og at júst hesir báðir grunnar eru við í roknskaparpostinum, er helst ein søgulig tilvild. Fíggingargrunnurin frá 1992 verður roknaður sum vinnurekandi grunnur, tó so at landið eigur grunnin.

Í uppskotum til samtyktar hevur Løgtingið í nógv ár mælt landsstýrismanninum til at fáa greiðu á hesum roknskaparposti.

Landsstýrismaðurin vísir á, at við støði í álitinum frá Fíggjarmálaráðnum frá november 2001 um landsstovnar og –grunnar, verður arbeitt við at greiða ivaspurningarnar um framtíðar tilknýti hjá ymiskum landsstovnum/-grunnum til landsroknskapin. Ætlandi verða ivamálini greidd til landsroknskapin 2003.

Virðisbrøv

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	271.701	221.701	201.201

Vøksturin frá 1999 til 2000 stavar frá partapeningi, sum Landsstýrið setti í p/f Vágatunnilin 20 mió.kr. og p/f Føroya Lívstrygging 500 t.kr. Vøksturin frá 2000 til 2001 stavar frá partapeningi, sum Landsstýrið setti í p/f Vágatunnilin 20 mió.kr. og í p/f Norðoyatunnilin 30 mió.kr.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum

Skrásett í landsroknskapinum (t.kr.)	**2001** Upphædd	**2000** Upphædd	**1999** Upphædd	Til skjals á Gjaldstovuni	Ikki til skjals
P/f Skipafelagið Føroyar	70	70	70	x	
P/f Føroya Banki	1	1	1	x	
P/f Flogsamband	1.511	1.511	1.511	x	
P/f Fiskaaling	175	175	175	x	
P/f Tvøroyrar Flakavirki	820	820	820	x	
Sp/f Vedding	20	20	20		x
L/f Skopunar Útróðrarfelag	50	50	50		x
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200	x	
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	0	x	
P/f Smyril Line	2.760	2.760	2.760	x	
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	x	
P/f Atlantic Airways	75.000	75.000	75.000	x	
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	x	
P/f Norðoyatunnilin	30.000	0	0	x	
P/f Vágatunnilin	80.300	60.300	40.300	x	
Partabrøv tilsamans	**271.701**	**221.701**	**201.201**		

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey eru keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera tó ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum, og gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum.

Landið eigur allan partapeningin í 5 feløgum: p/f Atlantic Airways, p/f Føroya Tele, p/f Vágatunnilin, p/f Norðoya tunnilin og p/f Fiskaaling. Ultimo 2001 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 175 t.kr. í partabrøvum í p/f Fiskaaling. Sambært roknskapinum hjá p/f Fiskaaling er partapeningurin í felagnum 500 t.kr. Vit hava fleiri ferðir heitt á Vinnumálaráðið um at greina hesi viðurskifti.

Av teimum feløgum, landið hevur sett partapening í, er tað bert p/f Føroya Tele, sum hevur goldið út vinningsbýti. Fyri roknskaparárið 2001 rindaði p/f Føroya Tele fyri fyrstu ferð vinningsbýti, 3 mió.kr.

Rentu- og avdráttarfrí lán

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	178.411	186.182	172.463

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, til sjálvsognarstovnar og studningslán sambært Ll. nr. 34/1993, Ll. nr. 48/1964, Ll. nr. 42/1976 og Ll. nr. 26/1997.

Minkingin frá 2000 til 2001 stavar frá niðurskrivingum av stuðulslánum til útróðrarflotan og umlegging av lánum til fjarfiskiflotan.

Útlán

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Áogn landskassans	448.800	471.202	584.407
Sett av	-262.060	-279.272	-378.069
Sambært roknskapinum	186.740	191.930	206.338

Talan er m.a. um veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk lán innan vinnumál, serlán, kurslán og stuðulslán, umframt likviditetslán, sum verða umsitin av Realinum.

Sett er av ímóti tapi, tí er virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum sett til kr. 0. Í sambandi við at hesi lán í 1999 vórðu løgd inn í eina nýggja lánsskipan, kannaði Gjaldstovan tey av nýggjum og avskrivaði uml. 400 mió.kr. Talan er um lán, har fyrr er sett av ímóti tapi. Lánini eru avskrivað, tí tað er endaliga staðfest, at ikki er gjørligt at heinta peningin inn, m.a. tí feløg eru strikað.

2.5.5 Áogn (GL 2001/3 01 3-6)

Goymslur

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	24.564	27.312	7.253

Talan er um vørugoymsluna hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Apoteksverkinum og Strandfaraskipum Landsins.

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Áogn landskassans	345.097	320.467	293.318
Sett av	-108.017	-155.410	-120.285
Sambært roknskapinum	237.080	165.057	173.033

Seinastu mongu árini hava vit víst á, at samsvar er ikki millum skattadebitorarnar hjá persónum og feløgum sambært skattaskipanunum og høvuðsbókhaldið/landsroknskapin. Talan er um munir, sum ikki eru støðugir.

Vit hava í juli 2002 spurt landsstýrismannin, hvat er hent í málinum, og nær viðurskiftini fara at koma í rættlag. Niðanfyri er tikið samanum skrivliga samskiftið og fundirnar við Toll- og Skattstovu Føroya og Gjaldstovuna um málið.

Partafelagsskattur

Í frágreiðing í desember 2001 frá Toll- og Skattstovu Føroya til Fíggjarmálaráðið varð kunnað um, at partafelagsskatturin stemmaði ikki, og at ætlanin var at leggja partafelagsskattin í eina dátabasutabell, so lættari fór at verða at telja upp og stemma av. Í skrivi í september 2002 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið at leggja partafelagsskattin um til eina dátabasutabell var ikki liðugt enn, tí orka hevði ikki verið at gjøgnumganga skattaskránna og gera møguligar broytingar í skránni. Tá ið arbeiðið at gera innkrevjingarskipanina varð liðugt, fór meira orka at verða sett inn á hesa uppgávuna. Toll- og Skattstovan miðaði ímóti, at arbeiðið at stemma av partafelagsskattin skuldi verða liðugt seint í mars 2003, men arbeiðið er seinkað.

Persónsskattur

Landsstýrismaðurin vísti í oktober 2001 á, at Toll- og Skattstova Føroya síðani mars 2001 hevði nýtt nógva orku til at skapa eitt munagott avstemmanargrundarlag.
Í september 2002 boðaði Landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstovan var komin á mál við arbeiðinum at stemma av persónsskattaskipanina. Smærri munir vóru rættaðir, og Toll- og Skattstovan hevði staðfest, at partsskattaskráirnar í persónsskattaskipanini stemma sín-ámillum, og at tær stemmaðu mótvegis "GB-skipanini", sum er millumliðið millum skatta-skipanirnar og fíggjarstýringarskipan landsins (FSL). Tí heldur Toll- og Skattstovan GB-skipanina vera eitt haldgott grundarlag at nýta til at stemma persónsskattin av mótvegis FSL.
Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hevur Gjaldstovan aftur, hvønn mánað í 2002, víst á, at skattadebitorarnir sambært teimum listum, sum Gjaldstovan fær frá Elektron, stemma ikki við høvuðsbókhaldið/landsroknskapin, at munir eru øll árini frá 1984 til 2001, og at grundarlagið fyri at stemma av framvegis ikki er nóg gott. Toll- og Skattstovan hevur víst á, at hon kennist ikki við teir listar, sum Gjaldstovan nýtir at stemma av við, og hon fer at kanna, um Gjaldstovan nýtir røttu listarnar. Somuleiðis fer Toll- og Skattstovan, við hjálp frá Elektron, at stemma av og lýsa sambandi millum "GB-skipanina" og FSL fyri at greina, hví skatta-bókhaldið ikki stemmar mótvegis FSL. Hetta arbeiði fer væntandi at byrja í mars 2003.
Gjaldstovan hevur aftur í 2002 víst á trupulleikan, at skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki kunnu handfara tíðaravmarkanir. Trupult er at fáa ein rættan landsroknskap, tá ið inntøkurnar verða tiknar við í landsroknskapin alt eftir, hvussu "a jour" Toll- og Skattstovan er við bókingum. Í januar 2003 hevur Toll- og Skattstova Føroya boðað frá, at ongar ætlanir eru um tøkniligar broytingar av bókhaldsskipanini, men dentur verður lagdur á at vera "a jour" við árslok.

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	306.543	208.988	128.893

Talan er um skuldarar hjá Landsverkfrøðinginum, Strandferðsluni, sjúkrahúsum og øðrum stovnum, sum lata vørur og tænastur. "Aðrir skuldarar" er m.a. renta av inniogn í Landsbankanum, ikki avroknað yvirskot (føroyski parturin) frá danska Tjóðbankanum, endalig upp-

gerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur ella endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað, fyri at ogn og skuld skulu geva eina rætta mynd.
Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya, kommunur o.a.

2.5.6 Tøkur peningur (GL 2001/3 01 4-3)

Inniogn í Landsbankanum

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	2.320.902	1.789.619	1.489.899

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 6 í Ll. nr. 57/1978 "um Landsbanka Føroya" er Landsbankin bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu eisini nýta bankan sum bankasamband. Sambært § 2 í Ll. nr. 31/1995 "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum", skulu innlánini í Landsbankanum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan. Vit hava fleiri ferðir áður vístá, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" ikki eru nóg greitt lýst, hvørki í lógunum ella í viðmerkingunum.
Vit hava eisini gjørt vart við, at fleiri landsstovnar/-grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, høvdu fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki vóru við í landsroknskapinum. Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hevur Gjaldstovan eisini vístá, at landsstovnar/-fyritøkur (t.d. Útvarp Føroya, Apoteksgrunnurin og Rúsdrekkasøla Landsins) hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Gjaldstovan hevur reist spurningin, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum. Gjaldstovan hevur eisini vístá, at Strandfaraskip Landsins hevur yvirtrekk á sínum peningastovnskontum, samstundis sum landskassin hevur nógvan likviditet.
Tá ið uppskotið til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 1999 (Lm. nr. 62/2000) varð samtykt 24. apríl 2001, vísti Løgtingið enn einaferð á, at útrokningin av bruttotjóðarúrtøkuni byggir á eitt leyst grundarlag, og at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" í lógini "um Landsbankan" og í lógini "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" eru ógreið. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu aftur landsstýrismanninum til at fáa greiðu á hesum viðurskiftum.
Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) sum Løgtingið samtykti 12. mars 2002, varð aftur vístá hesi viðurskifti.
Fíggjarmálaráðið boðaði í januar og september 2002 frá, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" fóru at verða lýst neyvari í uppskoti til broyting í lóg "um Landsbankan", sum fór at verða lagt fyri Løgtingið á heysti 2002. Fíggjarmálastýrið hevur eftirsíðan boðað frá, at arbeitt verður við at seta ein óheftan arbeiðsbólk at endurskoða alla lóggávuna viðvíkjandi Landsbankanum og koma við tilmæli um framtíðar bygnað.

Banka-, giro- og kassapeningur

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	318.097	286.587	141.148

Fleiri landsstovnar hava egnar banka- og girokontur. Síðani roknskaparkunngerðin kom í gildi, er talið á banka- og girokontum, sum liggja uttanfyri bókhaldið, nógv minkað. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at nakrir smáir stovnar stemmaðu ikki sínar kassa- og peningastovnskontur regluliga av við landsbókhaldið, og at fleiri kassa- og peningastovnskontur vóru skrásettar við negativari saldu í landsroknskapinum. Í dag eru viðurskiftini so at siga komin í rættlag.

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv "landið" tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Vit hava áður vístá, at fleiri landsstovnar/-grunnar, ofta við leysum tilknýti til

fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

2.5.7 Skuld (GL 2000/3 02 2-2)

Innanlandsskuld, langfreistað

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	405.834	412.295	416.929

Størstu upphæddirnar í 2001 eru brævalán, tilsamans navnvirði 300 mió.kr., og lán úr Íleggingargrunninum 99 mió.kr. Harafturat er talan um íløgugrunnar og bundna uppsparing.

Landsbanki Føroya umsitur lánsskuld landskassans og ger á hvørjum ári upp tíðaravmarkaðu rentuna. Broytingin frá 2000 til 2001 stavar frá, at í 2001 vórðu brævalán frá 2000, tilsamans 300 mió.kr., goldin aftur, og nýggj brævalán 300 mió.kr. vórðu seld.

Eins og í seinastu frágreiðing vil Landsgrannskoðanin mæla til at viðgera spurningin, um tað er skilagott at nýta orku og pening at skriva út brævalán, samstundis sum landið hevur tøkt gjaldføri.

Uttanlandsskuld, langfreistað

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	4.242.923	4.380.805	4.512.121

Talan er um 2 lán, sum stava frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Annað lánið er 4.010 mió.kr. Hitt lánið er 500 mió.kr., og er sambært avtaluni rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: *"Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer."* Lánini samsvara við lánsavtalur og onnur uttanhýsis skjøl.

Harafturat er talan um eitt stuðulslán frá Hypotekbankanum til Spesialskúlan. Lánið kr. 1.865.561 er ikki niðurskrivað ella goldið aftur seinastu nógvu árini. Sambært landsroknskapinum er eingin renta tilskrivað. Gjaldstovan hevur sett seg í samband við Hypotekbankan og spurt, hvat lán talan er um, og hvørjar treytir eru galdandi. Hypotekbankin hevur í skrivi í juli 2002 boðað Gjaldstovuni frá, at bankin kennist ikki við lánið, og Gjaldstovan hevur biðið Sernámsdepilin (Spesialskúlan) um eina frágreiðing.

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar innanfyri komandi árið

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	440.863	434.155	427.767

Talan er um brævalánið 300 mió.kr. og árliga avdráttin av láninum til donsku ríkisstjórnina.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

Ár (t.kr.)	**2001**	**2000**	**1999**
Sambært roknskapinum	520.856	393.336	366.096

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkanir og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Útjavningarkonta

Ár (t.kr.)	2001	2000	1999
Salda 1. januar	-841.342	-1.583.304	-2.354.158
RLÚ-úrslit	697.166	601.762	648.160
Ymiskar broytingar	270.435	139.271	127.940
Salda 31. desember	126.258	-842.272	-1.578.058

"Ymiskar broytingar" fevna um broytingar á fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingar av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøka av grunnum, úrslit hjá internum grunnum, broytingar í avsetingum, mótbókingar til útlánsroknskap og mótbókingar til kapitalinnskot. Vit hava við stakroyndum kannað grundarlagið undir bókingunum, og einki var at viðmerkja.

Útjavningarkontan líkist ikki "Kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Aktivini í landsroknskapinum verða virðismett øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip, vegir o.t., verða ikki virðismett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

2.6 Umsiting av skatti, avgjøldum o.a.

2.6.1 Roknskapar- og trygdarreglur (GL 1996/2 04 0-2)

Í 1993 setti Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya nakrar yvirskipaðar trygdarreglur, herímillum krøv til hvussu økis- og deildarstjórar skuldu leggja umsitingina á m.a. roknskaparøkinum til rættis. 25. mars 1996 boðaðu vit Toll- og Skattstovu Føroya frá einari kanning, sum vísti, at fleiri av ásetingunum vórðu ikki fylgdar, m.a. tí reglurnar vóru ikki nóg greiðar, og á fleiri økjum var tørvur á at endurskoða reglurnar.

Økisstjórarnir gjørdu síðani uppskot til nýggja reglugerð við ábyrgdar- og heimildarreglum viðvíkjandi edv-trygd og uppskot til roknskaparligu mannagongdina. 1. november 1998 góðkendi Stýrið trygdarreglugerðirnar fyri Norðoya-, Eysturoyar-, Vága- og Suðuroyar Øki.

Í 1999 vitjaðu vit økini og tosaðu við økisleiðararnar fyri í verki at kanna, hvussu trygdarreglurnar riggaðu. Vit vístu m.a. á, at reglurnar kundu verið betur skipaðar, hugtøk vóru ógreið, ivi var um eftirlitslistar, atgongd til og ábyrgd av edv var ikki nóg væl skipað, og fleiri arbeiðsøki vóru ikki nóg væl lýst.

Stjórarnir á Toll- og Skattstovuni vóru sum heild samdir við okkum, og settu í januar 2000 eitt fólk burturav at arbeiða við at bøta um trygdarreglugerðirnar. Í mai 2000 setti Stýrið ein arbeiðsbólk at endurskoða roknskapar- og trygdarreglurnar. Ætlanin var, at arbeiðið skuldi verða liðugt fyri árslok 2000. Vit mæltu til eisini at gera roknskapar- og trygdarreglurnar fyri Streymoyar Øki, Sandoyar Øki og fyri Stýrið.

Í frágreiðing okkara í mars 2001 vístu vit á, at við árslok 2000 vóru ongar ábøtur gjørdar, og roknskapar- og trygdarreglugerðir fyri Streymoyar Øki, Sandoyar Øki og Stýrið vóru heldur ikki gjørdar.

Í oktober 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at uppgávan fór at verða raðfest sera høgt, og at leiðslan á Toll- og Skattstovuni væntaði at verða komin á mál móti endanum av 2001.

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at ongar formligar broytingar vóru gjørdar í "trygdarreglunum" fyri Norðoya-, Eysturoyar-, Vága- og Suðuroyar Øki. Reglurnar frá 1. november 1998 vóru framvegis galdandi. Stýrið, Streymoyar Øki og Sandoyar Øki høvdu enn ikki fingið nakrar formligar roknskapar- ella trygdarreglur at arbeiða eftir.

Stjórnin á Toll- og Skattstovu Føroya hevur á fundi 23. januar 2003 greitt frá, at ein samlað roknskaparreglugerð, sum er galdandi fyri Stýrið og øll økini, er løgd út á intranetið í

desember 2002. Reglugerðin er galdandi frá 1. januar 2003. Roknskaparreglugerðin er góðkend av stjórnini á Toll- og Skattstovuni og er løgd til landsstýrismannin at góðkenna. Landsgrannskoðanin hevur ikki kannað, í hvønn mun bøtt er um veikleikarnar í gomlu reglunum. Í 2003 er ætlanin at kunna okkum nærri um roknskaparreglugerðina.

2.6.2 Systemgrannskoðan o.a. (GL 1996/2 04 0-2)

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at á Toll- og Skattstovu Føroya høvdu starvsfólk í fleiri førum atgongd til økir í telduskipanini, sum tey ikki skuldu hava atgongd til. Tí høvdu vit mælt til, at ábøtur vórðu gjørdar.

Í juli 2002 spurdu vit, hvat var hent í málinum. Vit vístu á, at endamálið við okkara tilmæli var at forða óheimilaðari atgongd til kunningarskipanir.

Í august 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, hvørjar trygdarfyriskipanir vóru settar í verk í sambandi við edv-atgongd. Trygdarfyriskipanin ásetir, at tað er stjórnin, sum hevur ábyrgdina av edv-trygdarskipanini, men at dagliga umsitingin er á Menningardeildini. Í trygdarskipanini stendur m.a., hvussu farið skal verða fram, tá ið nýggjur brúkari verður stovnaður, og tá ið brúkari verður strikaður, at fráboðanir um broytingar skulu verða gjørdar á serstakt fráboðanarskjal, og hvør hevur heimild at biðja um, at brúkari verður skrásettur ella strikaður. Ásett er, at deildarstjórarnir/økisstjórarnir hava ábyrgdina av, at starvsfólkini bert hava atgongd til tað, tey skulu, fyri at røkja arbeiði. Eisini eru reglur um sign-on og um logg-upplýsingar. Stýrið sendir deildar- og økisstjórunum yvirlit, sum vísir, hvørji rættindi teirra starvsfólk hava í edv-skipanini. Teir vátta yvirlitið og senda tað aftur til Stýrið. Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at hann heldur fyriskipanina vera nøktandi.

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit aftur áheitan okkara á Toll- og Skattstovuna um at kanna, í hvønn mun systemgrannskoðanin á Elektron fevndi um skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni. Á fundi í mai 1997 boðaði leiðslan á Elektron frá, at tað ikki var nakar trupulleiki, at Toll- og Skattstovan eisini fekk eina váttan frá systemgrannskoðanini um, at teir generellu edv-kontrollirnir vóru í lagi. Tó varð hildið, at serligar ásetingar/avtalur máttu verða gjørdar viðvíkjandi grannskoðanini, bæði tá ið ráddi um Toll- og Skattstovu Føroya og aðrar almennar edv-skipanir, herímillum hvør skuldi bera kostnaðin. Elektron skuldi koma við uppskoti um eina skipan.

Ætlanin var, at viðurskiftini skuldu vera komin í rættlag í seinasta lagi 1. september 1997, men av ymiskum grundum helt henda tíðarfreist ikki. Í januar 2002 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar avtalur um systemgrannskoðan og møguligar váttanir eru millum landið og Elektron.

Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at við árslok 2000 hevði systemgrannskoðarin hjá Elektron gjørt eina frágreiðing um tær telduskipanir, sum landið hevði á Elektron, herímillum skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeitt verður við at gera eitt uppskot um, hvussu systemgrannskoðanin skal verða løgd til rættis. Formligu leiðreglurnar fyri at fremja systemgrannskoðanina av skipanum og skipanarumhvørvinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya á Elektron skuldu eftir ætlan verða lidnar við árslok 2002.

Stjórnin á Toll- og Skattstovu Føroya hevur á fundi 23. januar 2003 greitt frá, at ongar skrivligar avtalur enn eru gjørdar um systemgrannskoðan. Eftirsíðan hevur Toll- og Skattstova Føroya boðað Landsgrannskoðanini frá, at á stýrisbólkafundi 28. januar 2003 við Elektron er gjørt av, at skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni á Elektron skulu verða grannskoðaðar hvørt ár.

Saman við sakkønari hjálp ætlar Landsgrannskoðanin í 2003 at grannskoða partar av edv-trygdini, sum Toll- og Skattstova Føroya sjálv hevur ábyrgdina av.

Í frágreiðingini frá systemgrannskoðanini á Elektron um skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya, sum varð gjørd ultimo 2000, varð víst á nakrar týðandi veikleikar, sum mælt

varð til at fáa í rættlag sum skjótast. Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at viðurskiftini eru komin í rættlag, tó ikki skjalfestingin av skattaskipanini, sum sambært frágreiðingini ikki var nøktandi. Bert tvey teirra, sum vóru við til at gera skipanina, eru eftir í starvi.

Landsstýrismaðurin hevur eftirsíðan boðað frá, at ætlanir eru um at umleggja skattaskipanina frá DL1 til relatiónsdátabasuna DB2. Henda nútímansgerð, sum fer at verða framd í stigum, fer væntandi at taka 2-3 ár. Helst verður farið undir hetta arbeiði fyrst í 2004.

2.6.3 Stovnsrakstur (GL 2000/2 04 1-2)

Í desember 1999 fingu Stýrið og Streymoyar Øki loyvi sjálvi at bóka í fíggjarstýringarskipan landsins. Í hesum sambandi varð álagt Stýrinum saman við Streymoyar Øki at gera eina roknskaparreglugerð. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at reglugerðin var ikki gjørd.

Sum víst á framman fyri er ein samlað reglugerð sett í gildi 1. januar 2003. Reglugerðin fevnir eisini um hetta øki.

2.6.4 Kassaeftirlit (GL 2000/2 04 0-8)

Avstemman av tøkum peningi

Eins og árini frammanundan hava vit í 2002 verið á ófráboðaðum kassaeftirliti á øllum økjunum á Toll- og Skattstovu Føroya. Einki var at viðmerkja. Eisini vórðu avstemmanirnar av peningastovnskontunum fyri mars mánað 2002 kannaðar.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at vit høvdu mælt Stýrinum til at áseta neyvari reglur fyri, hvussu ofta peningastovnskontur skuldu verða stemmaðar av, og at gera eina skrivliga leiðbeining til avstemmanarforritið fyri at tryggja, at bankaavstemmanirnar verða rættar og einsháttaðar kring landið. Í januar 2003 boðaði Stýrið frá, at fastar mannagongdir fyri, hvussu peningastovnskontur skulu verða stemmaðar av, eru ásettar í roknskaparreglugerðini, sum er sett í gildi 1. januar 2003.

Tíðaravmarkanir

Vit vístu í seinastu frágreiðing á, at í bókhaldsskipanini á Toll- og Skattstovu Føroya (BO), er ikki gjørligt at gera ein tíðaravmarkaðan roknskap. Dagurin, inntøppað verður, er avgerandi fyri, í hvørjum mánaði bókingin verður skrásett. T.d. verða gjaldingar á peningastovnskontu í desember 2000, sum verða inntøppaðar í januar 2001, bókaðar í januar 2001, og harvið í fíggjarárinum 2001.

Tá ið gjaldingar ikki verða tíðaravmarkaðar, vísir bókaða saldan á eini peningastovnskontu ikki røttu myndina av veruligu salduni í peningastovninum, og møguligar undirliggjandi inntøkur og útreiðslur verða heldur ikki bókaðar í røttum mánaði/fíggjarári. Er talan um nógvar og stórar upphæddir, t.d. tí komið er í afturhond við at bóka fyri árslok, kann tað í ein ávísan mun ávirka rættleikan av landsroknskapinum. Gjaldstovan hevur fleiri ferðir gjørt vart við henda trupulleika.

Í september 2002 greiddi landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at endurskoða alla bókhaldsskipanina hjá Toll- og Skattstovuni, sum í dag virkar sum eitt slag av kontantbókhaldsskipan. Ætlanin er at seta ein arbeiðsbólk at kanna, hvørt Toll- og Skattstovan skal keypa og tillaga eina standardbókhaldsskipan, ella um Toll- og Skattstovan skal gera broytingar í verandi skipan. Stjórnin á Toll- og Skattstovu Føroya hevur á fundi 23. januar 2003 greitt frá, at fyribils er ikki ætlanin at gera broytingar í verandi bókhaldsskipan, men at stórur dentur verður lagdur á, at verða ajour tá árið endar. Síðsta arbeiðsdag í árinum verður alt bókað, sum kann verða bókað. Stjórnin ætlar eisini at kanna tíðaravmarkanina við einum sonevndum QMF-lista, sum kann vísa bókingar eftir ársskiftið, sum hoyra til undanfarna ár.

Heimagreiðslu-/heimabankaskipan (GL 2001/1 01 0-9)

Í sambandi við kassaeftirlit í 2001 á Toll- og Skattstovu Føroya, komu vit fram á, at Suðuroyar Øki og Eysturoyar Øki høvdu stovnað heimagreiðslu-/heimabankasamband, og at Stýrið hevði eitt tílíkt samband at avgreiða flytingar vegna grunnarnar, sum Toll- og Skattstovan umsitur.

Vit vístu á, at nýggja "Bektflytingarskipanin" á Gjaldstovuni kann avgreiða útgjaldingar frá FSL-útgjaldingarskipanini elektroniskt beinleiðis inn í peningastovnskervið. Endamálið við FSL-útgjaldingarskipanini var at taka av allar tær ymisku útgjaldingarskipanirnar sum vóru, so at bert ein flutningsrás varð úr landskassanum í peningastovnarnar. Ein grund til, at skundað varð undir at gera Bektflytingarskipanina lidna, vóru vansarnir við, at almennir stovnar nýttu heimagreiðslu-/heimabankaskipanina.

Í februar 2002 segði landsstýrismaðurin, at rættast var, at bert ein flutningsrás var úr landskassanum í peningastovnarnar. Fíggjarmálaráðið hevði viðgjørt spurningin saman við leiðsluni á Toll- og Skattstovu Føroya, og niðurstøðan var, at farið skuldi verða burtur frá at nýta heimagreiðslu/heimabanka.

Vit hava í juli 2002 spurt, hvat er hent í málinum, og um nakar almennur stovnur framvegis hevur heimagreiðslu-/heimabankasamband. Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstova Føroya var farin burtur frá at nýta hesa skipan. Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum Toll- og Skattstovan umsitur, nýtir tó framvegis heimabankaskipanina. Sambært landsstýrismanninum eru tað bert stovnar, ið hava egnar edv-skipanir, ið møguliga brúka heimabanka, og tá skal mannagongdin verða lýst í roknskaparreglugerðini. Landsstýrismaðurin veit bert um ein tílíkan stovn.

Góðkenning av mánaðarroknskapinum

Tá ið vit vóru á kassaeftirliti í Streymoyar-, Norðoya- og Suðuroyar Øki í 2001, kannaðu vit eisini, hvussu góðkenning av mánaðarroknskapinum fór fram. Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini hevur stovnsleiðarin, mótvegis aðalráðnum, ábyrgdina av mánaðarliga at góðkenna roknskapin, og í góðkenningini er m.a. álagt honum at hava eftirlit við, at tær ásettu mannagongdirnar verða hildnar.

Tá ið økisstjórarnir vátta mánaðarroknskapin, kanna teir ikki, um "egnar" búskaparskipanir eru stemmaðar av. Vit mæltu Stýrinum til at kunna økisstjórarnar skrivliga um, hvat teirra váttan bar í sær, og hvørjar kontur í "egnum" búskaparskipanum hjá Toll- og Skattstovu Føroya, teir høvdu ábyrgd av at stemma av.

Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at skrivligar mannagongdir eru gjørdar, og at økisstjórarnir hava fingið at vita, hvør teirra ábyrgd er, og hvat skal vera stemmað av, áðrenn teir skriva undir at hava góðkent økisroknskapin. Góðkenning av mánaðarroknskapinum er umrødd í roknskaparreglugerðini, sum er sett í gildi 1. januar 2003.

2.6.5 Edv-skráir (GL 2000/2 04 1-2)

Til fyrst í 1995 vórðu allar skráir hjá Toll- og Skattstovu Føroya góðkendar av Skrásetingareftirlitinum. Seinni hava teir sent nýggjar skráir at góðkenna, men teir hava einki svar fingið frá Skrásetingareftirlitinum. Hesa tíðina eru sostatt skráir tiknar í nýtslu uttan at vera formliga góðkendar.

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit, at Ll. nr. 73/2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum" kom í gildi 1. januar 2002, samstundis sum Ll. nr. 62/1984 "um evnisskráir hjá almennum myndugleikum" fór úr gildi. Sambært § 48 í Ll. nr. 73/2001 skulu skráir, ið eru góðkendar eftir "gomlu" skrásetingarlógini, innan seks mánaðir lúka krøvini í nýggju lógini, og vit heittu á landsstýrismannin um at taka støðu til, hvørji tiltøk eru neyðug at seta í verk

fyri at lúka hesar treytir. Í juli 2002 bóðu vit landsstýrismannin um eitt fullfíggjað og dagført yvirlit yvir:

- Hvørjir stovnar, deildir o.l. viðgera persónsupplýsingar og koma undir lógina, og
- hvørjir stovnar hava trygdarskipanir samsvarandi § 31, stk. 2 – 5.
- Hvørjir stovnar, deildir o.l. koma undir § 35 um viðgerðarloyvi (viðkvæmir upplýsingar), og
- hvørjir stovnar hava fingið viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum.
- Hvørjar skráir eru fevndar av lógini um evnisskráir hjá almennum myndugleikum, og
- hvørjar skráir lúka treytirnar í lógini 30. juni 2002, so sum ásett í § 48.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Fíggjarmálaráðið hevði samskifti við Løgmálaráðið og Dátueftirlitið um henda spurning.

Í januar 2003 boðaði stjórnin í Toll- og Skattstovuni frá, at allar edv-skráir, broytingar í edv-skráum og brúkarar eru fráboðaðar Dátueftirlitinum. Allar heimildir at nýta skráirnar eru kannaðar av Toll- og Skattstovuni, og tað hevur fört við sær, at rættingar eru gjørdar.

2.6.6 Innkrevjing (GL 2001/2 04 9-1)

Í seinastu frágreiðing frá februar 2002 varð víst á, at nýggja innkrevjingarskipanin (IK-skipanin) fekst at virka væl fyri tey krøv, sum Toll- og Skattstovan frammanundan varðaði av og kendi til. Men vegna tíðarneyð stóðust nógvir trupulleikar av at skipa innkrevjingina av teimum eftirstøðum, sum Toll- og Skattstovan ikki varðaði av. Stundir vóru ikki at gera eina neyva kravfesting, sum nágreiniliga lýsti, hvussu peninga- og bókhaldsrenslið skuldi verða skipað fyri mongu debitorbólkarnar, sum lógu uttanfyri Toll- og Skattstovuna. Hesi viðurskifti hava eftirsíðan merkt arbeiðið við IK-skipanini, og nógv og góð arbeiðsorka er nýtt til at rætta feilir, at upploysa millumrokningar, at fyribilsbóka o.a. Víst varð á, at hóast innkrevjingin á fleiri økjum virkaði væl, og sum heild helst er munandi betri, enn hon var í 1994, tá ið eingin innkrevjingarskipan var, so eru trupulleikarnar teir somu á fleiri økjum.

Toll- og Skattstovan arbeiðir við at bøta um skipanina, og í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevði sett sær sum mál, at øll ógreið viðurskifti ímillum IK- og FSL-skipanirnar skuldu verða komin í rættlag fyri 1. november 2002.

IK-skipanin skuldi tá lúka øll krøv í roknskaparkunngerðini, og landsstýrismaðurin vísti í hesum sambandi eisini á:

at øll útgjøld tá skuldu fara um búskaparskipan landsins, og ikki um peningastovnskontur hjá Toll- og Skattstovuni,

at vantandi tíðaravmarkingarførleiki í IK-skipanini mátti verða loystur,

at sjálvvirkandi dátasamskifti skuldi verða skipað sambært ásetingum frá Gjaldstovuni,

at skrivlig rakstraravtala skuldi vera gjørd millum Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna um viðlíkahald av kontuskipan/-brúgv, avstemmanir, eftirlit o.a.,

at Gjaldstovan skuldi hava ein samskipandi og góðkennandi leiklut, tá ið nýggj markamót verða skapað millum IK-skipanina og aðrar stovnar, t.d. Almannastovuna og Stuðulsstovnin,

at avtalan eisini skuldi fevna um, hvussu farið skuldi verða kvalifiserað fram, um mótroknað varð í FSL-útgjaldingum.

Í juli 2002 heittu vit á landsstýrismannin um at kunna okkum um, hvørji tiltøk hann hevði sett í verk, og hvussu langt arbeiðið var komið ávegis. Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at:

- enn restaði at fáa nøkur útgjøldssløg í rættlag, t.d. konupengar og avgreiðslur av feilinngjøldum,
- Fíggjarmálaráðið hevði biðið leiðsluna á Toll- og Skattstovu Føroya, í samráð við leiðsluna á Føroya Gjaldstovu, kanna, um tað ikki var møguligt í fyrsta umfari at gera smærri broytingar í bókhaldsskipanini, soleiðis at hon í høvuðsheitum kom at nøkta krøvini til tíðaravmarkan,
- Toll- og Skattstova Føroya hevði kunnað um, at samskiftið fer at verða skipað sambært ásetingum frá Føroya Gjaldstovu,
- partarnir høvdu tosað nakað saman, men eingin avtala var gjørd enn,
- Toll- og Skattstovan hevði kunnað um, at tá ið tílík markamót fóru at verða skapt, fór tað at verða gjørt í tøttum samskifti við Gjaldstovuna,
- eingin bindandi avtala var gjørd um mótrokning í FSL-skipanini, sí innheinting av vinnulánum.

Í seinastu frágreiðing vístu vit eisini á, at brúkaravegleiðingarnar o.t. hava ikki verið nøktandi, og brúkararnir hava ikki havt neyðugan kunnleika til teir møguleikar, sum eru í IK-skipanini. Fyri at bøta um hetta fór Menningardeildin á heysti 2001 undir at skriva eina nágreiniliga brúkaravegleiðing, umframt eina vegleiðing um innkrevjingarmannagongdir mótvegis brúkarum og stovnum. Menningardeildin er eisini millumlið millum brúkarar og forritarar, í sambandi við at bøtt verður um skipanina. Gjørdar verða m.a. áminningarskipanir um fyrning og panting umframt aðrar ábøtur, sum lætta um arbeiðsgongdirnar.

Í desember 2002 kunnaði Menningardeildin um, at arbeiðið við at skriva brúkaravegleiðingar og vegleiðingar um innkrevjingarmannagongdir var ikki liðugt. Tað, sum er liðugt, er lagt út á intranetið. Talan er um eina verkætlan, sum verður ment so hvørt nýggj krøv og ynskir koma.

Toll- og Skattstovan roynir framhaldandi at menna IK-skipanina til eitt uppaftur betri amboð við m.ø. áminningarskipanum um fyrning, panting o.a. Hetta verður gjørt við status- og avtalukotum, ið eru knýttar at kravinum, og eftirlitskotum, ið eru knýttar at persónunum. Menningardeildin hevur eisini greitt frá, at uppgávan er á byrjanarstøði, men arbeiðið er ein støðug menning av skipanini, alt eftir ynskjum og krøvum til upplýsing, stýring o.a.

Landsgrannskoðanin heldur, at í sambandi við innheintan av eftirstøðum hjá t.d. Almannastovuni og Stuðulsstovninum, hevur talan verið um vantandi stýring av verkætlanum, har m.a. heimildir, myndugleiki og ábyrgd tykjast ógreið, og ivasamt er, hvør hevur høvuðsábyrgdina og tekur yvirskipaðu avgerðirnar.

Menningardeildin hevur víst á, at viðvíkjandi innkrevjingini hevur ein almennur trupulleiki frá byrjan verið, at eingin yvirskipað reglugerð varð gjørd fyri, hvussu mannagongdin skuldi vera. Eitt uppskot varð gjørt í 1999, men reglugerðin varð ongantíð gjørd liðug ella skrivað undir av Fíggjarmálaráðnum. Fyri at gera viðurskiftini greiðari, arbeiðir Menningardeildin við einum uppskoti til avtalu ímillum Toll- og Skattstovuna og teir stovnar, hvørs krøv skulu verða heintað inn. Saman við avtaluni er ætlanin at hava nøkur fylgiskjøl, m.a. eina reglugerð um innheintan av eftirstøðum, fylgiskjøl um tekniskar upplýsingar, og um hvussu bókingar og skrásetingar skulu fara fram.

Innkrevjing av vinnulánum

Í 1997 varð ábyrgdin av innkrevjingini flutt frá Fíggjar- og búskapardeildini til Gjaldstovuna, og í apríl 1998 varð innkrevjingin flutt til Toll- og Skattstovu Føroya. Í juli 1999 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstova Føroya var í ferð við gjølla at gjøgnumganga vinnulánini við tí fyri eyga at krevja inn tað, sum bar til. Steðgur kom í, tá ið starvsfólkið, sum sat við málinum, fór úr starvi.

Í mars 2001 boðaði Toll- og Skattstovan frá, at fólk við royndum aftur skuldi verða sett at kanna vinnulánini og kanna, um tey skuldu verða løgd inn í IK-skipanina. Tað varð ikki gjørt, og í februar 2002 fór framvegis eingin skipað mótrokning fram. Toll- og Skattstova Føroya ansar eftir, at lánini ikki verða fyrnað.

Í februar 2002 boðaði Toll- og Skattstovan frá, at í samráð við Fiskimálaráðið, sum "eigur" flest øll vinnulánini, vórðu øll málini send sakførara í desember 2001, so hann kundi ætla um, hvørt tað var møguligt at fáa nakað aftur av lánunum. Sakførarin lat í januar 2002 Toll- og Skattstovuni eina samlaða meting. Hann vísti á, at millum skuldararnar vóru flestu partafeløgini strikað, og í øðrum førum vantaðu neyðug skjøl. Viðvíkjandi teimum málum, sum vóru til innheintingar, var niðurstøðan, *"at nakað kann væntast at koma inn afturat, partvíst tí vit umsita avdráttarskipanir, og partvíst tí trygd er fingin. Viðvíkjandi teimum málum, sum ikki eru komin til innheintingar, verður nokk eisini møguligt at fáa nakað inn. Men størsti parturin fer uttan iva at enda úrslitaleyst og verður ongantíð goldin."* Toll- og Skattstovan fór at mæla landsstýrismanninum til at krevja inn tað, sum á nakran hátt er møguligt.

Í juli 2002 bóðu vit landsstýrismannin kunna okkum um gongdina í málinum. Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at ein skrivari í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya nýtir part av síni arbeiðstíð til at finna øll neyðug skjøl fram í hvørjum máli. Hetta vísir seg ofta at vera trupult, tí summi lán hava fleiri aðalráð/landsstýrismenn havt "undir hond".

Lánini verða gjøgnumgingin, og í hvørjum føri sær verða krøvini gjørd upp av nýggjum. Bræv verður síðani sent skuldarunum, har heitt verður á teir um at gjalda ella at siga frá, um teir halda fráboðanina vera skeiva. Í brævinum verður gjaldsfreist sett, og kunnað verður um, at verður ikki goldið til tíðina, verður málið sent til innheintingar beinanvegin. Við í viðgerðini av málunum eru innkrevjingarleiðarin, ein løgfrøðingur og skrivarin í Stýrinum. Arbeiðið gongur spakuliga, tí eingin arbeiðir burturav við at taka sær av hesum lánum.

Toll- og Skattstovan skipar fyri, at lánini verða løgd í IK-skipanina so hvørt, sum tey verða fráboðað móttakaranum. Fundur er avtalaður við Føroya Gjaldstovu og Elektron um at finna eina fasta mannagongd.

Viðvíkjandi mótrokning hevur Toll- og Skattstovan biðið landsstýrismannin um loyvi til at lata vera við at mótrokna í vanligum útgjaldingum (sivilrættarligum) frá tí almenna, tó undantikið avlopsskatt, negativt MVG o.a.

Atvoldin er, at løgfrøðingar halda tað vera ivasamt, um mótroknað kann verða í slíkum krøvum, uttan at málini verða veruliga viðgjørd, t.v.s. ein málsviðgerð, har skuldarin frammanundan fær boð um, at mótrokning fer at verða gjørd; og skuldarin skal somuleiðis hava møguleika at kæra.

Toll- og Skattstovan heldur mannagongdina taka ov nógva arbeiðsorku í mun til tær upphæddir, ið koma inn. Føroya Gjaldstova ger útgjaldingar eina ferð um dagin, so tað verður trupult at hava eina manuella mannagongd. Skal slík mótrokning virka væl, og ikki darva peningaflytingum óneyðuga, má ein automatisk EDV-skipan verða gjørd, *"sum helst ikki verður bílig."* Tá ið so kemur afturat, at løgfrøðingar halda málsviðgerð skal til í hvørjum føri, heldur Toll- og Skattstovan tað verða trupult at nýta eina automatiska skipan.

2.6.7 Innflutningsgjøld (GL 2001/2 04 5-7)

Eins og undanfarin ár hava vit gjørt ávísar teldukanningar (QMF) av tollskrásetingum, har vit av royndum vita, at stórir feilir kunnu koma fyri. Í juni 2002 komu vit fram á stórar feilir viðvíkjandi 2001. Feilirnir vórðu fráboðaðir økjunum og eru rættaðir. Landsgrannskoðanin heldur, at nú innflytarar sjálvir eru farnir at tollavgreiða, eigur Toll- og Skattstova Føroya at gera tílíkar teldukanningar javnan.

Tollautomatiseringin varð sett í verk í oktober 2002. Byrjað varð við einum innflytara, og nú eru fimm innflytarar, sum brúka skipanina. Frá 1. mars 2003 er skipanin tøk fyri allar innflytarar, sum hava "tollkreditt".

2.6.8 Rentuskattur (GL 2000/2 04 4-2)

Í frágreiðingini frá februar 2002 vístu vit á, at í nógv ár hevur umsitingin av rentuskatti ikki verið nøktandi. Ábyrgdarviðurskiftini hava ikki verið nóg greið, nøktandi eftirlit hevur ikki verið við, at allur rentuskattur í peningastovnum og grunnum verður kravdur inn, avroknaður rættstundis og bókaður rætt. Stýrið fyri Toll- og Skattstovuna hevði einki yvirlit yvir, hvat peningastovnarnir og postgiro hava goldið, hvørki samlað ella hvør sær, og einans bókingarteksturin gevur eina ábending um, hvør tað er, sum hevur goldið.

Í august 2001 heitti Stýrið tí á allar peningastovnar um at lata inn yvirlit yvir allar innlánskontur ultimo 2000 við frámerki, um kontan rindar rentuskatt sambært rentuskattalógini. Stýrið kannaði yvirlitini, sum vístu, at tað vóru kontur, sum ikki rindaðu eftir ásetingunum í lógini. Stýrið greiddi í februar 2002 frá, at tað hevði latið tveimum teimum størstu peningastovnunum fyribils uppskot til at loysa ivaspurningarnar. Tá ið Toll- og Skattstovan í samráð við peningastovnarnar hevur kannað allar innlánskontur, skal støða verða tikin til, hvussu eftirlitið skal verða í framtíðini.

Vit hava í juli 2002 spurt, hvat er hent í málinum. Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstovan í næstum ætlar at fara undir at gera status yvir allar kontur og boða peningastovnunum og postgiro frá, hvør skal rinda rentuskatt. Ætlaða mannagongdin, sum fer at verða áløgd peningastovnunum at fylgja, er:

- Peningastovnarnir skulu lata Toll- og Skattstovuni ein lista (elektroniskt) við øllum p-tølum/V-tølum/kontum í peningastovninum. Toll- og Skattstovan skal samanbera upplýsingarnar við skráirnar hjá Toll- og Skattstovuni, og feillisti skal verða skrivaður út fyri hvørt øki og fyri hvønn peningastovn sær. Økisskrivstovurnar skulu eftirkanna listarnar. Síðani skulu boð ella listar verða sendir aftur til peningastovnin við fráboðan um møguligar feilir.
- Sama mannagongd skal verða endurtikin tvær ferðir um árið. Hetta skal verða gjørt í hampiligari tíð fyri hvørja rentutilskriving.

Í seinastu frágreiðing varð umrøtt, at eingin renta er roknað av ov seint goldnum rentuskatti. Vit bóðu Toll- og Skattstovu Føroya um eina neyva útgreining av øllum bókingum av rentuskatti síðani 1995, serliga hvør peningastovnur og grunnur tað er, sum hevur goldið, nær teir hava goldið, og hvat tíðarskeið goldið er fyri. Nøktandi svar er ikki komið. Stjórnin á Toll- og Skattstovu Føroya hevur í februar 2003 boðað frá, at arbeitt verður við at greiða málið saman við Føroya Gjaldstovu.

2.6.9 Framleiðsluavgjald (GL 1999/2 04 6-6)

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 vístu vit m.a. á, at eftirlit verða javnan gjørd, men tey verða ikki skjalprógvað. Tí sæst ikki, nær tey eru gjørd, hvat úrslitið var, og hvør hevur gjørt eftirlitini. Eisini er ivasamt, hvønn týdning eftirlitini hava. Vit vístu á, at skipaðar og greiðar reglur hava stóran týdning fyri starvsfólkini, so tey vita, hvat tey skulu gera. Tað er eisini ein fyrimunur, tá ið onnur skulu taka yvir.

Stýrið fyri Toll- og Skattstovuna var samt við okkum í hesum sjónarmiðum og fór at hava tey við í teimum arbeiðs- og trygdarreglum og mannagongdum, ið arbeitt verður við at seta í verk. Eisini verður arbeitt við at skjalprógva eftirlitini betur, soleiðis at altíð ber til at síggja, nær eftirlitini eru gjørd, hvørji úrslitini eru, og hvør hevur gjørt eftirlitini.

Vit hava í juli 2002 spurt, hvat er hent í málinum. Í september 2002 ásannaði landsstýrismaðurin, at vegleiðingin, sum finst í starvsfólkahandbókini, er ikki nøktandi. Heldur ikki finnast fullfíggjaðar skrivaðar reglur fyri, hvussu eftirlitini skulu verða fyrireikað og framd. Tó eru reglur um, at øll eftirlit skulu verða skrásett.

Hóast tvørrandi skrivaðar mannagongdir/reglur, so er Toll- og Skattstovan tó av teirri áskoðan, at eftirlit er við framleiðsluavgjaldinum. Eitt nú hava tollararnir regluligt eftirlit við framleiðsluni á bryggjaríunum. Fylgt verður við mánaðarliga, og avrokningin av framleiðslugjaldinum verður samanhildin við teljaran á framleiðslubandinum, umframt at stakroyndir verða tiknar, har útrokningin av avgjaldinum verður eftirroknað.

Stýrið fer saman við økisskrivstovunum at gera meira við at eftirkanna hesi viðurskifti, eitt nú við at kanna framleiðslugongdina neyvari. Stýrið ásannar, at eftirlitsmannagongdirnar eru ikki broyttar stórvegis, síðani loyvi í sínari tíð varð givið at bryggja sterkt øl.

2.6.10 Trygdargrunnurin (GL 1998/2 09 1-2)

Í 2002 hava vit grannskoðað roknskaparviðurskiftini hjá Trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir. Niðanfyri hava vit kunnað um grunnin og í stuttum tikið saman um úrslitið av grannskoðanini.

Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið hjá grunninum er:

- Ll. nr. 68/1988 “um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir”.
- Kunngerð nr. 66/ 1991 “um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.”
- Kunngerð nr. 85/ 1991 “um gjald til trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir v.m.” Við kunngerð nr. 105 frá 20. desember 2002 var kunngerð nr. 85/1991 sett úr gildi frá 1. januar 2003.

Endamál

Sambært § 1, stk. 1, í lógini hevur grunnurin sum endamál at tryggja løntakarum lønarkrøv, herímillum fiski- og útróðrarpartar, og tryggja føroyskum skipa/bátaeigarum part av avrokning fyri fisk avreiddan til føroysk fiskavirki í sambandi við:

- at arbeiðsgevarin ella fiskavirkið eru komin í fíggjartrot,
- at arbeiðsgevarin doyr, og búgvið verður tikið til skiftisviðgerðar eftir 3. kap. í skiftilógini, ella
- at fyritøkan heldur uppat, og tað verður sannað, at arbeiðsgevarin er ikki førur fyri at rinda kravið.

Fyrisiting

Sambært § 9 í lógini umsitur Toll- og Skattstovu Føroya Trygdargrunnin.

Fíggjarviðurskifti

Sambært § 7, stk. 1, í lógini verður fæ grunsins fingið til vega við, at allir arbeiðsgevarar í Føroyum rinda inn í grunnin í mesta lagi 0,2% av teirri samlaðu útgoldnu A-inntøkuni fyri hvørt ár. Arbeiðsgevarar rinda ikki gjald fyri útlendingar undir FAS-skipanini o.l., og Almannastovan er frítikin fyri gjaldið í sambandi við útgjald av almannapensjón og øðrum forsorgarveitingum.

Sambært § 2 í kunngerð nr. 85/1991 er arbeiðsgevaragjaldið ásett til 0,15% av samlaðu útgoldnu A-inntøkuni fyri árið fyri. Við kunngerð nr. 105/2002 er kunngerð nr. 85/1991 sett úr gildi frá 1. januar 2003, og sostatt skulu arbeiðsgevarar ikki longur rinda í grunnin.

Eftir umsókn verða lønarkrøv móti Trygdargrunninum goldin út samsvarandi § 1, stk. 1, nr. 1, 2 og 3, í lógini:

- Treytin fyri at fáa pening úr grunninum fyri krøv í sambandi við avreiðingar er, at avreiðingin er gjørd seinastu 30 dagar fyri freistdagin.
- Treytin fyri at fáa pening úr grunninum fyri lønarkrøv er, at lønin er vunnin seinastu 30 dagarnar fyri freistdagin.
- Krøv mótvegis grunninum í sambandi við frítíðarløn skulu vera vunnin seinastu 6 mánaðirnar fyri freistdagin.

Sambært § 3 í lógini kann grunnurin í mesta lagi rinda 20.000 kr. til hvønn løntakara.

Yvirlit yvir roknskapartøl 1991 – 2001

Niðanfyri er ein samandráttur av roknskapartølunum hjá Trygdargrunninum seinastu 10 árini.

(mió.kr.)

	2001	2000	1999	1998	1997	1996	1995	1994	1993	1992	1991
Rakstrarroknskapur:											
Arbeiðsgevaragjøld	6,9	6,3	5,9	5,6	5,2	4,8	4,7	5,1	5,4	5,2	8,5
Rentuinntøkur o.a.	2,7	2,2	1,5	1,6	1,1	2,8	1,6	1,1	0,6	3,2	1,0
Játtan á fíggjarlóg	-	-	-	-	-	0,9	-	0,5	4,6	0,7	0,8
Inntøkur, samanlagt	**9,6**	**8,5**	**7,4**	**7,2**	**6,3**	**8,5**	**6,3**	**6,3**	**10,6**	**9,1**	**10,3**
Útreiðslur	-0,4	-0,3	-0,2	-0,3	-0,8	-0,1	-0,5	-2,0	-7,8	-10,6	-7,8
Úrslit	**9,2**	**8,2**	**7,2**	**6,9**	**5,5**	**8,4**	**5,8**	**4,3**	**2,8**	**-1,5**	**2,5**
Fíggjarstøða:											
Inniogn í peningastovnum	58,8	49,6	41,5	34,2	27,1	21,1	12,3	6,6	3,0	0,1	1,3
Skuldarar	0,4	0,2	0,2	0,3	0,1	0,6	1,1	1,3	1,8	1,9	2,2
Sett av móti tapi o.a.	-0,6	-0,4	-0,5	-0,4	-	-	-	-0,3	-1,6	-1,6	-1,6
Eginogn	**58,6**	**49,4**	**41,2**	**34,1**	**27,2**	**21,7**	**13,4**	**7,6**	**3,2**	**0,4**	**1,9**

Vísandi til talvuna frammanfyri talvu vóru inntøkurnar frá arbeiðsgevaragjøldum 8,5 mió. kr. í 1991. Frá 1. januar 1992 varð arbeiðsgevaragjaldið lækkað frá 0,2% til 0,15%. Í tíðarskeiðnum 1992 til 1996 lógu hesar inntøkur um 5 mió.kr. Síðani eru inntøkurnar frá arbeiðsgevaragjøldum hækkaðar til 6,9 mió.kr. í 2001.

Rentuinntøkur o.a. fevna um rentuinntøkur av inniogn í peningastovnunum, dividendu frá trotabúgvum og rentu av skuldarum. Seinnu árini er so at siga bara talan um rentuinntøkur.

Trygdargrunnurin fekk, frá tí hann var stovnaður í 1988, 0,15 % av almannapensjónunum goldnar í studningi á árligu fíggjarlógini. Harafturat vórðu í 1993 4 mió.kr. fluttar frá játtanini til "praktiskar fiskivinnuroyndir" til Trygdargrunnin, fyri at grunnurin kundi halda sínar skyldur. Studningurin á fíggjarlógini varð við Ll. nr. 38/1997 tikin av, frá 1. januar 1997 at rokna.

Útreiðslurnar av útgoldnum lønarkrøvum vóru størstar í 1992, uml. 10,5 mió.kr. Við Ll. nr. 123/1993 varð hægst loyvda útgjaldið úr grunninum til ein einstakan løntakara lækkað úr kr. 70.000 til kr. 20.000. Í 1994 vórðu uml. 1,6 mió.kr. goldnar út. Síðani hevur útgoldna árliga upphæddin ligið millum 35 t.kr. og 329 t.kr.

Inniognin í peningastovnum er vaksin úr uml. 0,1 mió.kr. í 1992 til uml. 58,8 mió.kr. í 2001.

Viðmerkingar

Í gjøgnumgongdini av roknskaparviðurskiftunum hava vit m.a. víst á fleiri veikleikar og mælt til at bøta um roknskaparreglugerðina, kontuskipanina, edv- og journalviðurskiftini. Sambært landsstýrismanninum verður hetta gjørt, og Fíggjarmálaráðið fer at taka stig til at flyta roknskaparhaldið hjá Trygdargrunninum yvir í búskaparskipanir landsins.
Í sambandi við gjøgnumgongd av einstøkum málum vístu vit m.a. á, at allir umsøkjarar, ið hava fingið krøv móti grunninum goldin út, lúka treytirnar í lógini. Í tveimum málum varð ov lítið goldið út. Vit hevur mælt til, at umsóknarskjalið verður dagført og gjørt lættari at skilja hjá umsøkjarunum, og at tað verður orðað soleiðis, at bústjórin váttar, at umsøkjarin lýkur treytirnar fyri útgjaldi úr grunninum.
Vit hava eisini mælt til, at avgerðir, grunnurin hevur tikið, verða betur skjalprógvaðar í uppriti í málunum.

3. LØGMANSFYRISITINGIN

3.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2001/1 04 1-8)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.", letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur undir § 2 "Løgmansfyrisitingin o.a.", har talan er um meirella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

2.12.3.01. Løgmaður og landsstýri

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,8 mió.kr. Meirnýtslan er 185 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 26 t.kr. Sambært løgmanni varð landsstýrismanningin broytt í árinum. Í eykajáttanini, sum kom í árinum, var ikki í nóg stóran mun lagt upp fyri meirútreiðslunum til kostnaðarendurgjald til nýggju landsstýrismenninar.

2.13.3.01. Menningarhjálp

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 300 t.kr. Eingin peningur varð nýttur. Sambært løgmanni leyk eingin umsókn vanligu reglurnar fyri stuðli til menningarhjálp.

3.2 Løgmansskrivstovan (GL 1998/2 02 9-2)

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at Løgmansskrivstovan hevði leigusáttmálar fyri kopimaskinur, sum ikki luku ásetingarnar í játtanarskipanini um leasing. Løgmaður hevur í september 2002 kunnað um, at Løgmansskrivstovan 1. juli 2002 hevur loyst seg frá sáttmálunum og keypt kopimaskinurnar. Nýggjur 1-ára sáttmáli er gjørdur um tænastu, røkt o.a.

3.3 Samsýning o.a. til landsstýrismenn (GL 1998/2 02 9-2)

Sambært § 32, stk. 2, í stýrisskipanarlógini verða neyvari reglur um setanarviðurskifti løgmans og landsstýrismanna ásettar í løgtingslóg. Tað er gjørt í Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." við seinni broytingum. Í lógini er neyvari ásett um løn, eftirløn umframt skattafrítt borðfæ og kostnaðarendurgjøld. Í 2000 grannskoðaðu vit veitingar til landsstýrismenn í 1999 og 2000. Útreiðslurnar samsvaraðu ásetingunum í lógini, tó ikki kostnaðarendurgjøld fyri heimatelefon.

Ongar ásetingar eru í lógini um kostnaðarendurgjald fyri heimatelefon/fría telefon. Seinastu nógvu árini hevur tað tó verið siðvenja. Á fundi 20. mars 1981 góðkendi Fíggjarnevndin, *"at landsstýrismenn fáa fría heimatelefon, tó soleiðis at teir fyri privatar samtalur gjalda 1.000 kr. um árið."* Í frágreiðing okkara til løgmann í juli 2000 vístu vit á, at okkum kunnugt varð hetta gjald ikki rindað, og sera ymiskt var, hvussu endurrindað varð fyri telefonútreiðslur. Vit mæltu løgmanni til at greiða fleiri ivaspurningar; m.a. um heimildina at veita onnur kostnaðarendurgjøld enn tey, sum vóru ásett í lógini; hvussu nógv skal verða rindað/endurrindað fyri heimatelefon/fartelefon; hvat skal verða givið upp skattliga o.a.

Lógarbroytingar

Í mars 2001 tók løgmaður stig til at greiða heimildarspurningin um kostnaðarendurgjald fyri telefon o.a., tá ið løgmaður legði fyri tingið uppskot um at broyta lógina "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." Eftir uppskotinum skuldi løgmaður/landsstýrismaður fáa skattafrítt endurgjald fyri samskiftisútreiðslur, kr. 2.000 um mánaðin. Broytingaruppskotið, sum annars snúði seg um at hækka eftirlønirnar, varð samtykt við gildi frá 1. januar 2002.

M.a. tí at nógv mótmæltu, at lógarbroytingin viðvíkjandi eftirlønum hevði afturvirkandi gildi til 1951, samtykti Løgtingið í desember 2001 at seta broytingarlógina úr gildi aftur. Eftirsíðan feldi Løgtingið eitt nýtt broytingaruppskot frá løgmanni, og sostatt er "gamla" lógin framvegis í gildi.

Í februar 2002 vísti løgmaður á, at tíverri var støðan viðvíkjandi samskiftisútreiðslum óbroytt. Tí má verða umhugsað, hvørji stig skulu verða tikin, verður endurgjald fyri samskiftiskostnað ikki ásett í løgtingslóg í næstum.

Í september 2002 hevur løgmaður kunnað um, at hann í tingsetuni ætlar at leggja nýtt uppskot fyri Løgtingið. Í fyrstu atløgu fer bert at verða ásett, at løgmaður skal velja eina nevnd við trimum fólkum at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna. Í nevndini, ið skal veljast fyri hvørt valskeið, kunnu ikki verða valdir løgtingsmenn, landsstýrismenn ella fólk, ið starvast í fyrisiting landsstýrisins ella stovni undir landsstýrinum. Ætlanin er, at nevndin skal lata løgmanni tilmæli í seinasta lagi í aðru tingsetu í hvørjum valskeiði.

Reglur um fartelefon

Løgmaður setti í rundskrivi 7. februar 2002 leiðreglur fyri at nýta fartelefon í fyrisitingini, sum eisini skuldu galda fyri landsstýrismenn. Toll- og Skattstova Føroya hevur í rundskrivi 2/2001 ásett reglur fyri, nær nýtsla av fartelefon heilt ella partvíst verður roknað sum skattafríur ágóði.

Í báðum rundskrivum er eitt ávíst eftirlit álagt "arbeiðsgevaranum". Vit hava spurt, hvør røkir hesa arbeiðsgevaraskyldu, tá ið talan er um landsstýrismenn. Løgmaður hevur víst á, at hvørt aðalráð sær eigur at hava eina roknskaparreglugerð, ið m.a. fevnir um allar útgjaldingar. Í hesum liggur eisini, at aðalráðið kannar, um alt fer rætt fram. Eru tekin um, at okkurt er farið fram óregluliga, verður avvarðandi gjørdur varugur við hetta. Tað er eisini galdandi, tá um løgmann og landsstýrismenn ræður.

Reglur um heimatelefon og skattlig viðurskifti

Í frágreiðing til løgmann í juli 2000 vístu vit á, at sera ymiskt var, hvussu endurrindað varð fyri telefonútreiðslur. Tí reistu vit fleiri spurningar um m.a. endurgjald fyri at nýta heimatelefon, hvør rætta mannagongdin var, hvørji rættindi ein landsstýrismaður hevði, hvussu nógv skuldi verða rindað, hvussu nógv skuldi verða givið upp skattliga, um tað var rætt, tá ið telefonendurgjøld til landsstýrismenn ikki longur vórðu bókað á somu høvuðskontu, sum onnur kostnaðarendurgjøld til landsstýrismenn o.a.

Løgmaður svaraði ongantíð beinleiðis hesum spurningum, og í skrivi 16. juli 2002 endurtóku vit spurningarnar, og spurdu eisini, hvussu endurrindað varð fyri telefonútreiðslur til løgmann og landsstýrismenn í fíggjarárunum 2001 og 2002, hvussu hesi endurgjøld vóru bókað, og í hvønn mun tey vóru skattað.

Í september 2002 kunnaði løgmaður um, at telefonendurgjøld til landsstýrismenn verða bókað á høvuðskontu hjá hvørjum aðalráði sær, og at Løgmansskrivstovan skuldi kanna, hvussu endurrindað verður. Í januar 2003 kunnaði løgmaður um úrslitið av kanningini:

1. Allir landsstýrismenn, uttan ein, hava fría heimatelefon.
2. 2 rinda 1.000 kr. um árið fyri privatar samtalur.
3. Gjøldini verða bókað á Strk. 1470 "telefon" ella sum endurgjald á Strk. 1930.
4. Aðalráðini leggja upp til, at landsstýrismenn sjálvir hava ábyrgd av skattligu viðurskiftunum, og *"eingin fráboðan er til Toll- og Skatt."*
5. Allir landsstýrismenn hava fría fartelefon, sum er ogn hjá aðalráðunum.

Í skrivinum gjørdi løgmaður eisini vart við, at hann hevði heitt á avvarðandi landsstýrismenn um at broyta mannagongd beinanvegin, so hon samsvarar galdandi reglum á økinum, ið eru

tær, sum vórðu samtyktar av Fíggjarnevnd Løgtingsins um *"at landsstýrismenn fáa fría heimatelefon, tó so at teir fyri privatar samtalur gjalda 1.000 kr. um árið."*

Í skrivi til løgmann í januar 2003 vístu vit á, at sambært § 25, stk. 4, í skattalógini eru fríir ágóðar skattskyldug inntøka. Sambært § 118, stk. 1 b, í skattalógini skal upplýsingarskyldugi boða Toll- og Skattstovuni frá um møguligar skattafríar ágóðar, sum hann hevur latið. Eftir hesum at døma, er tað ikki í tráð við skattalógina, at *"eingin fráboðan er til Toll- og Skatt."* Var løgmaður ikki samdur í hesum sjónarmiði, mæltu vit løgmanni til at avgreiða spurningin saman við Toll- og Skattstovu Føroya.

30. januar 2003 vendi løgmaður sær til Toll- og Skattstovu Føroya við spurninginum. Toll- og Skattstovan svaraði m.a., at heimatelefon hjá landsstýrismonnum er at rokna sum fríur ágóði/skattskyldug inntøka, sum landsstýrismenn hava skyldu at geva upp, og at arbeiðsgevarin hevur upplýsingarskyldu. Grundað á svarið hevur løgmaður 13. februar 2003 boðað aðalráðunum frá, hvørjar reglur eru galdandi á økinum, og hevur heitt á tey um at halda galdandi reglur. Løgmansskrivstovan hevur somuleiðis boðað Toll- og Skattstovu Føroya frá, at løgmaður hevur heimatelefon eftir ásetingunum frá Fíggjarnevnd Løgtingsins í 1981.

3.4 Sendistovan í Keypmannahavn (GL 2000/2 02 2-4)

Í juni 2002 var Landsgrannskoðanin á eftirliti á Sendistovuni í Keypmannahavn, har vit m.a. kannaðu roknskaparviðurskiftini, og um viðurskifti, sum fyrr eru umrødd í frágreiðingum, vóru komin í rættlag. Sendistovan í Keypmannahavn er partur av játtanini til kontu 2.13.1.01: Viðskiftastovur.

Vit hava fyrr víst á vantandi dagføring av endamáli og starvsøki. 7. februar 2002 varð "Fyriskipan um Uttanríkistænastu Føroya" sett í gildi, ið fevnir um eins orðaðar reglur fyri Løgmansskrivstovuna og tær tríggjar sendistovurnar. Samstundis fór kunngerð nr. 63/1979 um viðskiftastovuna í Keypmannahavn úr gildi.

Sambært grein 6 í fyriskipanini eru sendistovurnar umboðsstovur landsins á staðnum og eiga í sínum starvi:

- *at* fremja og avgreiða mál landsins eftir boðum frá Uttanríkisdeildini og at kunna um gongdina í málunum,
- *at* kunna uttanríkisdeildina um øll viðkomandi viðurskifti á starvsøki teirra,
- *at* fregnast um mál, ið kunnu hava týdning fyri landið, og at kunna í tøkum tíma Uttanríkisdeildina um gongdina í málunum,
- *at* veita landsins myndugleikum, vinnufeløgum, felagsskapum og einstaklingum hjálp,
- *at* at veita útlendskum myndugleikum, vinnufeløgum, felagsskapum og einstaklingum almenna kunning um landið og um mál, ið tæna áhugamálum landsins.

Eisini er ásett, at deildarstjórin á Uttanríkisdeildini í samráð við løgmansstjóran ásetir starvsøkið hjá sendistovunum.

Spurdur um geografiska býtið millum sendistovurnar, hevur løgmaður í desember 2002 greitt frá, at sum meginsjónarmið er starvsøkið hjá Sendistovuni í Keypmannahavn landafrøðiligt og fevnir um Norðurlond og lond í Evropa, íroknað Russland, Hvítarussland og Ukraina, sum ikki eru limir í ES. Tó eru undantikin tey lond, sum hava søkt um limaskap í ES. Hinvegin fevnir starvsøkið hjá Sendistovuni í Keypmannahavn ikki um Norðurlond, tá ið ræður um ES mál. Tey mál eru tillutað Sendistovuni í ES.

Vit hava fyrr gjørt vart við, at ongar ítøkiligar ætlanir verða lagdar fyri árliga virkseminum, og eingin skipað skráseting er av virkseminum. Løgmansskrivstovan hevur í desember 2002 kunnað um, at ítøkiliga starvsøkið hjá sendistovuni í Keypmannahavn í stóran mun er treytað av, hvørji mál eru á skrá frá degi til dags, og Løgmansskrivstovan vísir annars til fyriskipanina frá 7. februar 2002.

3.5 Alment um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting (GL 1998/2 02 9-2)

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at nógvar studningsjáttanir verða bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Fleiri stovnar/feløg kunnu fáa studning til somu endamál frá fleiri stuðulsjáttanum. Í ávísan mun er talan um fleirfaldaða málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Umsitingin av studningi er á fleiri økjum fløkt og óskipað og er merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv í sambandi við málsviðgerð og útgjalding. Eftir okkara tykki er tørvur á at bøta um stuðulsgrundarlag/-lóggávu og stuðulsumsiting, so endamál og treytir o.a. verða greiðari, og tað slepst undan dupultarbeiði o.s.fr.

Seinastu árini hava vit víst á, at tað er góður lóggávusiður, at neyvari reglur um studningsskipanir, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, verða ásettar í serstakari lóg við m.ø.:

- Neyvari endamálsáseting í lógini. Í viðmerkingunum: ítøkiligar ásetanir fyri, hvørji úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt sum mát fyri, um endamálið er rokkið.
- Lýsing/avmarkan av, hvør kann fáa stuðul, hvussu stuðulin verður roknaður út, og hvussu stór samlaða stuðulsupphæddin er, vísandi til fíggjarlóg.
- Reglur fyri, hvussu og nær stuðulin verður goldin út.
- Heimild í lógini at áseta reglur fyri viðgerð og góðkenning av umsóknum, krøv til skjalprógv og treytir fyri játtan og nýtslu av stuðuli.
- Heimild í lógini at krevja, at einstaklingar, feløg ella viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar o.l., skulu lúka ávís krøv/vera góðkend, sum treyt fyri stuðuli.
- Heimild í lógini at áseta neyvari treytir og reglur viðvíkjandi fíggjarætlan, eftirliti, roknskapum og grannskoðan.
- Ásetingar í lógini um, at ein tilsøgn um stuðul fellur burtur, ella stuðulin skal verða rindaður aftur, lýkur móttakarin ikki longur settar treytir, ella megnar hann ikki at fullføra eina ætlan innan ásetta tíð.
- Upplýsingarskyldu og atgongd til kanningar á staðnum.
- Møguligar revsireglur.

Umrøddu trupulleikar eru galdandi á øllum málsøkjunum, og í samráð við fleiri aðalráð tók Landsgrannskoðanin í september 2001 á seg at skipa fyri einum skeiði í "umsiting av stuðulsjáttanum o.a." Niðurstøðan á skeiðinum var, at stórur tørvur er á at bøta um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) samtykti Løgtingið 12. mars 2002 at mæla til, at Løgmansskrivstovan átók sær ein virknan og samskipandi leiklut í arbeiðinum at bøta um verandi stuðulslóggávu.

Í desember 2002 tók løgmaður stig til fund við umboð fyri Fíggjarmálaráðið, Løgmansskrivstovuna og Landsgrannskoðanina at lýsa málið. Niðurstøðan á fundinum var, at ein bólkur við starvsfólki úr miðfyrisitingini skal verða settur at arbeiða við málinum. Bólkurin skal, verður tað hildið at vera skilagott, evna til eina almenna lóg um stuðul, sum ásetir reglur og krøv um roknskap, eftirlit, grannskoðan o.a., og skal harafturat gera uppskot til eina skipan, sum skal tryggja, at verandi og nýggj stuðulslóggáva og viðmerkingar til stuðulsjáttanir á fíggjarlógini verða á fullgóðum støði. Í januar 2003 heitti løgmaður á Fíggjarmálaráðið um at taka á seg ábyrgdina og leiðsluna av verkætlanini og samskipa hana við arbeiðið hjá Fíggjarmálaráðnum at broyta játtanarskipanina.

4. FISKIVINNA

4.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2001/1 04 1-8)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

5.11.1.05. Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 17,3 mió.kr. Minninýtslan er 5,7 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum:

- byrjaði skipanin við samskipara innan fiskivinnugransking ikki fyrr enn í oktober 2001. Minninýtsla 3,5 mió.kr.
- gekk arbeiðið við at fáa samskipað tilbúgvingina fyri Føroyar seinni enn væntað. Minninýtsla 2 mió.kr.

5.34.1.10. Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.697 t.kr. Minninýtslan er 506 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru størv ósett í 2001.

5.34.3.07. Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8 mió.kr. Minninýtslan er 2 mió.kr. Hóast ongan lønarkarm eru 2,3 mió.kr. nýttar til lønir. Sambært landsstýrismanninum er lønarkarmur við á fíggjarløgtingslógini 2002, og fer at verða tað í framtíðini.

5.34.4.01. Inntøkutrygd (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 30 mió.kr. Minninýtslan er 8,7 mió.kr. Upprunaliga játtanin var 38 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin lækkað 8 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan í stóran mun frá góðum fiskiskapi og góðum fiskaprísum.

5.34.4.04. Sjúkratrygd (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6,5 mió.kr. Meirnýtslan er 305 t.kr.

5.34.4.16. Fiskivinnumenning á landi

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 10,3 mió.kr. Minninýtslan er 6,5 mió.kr. Upprunaliga játtanin var 10,7 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin lækkað 400 t.kr., *"tí Fiskimálaráðið hevur mett, at tað verður eitt lítið avlop á hesi stuðulsjáttan fyri fíggjarárið 2001."* Sambært landsstýrismanninum gjørdist nýtslan minni, enn roknað varð við.

5.34.4.22. Flutningsstuðul (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,5 mió.kr. Meirnýtslan er 226 t.kr.

5.34.4.31. Rentustuðul til fiskifør

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Eingin peningur er nýttur. Lógin varð tikin av við Ll. nr. 61 frá 27 apríl 2001 "um avtøku av ymiskum løgtingslógum (fiskivinnumál)".

5.34.5.01. Útlán

Á fíggjarlógini var eingin játtan til útlán. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar "Stuðul til vinnu" og "útlán v.m." 34,7 mió.kr. og inntøkurnar "Afturgjald av útlánum v.m." 31,5 mió.kr. Stóru frávikini standast av, at avskrivingar av vinnulánum verða tiknar við, bæði sum stuðul til vinnu og sum afturgjald av lánum.

5.34.5.07. Effektivar veðhaldsútreiðslur

Á fíggjarlógini var játtanin til útlán 1 mió.kr. og játtanin til afturgjald av lánum 3 mió.kr. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar "Stuðul til vinnu" og "útlán v.m." 4,5 mió.kr. og inntøkurnar "Afturgjald av útlánum v.m." 7,1 mió.kr. Stóru frávikini standast av, at í landsroknskapinum verða vinnulánsavskrivingar tiknar við, bæði sum stuðul og sum láns-afturgjald.

5.35.1.02. Skipaeftirlitið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,6 mió.kr. Minninýtslan er 2,3 mió.kr. Upprunaliga varð eingin peningur játtaður. Á eykajáttanarlógini fyri september vórðu játtaðar 2,6 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina

> *"hevur Fiskimálaráðið mett, at tað er neyðugt longu í ár at fara undir at skipa bygnaðin av Skipaeftirlitinum og seta fólk at taka sær av teimum praktisku uppgávunum, ið skulu vera loystar áðrenn 1. januar 2002, tá Skipaeftirlitið ætlandi skal virka eftir nýggja leistinum."*

Sambært landsstýrismanninum byrjaði nýggjur stjóri ikki fyrr enn í desember 2001. Tí varð so seint farið í gongd við at skipa bygnaðin av nýggju deildini.

5.35.1.05. FAS-endurgjald

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 13 mió.kr. Meirnýtslan er 2,5 mió.kr.

Lønarkarmur

Høvuðskonturnar niðanfyri vísa roknskapir, har farið er upp um ásetta lønarkarmin.

(t.kr)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	Munur
5.34.1.05.	Hvalagransking og hvalateljing v.m (rakstrarjáttan)	500	837	337
5.34.3.07.	Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan)	0	2.324	2.324

4.2 Fiskiveiðieftirlit/tyrlutænasta (GL 2000/2 14 2-2)

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 varð grannskoðanin av Fiskiveiðieftirlitinum/Tyrlutænastuni umrødd.

Ll. nr. 127/2000 "um tyrlutænastu" heimilar landsstýrismanninum at gera 10 ára sáttmála við tænastuveitara um tyrlutænastu. Sambært § 1, stk. 2, fevnir tænastan um "leiting og bjarging" á sjógvi og landi, eftirlitsflúgving fyri Fiskiveiðieftirlitið, sjúkraflutning og bráðfeingis tyrluflúgving. Sambært § 2, stk. 1, er treytin fyri sáttmálanum, at tænastuveitarin

útvegar sær eina miðalstóra, serútgjørda tyrlu, og at manning er tøk til eitt í sáttmálanum avtalað árligt flúgvitímatal.

7. februar 2001 skrivaðu Fiskimálaráðið og Atlantsflog undir 10 ára sáttmála galdandi frá 1. januar 2001. Fiskimálaráðið skal rinda Atlantsflogi árliga samsýning 14 mió.kr. umframt MVG. Avgerandi fyritreyt fyri sáttmálanum er, at verandi skipan við at røkja innanoyggja tyrluflúgving við Bell 212 tyrluni, sum landið eigur, heldur fram. Sáttmálin um innanoyggja tyrluflúgving er millum Vinnumálaráðið og Atlantsflog. Hann kostar 5 mió.kr. um árið.

Sostatt hevur landið gjørt 10 ára avtalu um tyrluflúgving við 2 tyrlum fyri samanlagt 19 mió.kr. um árið. Ger Fiskimálaráðið av at siga samstarvið upp, hevur landið skyldu at keypa tyrluna til handilsvirðið, tó í minsta lagi bókaða virðið, sum svarar til restskuldina av láninum.

Árliga samsýningin byggir á fyritreytirnar í eini rakstrarætlan, sum Atlantsflog hevur sett upp fyri nýútvegaðu tyrluna og tyrluna, sum landið eigur. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at eftir øllum at døma hevði Fiskimálaráðið ikki útvegað sær neyvari útgreiningar av fortreytunum fyri rakstrarætlanini og ætlað um tær.

Sambært § 7, stk. 2, í sáttmálanum millum Atlantsflog og Fiskimálaráðið skal Atlantsflog seta upp partsroknskap fyri samlaðu tyrlutænastuna sambært reglunum í ársroknskaparlógini. Partsroknskapurin skal verða grannskoðaður og áteknaður av grannskoðaranum hjá Atlantsflogi.

Sambært roknskapinum fyri 2001 vóru inntøkurnar uml. 1.730 t.kr. hægri, enn roknað varð við í rakstrarætlanini, og útreiðslurnar vóru uml. 2.051 t.kr. hægri, enn mett varð. Úrslitið var eitt hall 239 t.kr.

Eftir sáttmálanum hevur Fiskimálaráðið rætt til helvtina av staðfestum roknskaparligum vinningi yvir eina millión, sambært grannskoðaðum partsroknskapi. Atlantsflog hevur rætt til at fáa eitt staðfest roknskaparligt hall goldið av Fiskimálaráðnum, tó so, at Atlantsflog ber tær fyrstu 250 t.kr. av einum møguligum halli. Harafturat hevur Atlantsflog rætt til at fáa árligu samsýningina hækkaða, vísir partsroknskapurin eitt hall, sum stendst av vøkstri í útreiðslum til starvsfólk, brennievni og viðlíkahald.

Vit hava gjøgnumgingið roknskapin fyri 2001. Rakstrarroknskapurin er ikki settur upp eftir sama leisti sum rakstrarætlanin, og er eftir okkara tykki ov lítið greinaður. Tí er trupult at samanbera rakstrarætlanina við rakstrarroknskapin. Vit duga heldur ikki í roknskapinum at síggja, hvussu býtislyklar fyri felagskostnað, herímillum fyrisitingar- og hølisútreiðslur og ávísar lønarútreiðslur, eru ásettir, hvussu komið er fram til avskrivingar/avdráttir, rentuútreiðslur, viðlíkahaldsútreiðslur o.a. Vit hava tí mælt Fiskimálaráðnum til at útvega neyvari upplýsingar um hesi viðurskifti, og í hesum sambandi at útvega samsvarandi upplýsingar viðvíkjandi 2002. Fiskimálaráðið hevur í februar 2003 greitt okkum frá, at Fiskimálaráðið hevur biðið um fund við Atlantsflog at viðgera ivamálini.

4.3 Lønjavningarstovan (GL 2000/2 14 4-5)

Lógargrundarlag

Í frágreiðing í juli 1999 vístu vit m.a. á, at hóast tað í § 2, stk. 3, í Ll. nr. 73/1997 "um Lønjavningargrunn" er álagt landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur fyri mannagongdum í sambandi við útgjøld frá Lønjavningarstovuni, eru tær ikki settar. Landsstýrismaðurin boðaði í mars 2000 frá, at arbeitt varð við málinum. Landsstýrismaðurin greiddi í januar 2001 frá, at arbeiðið hevði drigið út, men at roynt varð at fáa viðurskiftini í rættlag skjótast gjørligt. Í februar 2002 kunnaði Fiskimálaráðið um, at ongar broytingar vóru gjørdar í lógargrundarlagnum.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at arbeiðið at gera kunngerð og áseta neyvari reglur fór at verða gjørt, samstundis sum roknskaparreglurnar fyri økið fóru at verða

gjørdar. Roknskaparreglurnar eru gjørdar, og nú er eftir at gera kunngerð og neyvari reglur fyri alt økið, við atliti at bygnaðarbroytingum fyri Lønjavningarstovuna.

Roknskaparreglur

Fiskimálaráðið kunnaði í februar 2002 um, at tey í 2001 høvdu gjørt roknskaparreglur fyri Lønjavningarstovuna. Hildið varð neyðugt at kanna allar mannagongdir, í sambandi við at veitingar verða rindaðar, og at fáa tær allýstar og gjørdar til reglugerðir. Játtan varð sett av til eitt roknskaparfólk, og arbeiðið skuldi eftir ætlan byrja, tá ið roknskaparfólkið var sett.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at roknskaparfólkið fór væntandi at verða sett í oktober 2002, og tá skuldi verða farið undir at gera neyvari roknskaparreglur. Roknskaparfólkið er ikki sett.

Innaneftirlit

Lønjavningargrunnurin umsitur ymiskar stuðulsskipanir. Í juli 1999 mæltu vit til við stakroyndum at eftirkanna mongu útrokningarnar á ein skipaðan hátt. Landsstýrismaðurin boðaði í mars 2000 frá, at roynt fór at verða sum skjótast at seta eitt innaneftirlit í verk. Í september 2000 staðfestu vit, at einki var hent. Deildarstjórin greiddi frá, at stovnurin hevði ikki neyðugu arbeiðsorkuna at loysa uppgávuna. Landsstýrismaðurin boðaði í januar 2001 frá, at hesi viðurskifti fóru at verða raðfest hægri í framtíðini.

Fiskimálaráðið kunnaði í februar 2002 um, at eitt fólk við roknskaparligum førleika fór at verða sett í starv, m.a. til at taka sær av hesari uppgávu.

Í september 2002 kunnaði Fiskimálaráðið um, at roknskaparfólkið fór væntandi at verða sett í oktober 2002, og tá skuldi verða farið undir at skipa innaneftirlitið. Roknskaparfólkið er ikki sett.

Edv-viðurskifti

Lønjavningarstovan umsitur ymiskar stuðulsskipanir til fiskivinnuna. Talan er um fleiri serskildar edv-skipanir, t.d. er ein skipan til dagstudning/minstaløn, ein er til minstaforvinning og ein til telefonstuðul. Í frágreiðing í juli 1999 vístu vit á, at eingin vegleiðing ella dokumentatión finst til tær ymisku skipanirnar. Landsstýrismaðurin kunnaði í mars 2000 um, at arbeitt varð við málinum. Í september 2000 staðfestu vit, at einki var hent.

Fiskimálaráðið boðaði í februar 2002 frá, at á fíggjarlógini 2002 varð 1 mió.kr. sett av til edv-íløgur í sambandi við ábøtur og dagføringar av verandi skipanum, herímillum ein automatiseran av roknskaparligu viðurskiftunum mótvegis skipanunum hjá Føroya Gjaldstovu.

Í september 2002 kunnaði Fiskimálaráðið um, at Ráðið innanhýsis hevði viðgjørt spurningin um dokumentatión og vegleiðing av verandi skipanum. Í staðin fyri at gera meira við verandi skipanir var semja um at leggja skipanirnar um, nútímansgera og betra tær, herímillum at tryggja eina automatiseran av roknskaparligu viðurskiftunum mótvegis útgjaldsskipanunum hjá Føroya Gjaldstovu. Heitt er á eina føroyska teldufyritøku um at átaka sær uppgávuna, og eisini at gera vegleiðingar og dokumentatión av skipanunum, og hetta arbeiði er farið í gongd.

4.3.1 Sjúkratrygd

Í frágreiðing í juli 1999 vístu vit á, at lógin um sjúkratrygd er ófullfíggjað, og als ikki er samskipað við lógarásetingarnar um sjúkradagpening frá Almannastovuni og Vanlukkutryggingini. Í november 2001 grannskoðaðu vit 20 mál um sjúkratrygd og staðfestu, at støðan var óbroytt:

1. Til ber at fáa sjúkratrygd og samstundis fáa dagpening frá Føroya Vanlukkutrygging
2. Eingin umsóknarfreist er ásett
3. Til ber at fáa sjúkratrygd og samstundis hava aðra inntøku
4. Frítíðarløn verður goldin út, hóast eingin heimild er í lógini
5. Lógin er ikki samskipað við lógirnar um dagpening frá Almannastovuni og frá Vanlukkutryggingini

Í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin hevur Løgtingið fleiri ferðir samtykt at mæla landsstýrismanninum til sum skjótast at broyta lógina um sjúkratrygd í samráð við landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum.

Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at umsitingin í Fiskimálaráðnum hevði latið honum eitt notat, har mælt varð til, at politisk støða varð tikin til hesar tríggjar møguleikar í sambandi við lógina um sjúkratrygd:

at uppskot verður lagt fyri Løgtingið um at taka av lógina um sjúkratrygd, tí hildið verður, at lógin ikki longur hevur sjálvstøðugan týdning. Er talan um sjúku ella skaða, kemur fiskimaður undir dagpeningalógina.

at uppskot verður lagt fyri Løgtingið um at broyta løgtingslógina um sjúkratrygd, har hædd verður tikin fyri teimum viðurskiftum, sum Landsgrannskoðanin heldur vera óheppin.

at málsøkið "sjúkratrygd" verður flutt til Trivnaðarmálaráðið. Hesin møguleiki er ikki umrøddur við Trivnaðarmálaráðið.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) átalaði Løgtingið 12. mars 2002, at landsstýrismaðurin ikki hevði loyst hetta mál. Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevur tikið málið upp til politiska viðgerð, og at eitt "upprit til landsstýrisfund" varð latið hinum landsstýrismonnunum til landsstýrisfundin 24. september 2002.

4.3.2 Mánaðarligur minstaforvinningur

Vit hava áður vísst á, at tørvur var á greiðari reglum á fleiri økjum, og vit hava mælt til ymiskar ábøtur. Nøkur viðurskifti eru rættað, men framvegis er talan um fleiri veikleikar við skipanini:

- Maður ikki við allar túrar: Vit hava mælt til, at neyvari reglur verða ásettar í kunngerð.
- Bert A-inntøka verður roknað sum onnur inntøka: Útróðrarmaður kann hava stórar B-inntøkur, uttan at tað minkar um minstaforvinningin.
- Inntøkutreytir: Í sambandi við grannskoðanina komu vit fram á fleiri dømi um bátar, sum ikki høvdu verið nakran túr í einum mánaði. Sostatt var manningarparturin 0 kr, men manningin fekk fullan minstaforvinning. Tað kundi lata seg gera, tí báturin 6 undanfarnu mánaðirnar hevði avreitt fyri so mikið, at hann leyk treytirnar í § 2, stk. 1, í lógini um minstaforvinning. Nevnt varð sum dømi, at um einsamallur maður avreiddi fyri 54 t.kr. í einum mánaði, leyk hann treytirnar fyri at fáa minstaforvinning komandi 5 mánaðirnar uttan at fara á flot. Teoretiskt nýttist honum sostatt bert at rógva út 6. hvønn mánað fyri at fáa minstaforvinning.

Fiskimálaráðið hevur áður kunnað um, at teir vistu um trupulleikarnar viðvíkjandi skipanini við minstaforvinningi, men at ringt var at koma fram til eina skipan, sum virkaði nóg væl. Tí vóru framvegis viðurskifti, sum gjørdu, at lóggávan ikki kundi verða umsitin til lítar. Landsstýrismaðurin boðaði í januar 2001 frá, at hann fór støðugt at bøta um skipanina.

Í januar 2002 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Fiskimálaráðnum og vinnuni hevði arbeitt við at tillaga lóggávuna, men eingin endalig niðurstøða varð gjørd. Fiskimálaráðið helt, at skipanin við mánaðarligum minstaforvinningi var politiskt tilætlað av Løgtinginum. Landsstýrismaðurin hevði roynt at broyta løgtingslógina, men politisk undirtøka fekst ikki, og tí varð uppskotið tikið aftur undir viðgerðini í Løgtinginum.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) mælti Løgtingið 12. mars 2002 landsstýrismanninum til at endurskoða skipanina.

Landsstýrismaðurin kunnaði í september 2002 um, at hann fór at seta eina nevnd seinni um heystið at endurskoða alla skipanina.

4.4 Fiskivinnuroyndir (GL 2000/2 14 1-3)

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 umrøddu vit m.a., at játtanin til "Fiskivinnuroyndir", sum Fiskimálaráðið umsitur, seinnu árini hevur verið 8 mió.kr. Talan er um eina "rakstrarjáttan". Í viðmerkingunum stendur einans:

> *"Fiskimálaráðið umsitur fiskivinnuroyndir, sum verða fyriskipaðar í samstarvi millum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Menningarstovuna. Játtanin er til fiskivinnuroyndir og kanningar, herímillum vørumenning og hvussu mest fæst burtur úr øðrum fiskasløgum."*

Í frágreiðing í september 1998 til landsstýrismannin í fiskivinnumálum vístu vit m.a. á, at fíggjarlógin, og tær fáu viðmerkingarnar í fíggjarlógaruppskotinum frá landsstýrinum, er einasta heimild fyri hesi lutfalsliga stóru studningsskipan. Vit hildu hetta ikki vera nøktandi, og heittu á Fiskimálaráðið um at viðgera spurningin.

Løgtingsgrannskoðararnir hava í áravís víst á, at játtanin er alt ov lítið útgreinað, og í uppskotum til samtyktar hevur Løgtingið átalað, at hon ikki er broytt.

Í november 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at í fíggjarlógaruppskotinum 2002 varð skotið upp at greina játtanina út á standardkontu 11 og 14.

Í november 2002 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í fíggjarlógaruppskotinum 2003 er játtanin greinað á enn fleiri standardkontur, og viðmerkingarnar eru broyttar, soleiðis at endamálið við játtanini verður meira týðiligt.

Verkætlanarleiðari innan fiskiídnaðargransking er settur at samskipa játtanina til Fiskivinnuroyndir. Hann hevur, saman við Fiskimálaráðnum, arbeitt við at endurskoða verandi mannagongdir í sambandi við játtan av umsóknum til "Fiskivinnuroyndir v.m." Gjørdar eru gjølligar ásetingar, mannagongdir, vegleiðingar og umsóknarbløð.

5. VINNUMÁL o.a.

5.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2001/1 04 1-8)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

6.11.1.16. Viðlíkahald (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.100 t.kr. Minninýtslan er 519 t.kr. Upprunaliga játtanin var 1.900 t.kr. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin lækkað við 800 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð ætlaða uttandura viðlíkahaldsarbeiðið hjá Bileftirlitinum steðgað, tí kommunan tók byggiloyvið aftur, og tí var næstan einki nýtt av játtanini.

6.33.1.0.7. Kanning av djórasjúkum í Føroyum (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,2 mió.kr. Minninýtslan er 2,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at kanna djórasjúkur í Føroyum nógv seinkað, m.a. tí tað var trupult at fáa fatur á djóralækna, sum skuldi standa fyri arbeiðinum. Tí var bert tørvur á einum lítlum parti av játtanini.

6.36.1.04. Havbúnaðarroyndir

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14 mió.kr. Minninýtslan er 9,15 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu 11 mió.kr. veittar p/f Fiskaaling sum stuðul til arbeiðið innan kynbøtur, royndir við nýggjum fiskasløgum, aliráðgeving og royndir við nýggjum aliøkjum.

Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært trý ára sáttmála frá 1999 millum p/f Fiskaaling og Vinnumálaráðið, skuldi møguligt yvirskot frá einari studningsjáttan falla aftur til landskassan. Verkætlanarroknskapurin fyri 2001 vísti, at felagið hevði ikki nýtt tilsamans 6,7 mió.kr. Tær vórðu tí skuldskrivaðar felagnum. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2003 boðað frá, at uppskot til løgtingslóg um "innskot av almennum ognum í p/f Fiskaaling" verður lagt fyri tingið í hesi tingsetuni. Av ikki nýttu studningsjáttanini fær landsstýrismaðurin sambært uppskotinum heimild at seta uml. 3,1 mió.kr. í p/f Fiskaaling sum partapening.

Eftir ætlan skuldu 3 mió.kr. verða nýttar til verkætlanir innan sjúkufyribyrging, men áhugin var lítil. Minninýtslan er 2,4 mió.kr.

6.37.2.04. Endurgjald til skipasmíð

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 9,3 mió.kr. Meirnýtslan er 121 t.kr. Sambært landsstýrismanninum gjørdust útreiðslurnar eitt vet størri, enn mett varð frammanundan. Seinasta rokningin kom eftir ársskiftið, og tá var ov seint at formalisera meirnýtsluna við eykajáttan.

6.37.4.01. Útskifting og Matrikulstova (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,3 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 65 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru lønarhækkingarnar nakað hægri, enn sáttmálabundnu lønarhækkingarnar annars vóru í miðal.

6.37.5.05. Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 400 t.kr. Minninýtslan er 395 t.kr. Upprunaliga játtanin var 6,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin lækkað 6,1 mió.kr, tí farið var ikki undir at byggja um í 2001.

Samferðsla og samskifti

6.38.3.01. Postverk Føroya (landsfyritøka)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 17 mió.kr. Minninýtslan er 3,6 mió.kr. Upprunaliga játtanin var 10 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin hækkað 7 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið vóru tær 10 mió.kr. ætlaðar til at innrætta bygningin á Óðinshædd, umvæla/umbyggja tvey økisposthús, og til at útvega nýmótans fíggjarstýringarskipan til Postverkið. Íløgurnar verða gjørdar til tess at umskipa og nýmótansgera Postverk Føroya og fyrireika tað til kapping.

Sambært viðmerkingunum til uppskot til eykajáttanarlóg fyri september 2001 var fyritreytin fyri fíggjarætlanini 2001, at ein umskipan skuldi verða framd av Postverki Føroya, soleiðis at raksturin kundi bera seg, men tað var ikki møguligt politiskt at fremja hesa ætlan.

Við støði í roknskapinum fyri teir 7 fyrstu mánaðirnar í 2001 varð roknað við einum samlaðum halli fyri árið uppá 7,0 mió. kr. Postgjøldini hækkaðu 1. oktober 2001, og tað varð tikið við í metingina av rakstrargongdini.

Gongdin í rakstrinum gjørdust tó væl betri, enn roknað varð við. Rakstrarinntøkurnar gjørdust uml. 4,5 mió.kr. hægri, og útreiðslurnar uml. 1,1 mió.kr. lægri enn mett varð, ella eitt rakstrarúrslit, sum var 5,6 mió.kr. betri enn mett varð. Hinvegin nýtti stovnurin 1,8 mió.kr. meira til íløgur, enn upprunaliga ætlað.

6.39.4.01. Barsilsskipan (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 41,3 mió.kr. Minninýtslan er 11,8 mió.kr. Upprunaliga var eingin peningur játtaður. Á eykajáttanarlógini fyri mars 2001 vórðu játtaðar 26,8 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin hækkað 14,5 mió.kr.

6.39.4.04. Umsiting av barsilsskipan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,9 mió.kr. Minninýtslan er 960 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin 18 t.kr. Upprunaliga var eingin peningur játtaður. Á eykajáttanarlógini fyri mars 2001 vórðu játtaðar 2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin hækkað 1,9 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var tað serliga ætlaði byrjanarkostnaðurin fyri edv, sum varð dýrari, enn roknað varð við. Ætlanin var, at 1,2 mió.kr. av eykajáttanini fyri september 2001 skuldi verða nýtt til edv. Eykajáttanin kom tó so seint, at tað ikki "eydnaðist" at nýta meira enn 155 t.kr. av henni. Søkt varð tí um at fáa 1.040 t.kr. endurjáttaðar í 2002, og tað varð samtykt við eykajáttanarlógini fyri mars 2002.

5.2 Roknskaparreglugerðir

Samsvarandi rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 skulu landsstovnar hava reglugerð fyri roknskaparhaldi sínum, og avvarðandi aðalstýri skuldu góðkenna reglugerðirnar í seinasta lagi 31. desember 2001. Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar 22. februar 2002 vístu vit á, at flestu stovnarnir høvdu latið Vinnumálaráðnum uppskot til roknskaparreglugerð, og at Vinnumálaráðið fór undir at góðkenna roknskaparreglugerðirnar í januar 2002.

Vinnumálaráðið hevur í august 2002 boðað frá, at ráðið hevur góðkent roknskaparreglugerðirnar hjá 10 stovnum, og at miðað varð ímóti, at írestandi reglugerðirnar vórðu góðkendar beint eftir summarfrítíðina í 2002. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2003 kunnað um, at 3 reglugerðir ikki eru góðkendar.

5.3 Vantandi stjórnan av kunningartrygd (GL 2001/1 02 0-2)

Samskifti við løgmann

Í skrivi til løgmann í august 2001, sum eisini varð sent landsstýrismonnunum til kunningar, vístu vit m.a. á :

at innan landsumsitingina fer arbeiðið at tryggja tann elektroniska partin av kunningarkervinum fram óskipað. Fólk sita hvør sær og stríðast við somu trupulleikum uttan at halda seg til viðurkendar standardar,

at tað lættliga kann fáa sera óhepnar fylgjur,

at vandi er fyri, at peningur og starvsfólkaorka verða ikki nýtt á skynsaman hátt,

at KT-Forum so at siga ikki er til longur,

at DNL-ráðið ikki hevur ásett felags trygdarreglur,

at tað er ógreitt, hvørja ábyrgd og hvønn myndugleika KT-forum, DNL-ráðið og onnur stýri og stovnar hava, og hvørjar avleiðingarnar verða, verða boð ikki fylgd.

Vit mæltu Landsstýrinum til, sum skjótast, at taka støðu til, um:

- landsumsitingin skal halda seg til viðurkendar standardar innan stjórnan av kunningartrygd,
- stjórnan av kunningartrygd skal verða gjørt til egið ábyrgdarøki, við egnari játtan,
- stovnar og landsstýrismenn, hvør í sínum lag, skulu seta krøvini til kunningartrygd, ella um málsøkið skal verða lagt til ein landsstýrismann,
- neyðugt er at samskipa arbeiðið í landsumsitingini, og um krøv skulu verða sett til samskiftið stovnanna millum í arbeiðinum við kunningartrygd.

Ábyrgdarøkið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum

Løgmaður ásannaði í skrivi í oktober 2001, at eingin felags kunningar- ella trygdarpolitikkur var ásettur, og hann vísti á, at síðani landsumsitingin varð umskipað í 1996/97, hevði landsstýrismaðurin í vinnumálum havt ábyrgdina av málsøkinum kunningartøkni. Landsstýrismaðurin hevur sostatt ábyrgdina av, at tað almenna hevur ein yvirskipaðan kunningartøkni- og trygdarpolitikk.

Somuleiðis vísti løgmaður á, at ábyrgdin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum eisini fevnir um samskipanini millum aðalráðini t.v.s.:

at kunningartøknin í fyrisitingini verður á einum nøktandi og rímiliga einsháttaðum støði,

at tann samlaði fakligi førleikin á økinum verður mentur og fullnýttur,

at stuðla undir implementeringina av felags tvørgangandi KT-loysnum í almennu umsitingini.

Sambært skrivinum frá løgmanni skuldi Vinnumálaráðið, við hjálp frá einum tvørgangandi KT-forum, m.a. gera uppskot til ein KT-trygdarpolitikk, ið skal taka støði í altjóða standardum innan stjórnan av KT-trygd.

Løgmaður vísti á, at yvirskipaða lýsingin av KT-trygd er ábyrgdarøki hjá landsstýrismanninum í vinnumálum. Stovnar og landsstýrismenn skulu sostatt ikki hvør í sínum lag seta

yvirskipað krøv til KT-trygd, men taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar, sum verða ásettir av Vinnumálaráðnum.

Átala og áheitan frá Løgtinginum

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) átalaði Løgtingið 12. mars 2002, at viðurskiftini á hesum týðandi øki eru óskipað, og heitt varð á landsstýrismannin um at raðfesta hetta arbeiði høgt og fáa viðurskiftini í rættlag sum skjótast.

Arbeiðsætlan hjá landsstýrismanninum í vinnumálum

Landsstýrismaðurin kunnaði í skrivi 7. februar 2002 um, at Vinnumálaráðið hevði heitt á aðalráðini og Løgmansskrivstovuna um at velja umboð í eitt endurskoðað KT-forum. Vinnumálaráðið hevði orðað eitt uppskot til KT-politikk, ið skuldi verða viðgjørt í KT-forum. Tá ið arbeiðið varð liðugt, skuldi tilmælið verða latið løgmanni og landsstýrismonnum at taka støðu til. Vinnumálaráðið miðaði ímóti, at arbeiðið skuldi verða liðugt í seinasta lagi 1. mai 2002.

Arbeiðið varð ikki liðugt til ásettu tíð, og í juni 2002 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevði, og nær viðurskiftini eftir ætlan fóru at koma í rættlag.

Í august 2002 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at endurskoðaða KT-forum í fyrsta lagi hevur lagt dent á arbeiðið við KT-trygdarpolitikki. Semja er í KT-forum um at fara fram eftir hesum leisti:

- Forkanning, sum er ein váðakanning av øllum tí almenna sektorinum í Føroyum
- Útgreining av váðakanningini við støði í BS 7799 (British Standard BS 7799 “Information security management “) og einari “cost-benefit” útgreining
- Uppskot til vegleiðing verður latið til hoyringar
- Vegleiðing latin øllum aðalráðum og stovnum

Í sambandi við fyrireikingina til greiningararbeiðið verður arbeitt við at fáa til vega eitt yvirlit yvir stovnar hjá landinum, sum hava edv-kervi, og herímillum eisini:

- hvørjir stovnar eru fevndir av nýggju trygdarkunngerðini, sum Løgmálaráðið arbeiðir við,
- hvørjir stovnar hava serliga viðkvæmar upplýsingar,
- uppskot til flokking av dátum hjá stovnunum.

Arbeiðið at orða ein KT-trygdarpolitikk er munandi meira víðtøkið og tíðarkrevjandi, enn roknað varð við, og tí heldur Vinnumálaráðið, at arbeiðið í fyrsta lagi verður liðugt í seinnu hálvu av 2003. Spurdur, hvørjar yvirskipaðar reglur/karmar viðvíkjandi KT-trygd stovnar og landsstýrismenn skulu halda seg til, til arbeiðið er liðugt, svarar landsstýrismaðurin í november 2002, at illa ber til at lata stovnum og landsstýrismonnum fyribils karmar at virka eftir, men Vinnumálaráðið og KT-forum fara at veita ta leiðbeining, sum er møgulig, eru ivamál ella spurningar.

Viðmerkingar

Í flestu londum í Evropa eru longu lagdar miðvísar yvirskipaðar ætlanir um at gagnnýta menningina innan KT til at effektivisera umsitingina (digitalisering), og í hesum sambandi verða allir tættir í umsitingini endurskoðaðir, eisini verandi lóggáva, uppgávubýtið millum land og kommunur, málsøki, stovnar o.a. Skulu vit luttaka fult út í hesi gongd, er tað neyðugt, at tey grundleggjandi trygdarviðurskiftini eru í lagi.

Tá ið ræður um KT-trygd heldur Landsgrannskoðanin, at verandi KT-bygnaður er eitt tað størsta vandamálið. Í dag hevur landsumsitingin eitt ótal av KT-skipanum, og tíðum hava alt ov smáar umsitingarligar eindir ábyrgd av at keypa, broyta, halda viðlíka, menna og reka skipanir, umsita net, trygd o.s.fr. Óneyðuga nógvir stovnar mega tí hava starvsfólk, sum hava kunnleika til kunningartøkni. Torført er at fáa skikkað fólk. Hjá dugnaligum fólki við royndum stendur ofta annað starv í boði. Tá ið eindirnar eru smáar, verða stovnarnir ofta hart raktir, tá ið fólk skifta arbeiði. Nógvar leiðslur megna ikki at taka á seg ábyrgdina av KT-skipanum, og verða uppgávurnar tí ofta uttan neyðuga leiðslustýring latnar privatum veitarum uppí hendi.

Eftir okkara tykki er neyðugt at endurskoða verandi KT-bygnað. Helst verður neyðugt at miðsavna fleiri uppgávur fyri at bøta um trygdina. Sum víst á í skrivi okkara til løgmann í august 2001 kann tað lættliga fáa sera óhepnar fylgjur, at viðurskiftini á hesum øki eru so óskipað, og harafturat verður peninga- og starvsfólkaorka ikki nýtt á skynsaman hátt.

Almenni KT-bygnaðurin kundi verið væl betri skipaður/samskipaður, men hann er í stóran mun ein spegilsmynd av einum undirliggjandi bygnaði. Broytingar innan lógarverkið, roknskaparverkið, uppgávubýtið millum aðalráð, stovnar, millum land og kommunu, millum landsstovnar og meira ella minni almennar grunnar o.s.fr. eru oftast farnar fram uttan nakað yvirskipað endamál, og tí er KT-bygnaðurin og KT-trygdin hareftir.

Landsgrannskoðanin heldur, at ein yvirskipaður KT-politikkur/KT-trygdarpolitikkur ikki kann verða gjørdur, uttan at almenni bygnaðurin verður endurskoðaður við tí endamáli at effektivisera umsitingina, t.v.s. gera hana bíligari og betri.

5.4 Bileftirlit Føroya (GL 2000/2 16 9-5)

Menning og umsiting av edv-skipanum

Bileftirlitið hevur ment og rekur "egnar" edv-skipanir. Ein KT-fyritøka umsitur og mennir hesar skipanir. Í seinastu frágreiðing í februar 2002 vístu vit á, at Bileftirlitið var ógvuliga bundið at einum fólki hjá edv-veitara sínum, og vit mæltu til, at formalisera samstarvið við fyritøkuna. Sambært stjóranum skuldi verða farið undir hetta í 2002. Vinnumálaráðið hevur í september 2002 boðað frá, at Bileftirlitið hevur gjørt sáttmála við edv-fyritøku um veitingar av edv-tænastum, t.e. umsiting og menning av egnu edv-skipanum stovnsins. Harafturat hevur stovnurin gjørt avtalu við aðra edv-fyritøku um kervisfyrisiting.

Dokumentatión og brúkaravegleiðingar

Vit vístu á, at eingin skrivlig skjalfesting av edv-skipanunum fanst á stovninum, og ongar brúkaravegleiðingar vóru. Stjórin boðaði í november 2001 frá, at í 2002 skuldi verða farið undir hesar uppgávur. Vinnumálaráðið hevur í september 2002 boðað frá, at arbeitt verður við at skjalfesta edv-skipanirnar, og arbeiðið fer væntandi at verða liðugt í 2002. Síðani verður farið undir at gera brúkaravegleiðingar.

Ásetingar um edv-skipanir í roknskaparreglugerðini

Vit vístu á, at sambært punkt 10 í roknskaparrundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum skal verða greitt frá í roknskaparreglugerðini, "hvussu og hvar edv verður nýtt, og hvussu henda uppgáva er skipað." Víst skal vera til viðkomandi skjøl (kervisfrágreiðing og brúkarahandbók), hvussu skipanin verður nýtt, og hvørji eftirlit eru. Harafturat skal verða víst til skjalatilfar, ið vísir tøkniliga bygnaðin av edv-skipanini, og vísir, hvør hevur atgongd til edv-útgerð, forrit og skráir. Stjórin boðaði í november 2001 frá, at í sambandi við, at roknskaparreglugerðin verður dagførd í 2002, fara hesar frágreiðingar eisini at verða gjørdar.

Spurdur, um Vinnumálaráðið hevur góðkent dagførdu reglugerðina, og um hon lýkur treytirnar í rundskrivinum, hevur landsstýrismaðurin í september 2002 greitt frá, at reglugerðin hjá stovninum er ikki dagført í 2002, tí Vinnumálaráðið góðkendi hana ikki fyrr enn í juli 2002. Kervisfyrisitari stovnsins arbeiðir við at gera eina rakstrarhandbók, herímillum kervisfrágreiðing. Tá ið tað arbeiðið er liðugt, verður roknskaparreglugerðin dagført samsvarandi.

Edv-skráir/persónsupplýsingar

1. januar 2002 kom í gildi Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum". Vísandi til § 48 hava vit í juni 2002 spurt, um skráirnar lúka treytirnar í nýggju lógini. Vinnumálaráðið hevur í september 2002 boðað frá, at Bileftirlitið samskiftir við Dátueftirlitið um tær skráir, sum viðgera persónsupplýsingar. Vinnumálaráðið heldur, at tað skuldi tryggjað, at stovnurin lýkur treytirnar í lógini. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2003 boðað frá, at Bileftirlitið í januar 2003 hevur sent Dátueftirlitinum fráboðan um hesar skipanir: akfarsskránna, koyrikortsskránna, sýnsskránna, navnaskránna og kassaskipanina. Dátueftirlitið hevur boðað Bileftirlitinum frá, at tað bert er koyrikortsskráin, ið hevur viðkvæmar upplýsingar.

5.5 Heilsufrøðiliga Starvsstovan (GL 1997/2 08 2-1)

Vantandi kunngerð

Sambært § 1, stk. 2, í Ll. nr. 23/1986 "um Heilsufrøðiliga Starvsstovu" er álagt Landsstýrinum við kunngerð at áseta neyvari reglur um arbeiðsøki, samskipanarviðurskifti og starvsfólkaviðurskifti. Vit vístu í seinastu frágreiðing í februar 2002 á, at hóast mong ár eru liðin, eru ongar reglur ásettar í kunngerð.

Landsstýrismaðurin vísti á í januar 2002, at við støði í einum arbeiðsskjali frá august 2000 var ætlanin í næstum at gera kunngerðina. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2003 greitt frá, at kunngerðin er liðug orðað, og hon er send Løgmálaráðnum at kanna.

Kanningarstovur/kappingaravlagandi virksemi

Prísirnir á tænastunum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni verða ásettir ájavnt prísum hjá kanningarstovum í øðrum londum. Í summum førum hava kanningarstovurnar roynt at rokna út veruliga kostnaðin, men tað verður ikki skrásett, hvussu nógv hvør tænastan kostar. Vit hava víst á, at kanningarstovurnar lúka ikki treytirnar í játtanarskipanini um "inntøkufíggjað virksemi", og at virksemið kann vera kappingaravlagandi.

Landsstýrismaðurin var samdur við Landsgrannskoðanini og ásannar, at gjøldini ikki svara til kostnaðin á tænastuni. Roknað varð við undirskoti fyrstu árini, men at inntøkur og útreiðslur síðani fóru at javnviga eftir nøkrum árum. Í 2002 varð roknað við einum undirskoti, svarandi til 58% av samlaðu útreiðslunum. Frá 2003 fer Vinnumálaráðið ikki at stýra virkseminum á kanningarstovunum sum "inntøkufíggjað virksemi". Ætlanin verður tó at varðveita raksturin á egnari undirkontu, soleiðis at virksemið framhaldandi gongur greitt fram á fíggjarlógini, og fyri at Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Vinnumálaráðið kunnu verða eggjað til at fáa raksturin at bera seg.

Vit hava síðani víst á í skrivi til landsstýrismannin í juni 2002, at løgtingslóg um kapping fevnir eisini um vinnuvirksemi framt av landsumsitingini, og vit duga ikki at síggja, at virksemið gerst minni kappingaravlagandi av at verða flutt frá einari undirkontu til eina aðra. Játtanarreglurnar um "inntøkufíggjað virksemi", sum skal verða bókað á serstakari undirkontu, eru sum útgangsstøði ætlaðar til vinnuliga sølu av vørum og tænastum, og strongu reglurnar um prísáseting skulu forða fyri, at alment vinnuligt virksemi verður kappingaravlagandi.

Landsstýrismaðurin hevur í september 2002 kunnað um, at Vinnumálaráðið hevur umrøtt við stjóran á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at skilja vanligt virksemi á kanningarstovunum frá vinnuligum virksemi, soleiðis at myndugleikauppgávurnar verða fluttar til undirkontu 20, vanligt virksemi. Undirkonta 40, inntøkufíggjað virksemi, verður varðveitt, og vinnuliga virksemi skal lúka treytirnar fyri inntøkufíggjaðum virksemi.

Verkætlanir/"inntøkufíggjað virksemi"

Sum nevnt, eru játtanarreglurnar um "inntøkufíggjað virksemi" ætlaðar til vinnuliga sølu av vørum og tænastum.

Verkætlanirnar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kunnu í flestu førum ikki haldast at vera vanligt vinnuligt virksemi. Talan er um granskingar- og menningarverkætlanir, sum stovnurin í flestu førum tekur stig til, í framhaldi av vanliga virkseminum. Hesar verkætlanir verða fyri ein stóran part fíggjaðar av árligu játtanini til "Fiskivinnuroyndir", og úrslitið av verkætlanunum kemur stovninum og ofta eisini vinnulívinum til góðar. Í øðrum førum er talan um verkætlanir, sum fara fram í samstarvi við m.a. norðurlendskar stovnar og grunnar.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at verkætlanirnar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eru ikki nakað eindømi. Á øllum málsøkjum er tørvur á einum greiðum skilnaði á undirkontustøði ímillum "inntøkufíggjað virksemi" og annað "studningsfíggjað virksemi", sum ikki er vinnuligt, men sum heilt ella lutvíst verður fíggjað av øðrum. Hesin tørvur gerst meira viðkomandi, nú tað verður alt meira vanligt, at privat feløg, grunnar o.o. eru við til at fíggja m.a. ymiskar granskingarverkætlanir. Í tí sambandinum er eisini avgerandi at staðfesta, at talan skal verða um granskingarvirksemi, sum stovnurin sjálvur hevur áhuga í at fremja, og at tað er stovnurin, sum hevur "ognarrættin" til úrslitini, sum kunnu verða almannakunngjørd.

Ætlanin var, at Fíggjarmálastýrið skuldi broyta játtanarskipanina, so heimild eisini varð at hava ikki-vinnuligt "studningsfíggjað virksemi" á serstakari undirkontu. Hetta arbeiði er ikki liðugt.

5.6 Rúsdrekkasøla Landsins (GL 2000/2 03 9-9)

Vit hava grannskoðað ársroknskapin fyri 2001, og hava í árinum verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum. Eftir árslok hava vit grannskoðað vørugoymslur, lønir og gjøgnumgingið avstemmanir viðvíkjandi banka- og girokontum, kreditorum o.a. Vit hava eisini kannað, um samsvar er ímillum bókhaldið hjá Rúsdrekkasøluni og skrásettu roknskapartølini í landsroknskapinum.

Roknskaparreglugerð

Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 skulu roknskaparreglugerðirnar á øllum stovnum verða góðkendar 31. desember 2001. 30. oktober 2001 sendi Rúsdrekkasølan Vinnumálaráðnum eina roknskaparreglugerð at góðkenna. Vinnumálaráðið heldur ikki, at uppskotið fylgir ásetingunum í rundskrivinum og hevur biðið Rúsdrekkasøluna gera ábøtur á uppskotið.

Millumrokning við landskassan

Vit hava vístá, at stovnurin ofta hevur nógvan tøkan pening. Meginparturin av peninginum stendur á vanligum peningastovnskontum, ið lata 0,75% og minni í rentu. Ein av grundunum til nógva tøka peningin er, at Rúsdrekkasøla Landsins bert einaferð um árið avroknar við landskassan. M.a. vísandi til rentumiss, hava vit fyrr mælt til, at avlopið verður avroknað javnan. Landsstýrismaðurin er samdur við okkum og hevur skotið upp, at tørvurin á tøkum peningi verður greinaður.

Lønargrannskoðan

Vit hava vískt á fleiri veikleikar í lønarumsitingini og hava mælt til at bøta um mannagongdirnar og lýsa tær skrivliga.

Stovnurin hevur egna lønarskipan. Sambært skrivi 12. juni 2001 frá Fíggjarmálaráðnum skulu allar almennar lønir og aðrar gjaldingar, ið verða handfarnar sum løn, verða avgreiddar um nýggju lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Í ávísum førum kunnu egnar forskipanir verða nýttar. Vit hava spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru um at brúka nýggju felags lønarskipanina. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2003 boðað frá, at hann heldur, at Rúsdrekkasølan eigur at nýta nýggju felags lønarskipanina.

Edv-viðurskifti

Í gjøgnumgongd okkara av edv-viðurskiftunum hava vit vískt á, at Rúsdrekkasøla Landsins lýkur ikki fleiri grundleggjandi krøv, sum verða ásett í roknskaparrundskrivinum, punkt 10.1 "Egnar edv-skipanir". Landsstýrismaðurin hevur í februar 2003 boðað frá, at Rúsdrekkasølan skal fylgja ásetingunum í roknskaparrundskrivinum.

5.7 Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar (GL 1998/2 15 3-2)

Í seinastu frágreiðing frá februar 2002 umrøddu vit í stuttum Endurgjaldsgrunn alivinnunnar Har varð m.a. kunnað um, at í sambandi við at ILA-sjúkan í 2000 rakti eitt alibrúk, varð eitt endurgjaldskrav reist ímóti grunninum. Hetta hendi, áðrenn Ll. nr. 26/1987 "um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum" varð tikin av. Í 2001 eru uml. 2,9 mió.kr. goldnar út til felagið. Kravið var munandi størri, og málið er farið í rættin. Tá ið málið er endaliga avgreitt, er ætlanin at taka av lógina og grunnin.

Í oktober 2002 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at úrskurður enn ikki er gjørdur í rættarmálinum. Bíðað verður til rættarmálið er avgreitt, og síðani verður, sum ætlað, lógin og grunnurin tikin av.

5.8 Tyrlutænastan (GL 1998/2 15 3-2)

Sáttmálin við Atlantsflog

Landsstýrið/Vinnumálaráðið hevur síðani 1996 rindað Atlantic Airways (Atlantsflog) 5 mió.kr. (á høvuðskontu 6.38.2.04. "Tyrlutænastan") fyri at flúgva millum oyggjarnar við Bell 212 tyrluni, sum Landsstýrið eigur.

Sambært § 1 í sáttmálanum tekur Atlantsflog á seg at reka tyrluna hjá Landsstýrinum, og Landsstýrið letur Atlantsflog tyrluna at nýta, umframt eykalutir, vørugoymslu o.a. Í § 3 stendur, at Atlantsflog veitir Landsstýrinum tyrlutænastu sambært galdandi ferðaætlan, umframt SAR (Search and Rescue). Veitingin fevnir um operativa og tekniska raksturin/viðlíkahaldið. Í § 4 er ásett, at árliga samsýningin er 5 mió.kr. Sambært § 6 kann sáttmálin verða sagdur upp til ein 1. mars við 6 mánaða skrivligari freist. Sáttmálin kann verða sagdur upp uttan freist, um annar parturin misheldur hann.

Við heimild í § 1, stk. 1, í Ll. nr. 127/2000 "um tyrlutænastu", skrivaðu Fiskimálaráðið og Atlantsflog 7. februar 2001 undir 10-ára sáttmála um tyrlutænastu til "leiting og bjarging". Sambært sáttmálanum er ein avgerandi fyritreyt, at Atlantsflog heldur fram við at reka innanoyggja tyrluflúgvingina við Bell 212 tyrluni, meðan sáttmálin er í gildi. Raksturin av tyrluni, sum landið eigur, er roknskaparliga samantvinnaður við raksturin av nýggju tyrluni, sum Atlantsflog eigur; men í viðmerkingunum til fíggjarlógina til høvuðskontu 6.38.2.04. verður ikki kunnað um broyttu støðuna.

Landsstýrismaðurin boðaði í januar 2002 frá, at Vinnumálaráðið ætlaði at siga upp sáttmálan við Atlantsflog um innanoyggjaflúgving, og arbeiddi við at gera ein nýggjan sáttmála, har m.a. SAR-uppgávurnar vórðu tiknar burtur úr sáttmálanum, tí tilbúgving sum málsøki er flutt til Fiskimálaráðið. Vinnumálaráðið hevur í oktober 2002 kunnað um, at Strandfaraskip Landsins, sum umsitur "tyrlusáttmálan" vegna landsstýrismannin, í august 2002 hevur boðað Atlantsflog frá, at sáttmálin fer úr gildi 1. mars 2003. Endamálið við uppsøgnini er at dagføra sáttmálan, og Vinnumálaráðið hevur gjørt Strandfaraskipum Landsins greitt, at SAR-uppgávurnar ikki skulu verða partur av endurskoðaða sáttmálanum, tí tað málsøkið er flutt til Fiskimálaráðið.

Eykalutir o.a.

Við sáttmálanum frá 1996 fekk Atlantsflog nýtslurætt til eykalutir, vørugoymslu o.a., og ásett er, at ognirnar skulu verða hildnar skildar frá ognunum hjá Atlantsflog, soleiðis at eingin ivi er um, hvør eigur tær.

Atlantsflog skal á hvørjum ári – 31. desember – telja ognirnar, og skal fyri 1. mars árið eftir skrivliga lata Landsstýrinum samanteljingina, váttaða av felagsins grannskoðara, saman við peningavirðinum á ognunum. Landsstýrismaðurin ásannaði í februar 2002, at Vinnumálaráðið hevði ikki fingið uppgerðina á hvørjum ári, men at tað verður gjørt í framtíðini. Í oktober 2002 hevur Vinnumálaráðið sent okkum eina uppgerð frá felagsins grannskoðara, har grannskoðarin váttar krónuvirðið á goymslu av komponentum og goymslu av brúkslutum við árslok 2001.

6. ÚTBÚGVING OG GRANSKING o.a.

6.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2001/1 04 1-8)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

7.11.1.09. Mentamálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14,6 mió.kr. Meirnýtslan er 220 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 432 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru tiltøk sett í verk at fyribyrgja, at tað endurtekur seg í 2002.

7.11.1.27. Mentamálaráðið (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru 1,8 mió.kr. játtaðar til at byggja um, til útbúnað o.a. í sambandi við, at Mentamálaráðið flutti í bygningin við Hoyvíksvegin. Minninýtslan er 868 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð arbeiðið ikki liðugt í 2001. Upphæddin er endurjáttað í 2002, so bygningurin kann verða gjørdur liðugur.

Á eykajáttanarlógini fyri februar 2002 varð játtanin hækkað úr 400 t.kr. í 1.949 t.kr. Sambært viðmerkingunum varð søkt um, at ikki brúkt játtan í 2001 varð endurjáttað í 2002. Harafturat varð biðið um at hækka játtanina 300 t.kr.

Játtanin í 2002 er sostatt hækkað 681 t.kr. og ikki 300 t.kr. sum sagt í viðmerkingunum.

7.23.1.13. Skúlabókagerð (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 808 t.kr. Meirnýtslan er 137 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 173 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð móti ársenda staðfest, at nakrar stuðulsjáttanir vóru ikki skrásettar.

7.23.1.34. Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,6 mió.kr. Minninýtslan er 1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum kundu fleiri lærarar ikki fara í verkliga partin av námsfrøðiligu útbúgvingini, summir vegna barnsburðarfarloyvi, og onkur tí skúlin fekk ongan vikar.

7.23.3.08. Fiskivinnu- og havbúnaðargranskingarmiðstøð (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 200 t.kr. Eingin peningur varð nýttur. Upprunaliga vóru 800 t.kr. játtaðar. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin lækkað 600 t.kr. Sambært landsstýrismanninum byrjaði verkætlanin ikki í 2001.

7.23.3.14. Studningur til læruplass (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 11,5 mió.kr. Meirnýtslan er 1,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er trupult at ætla um tilgongdina av lærlingum og gera heilt neyvar útrokningar av útreiðslunum.

7.23.6.12. Lista- og Tónleikaraskúli Føroya (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Eingin peningur er nýttur. Sambært landsstýrismanninum byrjaði verkætlanin ikki í 2001.

7.23.6.23. Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,5 mió.kr. Meirnýtslan er 76 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 84 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fekk granskingarverkætlanin fyri Økismenning í Klaksvík óvæntaðar útreiðslur av edv-skipanini m.a. av virusálopum.

7.23.7.04. Lestrarstudningur (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 61,7 mió.kr. Nýttar eru 8,3 mió.kr. minni til stuðul. Sambært landsstýrismanninum:

- varð roknað við einum ov høgum næmingatali
- nýttu ikki allir næmingar eina royndarskipan viðvíkjandi ferðastuðli innanoyggja
- varð nýggj kunngerð lýst um ferðastuðul uttanlands, sum hevði avmarkingar við sær.

Nettoútreiðslurnar til lán samsvara við játtanina, men stór frávik eru á hvørjari kontu. Atvoldin er m.a., at í fleiri ár vórðu rentuinntøkurnar ikki rætt bókaðar í landsroknskapinum. Tað er eftirsíðan rættað.

7.24.3.01. Bókasøvn (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 12,2 mió.kr. Meirnýtslan er 210 t.kr. Sambært landsstýrismanninum komu so nógvar bøkur út á føroyskum í 2000 sum ongantíð fyrr. Nógvar vórðu keyptar bókasøvnunum í 2001. Annar meirkostnaður gjørdi, at ikki bar til at reka samlaða bókasavnsvirksemið fyri minni. Mentamálaráðið hevur tikið stig til at rætta viðurskiftini í 2002.

7.24.3.10. Føroya Fornminnissavn (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6,2 mió.kr. Meirnýtslan er 112 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru endurgjøld frá Almannastovuni og Fróðskaparsetrinum, fyri útreiðslur í 2001, ikki bókað fyrr enn í 2002.

Lønarkarmur

Á høvuðskontunum niðanfyri, vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin:

Konta	Navn (t.kr.)	Lønarkarmur	Roknskapur	*Munur*
7.11.1.09.	Mentamálaráðið (rakstrarjáttan)	11.852	12.284	*432*
7.21.1.14.	Viðlíkahald - Mentan (rakstrarjáttan)	0	26	*26*
7.23.1.13.	Skúlabókagerð (rakstrarjáttan)	808	981	*173*
7.23.1.16.	Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan)	2.617	2.735	*118*
7.23.2.02.	Sernámsdepilin (rakstrarjáttan)	30.542	30.989	*447*
7.23.3.06.	Miðnámsskúlin í Suðuroynni (løgujáttan)	0	91	*91*
7.23.5.07.	Frítíðarundirvísing (rakstrarjáttan)	8.593	9.132	*539*
7.23.6.04.	Klaksvíkar Sjómansskúli (rakstrarjáttan)	1.903	1.914	*11*
7.23.6.23.	Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan)	1.782	1.866	*84*
7.24.3.13.	Føroya Náttúrugripasavn (rakstrarjáttan)	2.842	3.057	*215*

6.2 Vantandi reglur fyri mannagongdum á roknskaparøkinum

Í frágreiðingini í februar 2002 vístu vit á, at landsstovnar skuldu hava reglugerð fyri roknskaparhaldi sínum. Reglugerðin skuldi verða góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001. Flestu stovnarnir hava latið Mentamálaráðnum uppskot til roknskaparreglugerð, og landsstýrismaðurin boðaði í januar 2002 frá, at Mentamálaráðið fór at góðkenna roknskaparreglugerðirnar nakað eftir ársskiftið 2002. Vit hava í juni 2002 spurt, hvat síðani er hent í málinum, og nær viðurskiftini fara at koma í rættlag.

Mentamálaráðið greiddi í august 2002 frá, at arbeiðsorka hevði ikki verið tøk í vár, men eftir ætlan fór arbeiðið at verða liðugt fyri árslok 2002.

Í februar 2003 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at arbeiðið við at góðkenna roknskaparreglugerðirnar vantandi fer at verða liðugt seinni í mánaðinum.

6.3 Fólkaskúlin (GL 1996/2 10 2-1)

Í frágreiðingum okkara frá mars 2001 og frá februar 2002 vístu vit á, at lønarskipanin til læraraløn er gomul og ótíðarhóskandi, og ikki hevur nøktandi dokumentatión, vegleiðing o.t. Í frágreiðingini vístu vit eisini á, at Lønarstovan hevði innanhýsis eftirlit á teimum mest týðandi økjunum. Vit hildu tað tó vera ein veikleika, at ongar samanskrivaðar reglur lýstu, hvørji innanhýsis eftirlit skuldu verða gjørd, hvussu stemmað skuldi verða av, hvussu arbeiðið skuldi verða skjalprógvað, og hvørja ábyrgd og heimild hvør einstakur hevði. Vit mæltu til at fara undir arbeiðið. Í januar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið hevði valt at bíða, tí nýggja lønarskipanin fór at verða tikin í nýtslu.

Til at loysa av gomlu lønarskipanina fór Mentamálaráðið á vári 2000 undir at menna eina forskipan til nýggju felags lønarskipanina, sum Gjaldstovan stendur fyri. Arbeiðið lá stilt eina tíð, men Mentamálaráðið boðaði frá, at tað fór at verða liðugt á vári 2002.

Forskipanin er ikki enn tikin í nýtslu, og í desember 2002 kunnaði Mentamálaráðið um, at hon neyvan fór at verða tikin í nýtslu fyrr enn eftir summarfrítíðina 2003.

6.4 "Stuðul til næmingaheim" (GL 2000/2 10 1-2)

Sambært § 6 í Ll. nr. 63/1983 "um bústaðarhús til fólk í útbúgving" við seinni broytingum, kann rakstrarstuðul verða veittur næmingaheimum, upp til 50% av útreiðslunum til rentur og avdráttir av upprunaligu prioritetslánunum.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin lutað sundur í undirkontur fyri hvørt heimið.

Stuðulin, sum varð latin fíggjarárið 2001, var 50% av útreiðslunum til rentur og avdráttir fyri árið frammanundan. Stuðulin var rætt roknaður samsvarandi lógini.

6.5 Eftirútbúgving av yrkislærdum (GL 2000/2 10 1-2)

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina verður stuðul játtaður til skeiðsluttøku hjá yrkislærdum, t.e. handverkarum og handils- og skrivstovufólki, so at tey fakliga kunnu fylgja við og varðveita yrkisførleika og kappingarføri.

Í frágreiðing frá februar 2002 vístu vit m.a. á:

at vit ikki hildu játtanina hava tey eyðkenni, sum ein "rakstrarjáttan" skal hava sambært játtanarskipanini.

at í 2000 vóru allar útreiðslur bókaðar sum "stuðul til vinnu", standardkontu 53, hóast talan var um stuðul til einstaklingar.

at eftir okkara tykki vóru nógvir ivaspurningar tengdir at játtanini og endamálinum við játtanini. Vit hildu tað vera óheppið at hava játtanir, sum eru so breitt og so leyst orðaðar í 3 reglum í viðmerkingum til eina fíggjarlóg.

Í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Vinnu- og Miðnámsskúladeildin fór at viðgera játtanina og játtanarheitið í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2003.

Í juli 2002 boðaði Mentamálaráðið frá, at teir hildu tað vera rættast at bíða við víðari viðgerð og møguligum broytingum, til arbeiðsbólkurin, sum Yrkisútbúgvingarráðið hevði sett, hevði latið úr hondum álit og uppskot til lóg um yrkisskeið (arbeiðsmarknaðarútbúgvingar). Mentamálaráðið væntaði, at hetta arbeiði fór at verða liðugt á heysti 2002. Sambært Mentamálaráðnum kundi hugsast, at verandi stuðulsskipan annaðhvørt kundi verða tikin av ella verða partur av tí skipan, sum eftir ætlan fór at koma í gildi við støði í nevnda áliti.

Í februar 2003 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeiðsbólkurin, sum ger lógaruppskot, er um at verða liðugur, og verður uppskotið lagt fyri Løgtingið eftir ólavsøku.

6.6 Musikkskúlaskipanin (GL 2001/2 10 9-5)

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 vístu vit á, at ósamsvar var ímillum § 1 í lógini, har ásett er, at landskassin letur studning, og § 5, har ásett er, at landsstýrismaðurin setir lærararnar. Heldur ikki verður lógin umsitin, sum at talan er um studning úr landskassanum. Landskassin rindar allar lønarútreiðslurnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum 50% av lønarútreiðslunum til lærararnar, í mun til hvussu nógvar tímar musikkskúlarnir í kommununum hava fingið tillutað.

Vit mæltu landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða lógina, soleiðis at fult samsvar verður ímillum praksis og allar ásetingar í lógini. Landsstýrismaðurin svaraði í februar 2002, at hann fór at seta eina innanhýsis nevnd at kanna, hvørjar tillagingar skulu til, fyri at fáa samsvar millum praksis og ásetingarnar í lógini. Vit hava í juni 2002 spurt, hvat síðani er hent í málinum, og nær viðurskiftini væntandi fara at koma í rættlag.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2002 kunnað um, at hann hevur givið umsitingini boð um, at frá 1. august 2003 fer Mentamálaráðið bert at veita stuðul, soleiðis sum eisini ásett er í lógini.

Sæð út frá einum almennum sjónarmiði ivast vit í, um tað er nøkur góð loysn. Musikkskúlaskipanin er væl umsitin, og umsitingin verður neyvan bíligari ella betri, verður hon løgd út til kommunurnar. Tí mæltu vit í seinastu frágreiðing landsstýrismanninum til at broyta lógina, soleiðis at samsvar varð ímillum praksis og allar ásetingar í lógini.

Í februar 2003 hevur landsstýrismaðurin víst á, at hann hevur sett ein arbeiðsbólk, ið innan 1. apríl 2003 skal koma við einum tilmæli um, hvørjar tillagingar/broytingar skulu verða gjørdar í lógargrundarlagnum fyri musikkskúlaskipanini, soleiðis at samsvar er millum lógina og fyrisitingina av lógini.

6.7 Frítíðarundirvísing (GL 2001/2 10 9-7)

Vit hava í 2002 grannskoðað umsitingina av játtanini til frítíðarundirvísing. Lógargrundarlagið er Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing", sum broytt við Ll. nr. 67/1996, og kunngerð nr. 6/1988 "um frítíðarvirksemi". Harafturat eru nógvar ásetingar gjørdar í rundskrivum.

Sambært lógini er talan um trý sløg av frítíðarundirvísing:

- almenn frítíðarundirvísing
- serstøk frítíðarundirvísing og
- frítíðarvirksemi.

Rundskriv

Í frágreiðing í juli 2002 vístu vit m.a. á, at nógvar ásetingar viðvíkjandi frítíðarundirvísingini eru gjørdar í rundskrivi. Eitt rundskriv er frá einum myndugleika, sum er yvir, til ein myndug-

leika, sum er undir. Er ætlanin at áseta neyvari ella avmarkandi reglur mótvegis triðjamanni, krevst vanliga lógarheimild, og tá verða tær at áseta í kunngerð.

Sum dømi kann verða tikið fram, at lønin til lærararnar er ásett í rundskrivi nr. 1 frá 1989, broytt við rundskrivi nr. 1 frá juli 2001. Vanliga verður løn ásett í sáttmála, men í § 13, stk. 6, í Ll. nr. 70/1983 er heimilað, at *"Landsstýrismaðurin ásetir setanarkorini og lønina hjá leiðarum, hjálparfólki eftir § 13, 3. stk., og lærarum við frítíðarundirvísingina v.m."* Eftir okkara tykki skuldi henda áseting verið gjørd við kunngerð ella sáttmála, ikki í rundskrivi.

Mentamálaráðið hevur í oktober 2002 ásannað, at fleiri av rundskrivunum eiga at verða gjørd til kunngerðir, men Mentamálaráðið heldur ikki, at regulering av lønum eigur at verða ásett í kunngerð.

Studningur til kommunur

Lærararnir verða settir av kommununum. Eftir tilmæli frá kommununum góðkennir Mentamálaráðið lærararnar. Lønarskrivstovan í Mentamálaráðnum umsitur lønarútgjaldingarnar.

Kommunurnar søkja á hvørjum ári um stuðul til frítíðarundirvísing. Við støði í árinum frammanundan og ætlanunum, ið kommunurnar vísa á, játtar Mentamálaráðið kommununum stuðul. Játtanin er í fyrsta umfari ein upphædd til ávísa lærugrein. Mentamálaráðið góðkennir síðani eisini hvønn flokk sær við ávísum treytum viðvíkjandi næmingatali, tímatali og øðrum.

Sambært § 19 í lógini, veitir landskassin kommununum studning til frítíðarundirvísing. Studningurin til almenna frítíðarundirvísing er 50%, og til frítíðarvirksemi upp til 50% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum. Til serstaka frítíðarundirvísing verður latið 100% av studningsheimilaðu útreiðslunum.

Hóast lógin ásetir, at landskassin veitir kommunum studning, er játtanin til frítíðarundirvísing ein rakstrarjáttan. Sambært játtanarskipanini verður rakstrarjáttan nýtt, *"tá endamálið við játtanini serliga er ætlað at verða rokkið við almennum rakstrarvirksemi, og at hava neyðugar útreiðslur í tí sambandi, t.v.s. útreiðslur til starvsfólk, keyp av tilfari og tænastum og til rakstur av bygningum v.m."*

Landskassin rindar lønirnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum fyri lønarútreiðslurnar til lærararnar í mun til, hvussu nógv kommunan hevur fingið tillutað fyri árið. Mannagongdin er sostatt ikki í samsvari við Ll. nr. 70/1983, har ásett er, at landskassin letur kommununum studning.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði tikið stig til, at frá 1. august 2003 fór fult samsvar at verða millum fyrisitingarligu mannagongdina og lógina um frítíðarundirvísing. Frá 1. august 2003 fer Mentamálaráðið ikki sum higartil at gjalda út lønirnar hjá undirvísarum í frítíðarundirvísingini, men bert at veita kommununum stuðul. Kommunurnar mugu sjálvar gjalda undirvísarum løn o.a. samsýning sambært galdandi sáttmálum.

Sæð út frá einum almennum sjónarmiði, ivast vit í, um tað er nøkur góð loysn. Umsitingin av lønunum í sambandi við frítíðarundirvísing verður neyvan bíligari ella betri, verður hon løgd út til kommunurnar. Eftir okkara tykki kundi landsstýrismaðurin umhugsað at endurskoða lógina, soleiðis at lógin kemur at samsvara við praksis.

Lønarumsiting

Ongar skrivligar reglur eru, sum lýsa, hvørji innanhýsis eftirlit skulu verða gjørd, frá tí at lærari verður settur, til lønin verður goldin út og bókað, hvussu stemmað skal verða av, hvør hevur ábyrgd/heimild at gera hvat, og hvussu tað skal verða skjalprógvað. Vit hava mælt til, at tílíkar reglur verða gjørdar.

Í februar 2003 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið í næstum fer at gera eina mannagongd, ið tryggjar eitt innanhýsis eftirlit.

Lønarskrivstovan í Mentamálaráðnum rindar lærarunum lønir. Lærararnir føra tímarnar, ið teir undirvísa, í dagbøkur. Ein dagbók er fyri hvønn flokkin. Tá ið skúlaárið er liðið, verða

dagbøkurnar váttaðar av leiðaranum á skúlanum og latnar Lønarskrivstovuni. Lønin verður tí fyribils goldin út við støði í áður nevndu góðkenning frá Mentamálaráðnum. Síðani kannar Lønarskrivstovan, um samsvar er í millum útgoldnu lønina og dagbøkurnar.

Hvønn mánað, tá ið lønirnar verða roknaðar, verður gjørt eitt bókingarskjal, har útreiðslurnar verða býttar millum land og kommunu. Parturin, sum kommunan skal gjalda, verður síðani skuldskrivaður kommununi.

Í sambandi við maritim skeið og dugnaskaparroynd í sigling rindar Mentamálaráðið Tórshavnar Kommunu stuðul, 70% av lønarútreiðslunum. Vit duga ikki at síggja heimild vera í lógini at veita 70%. Antin er talan um 50% (almenn frítíðarundirvísing) ella 100% (serstøk frítíðarundirvísing).

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at skeiðini í maritimari fyrireiking byrjaðu á heysti 1994, og at býtið av gjaldinum millum land og kommunu er gjørt sum eitt undantak, vegna búskaparligu støðuni fyrst í níti-árunum, og ásett við støði í § 19, stk. 4, har tað stendur, at *"Landsstýrismaðurin kann góðkenna nærri reglur um, hvør skal bera útreiðslurnar eftir hesi lóg."* Frá 1. august 2002 verður undirvísingin skipað sum serstøk frítíðarundirvísing, av tí at talan er um fráfaringarroyndir fólkaskúlans.

Lønargrannskoðan

Vit grannskoðaðu lønarútgjaldingar fyri veturin 2000/2001 hjá 10 lærarum. Útgjøldini fevndu um ymiskar kvøldskúlar og um ymiskar lærugreinir. Við støði í teimum tímalønum, sum eru ásettar í rundskrivum frá Mentamálaráðnum, vóru lønirnar í 8 málum rætt roknaðar.
Í 2 málum ivaðust vit í, um tímasatsur og ískoyti vóru rætt roknað, og vit dugdu heldur ikki at síggja, at ískoytini vóru í samsvari við rundskrivið. Mentamálaráðið hevur tikið viðmerkingarnar til eftirtektar og kannar málini fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

6.8 Klaksvíkar Sjómansskúli og Føroya Sjómansskúli (GL 2000/2 10 4-5)

Sjómansskúlarnir undirvísa við støði í Ll. nr. 65/1984 "um sjómansútbúgving" v.s.b. Vísandi til at samlaða næmingatalið er minkandi, spurdu vit í oktober 2001 landsstýrismannin, um hann hevði ætlanir um at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Havn og í Klaksvík.

Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at 24. juli 2001 varð nýggj lóg nr. 55 "um útbúgving av manning á skipum o.ø." samtykt. Arbeitt varð við at laga útbúgvingarnar til nýggj krøv, ið IMO og vinnulívið annars seta. Í hesum arbeiði liggur eisini ætlan um møguliga at samskipa virksemið hjá sjómansskúlunum í Tórshavn og Klaksvík.

Í februar 2003 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ætlanin er, at høvuðs kunngerðin fyri hesar útbúgvingar skal verða liðug í summar, og síðani verður spurningurin um samskipan tikin upp.

6.9 Føroya Læraraskúli (GL 2000/2 10 4-5)

Lógargrundarlagið hjá Føroya Læraraskúla er:

- Lov nr. 52/1979 for Færøerne om læreruddannelsen, som sat i kraft ved bek. nr. 71/1984
- Ll. nr. 69/1980 "um læraraútbúgving", sum broytt við Ll. nr. 67/1996
- K. nr. 13/1990 "um námsfrøðiliga útbúgving" og
- K. nr. 26/1991 "um læraraútbúgving"

Landsstýrismaðurin segði í januar 2002, at hann um várið ætlaði at endurskoða lógargrundarlagið fyri læraraútbúgving og námsfrøðiútbúgving. Spurdur, hvussu langt ávegis arbeiðið var

komið, svaraði landsstýrismaðurin í september 2002, at arbeitt hevur verið við málinum, og at fundir hava verið við avvarðandi yrkisfeløg.

Viðmerkingar til fíggjarárið 2001

Á fíggjarlógini 2001 var játtanin til Læraraskúlan 11.888 t.kr. Mentamálaráðið søkti 15. juni 2001 fíggjarnevndina um 500 t.kr. eyka.

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 umrøddu vit m.a., at vit høvdu biðið rektaran greiða frá, hví játtanin í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001 var lægri enn játtanin í 2000, og hví biðið varð um eykajáttan í juni mánaði.

Rektarin hevur greitt frá, at Læraraskúlin 7. september 2000 lat Mentamálaráðnum tøl til fíggjarlógina 2001, ið vístu ein minstatørv 12.094 t.kr. Tá ið skúlin varnaðist, at hetta talið ikki varð sett á fíggjarlógina, gjørdi rektarin vart við seg munnliga, og 12. februar 2001 sendi hann Mentamálaráðnum formliga umsókn um 500 t.kr. eyka. Rektarin vísti á, at tá var greitt, at metti minstatørvurin eisini var undirmettur.

Í oktober 2001 bóðu vit landsstýrismannin um viðmerkingar til frágreiðing rektarans. Landsstýrismaðurin svaraði í januar 2002, at ein kanning var í gongd, og at hann ikki vildi gera viðmerkingar, meðan kanningin fór fram.

Í fíggjarnevndarskjalinum 15. juni 2001 kunnaði landsstýrismaðurin í mentamálum um, at hann hevði sett eina nevnd at kanna málið.

Í skrivi til landsstýrismannin 18. juni 2001 vísti løgmaður á, at Landsstýrið á ongan hátt kundi góðtaka, at játtanartrupulleikar, sum áttu at hava verið eyðsýndir fyri langari tíð síðani, gjørdust bráðfeingistrupulleikar. Um nevndina, sum landsstýrismaðurin hevði sett, helt løgmaður, at kanningararbeiðið átti at verið gjørt sum skjótast, og helst av uttanfyristandandi fólkum.

Eitt grannskoðaravirkið varð biðið um at kanna fíggjarviðurskiftini á Læraraskúlanum og at lata landsstýrismanninum úrslitið av kanningini í seinasta lagi 10. september 2001. Í oktober 2001 bóðu vit um eintak av frágreiðingini. Í januar 2002 fingu vit tað svar, at Mentamálaráðið hevði fingið eina frágreiðing. Eftir at hava lisið frágreiðingina helt Mentamálaráðið, at hon var ikki nøktandi og fylgdi ikki kanningarsetninginum. Frágreiðingin varð tí í januar 2002 send aftur til grannskoðaravirkið, saman við rokningini. Tessvegna kundi Mentamálaráðið ikki útvega Landsgrannskoðanini eintak av frágreiðingini.

Í skrivi 7. februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at á fundi við grannskoðaravirkið 30. januar 2002 hevði grannskoðaravirkið átikið sær at gera frágreiðingina lidna, men hevði tó boðað frá, at tað ikki vildi átaka sær at staðfesta ábyrgdina. Í juli 2002 spurdu vit, hvat síðani var hent í málinum.

Landsstýrismaðurin svaraði í september 2002, at Mentamálaráðið ikki fekk grannskoðaravirkið at fylgja kanningarsetninginum, serliga um at staðfesta ábyrgd. Tí helt Mentamálaráðið, at kanningin fekk ikki ætlaða virðið. Mentamálaráðið skrivaði 4. apríl 2002 til løgmann, at 3 møguleikar vóru í at velja. Mentamálaráðið mælti til, at Ráðið sjálvt stóð fyri kanningini. Løgmaður boðaði 11. apríl 2002 frá, at tað var upp til landsstýrismannin at velja kanningarháttin. Landsstýrismaðurin setti eina kanningarnevnd mannaða við tveimum fólkum úr Mentamálaráðnum og einum frá stovni undir Mentamálaráðnum. Kanningarsetningurin var hin sami, sum upprunaliga var latin grannskoðarafelagnum. Frágreiðingin skuldi eftir ætlan verða liðug 1. desember 2002. Fyrr enn kanningin varð liðug, hevði landsstýrismaðurin onga viðmerking.

Í januar 2003 bóðu vit um avrit av frágreiðingini frá kanningarnevndini og spurdu, hvat síðani er hent í málinum.

Í februar 2003 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at av tí at trupult var at manna nevndina, er kanningin, sum Mentamálaráðið sjálvt skuldi gera, ikki gjørd. Sambært landsstýrismanninum hevur Mentamálaráðið keypt frágreiðingina, sum grannskoðaravirkið

gjørdi í 2001, og við støði í frágreiðingini, er ætlanin nú at arbeiða víðari við málinum í samstarvi við Fíggjarmálaráðið.

Leasingsáttmáli

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at Læraraskúlin hevði leigað 2 kopimaskinur. Í játtanarskipanini er ásett, at sáttmálar kunnu ikki verða gjørdir um fíggjarliga leasing, sum reelt kemur í staðin fyri keyp. Í februar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, skúlin hevur keypt kopimaskinurnar í 2002.

Lønargrannskoðan

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at lønarumsitingin byggir ikki í øllum førum á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað. Vit mæltu til at bøta um viðurskiftini.

Í januar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann í næstum fór at taka spurningin upp við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum.

Vit hava síðani spurt, hvat er hent í málinum. Í september 2002 svaraði landsstýrismaðurin, at spurningurin varð viðgjørdur saman við rektaranum, men partarnir vóru ikki enn lidnir við at umrøða, hvørjar mannagongdir og ásetingar vóru hóskandi. Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at málið fór at verða tikið upp við Fíggjarmálaráðið, so skjótt tað fyrireikandi arbeiðið var gjørt, eftir ætlan á heysti 2002.

Harafturat kunnaði landsstýrismaðurin um, at í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum skúlamál, fór spurningurin um donsku tænastumenninar á Læraraskúlanum eisini at verða tikin upp við danska Fíggjarmálaráðið. Í september 2002 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið fór at verða gjørt saman við Fíggjarmálaráðnum.

Avspákanartímar

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at árini 1993 til 2000 høvdu avspákanartímarnir ligið ímillum 1,5 – 2 fulltíðarstørv, býtt út á 8-10 lærarar. Læararnir høvdu sostatt eitt lønarkrav, sum ikki hevði verið skrásett í roknskapinum. Vórðu allar skyldugar lønir goldnar út, helt rektarin, at tað hevði kostað uml. 500 t.kr. Rektarin helt, at avspákanartímar fóru at verða færri í skúlaárinum 2001/2002.

Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at avspákanartímarnir í skúlaárinum 2002/2003 ikki vóru fækkaðir, tí tað hevði ikki borið til at fingið skikkaðar lærarar at lesa allar tímarnar. Summir av lærarunum høvdu sostatt verið noyddir at lisið yvirtímar, fyri at undirvísingin kundi vera á einum haldgóðum fakligum støði.

6.10 Undirvísingarskylda hjá skúlastjórum (GL 2000/2 10 4-5)

Vit hava í frágreiðingum síðani í 2000 umrøtt undirvísingarskylduna hjá skúlastjórunum á Maskinmeistaraskúlanum, Føroya Sjómansskúla og Klaksvíkar Sjómansskúla, og vit hava víst á, at stjórarnir ikki undirvístu skylduga tímatalið. Setanarviðurskiftini hjá stjóranum á Maskinmeistaraskúlanum eru ógreið og óformlig, og bæði hann og stjórin á Føroya Sjómansskúla hava gjørt vart við, at ásetta skylduga tímatalið er ov høgt.

Í januar 2001 boðaði Mentamálaráðið okkum frá, at arbeitt varð við málinum saman við Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum. Í september 2001 boðaði Mentamálaráðið frá, at málið var tengt at sáttmálasamráðingunum við avvarðandi yrkisfeløg. Mentamálaráðið fór saman við Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum at viðgera spurningin, soleiðis at eitt lægri skyldugt undirvísingartímatal kundi verða sett í gildi frá skúlaárinum 2002/03.

Tíðarætlanin helt ikki. Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið væntandi fór at verða loyst innan fyri stutta tíð.

Mentamálaráðið hevur í desember 2002 kunnað um, at eingin niðurstøða er í málinum.

6.11 Fróðskaparsetur Føroya (GL 1996/2 10 4-1)

Í frágreiðing í februar 2002 vístu vit m.a. á, at Fróðskaparsetrið hevði leigað/leasað nakrar kopimaskinur við teirri grundgeving, at ráð vóru ikki at keypa. Í februar 2003 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fróðskaparsetrið hevur keypt kopimaskinurnar.

6.12 Almanna- og heilsuskúli Føroya (GL 1996/2 10 4-7)

Vit hava í 2002 grannskoðað Almanna- og heilsuskúla Føroya. Skúlin er skipaður við tveimum útbúgvingarrásum:

- Sjúkrasystraskúli Føroya (í Havn)
- Almanna- og heilsuskúladeildin (á Tvøroyri)

Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið undir Sjúkrasystraskúla Føroya og føroysku sjúkrasystraútbúgvingini er "Lov nr. 127 af 25. maj 1956 om sygeplejersker", sum er sett í gildi við kongligari fyriskipan nr. 353 frá 21. desember 1959, seinast broytt við kongligari fyriskipan nr. 217 frá 6. apríl 1988. Við heimild í § 2, stk. 4, í lógini, eru reglur um útbúgving ásettar í "Bekendtgørelse nr. 653 af 17. juli 1992 for Færøerne om sygeplejerskeuddannelsen".

Sjúkrasystraskúli Føroya varð stovnaður 1. februar 1960. Eftir at hava verið partur av játtanini til Landssjúkrahúsið síðani stovnanina, flutti Sjúkrasystraskúli Føroya sum málsøki 1. januar 2000 frá Trivnaðarmálaráðnum til Mentamálaráðið sambært avtalu 3. februar 2000. Flytingin varð staðfest við Ll. nr. 74/2000 um "Eykajáttanarløgtingslóg fyri mars 2000", tá ið játtanin varð flutt frá landssjúkrahúsinum til Almanna- og heilsuskúla Føroya.

Í mars 2002 legði landsstýrismaðurin fram uppskot til løgtingslóg um útbúgving av sjúkrasystrum. Eftir ætlan skuldi Sjúkrasystraskúli Føroya fara undir nýggja útbúgvingarskipan í februar 2003. Útbúgvingin skuldi taka 4 ár og verða á Bachelor stigi. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð útskrivað.

29. november 2002 legði landsstýrismaðurin aftur fram uppskotið til løgtingslóg um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum. Uppskotið varð samtykt 15. januar 2003.

Lógargrundarlagið undir Almanna- og heilsuskúladeildini er Ll. nr. 44/1999 um almanna- og heilsuútbúgvingar. Neyvari ásetingar eru í kunngerð nr. 17/2001. Ásetingar um útbúgvingarráð fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar eru lýstar í kunngerð nr. 18 /2001. Sambært lógini er talan um útbúgving til ávikavist heilsuhjálpara og heilsurøktara. Atgongd til heilsurøktaraútbúgvingina hevur tann, sum m.a. hevur útbúgving sum heilsuhjálpari.

Útbúgvingin til heilsuhjálpara tekur vanliga 1 ár, og fevnir um skúlaundirvísing og starvsvenjing. Útbúgva heimahjálparar seg til heilsuhjálpara, verður partur av starvsvenjingini góðskrivaður, og útbúgvingartíðin stytt til 26 vikur. Útbúgving til heilsurøktara er ætlað at taka 1½ ár. Higartil hevur skúlin ikki havt hesa útbúgving.

Skjala- og lønargrannskoðan

Nøkur skjøl vórðu vald út at grannskoða neyvari. Kannað varð m.a., um kontering, upphædd, slag, ávísing og skráseting var í lagi, og um bókingar um ársskiftið 2001/02 vóru farnar á rætt figgjarár. Einki var at finnast at.

Vit vístu tó á, at ein partur av lønunum verður ikki rætt konteraður. Landssjúkrahúsið rindar lønirnar fyri Sjúkrasystraskúlan og sendir rokning til skúlan. Rokningin verður konteraað á kontu 1180, sum er konta fyri "Endurgjald í sambandi við lønir". Vit halda tað ikki vera

rætt, tí rokningin skuldi verið bókað á ta útgreining, har hon hoyrir heima, t.d. fastar mánaðarlønir á kontu 1110, tímalønir á kontu 1112 o.s.fr. Mælt er til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Við støðið í lønarútgjaldingini í desember 2001 vórðu lønirnar hjá 5 starvsfólkum valdar út at grannskoða. 3 á Sjúkrasystraskúla Føroya og 2 á Almanna- og heilsuskúladeildini. Einki var at finnast at.

Næminga- og starvsfólkaviðurskifti

Sambært roknskaparreglugerðini setir rektarin starvsfólk, tó ikki deildarleiðarar, sum Mentamálaráðið setir. Arbeiðstíðin hjá lærarunum er løgd til rættis við undirvísing og fyrireiking. Yvirtíð er ikki vanlig á skúlanum. Rektarin hevur greitt frá, at lærararnir hava ikki skyldu at undirvísa ávíst tímatal, men teir eru settir í starv 40 tímar um vikuna við summarfrí í 5 vikur. Eingin skipað skráseting er av arbeiðstíð og fráveru. Vit hava mælt til, at tað verður gjørt.

Í januar 2003 hevur landsstýrismaðurin víst á, at í mun til aðrar skúlar, so fer alt arbeiðið í sambandi við undirvísing fram á skúlanum, bæði fyrireiking, fyrisiting, bólka- og einstaklingavegleiðing, uppgávurætting, skematímar o.s.fr. Landsstýrismaðurin heldur ikki, at neyðugt er við neyvari skráseting av arbeiðstíð ella fráveru. Landsgrannskoðanin er ikki samd við landsstýrismanninum og fer at reisa spurningin av nýggjum.

Á Sjúkrasystraskúla Føroya ganga 4 flokkar við sjúkrasystranæmingum. 20 næmingar eru í hvørjum flokki. Skúlin hevur 7 lærarar í føstum starvi. Sjúkrasystraútbúgvingin, sum tekur 45 mánaðir, fevnir bæði um ástøðiliga og verkliga frálæru. Næmingarnir hava møtiskyldu. Frávera kann í mesta lagi vera 15% av skúlatímunum og 20% av starvsvenjingartíðini.

"Uddannelsesordning for sygeplejerskeuddannelsen" er dagførd 19. mars 2001. Í § 12, stk. 3, í "Bekendtgørelse nr. 653 af 17.07.1992" stendur, at útbúgvingarskipanin skal verða góðkend av "ministeriet" (Mentamálaráðið) og av "Sundhedsstyrelsen". Eisini finst ein praksisskrá, har tann lesandi arbeiðir við sjúkrarøkt í praksis. Praksisskráin er seinast dagførd í november 1999 og er ein partur av útbúgvingarskipanini.

Síðani byrjan í 2001, hevur Almanna- og heilsuskúladeildin útbúgvið 3 flokkar av heilsuhjálparum; 1 flokkur tók vanligu 1-ára útbúgvingina og 2 flokkar vóru eftirútbúgvingarflokkar av heimahjálparum. Í september 2002 byrjaði nýggjur flokkur vanliga 1-ára útbúgving, og harafturat er ætlanin, at 2 flokkar av heimahjálparum skulu eftirútbúgvast hetta skúlaárið. 20 næmingar eru í hvørjum flokkinum, og skúlin hevur 3 lærarar.

Í januar 2003 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað væntandi verða 2-3 ár, áðrenn heimahjálparaskipanin hevur fingið nøktað sín tørv á eftirútbúgving av heimahjálparum.

Vit hava spurt landsstýrismannin, nær ætlanin er at fara undir útbúgvingina til heilsurøktara. Í januar 2003 svaraði landsstýrismaðurin, at tað eru tvær høvuðsatvoldir til, at tað dregur út við heilsurøktaraútbúgvingini: Hølistrupulleikin og starvsvenjingarplássini.

Hølisviðurskiftini eru nóg illa nøktandi til verandi virksemi. Landsstýrismaðurin ivast í, um tað fer at bera til at finna fyribils hóskandi høli til at byrja heilsurøktaraútbúgvingina, áðrenn nýggjur skúli er bygdur. Harafturat hava starvsvenjingarplássini tørv á eini tillagingartíð. Landsstýrismaðurin heldur ikki, at tað ber til at útvega so nógv starvsvenjingarpláss í senn, sum framhaldandi útbúgvingin fer at krevja. Helst verður ikki byrjað við útbúgvingini, fyrr enn allir heimahjálparar eru eftirútbúnir.

6.13 Miðnámsskúlin í Suðuroy (GL 2000/2 10 3-5)

Vit hava í 2002 grannskoðað Miðnámsskúlan í Suðuroy. Skúlin er deild undir Føroya Studentaskúla og HF-skeiði. Í frágreiðing okkara frá desember 1997 umrøddu vit fyrstu ferð, at leiðsluviðurskiftini á Miðnámsskúlanum ikki vóru formaliserað, serliga spurningurin um ábyrgd og heimild hjá deildarleiðaranum mótvegis rektaranum.

Rektarin hevur greitt frá, at Mentamálaráðið og skúlin í eini 2 ár hava arbeitt við at gera leiðslureglugerð. Mentamálaráðið gjørdi eitt uppskot, sum hevur verið viðgjørt av Ráðnum, rektaranum, miðnámsskúlunum og Yrkisfelagnum hjá studentaskúla- og HF-lærarum. Í desember 2002 spurdu vit landsstýrismannin, nær reglugerðin væntandi verður liðug.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið og skúlaleiðslan á Føroya Studentaskúla ætla at loysa henda spurning í hesum skúlaárinum.

Lønar- og starvsfólkaviðurskifti

Vit grannskoðaðu lønarútgjaldingar hjá 3 lærarum. Einki var at finnast at. Flestu lærarar á skúlanum eru í føstum starvi. Yvirtíð er rættiliga vanlig. Rektarin vísti á, at Miðnámsskúlin er ein lítil skúli við fáum lærarum, og tí er torført at samanseta tímarnar til 22,1 um vikuna. Í Suðuroynni er trupult at fáa skikkaðar føroyingar at søkja størv, og tí eru fleiri útlendingar á skúlanum enn t.d. í Hoydølum. Eitt nýtt fyribrigdi í YF-sáttmálanum er § 28 um yvirtíð og avspáking, sum verður nevnt tímabankin. Tímabankin gevur møguleika fyri, at yvirtímar, upp til 2,5 tímar um vikuna, kunnu verða avspákaðir árið eftir. Sambært rektaranum hjálpir tað lítið, um yvirtímatalið er stórt, tí so skal annar lærari vera tøkur til at taka tímarnar.

Leasing

Nøkur skjøl vórðu vald út at grannskoða neyvari. Kannað varð m.a., um kontering, upphædd, slag, ávísing og skráseting var í lagi, og um bókingar um ársskiftið 2001/02 vóru farnar á rætta fíggjarár.

Miðnámsskúlin hevði 6 ára sáttmála um leigu av tveimum kopimaskinum. Rektarin og deildarleiðarin søgdu tað vera vanligt, at skúlar leiga kopimaskinur yvir longri áramál, vanliga 5 ár. Vit vístu á, at sambært játtanarskipanini kunnu sáttmálar ikki verða gjørdir um fíggjarliga langtíðarleigu, sum reelt kemur í staðin fyri at keypa. Ein partur av leigugjaldinum er tá at rokna sum renta og afturrindan av láni, og til lántøku krevst serlig lógarheimild. Í februar 2003 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at skúlin hevur keypt kopimaskinurnar.

6.14 Yrkisskúlar og aðrir skúlar (GL 2000/2 10 3-4)

Í februar 2001 vístu vit á, at hóast Ll. nr. 106/1998 "um yrkisskúlar" kom í gildi 1. januar 1999, hevur landsstýrismaðurin ikki ásett reglur, sum álagt er í § 14 í lógini. Mentamálaráðið boðaði tá frá, at ein innanhýsis arbeiðsbólkur fór at verða settur at arbeiða við málinum.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 1999 (Lm. nr. 62/2000) heitti Løgtingið á landsstýrismannin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í desember 2001 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið var ikki liðugt enn, men at vinnu- og miðnámsskúladeildin hevði gjørt fastar mannagongdir fyri, hvussu fíggjarlógar-arbeiðið, herímillum játtan til góðkent undirvísingarvirksemi skuldi fara fram.

Eftir var at gera almennar reglur fyri fleiri viðurskifti, so sum:

- Greiðan skilnað millum inntøkufíggjað virksemi og alment góðkent undirvísingarvirksemi, herímillum at endurskoða rundskriv um yvirskot frá eginrakstri.
- Hvussu avdráttir av lánum hjá sjálvsognarstovnum, sum landið rindar, skuldu verða bókaðir.
- Hvat skuldi verða bókað í landsroknskapinum, og hvat skuldi vera hildið uttanfyri.
- Krøv viðvíkjandi at bóka á egnum teldukervi.

Landsstýrismaðurin boðaði frá, at nøkur av frammanfyri standandi viðurskiftum fóru at verða tikin upp í sambandi við, at uppskot um roknskaparreglugerð, sum skúlarnir høvdu sent inn, fóru at verða viðgjørd í Mentamálaráðnum fyrst í 2002.

Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið við at gera almennar reglur tíverri ikki var liðugt.

Lógin um yrkisskúlar hevur verið í gildi í 4 ár. Vit halda ein vanda liggja í, at skiftandi landsstýrismenn ár um ár sleppa sær undan at gera lógarásettar kunngerðir.

6.15 Skúlabókagrunnurin (GL 2000/2 10 6-5)

Lógargrundarlagið undir Skúlabókagrunninum er Ll. nr. 36/1959 "um útgávu av skúlabókum" við seinni broytingum. Vit hava í áravís gjørt vart við, at lógargrundarlagið er ófullfíggjað og ikki dagført, og at játtanarviðurskiftini eru ógreið.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 umrøddu vit, at landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum í desember 1995 hevði sett eina nevnd at gera álit viðvíkjandi uppskoti til rationaliseringar og sparingar á fólkaskúlaøkinum, sum fevndi um fólkaskúlan, sernámsfrøðiliga virksemið, frítíðarundirvísingina, skúlabókaútgávu o.a. Álit við uppskotum til rationaliseringar og sparingar m.a. viðvíkjandi skúlabókaútgávu varð latið landsstýrismanninum í februar 1996. Í álitinum varð mælt til at seta nevndir at endurskoða virksemið og kunngerðina fyri Skúlabókagrunnin, og at kanna Bókamiðsøluna gjøllari. Spurdur, greiddi landsstýrismaðurin í februar 2001 frá, at álitið fekk ikki politiska undirtøku, og varð tí ikki sett í verk.

Í februar 2000 lótu vit landsstýrismanninum eina frágreiðing um grannskoðan av Føroya Skúlabókagrunni, har vit enn einaferð vístu á, at lógargrundarlagið var ófullfíggjað, var ikki dagført, og at játtanarviðurskiftini vóru ógreið. Ein arbeiðsbólkur varð settur at viðgera spurningarnar og lata landsstýrismanninum uppskot um broytingar.

Í januar 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið á heysti 2000 hevði gjørt uppskot til nýggja lóg um útgávu av undirvísingarmiðlum. Landsstýrismaðurin helt tá, at um uppskotið varð samtykt, var møguligt at loysa trupulleikarnar.

Í november 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at lógaruppskot um at skipa regluverkið um Skúlabókagrunnin og Bókamiðsøluna í februar 2001 varð sent Føroya Lærarafelag og Yrkisfelagnum til hoyringar. Uppskotið fekk kaldliga móttøku frá feløgunum. Tey vístu m.a. á, at Skúlabókagrunnurin als ikki kundi verða skipaður sum ein almennur stovnur, tí ognarviðurskiftini vóru ógreið, og hildið varð, at Skúlabókagrunnurin ikki kundi útinna virksemi sítt nóg væl, um hann ikki kundi flyta yvirskot/hall um ársskiftið. Feløgini hildu seg eisini hava ein søguligan rætt til at taka lut í tí yvirskipaða útgávuarbeiðinum av undirvísingarmiðlum. Í samráði við tveir løgfrøðingar gjørdi Skúlabókagrunnurin stutt eftir hoyringar fundin sítt egna lógaruppskot, sum varð sent Mentamálaráðnum. Mentamálaráðið kundi ikki taka undir við uppskotinum frá Skúlabókagrunninum.

Landsstýrismaðurin vísti á, at fyri Føroya Lærarafelag er spurningurin um at broyta regluverkið og skipanina hjá Skúlabókagrunninum eitt eymt mál, sum ávirkar "kenslur" felagsins. Føroya Lærarafelag og limir tess hava verið sálin í Skúlabókagrunninum síðan 1936, og hava í fleiri umførum verið við til at bjargað ella endurreist "grunnin". Tætta samstarvið millum fakfeløgini og Skúlabókagrunnin hevur havt við sær, at arbeiðið hjá landsstýrismanninum at umskipa regluverkið hevur gingið striltið.

Í november 2001 vísti landsstýrismaðurin eisini á, at í sambandi við viðgerðina av málinum hevði Mentamálaráðið bíðað eftir endaligu viðgerðini av álitinum hjá Fíggjarmálaráðnum "um landsstovnar og –grunnar". Landsstýrismaðurin álegði einari innanhýsis nevnd at arbeiða víðari við málinum, soleiðis at lógaruppskot um at skipa Skúlabókagrunnin kundi verða lagt fyri Løgtingið í februar 2002. Okkum kunnugt varð einki slíkt lógaruppskot lagt fyri tingið.

Í juni 2002 spurdu vit, hvat er hent í málinum, og nær viðurskiftini fara at koma í rættlag.

Í august 2002 segði landsstýrismaðurin, at alt økið viðvíkjandi undirvísingartilfari skuldi verða umskipað, og hann hevði sett nevnd at arbeiða við umskipanini. Landsstýrismaðurin

vónaði, at arbeiðið fór at verða liðugt eftir einum ári. Síðani skuldi lógaruppskot verða fyrireikað og lagt fyri tingið.

Vit halda, at gongdin í málinum bendir á, at Mentamálaráðið/skiftandi landsstýrismenn í áravís hava skákað sær undan at loysa trupulleikarnar við at seta nevndir at kanna, gera uppskot o.a., uttan at tað førir til ítøkilig úrslit.

6.16 Bókamiðsølan (GL 2000/2 10 6-5)

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 um Skúlabókagrunnin vístu vit aftur á, at Bókamiðsølan tyktist vera ein almennur stovnur, hvørs ognir fullu til Skúlabókagrunnin helt Bókamiðsølan uppat við virksemi sínum. Virksemið varð tó hvørki tikið við á fíggjarlógina ella í landsroknskapin.

Skuldarar og ognarar í roknskapinum hjá Bókamiðsøluni eru fyri stóran part skuldarar og ognarar hjá Skúlabókagrunninum, og avrokningin lagar seg í ein ávísan mun eftir gjaldførinum hjá Bókamiðsøluni. Vit spurdu, um ikki rættast hevði verið, at játtanin til Bókamiðsøluna var ein rakstrarjáttan, ella at Bókamiðsølan og Skúlabókagrunnurin játtanarliga og roknskaparliga vórðu roknað sum ein og sami stovnur.

Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at eitt lógaruppskot var gjørt, har Bókamiðsølan varð gjørd til ein sjálvsognarstovn. Í november 2001 segði landsstýrismaðurin, at í sambandi við at Skúlabókagrunnurin fór at verða umskipaður, helt hann tað vera ráðiligast, at øll viðurskiftini fingu eina nýggja viðgerð.

Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti". Bókamiðsølan varð ikki umrødd í álitinum.

Fíggjarmálaráðið hevur eftirsíðan viðgjørt stovnin og vísir á, at Bókamiðsølan er ein landsstovnur, og er sostatt ogn landskassans. Víst verður á, at eingin lógarheimild er fyri at stovnurin, sum er, ikki verður tikin við á fíggjarlógina, og heldur ikki verður tikin við í landsroknskapin. Niðurstøðan er, at antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg ella eigur lógarheimild at verða veitt, soleiðis at virksemið hjá Bókamiðsøluni kann verða hildið uttan fyri fíggjarlógina. Somuleiðis eigur virksemið antin at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógarheimild at verða veitt, soleiðis at virksemið kann verða skilt frá landsroknskapinum. Víst verður á, at talan er um ogn hjá landinum, sum eigur at verða tikin við í landsroknskapinum.

Løgmaður hevur í desember 2002 kunnað um, at arbeitt verður við at fáa greiðu á formligu viðurskiftunum. Síðani verður støða tikin til, um neyðugar lógarbroytingar skulu verða gjørdar, so heimild fæst fyri, at stovnurin kann liggja uttanfyri fíggjarlógina, ella um hann skal verða settur á fíggjarlógina. Sambært løgmanni halda Løgmálaráðið og Fíggjarmálaráðið, at uppskot til neyðugar lógarbroytingar kunnu verða gjørdar so mikið skjótt, at tær kunnu verða lagdar fyri Løgtingið í hesi tingsetuni.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt hevur verið við lógaruppskoti at gera Bókamiðsøluna til sjálvsognarstovn. Partarnir í nevndini fyri Bókamiðsøluna, Bókadeild Føroya Lærarafelags og Skúlabókagrunnin, taka undir við uppskotinum, men felagið Føroysk Bókaforløg og Fíggjarmálaráðið taka ikki undir við tí. Landsstýrismaðurin hevur lagt hesa ætlan fyri á landsstýrisfundi, men ein gjøllari lýsing av ætlanini varð kravd.

6.17 Útbúgvingarstuðul og -lán (GL 2000/2 10 9-6)

Stuðulsstovnurin umsitur stuðul og lán til fólk í útbúgving, og krevur lánini innaftur. Lógargrundarlagið er Ll. nr. 45/1999 "um útbúgvingarstuðulsskipan". Við heimild í lógini eru 4 kunngerðir lýstar, sum áseta neyvari reglur á økinum.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 tóku vit samanum úrslitið av grannskoðanini og vístu á, hvørjar ábøtur vóru framdar. Niðanfyri verður kunnað um, í hvønn mun viðurskifti, ið tá vórðu umrødd, eru komin í rættlag.

Avstemman av lánum og peningastovnskontum í 2001 og 2002

Sambært Stuðulsstovninum stemma bókaðu lestrarlánini í landsroknskapinum við lánsskipanina á Stuðulsstovninum, allar peningastovnskontur stemma við uttanhýsis kontuavrit, og bókaðu rentuinntøkurnar o.a. stemma við tað, sum er skrásett í lánsskipanini.

Roknskaparreglur/innanhýsiseftirlit

Í frágreiðing frá november 2000 vístu vit á, at eingin roknskaparreglugerð var á stovninum. Í februar 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið fór at taka neyðug stig til, at allar roknskaparreglugerðir undir § 7 í fíggjarlógini vórðu lidnar tíðliga á heysti 2001. Í november 2001 kunnaði Stuðulsstovnurin um, at reglugerðir fyri stovnin vóru gjørdar sambært roknskaparrundskrivinum og sendar Mentamálaráðnum at góðkenna. Í oktober 2002 kunnaði Stuðulsstovnurin um, at stovnurin ikki hevði frætt aftur frá Mentamálaráðnum.

Í november 2000 vístu vit á, at ongar samanskrivaðar reglur ella starvslýsingar lýstu, hvørji innanhýsiseftirlit skuldu verða gjørd. Í november 2001 kunnaði Stuðulsstovnurin um, at arbeiðið við hesum væntandi varð liðugt í næstum. Í oktober 2002 kunnaði Stuðulsstovnurin um, at arbeiðið var ikki liðugt.

Journalviðurskifti

Í november 2000 vístu vit m.a. á tørvin á einari journalskipan til mál, ið ikki eru persónsmál. Í oktober 2002 kunnaði leiðarin um, at stovnurin arbeiddi við at lúka tey krøv, ið Landsskjalasavnið setir sambært galdandi lóg/kunngerð. Ein journalskipan verður latin stovninum í mars 2003.

Edv-skipanin

Umsitingin av stuðli og lánum er knýtt at edv-skipanini á stovninum. Skipanin er sjálvvirkandi á nógvum týðandi økjum, tað verið seg at rokna út, gjalda út og bóka stuðuls- og lánsveitingar, renturokna, skráseta inngjøld, rokna út afturgjaldsupphæddir, senda áminningarskriv um eftirstøður o.s.fr.

Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 1. februar 2001 um roknskaparreglugerðir eru m.a. ásett ávís krøv til edv-skipanir. Edv-skipanin á Stuðulsstovnurin varð tikin í nýtslu í august 1993, og hon lýkur ikki øll krøv, sum sett eru til dokumentatión, brúkaravegleiðingar, brúkararættindi o.a. Váðameting er ikki gjørd, eingin neyðætlan finst, og ongar reglur eru um log. Back-up verður tó tikið hvønn dag, og veitarin hevur eitt avrit av telduforritinum.

Eingin skrivlig avtala er gjørd við veitaran um menning og viðlíkahald av skipanini, og stovnurin er bundin av einstøkum persóni hjá edv-veitara sínum. Stuðulsstovnurin er greiður yvir umrøddu veikleikar. Stovnurin hevur nýtt orku at kravfesta eina nýggja telduskipan. Í desember 2002 varð sáttmáli undirskrivaður við teldufyritøku um at menna nýggja telduskipan, sum væntandi verður liðug um ársskiftið 2004/2005. Ábøtur á verandi skipan verða tí ikki raðfestar høgt.

Innheintan av eftirstøðum

Lánsskuldin er góðar 62 mió.kr. Talan er um uml. 3.000 lán. "Vanligu" eftirstøðurnar eru uml. 7 mió.kr. Fleiri hava ikki goldið, hóast tey hava fingið fleiri rykkjarar, og tí eru 600 lán

fallin til gjaldingar í síni heild, svarandi til uml. 12 mió.kr. 400 lántakarar búgva í Føroyum (8 mió. kr.), og 200 lántakarar (4 mió.kr.) búgva uttanfyri Føroyar, einamest í Danmark.

Í tíðarskeiðinum 1995 – 2000 sendi Stuðulsstovnurin ongar rykkjarar. Eftirsíðan er tað gjørt. Sambært § 8 í lógini um útbúgvingarstuðul er síðani 1999 heimilað Toll- og Skattstovu Føroya at krevja inn skuld, ið stavar frá Stuðulsstovninum. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið var ætlanin við hesi lógarbroyting at effektivisera innkrevjingina av eftirstøðunum, soleiðis at Toll- og Skattstovan fekk heimild at krevja lánsskuldina aftur eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri innkrevjingina av persónsskatti í skattalógini.

Trupulleikar vóru á Innkrevjingardeildini, og ikki fyrr enn á einum fundi í oktober 2001 varð avtalað, hvussu innheintingarmannagongdin skuldi vera, og hvørjar upplýsingar Stuðulsstovnurin skuldi lata Toll- og Skattstovu Føroya. Eini 40-50 innheintingarmál vórðu í desember 2001 latin Innkrevjingardeildini eftir hesum leisti.

Í apríl 2002 boðaði Toll- og Skattstovan Stuðulsstovninum frá, at allar upplýsingar millum lánsskipanina á Stuðulsstovninum og innkrevjingarskipanina á Innkrevjingardeildini um innheintan av eftirstøðum skuldu fara fram elektróniskt um alnótina, og innheintingarmálini vórðu latin Stuðulsstovninum aftur. Vit hava kannað nakað av skrivliga samskiftinum millum partarnar, og hava havt fundir við umboð fyri Stuðulsstovnin og Menningardeildina á Toll- og Skattstovu Føroya, sum vanliga stendur fyri tílíkum verkætlanum. Stuðulsstovnurin, Toll- og Skattstova Føroya og teirra edv-veitarar hava verið við í verkætlanini at krevja inn lestrarlán.

Eftir okkara tykki bendir óskipaða og óformliga samskifti á, at tað er ógreitt, hvør persónur hevur verið leiðari á verkætlanini, og tað er ilt at siga, hvørjar arbeiðsuppgávur, hvønn myndugleika og hvørja ábyrgd, hvør einstakur luttakari í verkætlanini hevur havt.

Endamálið er at krevja pening inn. Hóast meira enn eitt ár er umliðið, síðani innheintingin skuldi verið byrjað, er so at siga einki kravt inn. Í skjótt eitt ár hevur málið snúð seg meira um at tillaga lánsskipanina á Stuðulsstovninum til eina elektroniska samskiftisloysn, sum skal sampakka við innkrevjingarskipanina hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Stuðulsstovnurin hevur ikki nóg góðan førleika og royndir at krevja inn falna skuld, og eingin frá Innkrevjingardeildini hevur sett seg inn í lánsskipanina á Stuðulsstovninum. Málið hevur eisini verið merkt av ivamálum um m.a. fyrning. Lánsskipanin á Stuðulsstovninum tilskrivar rentur av einari upphædd, sum í ávísum førum kann verða ov stór, tí møgulig fyrnað renta er íroknað. Sambært Stuðulsstovninum verður mannagongdin tann, at lánið verður "reinsað" fyri fyrnaðar rentur, áðrenn tað verður sent til innkrevjingar.

Menningardeildin hevur víst á, at ein trupulleiki viðvíkjandi innkrevjingini frá byrjan hevur verið, at eingin yvirskipað reglugerð varð gjørd fyri, hvussu mannagongdin skal vera. Eitt uppskot varð gjørt í 1999, men reglugerðin varð ongantíð gjørd liðug og undirskrivað av Fíggjarmálaráðnum. Fyri at gera viðurskiftini greiðari, arbeiðir Menningardeildin við einum uppskoti til avtalu ímillum Toll- og Skattstovu Føroya og Stuðulsstovnin. Saman við avtaluni er ætlanin at hava nøkur fylgiskjøl, m.a. eina reglugerð um innheintan av eftirstøðum, fylgiskjøl um tekniskar upplýsingar og um, hvussu bókingar og skrásetingar skulu fara fram.

Fyri at effektivisera innkrevjingina av lestrarlánum broytti Løgtingið fyri 4 árum síðani lógina, og heimilaði Toll- og Skattstovu Føroya at krevja inn falna skuld. So at siga einki er tó kravt inn. Vit hava mælt Stuðulsstovninum til at kunna Mentamálaráðið/landsstýrismannin gjølla um trupulleikarnar, so at Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið kunnu loysa verandi ivamál og finna eina hóskandi og greiða mannagongd, sum tryggjar, at tað sum skjótast verður farið undir eina effektiva innheintan av eftirstøðum, bæði í og uttanfyri Føroyar.

6.18 Føroya Landsbókasavn (GL 1998/2 11 2-7)

Føroya Landsbókasavn hevur virkað eftir Ll. nr. 31/1952, sum fór úr gildi 1. januar 2002. Samstundis varð Ll. nr. 79/2001 "um bókasøvn" sett í gildi. Sambært lógini skal ella kann landsstýrismaðurin á fleiri økjum áseta neyvari reglur. Vit hava spurt, í hvønn mun reglur eru

ásettar. Landsstýrismaðurin hevur í juli 2002 svarað, at hann hevur ikki tikið stig til at áseta neyvari reglur. Landsbókasavnið nýtir gomlu reglurnar, til nýggjar eru gjørdar.

Í mars 2002 hevur Mentamálaráðið gjørt eitt rundskriv um studning til bókasøvn. Rundskrivið er ætlað at lýsa mannagongdina av samskiftinum millum Landsbókasavnið og bókasøvn, sum fáa studning, fyri at tryggja at rakstrarstuðulin verður rætt avgreiddur.

Eitt rundskriv er frá einum myndugleika, sum er yvir, til ein myndugleika, sum er undir. Er ætlanin at áseta neyvari ella avmarkandi reglur mótvegis triðjamanni, krevst vanliga lógarheimild, og tá verða tær at áseta í kunngerð. Vit hava víst á, at ein stuðulslóg sum Ll. nr. 79/2001 "um bókasøvn", átti at havt ásetingar um ella givið landsstýrismanninum heimild til at áseta neyvari reglur (í kunngerð) um stuðulsumsiting, t.d. um fíggjarætlan, roknskap, grannskoðan, eftirlit, kanning á staðnum, at/nær ein tilsøgn kann detta burtur, møgulig afturrindan av stuðli, møguligar ásetingar um revsing o.a.

Landsstýrismaðurin hevur í juli 2002 boðað frá, at í sambandi við at stuðulslóggávan sum heild verður endurskoðað, eigur Ll. nr. 79/2001 at verða endurskoðað, so viðurskiftini, sum her eru umrødd, koma í rættlag.

Inntøkur/fólkabókasøvn

Í frágreiðingini vístu vit á, at í sundurgreiningini av játtanini hevur seinastu mongu árini staðið ein mett inntøka 625 t.kr. (í 2001 638 t.kr.); men ongar tílíkar inntøkur eru bókaðar í roknskapinum. Vit mæltu til at fáa samsvar millum játtanar- og skrásetingarmannagongdina. Metta inntøkan er tikin burtur í uppskotinum til fíggjarlóg 2003.

Inntøkufíggjað virksemi - Lønarútreiðslur "burtur" í landsroknskapinum

Landsbókasavnið lønar fólki, ið ger arbeiði fyri almennar stovnar. Landsbókasavnið sendir stovnunum rokning, sum svarar til lønina, og mótroknar peningin í lønarútreiðslunum.

Summir stovnar bóka lønarrokningina frá Landsbókasavninum sum keyp av tænastu í staðin fyri sum lønarútreiðslu. Tá verður lønarútreiðslan burtur í landsroknskapinum.

Vit vístu á, at hetta fyribrigdi ger seg galdandi á fleiri stovnum undir Mentamálaráðnum, og vit mæltu Mentamálaráðnum til at taka spurningin upp við Gjaldstovuna. Landsstýrismaðurin hevur í juli 2002 svarað, at Landsbókasavnið frá Gjaldstovuni hevur útvegað sær eina vegleiðing til mannagongdir, sum klárt greiðir frá, hvussu lønir skulu verða bókaðar. Vegleiðingin verður send við, tá ið lønir skulu verða bókaðar millum stovnar, fyri at tryggja at tær altíð verða bókaðar á rætta kontu.

Ivasamt, um talan er um "inntøkufíggjað virksemi"

Ein partur av virkseminum hjá Landsbókasavninum er sokallað "Inntøkufíggjað virksemi", og tað verður skrásett á undirkontu 40. Talan er um virksemið hjá einum bókavørði, sum skrásetir bókasøvn á almennum stovnum, skúlum, hjá felagsskapum o.ø. Endamálið er, at tað um eina telduskipan skal bera til at síggja, hvørjar bøkur eru hvar í landinum. Landsbókasavnið lønar bókavørðinum og sendir rokning til stovnarnar.

Sambært játtanarskipanini kunnu landsstovnar fáa játtan til inntøkufíggjað virksemi, um virksemið lýkur ávísar treytir. Grundin til at skilja inntøkufíggjað virksemi frá vanligum virksemi er, at talan er um sølu av tænastum í kapping við onnur. Prísurin skal m.a. ikki vera kappingaravlagandi mótvegis privatum og øðrum almennum kappingarneytum, og langtíðar miðalkostnaðurin skal verða fíggjaður.

Landsbókavørðurin hevur greitt frá, at endamálið er at nøkta ein tørv, og ikki at fáa vinning burturúr virkseminum. Uppgávan tykist tí vera partur av vanliga virksemi stovnsins, og landsbókavørðurin heldur, at uppgávan á undirkontu 40 er varandi. Vit halda, at tað helst hevði verið rættari, at virksemið varð játtað á undirkontu 20 undir vanliga virkseminum.

Fleiri stovnar/skúlar undir Mentamálaráðnum hava undirkontur, sum sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina bera heitið „Inntøkufíggjað virksemi“. Í nógvum førum lýkur virksemið eyðsæð ikki tær serligu treytir, sum eru ásettar í játtanarskipanini fyri hesum hugtaki. Vit hava tí mælt Mentamálaráðnum til at endurskoða allar tílíkar undirkontur undir § 7 “Útbúgving og gransking o.a.”

Í juli 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði kunnað um, at hann var í ferð við at endurskoða játtanarskipanina. Ætlanin var eisini at endurskoða reglurnar um inntøkufíggjað virksemi. Tá ið nýggjar og greiðari reglur eru settar í verk, ætlar Mentamálaráðið at endurskoða undirkonturnar við heitinum “inntøkufíggjað virksemi”, so tær verða í samsvari við nýggju játtanarskipanina.

Landsgrannskoðanin undraðist á, at Mentamálaráðið ikki straks tók stig til at rætta viðurskifti, ið eyðsæð eru skeiv sambært galdandi greiðum reglum, vísandi til at bíðað verður eftir øðrum reglum. Í februar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at mannagongdin verður broytt, og virksemið verður skrásett á vanliga raksturin hjá Landsbókasavninum.

6.19 Føroya Landsskjalasavn (GL 1998/2 11 2-7)

Journalskipanir

Í § 7 í Ll. nr. 49/1992 “um Føroya Landsskjalasavn” er ásett, at almennir stovnar, undir eftirliti av Landsskjalasavninum, hava ábyrgdina av, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt. Í frágreiðing í februar 2002 vístu vit á, at Landsskjalasavnið hevur bert góðkent journalskipanir hjá 10 stovnum. Afturat hesum hevur Landsskjalasavnið góðkent journalskipanir hjá nøkrum stovnum, sum seinni eru umskipaðir. Landsskjalasavnið hevur eftirlit við umleið 40 øðrum skipanum, sum ikki eru góðkendar. Helst lúka allar treytirnar fyri at verða góðkendar.

Leikluturin hjá Landsskjalasavninum er at ráðgeva, Stovnurin kann ikki áleggja øðrum stovnum at fáa sær journalskipan. Landsskjalasavnið kunnaði um, at orka er ikki til at hava eftirlit við teimum umleið 125 stovnunum, sum Landsskjalasavnið sambært Ll. nr. 49/1992 skal. Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at Mentamálaráðið er sinnað at bøta um viðurskifti savnsins í teimum førum, har stovnurin hevur tørv á størri játtan fyri at virka, sum hann skal.

Landsskjalasavnið hevur boðað frá, at verkætlan verður fyrireikað, sum hevur til endamáls at skráseta øll journalviðurskifti hjá stovnum, ið skjalasavnslógin fevnir um. Endamálið er at leggja til rættis framtíðar goymslutørv og neyðugar lógarbroytingar, og eisini at tryggja skiftið til kunningartøkni.

Í august 2002 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Mentamálaráðið fer at royna at útvega stovninum neyðuga orku til hesar uppgávur.

Sum nevnt, hava almennir stovnar ábyrgdina av, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt. Vit hava víst á, at nógvir stovnar ikki hava eina nøktandi journalskipan, og fleiri hava ikki ásett minstukrøv til málsviðgerð, herímillum hvørji skjøl, upprit o.a. skulu verða til skjals í einum máli, eisini fyri at tryggja, at málsviðgerðin lýkur krøvini um vegleiðing, partshoyring, skyldu at skriva upp o.a. í ávikavist Ll. nr. 132/1993 “um fyrisitingarlóg” og Ll. nr. 133/1993 “um innlit í fyrisitingina”. Stýri og stovnar gera íløgur í edv-journalskipanir, ofta hvør í sínum lagi. Um hetta var betur samskipað, kundu íløgur, rakstur, menning og viðlíkahald av hesum skipanum verið væl bíligari.

Starvsfólkaviðurskifti

Í frágreiðingini umrøddu vit eisini, at stovnurin hevði víst á tørvin á einum konservatori, tí savnindi stovnsins fórust. Harafturat var tørvur á 2 savnshjálparum, skuldi stovnurin kunna umsita tey savnindi, sum í løtuni lógu á goymslu óviðgjørd. Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at Mentamálaráðið er sinnað at bøta um viðurskiftini á starvsfólkaøkinum, og fer at hava

samráðingar við Landsskjalasavnið um hesi og onnur viðurskifti, sum kunnu vera savninum at gagni. Vit hava í juni 2002 spurt, hvat síðani er hent í málinum.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2002 boðað frá, at konservator ikki eigur at verða settur í fast starv, fyrr enn spurningurin um ein møguligan felags framtíðar konserveringsverkstað fyri øll søvnini er greiddur. Mentamálaráðið heldur, at stovnurin fyribils kann klára tann mest átrokandi konserveringstørvin við at keypa sær sakkøna hjálp uttaneftir.

Mentamálaráðið ásannar, at tørvur er á at fáa til høldar óskipað almenn og privat savnindi á goymslum Landsskjalasavnsins, men ger samstundis vart við, at stovnarnir hava skyldu til at avhenda síni savnindi í skrásettum og skipaðum formi. Eisini vísir Mentamálaráðið á, at stovnar ikki eiga at avhenda savnindi, fyrr enn tey eru 30 ára gomul.

Hølisviðurskifti

Sambært § 8 í Ll. nr. 49/1992 "um Føroya Landsskjalasavn" hava almennir stovnar skyldu at avhenda Landsskjalasavninum savnindi síni, tá ið tey eru 30 ára gomul. Eftir avtalu í 1990 millum donsku stjórnina og Landsstýrið um skjalasøvn hjá stovnum ríkisins í Føroyum, hava teir avhendingarskyldu til Landsskjalasavnið.

Arbeiðsbólkur, settur av Landsstýrinum í 1997, gjørdi tilmæli um at byggja nýtt landsskjalasavn. 1. januar 1998 var hølistørvurin hildin at vera uml. 2.300 fermetrar, harav uml. 1.300 fermetrar vóru goymslutørvur. Bólkurin mælti Landsstýrinum til at byggja eini 2.400 fermetra stór savnshús, soleiðis at tørvurin varð nøktaður til ár 2008. Í frágreiðingini vístu vit á, at sambært yvirliti frá Landsskjalasavninum hevur stovnurin eina gólvvídd 785 fermetrar, harav 475 fermetrar eru goymsla. Landsstýrismaðurin kunnaði um, at í løguætlanini á fíggjarlógini er byggimálið sett til 2005, og Mentamálaráðið fór at taka upp samband við Landsskjalasavnið um hølisviðurskiftini.

Í august 2002 vísti landsstýrismaðurin á, at tað leingi hevur verið greitt, at hølisviðurskiftini hjá Landsskjalasavninum ikki vóru nøktandi. Við støði í m.ø. tilmæli, sum arbeiðsbólkur legði úr hondum 3. februar 1997, hevur Mentamálaráðið skotið upp, at peningur varð settur av til savnshús í langtíðar løguætlan. Eisini vísti landsstýrismaðurin á, at felags lesistova og granskingarklivar hjá Landsbókasavninum og Landsskjalasavninum verða gjørd í gomlu bókasavnshúsunum á Debesartrøð. Hesi høli verða ætlandi liðug í 2003, og tað fer at geva betri tænastuveiting til granskarar og lesistovugestir. Verandi lesistova í starvstovubygninginum kann tá verða nýtt til onnur savnsendamál, og soleiðis kann verða bøtt nakað um bráðneyðuga hølistørvin hjá Landsskjalasavninum á Debesartrøð.

Ábøtur eru gjørdar á goymsluna í Slættanesgøtu, og Landsskjalasavnið hevur samanlagt 4.143 hillametrar, harav 593 metrar í løtuni eru tøkir. Mentamálaráðið heldur, at hetta skuldi nøkta bráðneyðuga tørvin.

6.20 Føroya Náttúrugripasavn (GL 1998/2 11 2-7)

Í frágreiðingini frá februar 2002 vístu vit á, at hóast samsvar millum samlaða játtan og nýtslu í 2000, vóru lutfalsliga stór frávik í inntøkum, lønum og øðrum útreiðslum. Atvoldin var, at stovnurin hevði havt inntøkur og útreiðslur í sambandi við verkætlanir, sum ikki vóru tiknar við, tá ið fíggjarætlanin fyri stovnin varð gjørd. Sambært stjóranum var ætlanin at stovna eina undirkontu til verkætlanirnar, soleiðis at hesar inntøkur og útreiðslur vórðu skildar frá vanliga rakstrinum. Í august 2002 segði landsstýrismaðurin, at í eykajáttanarlógini fyri 2002 var heimilað Føroya Náttúrugripasavni at hava inntøkufíggjað virksemi í sambandi við ymiskt prosjektvirksemi, og undirkonta varð stovnað til hetta virksemi.

Stovnurin hevði eina bankakontu, sum ikki var skrásett í landsbókhaldinum. Vit mæltu til at fáa viðurskiftini í rættlag í samráð við Gjaldstovuna. Náttúrugripasavnið hevur í januar 2003 boðað frá, at kontan verður skrásett frá 1. januar 2003.

6.21 Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum

Við skrivi 12. august 2002 bóðu vit landsstýrismannin í mentamálum um eitt fullfíggjað og dagført yvirlit yvir:

- Hvørjir stovnar, deildir o.l. viðgera persónsupplýsingar og koma undir Ll. nr. 73/2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum", og
- hvørjir hava trygdarskipanir samsvarandi § 31, stk. 2-5.
- Hvørjir stovnar, deildir o.l. koma undir § 35 um viðgerðarloyvi, og
- hvørjir hava fingið viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum.
- Hvørjar skráir vóru fevndar av lógini um evnisskráir hjá almennum myndugleikum, og
- hvørjar lúka treytirnar í lógini tann 30. juni 2002, sum ásett í § 48.

Landsstýrismaðurin segði í november 2002, at hann ikki hevur hesar upplýsingar. Arbeiðsbólkur varð settur at útgreina nevndu viðurskifti við atliti at lýsa, hvussu umfatandi uppgávan veruliga er og gera uppskot til, hvussu farast skal víðari fram í málinum, soleiðis at tryggjað verður, at lógarásettu treytirnar verða fylgdar. Arbeiðið skuldi væntandi verða liðugt fyri jól 2002.

6.22 Stuðul til mentan og ítrótt (GL 2000/2 11 9-1)

Landsgrannskoðanin hevur kunnað seg nærri um umsitingina av ymiskum stuðulsjáttanum, sum Mentamálaráðið umsitur, har stuðulin serliga verður veittur feløgum.

6.22.1 Leikpallur Føroya

Leikpallur Føroya fekk í 2001 2,8 mió.kr. í stuðli av játtanini 7.24.2.07 "Leikpallur Føroya". Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2001 stendur, at Leikpallur Føroya er sjálvsognarstovnur, sum verður rikin við egnum inntøkum, umframt stuðli frá kommunum og játtan á fíggjarlógini. Endamálið er m.a. at umsita almenna studningin til leiklist í Føroyum.

Av roknskapinum 2001 hjá Leikpalli Føroya sæst, at stuðulin á fíggjarlógini er so at siga einasta inntøka.

Útreiðslurnar eru (t.kr.):

- 880 stuðul til Leikarafelag Føroya,
- 770 stuðul til Meginfelag Áhugaleikara Føroya,
- 805 listarligur leiðari, umsitingarstjóri, og aðrar umsitingarútreiðslur,
- 100 leikritakapping,
- 76 annar stuðul.

6.22.2 Leikarafelag Føroya

Sambært viðtøkunum er endamál Leikarafelag Føroya:

at umsita játtanina, sum felagið fær frá Leikpalli Føroya til yrkissjónleik í Føroyum,

at umsita áhugamál hjá føroyskum yrkisleikarum, herímillum sáttmálasamráðingar o.a.,

at leggja lunnar undir eitt fakfelag fyri føroyskar yrkisleikarar.

Roknskapurin fyri 2001 er ikki liðugur. Sambært fyribilsroknskapinum 2001 eru inntøkurnar hjá felagnum 1.419 t.kr. Tær kunnu greinast sundur soleiðis (t.kr.):

- 880 frá Leikpalli Føroya,
- 278 frá Mentamálaráðnum - til útgerð og høli,

- 150 frá Tórshavnar Býráð,
- 88 aðrar inntøkur,
- 23 frá Grímustuðlum.

Sambært fyribilsroknskapinum 2001 eru útreiðslurnar 1.478 t.kr., og kunnu greinast soleiðis (t.kr.):

- 880 leikverk,
- 248 íløgur – útgerð og høli,
- 103 byggilán – rentur og avdráttur,
- 90 uttanlandssamstarv,
- 86 umsiting,
- 36 skeið,
- 35 umboðan.

Av útreiðslunum til leikverk uppá 880 t.kr., eru 805 t.kr. nettoútreiðslur hjá Leikhúsinum Gríma fyri leikirnar "Fótur í hosu" og "Eitur nakað land Week-end".

6.22.3 Meginfelag Áhugaleikara Føroya

Sambært viðtøkunum er endamál Meginfelag Áhugaleikara Føroya at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentanargrein í Føroyum.

Inntøkurnar eru 870 t.kr. Tær kunnu greinast sundur soleiðis (t.kr.):

- 770 frá Leikpalli Føroya,
- 29 limagjøld o.a.,
- 26 frá kommunum o.ø.,
- 25 luttøkugjøld,
- 20 úr Jólamerkjagrunninum.

Útreiðslurnar eru 913 t.kr. Tær kunnu greinast sundur soleiðis (t.kr.):

- 292 lønir og eftirlønargjald,
- 285 stuðul til limafeløg og einstaklingar,
- 128 skrivstovuhald og umsiting,
- 103 ferð til Edered,
- 75 skeiðsvirksemi,
- 30 leikrit og barnasjónleikarastevnan.

6.22.4 Norrøna felagið

Sambært viðtøkunum er endamálið hjá felagnum at styðja og økja um norðurlendskt samstarv saman við norrønu feløgunum í hinum Norðurlondunum. Felagið fær 150 t.kr. í stuðli á undirkontu 7.24.1.13.02 "Norrøna felagið". Flest allar útreiðslurnar eru lønir og umsitingarútreiðslur.

Roknskapargrannskoðanin vísir á, at tað er trupult at greiða inntøkur og útreiðslur, tí fleiri persónar hava tikið sær av roknskapinum í 2001. Eisini verður víst á, at útreiðslurnar at heinta limagjaldið inn og roknskaparførsla eru óneyðuga høgar.

6.22.5 Mentanargrunnur Landsins (GL 2001/2 11 9 – 3)

Í sambandi við grannskoðanina av útgjaldingum úr Mentanargrunninum í 2001 hava vit aftur heft okkum við, at fleiri persónar og feløg eisini hava fingið studning frá øðrum stuðulsjáttanum, ið Mentamálaráðið umsitur.

Í frágreiðingini frá februar 2002 til løgtingsgrannskoðararnar vístu vit á, at fleiri stovnar/-feløg fáa studning til somu endamál frá meginfeløgum, frá Mentanargrunninum umframt frá stuðulsjáttanum, ið landsstýrismaðurin umsitur. Mentanargrunnurin veitir studning sambært ásetingum í serstakari lóg, men fleiri aðrar studningsjáttanir til mentanarendamál liggja innanfyri breiðu endamálsorðingina fyri virkseminum hjá Mentanargrunninum.

Eisini kann verða nevnt, at sambært § 4 í nr. Ll. 81/2001 "um Vinnuframagrunn" staðfestir landsstýrismaðurin í vinnumálum í stuðulsskipanum hvørji endamál, ið Vinnuframagrunnurin kann stuðla. Í 2001 hevur landsstýrismaðurin m.a. staðfest, at serligur dentur skal leggjast á stuðul til tónleik og ítrótt.

6.22.6 Tiltøk fyri børn og ung

Á høvuðskontu á fíggjarlógini 7.24.1.05 "Tiltøk fyri børn og ung" er í 2001 ein inntøku- og ein útreiðslujáttan, sum eru eins stórar, 900 t.kr. Talan er um væntaða partin av veddingarpengunum, sum verður tillutaður Mentamálaráðnum umvegis Sp/f Ítróttarvedding. Sambært landsroknskapinum vóru veddingarpengarnir í 2001 1.380 t.kr.

Í frágreiðing um "Ítróttarvedding" undir partinum um Sjálvstýrismál/Løgmálaráðið hava vit greitt neyvari frá umsitingini av veddingarpengunum. Har verður m.a. víst á, at parturin av veddingarpengunum, sum fer til "børn og ung" verður umsitin sambært einari sera breiðari endamálsorðing, og stuðul verður eisini veittur feløgum, sum í fleiri førum fáa stuðul frá øðrum játtanum, Jólamerkjagrunninum, meginfeløgum umframt veddingarpengar frá øðrum.

6.22.7 Stuðul til Ítrótt

ÍSF hevur í fíggjarárinum 2001 fingið 2 mió.kr. í stuðli av játtanini 7.24.6.04. Sambært roknskapinum fær ÍSF sjálvt 552 t.kr. og rindar 1.448 t.kr. víðari sum stuðul til ser- og deildarsambond. Harafturat hevur ÍSF fingið 3.780 t.kr., sum eru parturin av veddingarpengunum, sum ÍSF skal umsita.

Fótbóltssambandið hevur í fíggjarárinum 2001 fingið 900 t.kr. av játtanini 7.24.6.01. Harafturat hevur Fótbóltssambandið fingið 600 t.kr. av veddingarpengunum umvegis ÍSF.

ÍSB hevur í fíggjarárinum 2001 fingið 150 t.kr. í stuðuli av játtanini 7.24.6.05. Harafturat hevur ÍSB á ymiskan hátt fingið lut í veddingarpengunum.

Í frágreiðing okkara um "Ítróttarvedding" undir partinum um Sjálvstýrismál/Løgmálaráðið hava vit greitt nærri frá um umsitingina av veddingarpengunum.

6.22.8 Ungmannafeløg og skótarørsla

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin á undirkontu 7.24.1.13.03 "Ungmannafelag og skótarørsla" (620 t.kr.) ætlað at stuðla ungdómsarbeiði, til tess at menna ungdómin í øllum lutum. Peningurin fer til:

- Landsfelag Føroyinga í Útbúgving (LFÚ),
- Føroya Ungdómsráð (FUR),
- Føroya Skótaráð og
- CISV barnalegur.

FUR fekk í 2001 150 t.kr. í stuðli av undirkontu 7.24.1.13.03. og 15 t.kr. av játtanini "Tiltøk fyri børn og ung", sum er tann parturin av veddingarpengunum, ið Mentamálaráðið fær í sín

lut at býta út. Harafturat hevur FUR fingið 1.330 t.kr. av pengunum frá Sp/f Ítróttarvedding at umsita og til at rinda víðari til m.a. ungmannafeløg og skótarørslu.

Í frágreiðing okkara um "Ítróttarvedding" undir partinum um Sjálvstýrismál/Løgmálaráðið hava vit greitt nærri frá um umsitingina av veddingarpengunum.

6.22.9 Stuðul til onnur endamál – strategisk tiltøk

Játtanin á undirkontu 7.24.1.13.04 "Stuðul til onnur endamál – strategisk tiltøk" er 1,8 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað mentanarpolitiskum strategiskum tiltøkum hjá landsstýrismanninum í mentamálum, serstakliga nýskapandi tiltøkum og tiltøkum, ið kunnu menna føroyska mentan og list á bygd og í bý, t.d. framsýningar, konsertferðir, seminar og tiltøk innanlands sum uttanlands. Játtanin er eisini eitt amboð hjá landsstýrismanninum í einum miðvísum mentanarpolitikki. Játtanin skal eisini nýtast til føroyskar-norðurlendskar mentanarverkætlanir "og til at framflyta (promovera) føroyska mentan og list uttanlands."

Vit hava kannað útgjaldingar í 2001. Peningurin er m.a. nýttur soleiðis:

- 271 t.kr.: at keypa 3 listaverk
- 250 t.kr.: stuðul til skrivstovuhald hjá LISA (Listafólkasambandinum)
- 200 t.kr.: stuðul til Listastevnu Føroya (Norðurlandahúsið)
- 81 t.kr.: flokkurin 99Ð í Hoydølum, stuðul til ferð til München og Rom
- 75 t.kr.: Føroya Fornminnissavn, stuðul í sambandi við 14. víkingafundin
- 72 t.kr.: Filmseftirlitið, stuðul til Norðurlendska filmseftirlitsráðstevnu
- 60 t.kr.: Talvsamband Føroya, stuðul í sambandi við vitjan av Garry Kasparov
- 50 t.kr.: Havnarkórið, stuðul til verkætlanirnar "Amerikanskur swingtónleikur", "Jesus meine Freude" og "Messias"
- 50 t.kr.: stuðul til ouverturu Jørgens Frants Jacobsen
- 50 t.kr.: stuðul til tónleikaratiltak
- 50 t.kr.: Forlagið Sprotin, stuðul til bókaútgávu

Harafturat er stuðul veittur til fleiri feløg og einstaklingar.

6.22.10 Annar stuðul

Aðrar kontur á fíggjarlógini, sum fevna um mentanarstuðul, eru:

- undirkonta 7.24.1.13.01 "Før.-ísl.-grønl. Mentanarsamstarv",
- høvuðskonta 7.24.2.01. "Tónleikur og sangur",
- høvuðskonta 7.23.7.16. "Næmingastuðul til listamenn",
- høvuðskonta 7.24.4.10. "Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari".
- Í uppskoti til fíggjarlóg 2003 er høvuðskonta 7.24.4.10. "Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari" løgd niður, og játtanin flutt Mentanargrunni Landsins at umsita.

6.22.11 Viðmerkingar

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 vístu vit á, at umsitingin av studningi til mentanarendamál tykist sum heild fløkt og óskipað, Í ávísan mun er talan um fleirfalda málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Eftir okkara tykki var tørvur á eini sanering/upprudding viðvíkjandi stuðulsgrundarlagi/-lóggávu og stuðulsumsitingini, so endamál og treytir o.a. verða greiðari, tað slepst undan dupultarbeiði, o.s.fr.

Mentamálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini í hesari áskoðan og vónaði, at á hesum øki kann verða ruddað upp við einari komandi listastuðulslóggávu. Í august 2002 vísti landsstýrismaðurin á, at um várið 2002 lat Mentamálaráðið úr hondum álitið "Mentan og Menning", sum hevur verið til aðalorðaskifti í Løgtinginum. Umframt at verða ein menningarætlan fyri alt listaøkið, er endamálið eisini at skipa stuðulin til økið við lóg.

Sum víst á omanfyri letur Mentamálaráðið í nógvum førum øðrum upp í hendi at umsita stuðul, sum er játtaður á fíggjarlógini, t.d. Leikpalli Føroya, ÍSF, Føroya Skótaráð, Norrøna felagnum o.ø. Mentamálaráðið hevur ikki ásett leiðreglur ella treytir fyri, hvussu hesi feløg skulu umsita stuðulin t.d. reglur um fíggjarætlan, eftirlit, roknskaparhald og grannskoðan.

Í februar 2003 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið fer at taka stig til at fáa mannagongdir gjørdar, har stuðul verður latin øðrum upp í hendi at umsita.

Í brotinum "Alment um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting" undir Løgmansfyrisitingini, hava vit eisini víst á, at løgmaður hevur heitt á Fíggjarmálaráðið um at seta ein arbeiðsbólk við starvsfólki úr miðfyrisitingini at gera uppskot til eina ætlan fyri at fáa verandi stuðulslóggávu fullgóða og í hesum sambandi ætla um, hvørt tað er skilagott at gera eina generella lóg fyri stuðulsumsiting, roknskap, eftirlit, krøv til útgjald, grannskoðan o.a.

Vit hava mælt til, at arbeiðsbólkurin eisini fær litið upp í hendi at viðgera umrøddu trupulleikar viðvíkjandi lóggávu og umsiting av veddingarpeninginum og øðrum stuðli til mentan og ítrótt.

7. OLJUMÁL o.a.

7.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2001/1 04 1-8)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður vístá stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

9.11.1.31. Oljumálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8,6 mió.kr. Minninýtslan er 1,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum hava nettoinntøkurnar frá oljufeløgum verið størri, enn mett varð frammanundan.

9.30.1.10. Spilloljureinsing

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,75 mió.kr. Meirnýtslan er 3 t.kr. Við heimild í Ll. nr. 75/1992 "um umhvørvisgjald á smyrjiolju" hevur Landsstýrið gjørt sáttmála við IRF, har IRF átekur sær at savna inn spillolju kring landið og viðgera hana, meðan Landsstýrið átekur sær at rinda roknskaparliga hallið. IRF hevur bert smávegis inntøkur frá ómaksgjøldum og frá sølu av reinsaðari olju.

Í desember 2001 varð sáttmálin broyttur m.a. soleiðis, at Oljumálaráðið nú ikki er bundið at rinda meira, enn sett er av á løgtingsfíggjarlógini.

7.2 Umhvørvi (GL 1997/2 8 2-1)

7.2.1 Umhvørvisverndarlógin

Í frágreiðing okkara í februar 2002 umrøddu vit m.a., at Landsstýrinum er álagt í umhvørvisverndarlógini at gera kortleggingar og ætlanir viðvíkjandi ymiskum sløgum av dálking. Landsstýrið hevur lagt flestu eftirlits- og umsitingaruppgávurnar til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, sum hevur gjørt ávísar kortleggingar og ætlanir. Tó vantar framvegis nógv í hesum partinum av umhvørvisverndarlógini. Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at tað hevur samband við avmarkaðu umsitingarligu orkuna á økinum.

Fyri at lýsa umhvørvis- og náttúruverndarøkið setti landsstýrismaðurin í juli 2000 ein arbeiðsbólk, sum legði fram eitt tilmæli um ábøtur í 10 pørtum. Tá ið tað snúði seg um tann partin av umhvørvisverndarlógini, sum fevnir um kortleggingar og ætlanir av ymiskum slagi, legði arbeiðsbólkurin stóran dent á, at skipað varð ein samlað náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting, ið skuldi hava beinleiðis tilvísing til landsstýrismannin í umhvørvismálum.

Landsstýrismaðurin greiddi í februar 2002 frá, at av tí at umsitingarliga orkan á umhvørvisøkinum var avmarkað, gjørdi hann av at raðfesta teir 3 partarnar fyrst, sum snúðu seg um lóggávu, so at hon kom at samsvara við ta lóggávumenning, sum er farin fram í okkara grannalondum, herímillum at:

- gera eina tíðarhóskandi náttúruverndarlóg
- gera eina serstaka produkt- og kemikaliulóg
- dagføra umhvørvisverndarlógina

Í februar 2003 hevur Oljumálaráðið kunnað um, hvat síðani er hent í hesum málum.

Náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting

Henda fyrisiting er ikki skipað enn. Nøkur málsøki vórðu flutt Oljumálaráðnum at umsita eftir løgtingsvalið í fjør, t.d. byggiplanlegging, skógrøkt o.a.

Náttúruverndarlóg

Oljumálaráðið hevur gjørt uppskot til nýggja lóg "um viðarvøkstur og frílendisrøkt", sum skal loysa av lógina "um viðarlundir" frá 1952. Ráðið er farið undir at evna til nýggja lóg um náttúruvernd, sum skal koma ístaðin fyri galdandi lóg um náttúrufriðing. Lógaruppskotið verður ætlandi lagt fyri Løgtingið á vári 2004.

Produkt- og kemikaliulóg

At gera eina produkt- og kemikaliulóg er ein krevjandi uppgáva, sum arbeiðsorka ikki er til í løtuni. Ístaðin fer landsstýrismaðurin, við heimild í § 8 í verandi umhvørvisverndarlóg, í kunngerð at "áseta reglur um bann ella avmarking fyri innflutningi, nýtslu ella sølu av ávísum evnum, um so er, at tey kunnu ætlast at vera til skaða fyri umhvørvið." Tey evni, ið verða bannað, eru nevnd í altjóða sáttmálum, sum Løgtingið hevur samtykt.

Umhvørvisverndarlógina

Oljumálaráðið hevur ikki dagført umhvørvisverndarlógina, men hevur arbeitt við kunngerðum, sum verða ásettar við heimild í lógini, m.a. "um góðkenning av serliga dálkandi virkjum". Ráðið hevur ikki ætlanir um at gera eina nýggja umhvørvisverndarlóg. Ístaðin er ætlanin, í samstarvi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, at dagføra verandi lóg í stigum. Farið verður undir arbeiðið í 2003, og hildið verður fram í 2004.

7.2.2 Havumhvørvisverndarlógin

Í frágreiðing okkara í februar 2002 umrøddu vit, at "Havumhvørvisverndarlógin" varð sett í gildi í Føroyum í 1999. Sambært lógini hevur Landsstýrið á fleiri økjum fingið heimild at útinna eftirlit vegna "miljø- og energiministeren". Í kunngerðum, sum landsstýrismaðurin hevur sett í gildi, er álagt Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at røkja neyvari ásettar uppgávur. Sambært stjóranum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hevði stovnurin ikki formelt fingið álagt hesar uppgávur.

Oljumálaráðið hevur í januar 2003 kunnað um, at avtala er gjørd við donsku stjórnina um yvirtøku av havumhvørvismálum 1. mai 2003. Í næstum verður fyrisitingarliga ábyrgdarbýtið millum Oljumálaráðið, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og møguliga aðrar myndugleikar skipað.

Oljumálaráðið hevur aftur í februar 2003 vísst á, at fleiri uppgávur sambært havumhvørvisverndarlógini meira hóskandi kundu verið lagdar til Fiskimálaráðið og stovnar tess. Fiskimálaráðið arbeiðir við at gera eina føroyska tilbúgvingarlóg, og í tí sambandinum hevur verið umrøtt, um málsøkið "sanering af kyststrækninger" eigur at verða tikið við í ta lógina, soleiðis at §§ 35 og 36 í havumhvørvislógini verða fluttar ella strikaðar. Harafturat hevur lógin um skipatrygd, frá desember 2001, sett nakrar greinar í havumhvørvisverndarlógini úr gildi.

Í 2003 ætlar Oljumálaráðið í samstarvi við umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at dagføra havumhvørvisverndarlógina, herímillum eisini at seta í gildi fleiri kunngerðir, sum hava heimild í havumhvørvislógini. Á heysti 2003 verður eitt dagført lógaruppskot eftir ætlan lagt fyri Løgtingið.

8. ALMANNA- OG HEILSUMÁL

8.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2001/1 04 1-8)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Felagsútreiðslur

8.11.1.08. Trivnaðarmálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 18,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri mars 2001 varð játtanin hækkað 3,6 mió.kr. 2,6 mió.kr. var endurjáttan av ikki nýttari játtan í 2000 til lønarverkætlanina. Minninýtslan er 4 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum í almannamálum og landsstýrismanninum í heilsumálum

- varð lønarverkætlanin útsett til 2002. Tað førdi til eina minninýtslu 1,5 mió.kr.
- varð peningurin 998 t.kr. til "Verkætlan rørslubólkur" ikki nýttur í 2001, tí verkætlanin ikki kom í gongd,
- vórðu fleiri størv ikki sett í 2001 av tí at viðurskiftini í Trivnaðarmálaráðnum vóru ógreið. Tað førdi við sær eina minninýtslu 996 t.kr.

8.11.1.10. Flyting av Trivnaðarmálaráðnum (løgujáttan)

Upprunaliga var eingin peningur játtaðar á fíggjarlógini. Á eykajáttanarlógini fyri sept. 2001 vórðu játtaðar 1,4 mió.kr. Minninýtslan er 1,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum í almannamálum og landsstýrismanninum í heilsumálum var ætlanin at nýta peningin m.a. til nýtt tak og til at keypa nýggja lyft. Meginparturin av arbeiðinum fór ikki í gongd fyrr enn í 2002.

Heilsumál

8.20.2.01. Sjúkrakassar

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 21,9 mió.kr. Meirnýtslan er 15,8 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var upprunaliga mannagongdin, at allur studningurin varð goldin sjúkrakassunum við einum gjaldi, og síðani varð avroknað í februar mánaði árið eftir. Síðani 1989 hevur mannagongdin verið, at studningurin fyri 3. og 4. ársfjórðing í einum ári hevur verið goldin út og bókaður í landsroknskapinum árið eftir. Almannastovan ásetti acontogjøldini og restgjaldið soleiðis, at samlaðu útgjøldini í einum fíggjarári samsvaraðu við játtanina á løgtingsfíggjarlógini. Gjaldingar- og bókingarhátturin førdi við sær, at í landsbókhaldinum varð tíðaravmarkanin skeiv, og játtanin á fíggjarlógini og landsroknskapurin góvu ikki rætta mynd av útreiðslunum til sjúkrakassarnar.

Fíggjarmálaráðið og Føroya Gjaldstovu samdust í mars 2002 um, at skrásetingarnar í tíð skuldu fylgja árinum. Fyri at fáa viðurskiftini í rættlag varð gjørt av, at allar útreiðslur viðvíkjandi 2001 skuldu verða tiknar við í landsroknskapin fyri 2001.

8.20.3.04. Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 239,8 mió.kr. Meirnýtslan er 3,2 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin 1,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er tilbúgvingarvirksemið økt, autoklavur

eru keyptar, meirútreiðslur eru farnar til sjúkraflutning og tilbúgvingargjaldið til farleiðina um Skopunarfjørð er hækkað.

8.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 35 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri mars 2001 varð játtanin hækkað 842 t.kr., sum var endurjáttan av ikki nýttari játtan í 2000. Minninýtslan er 6,4 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð tilboðið uppá betongarbeiðið og innilokan nógv lægri, enn roknað varð við. Harumframt tóku ymiskar fyrireikingar longri tíð enn ætlað, so tann setti arbeiðssetningurin fyri 2001 varð ikki rokkin. Talan er um eina byggiverkætlan, ið gongur yvir ár, og tí kann tað vera trupult at vita, nær útreiðslurnar falla.

8.20.3.10. Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 43,1 mió.kr. Meirnýtslan er 180 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin 223 t.kr.

8.20.3.15. Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 31,4 mió.kr. Meirnýtslan er 271 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin 410 t.kr.

8.20.3.17. Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7,4 mió.kr. Meirnýtslan er 264 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hækka tænastumannaeftirlønirnar samstundis, sum lønirnar hækka.

8.20.3.20. Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 70,8 mió.kr. Meirnýtslan er 1,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er talið á sjúklingum økt. Tøl frá Landssjúkrahúsinum vísa, at í 2001 vórðu sjúklingar sendir 1.260 ferðir av landinum ímóti 1.170 ferðum í 2000.

8.20.5.01. Lánsafturgjald

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 2,5 mió.kr. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar 1,4 mió.kr. og inntøkurnar 8,3 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at í 1999 hendi eitt mistak. Lánið til Húsalánsgrunnin varð tikið við á hesa kontu í 1999-2001 bæði í roknskapartølunum og í játtanartølunum. Føroya Gjaldstova hevur í 2002 rættað roknskapartølini. Rættaðu roknskapartølini fyri 2001 vísa útlán 50 t.kr. og afturgjalding 819 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan um lán, sum kommunurnar hava goldið aftur. Kommunurnar fingu lánini til at byggja heilsumiðstøðir fyri.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin (t.kr.):

Kontu	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	Munur
8.20.3.04.	Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan)	192.629	193.704	1.075
8.20.3.10.	Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)	44.270	44.493	223
8.20.3.15.	Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)	33.326	33.736	410

Almannamál

8.21.1.04. Almannastovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 26,9 mió.kr. Meirnýtslan er 196 t.kr.

8.21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini var útreiðslujáttanin 9 mió.kr. og inntøkujáttanin 9 mió.kr. Í sundurgreiningini á fíggjarlógini eru inntøkurnar kravd gjøld, bøtur o.a. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar einans 436 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at roknað varð við at uml. 9 mió.kr. skuldu verða goldnar út, men upphæddin bleiv bara 436 t.kr. Samstundis varð roknað við einum inngjaldi 9 mió.kr., *"men eingin peningur kom inn. Eitt frávik uppá 408 t.kr. (1.457%). Talan er um eina nettojáttan, og er nettoúrslitið tengt at úrslitinum av innkrevjingini."*

Eftir okkara tykki byggir frágreiðingin á eina misskiljing. Vit hava víst á, at sambært bókhaldinum eru 9,1 mió.kr. bókaðar sum forskotsrindan av barnapeningi (útgjald) og 8,7 mió.kr. sum afturrindan av barnapeningi (inngjald).

Vit hava fleiri ferðir fyrr víst á, at høvuðsatvoldin til munin er, at útgreiningin í landsroknskapinum er nettotøl, meðan sundurgreiningin á fíggjarlógini er bruttotøl. Vit hava eisini víst á, at sundurgreiningin á fíggjarlógini er ikki rætt, tí talan er ikki um kravd gjøld, bøtur o.a. (standardkonta 62), og vit hava í hesum sambandi víst til konteringarleiðbeiningina frá Føroya Gjaldstovu.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 ásannað, at ein feilur er hendur í frágreiðingini. Í løgtingsfíggjarlógini fyri 2003 er roknað við nettotølum, har bert standardkonta 52 verður nýtt, og í uppskotinum til eykajáttanarlóg fyri oktober 2002 vórðu játtanartølini fyri 2002 somuleiðis rættað til nettotøl.

Eftir okkara tykki er mannagongdin ikki í samsvari við galdandi játtanar- og roknskaparreglur. Sambært meginregluni í játtanarskipanini er ein lógarbundin játtan ein bruttojáttan. Sambært konteringarleiðbeiningini frá Gjaldstovuni kann ikki verða talan um standardkontu 52: Flytingarinntøkur. Tá ið landið rindar forskot út, er talan ikki um stuðul. Talan er um pening, sum skal verða goldin aftur. Samanumtikið halda vit, at talan er um eina bruttojáttan og ikki um eina nettojáttan, og at talan er ikki um stuðul, men um:

a) útlán, tá ið landið rindar út í forskoti (standardkonta 82)
b) afturgjald av útlánum (standardkonta 86), tá ið peningurin verður rindaður aftur.

8.21.3.05. Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 2,4 mió.kr. Roknað var við, at eitt lógaruppskot skuldi verða lagt fyri Løgtingið um at lækka stuðulin frá 50% til 25%. Lógaruppskotið varð ongantíð lagt fram. Á eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð játtanin hækkað 2,8 mió.kr. Meirnýtslan er 893 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu útreiðslur viðvíkjandi 2000 bókaðar í 2001. Harafturat vórðu fleiri umsóknir latnar inn enn árið frammanundan.

8.21.3.07. Føroya Barnaheim (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6,2 mió.kr. Minninýtslan er 1,7 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum varð familju- og smábarnadeildin niðurløgd 1. juli 2001. Tað hevði við sær, at 6 starvsfólk vórðu søgd úr starvi, og 1 starvsfólk fór at arbeiða niðursetta tíð.

8.21.4.01. Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan)

Meirnýtslan er 1,5 mió.kr. netto. Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga settar til 48,3 mió.kr. netto. Á eykajáttanarlógini fyri mars 2001 varð játtanin lækkað 8,7 mió.kr., tí dagpeningalógin ikki longur skuldi fevna um dagpengar í sambandi við barnsburð. Á eykajáttanarlógini fyri november 2001 varð játtanin hækkað aftur 7 mió.kr., tí nýggja dagpeningalógin, ið kom í gildi 1. juni 2001, førdi við sær øktar útreiðslur, av tí at lógin varð ikki samtykt í tí líki, hon varð løgd fram.

Sambært landsstýrismanninum hækkaðu útgjaldingarnar munandi í november-desember 2001.

8.21.6.02. Bústovnar, serforsorg (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8,3 mió.kr. Minninýtslan er 3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum byrjaði byggingin av heiminum til sinnisveik ikki í 2001 sum ætlað.

8.21.6.03. Eldrarøkt á Sandoynni (løgujáttan)

Á fíggjarlógini var eingin peningur játtaður. Sambært roknskapinum eru negativar inntøkur 91 t.kr. "flyting frá kommunum". Sambært landsstýrismanninum er talan um ein bókingarfeil.

8.21.6.16. Eldrasambýli (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3 mió.kr. Eingin peningur er nýttur í 2001. Á hesi kontu er heimilað landsstýrismanninum at veita stuðul til at keypa, byggja og umbyggja hús til eldrasambýlir og aðrar eldrabústaðir, har ímillum ellis- og røktarheim. Sambært landsstýrismanninum leyk eingin verkætlan treytirnar fyri stuðli.

8.21.7.01. Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 101,1 mió.kr. Meirútreiðslurnar eru 4,8 mió.kr., netto. Hóast ongan lønarkarm eru 12,8 mió.kr. nýttar til lønir.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur. Niðanfyri verður vístá tær kontur, har talan er um ávikavist meir- og minniútreiðslur.

Meirútreiðslur:

- § 9 fyribils hjálp 1,9 mió.kr.
- § 17 meirútreiðslur brekað barn 4,9 mió.kr.
- § 18 endurbúgving 0,8 mió.kr.
- § 18 hjálparamboð v.m. 3,0 mió.kr.

Minniútreiðslur:

- § 15 stakútreiðslur 0,9 mió.kr.
- § 9 arbeiðsloysisforsorg 4,9 mió.kr.

8.21.8.05. Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 188,4 mió.kr. Minninýtslan er 7,6 mió.kr. Hóast ongan lønarkarm eru 7,6 mió.kr. nýttar til lønir.

8.21.9.01. Dagstovnar

Í eykajáttanarlógini fyri september 2001 varð ein eykajáttan 1,2 mió.kr. latin til endaliga avrokning av útreiðslum í 2000 til dagstovnar. Minninýtslan er 502 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum yvirtóku kommunurnar 1. juli 2000 allar útreiðslur av dagstovnum og dagrøkt. Roknskapirnir 1. januar 2000 til 30. juni 2000 vístu eina meirnýtslu uml. 1,2 mió.kr. táið teir vórðu gjørdir upp. Trivnaðarmálaráðið skuldi kanna meirnýtsluna neyvari, men ikki bar til at fáa kanningina lidna, áðrenn Gjaldstovan læt aftur fyri bókingum fyri 2000.

Táið meirnýtslan var kannað, helt Trivnaðarmálaráðið ikki, at allar meirútreiðslurnar kundu verða góðtiknar. Tí var ikki allur peningurin brúktur.

8.22.1.01. Rentustudningur til sethúsabygging

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 557 t.kr. til stuðul; men sambært landsroknskapinum er talan um nettoinntøkur 689 t.kr. Sostatt er talan um eina minninýtslu 1.246 t.kr. Sambært bókhaldinum er útgoldin rentustuðul 596 t.kr., og afturgoldin rentustuðul 1.286 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar afturgoldni rentustuðulin frá kontum, ið eru gjørdur upp, tí samansparingin hevur ikki verið nýtt eftir treytunum í lógini, áðrenn 8 ára samansparingartíðin var runnin.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin (t.kr.):

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	Munur
8.21.3.01.	Barnaforsorg (lógarbundin játtan)	2.903	3.215	312
8.21.6.01.	Serforsorg (rakstrarjáttan)	52.864	52.937	73
8.21.7.01.	Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)	0	12.789	12.789[1)]
8.21.8.05.	Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)	0	7.612	7.612[1)]

[1)] Vit hava fleiri ferðir áður vístá, at hóast eingin lønarkarmur hevur verið játtaður til barnaforsorg, vanliga forsorg og fólka- og fyritíðarpensjón, verða lønarútreiðslur bókaðar á hesar játtanir. Í 2001 eru lønarútreiðslur játtaðar barnaforsorg, men framvegis er eingin lønarkarmur á játtanini til vanliga forsorg og fyritíðarpensjón. Samanlagt eru lønarútreiðslurnar í 2001 23,6 mió.kr. Talan er m.a. um lønarútreiðslur til stuðulsfólk, og í ávísum førum er talan um stovnslíknandi tiltøk. Vit halda tað vera misvísandi og skeivt framhaldandi at bóka slíkar lønarútreiðslur á hesar kontur. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina fær Løgtingið at vita, at talan er um *"tilskot til einstaklingar."*

8.2 Trivnaðarmálaráðið (GL 2001/2 08 1-1)

Í juni 2001 grannskoðaðu vit roknskaparviðurskiftini í Trivnaðarmálaráðnum, har vit m.a. kunnaðu okkum um mannagongdir á roknskaparøkinum og við stakroyndum gjøgnumgingu skjøl og lønarmál.

Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 skuldi ein roknskaparreglugerð verið gjørd og góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001.

Í oktober 2001 spurdu vit landsstýrismannin, hvussu langt arbeiðið við roknskaparreglum fyri Ráðið og fyri stovnarnar undir Ráðnum var komið, og nær allar reglugerðirnar fóru at verða lidnar og góðkendar. Landsstýrismaðurin svaraði í februar 2002, at tey miðaðu ímóti at fáa flest allar reglugerðirnar góðkendar í februar 2002.

Ráðið umsitur 30 aðrar høvuðskontur á fíggjarlógini, har játtanirnar í 2000 vóru uml. 160 mió.kr. Harafturat bókaði Ráðið rakstrarútreiðslur og –inntøkur fyri 4 høvuðskontur, har játt-

anirnar í 2000 vóru uml. 480 mió.kr. Vit vístu á, at ongar formligar eftirlits- ella góðkenningarmannagongdir vóru fyri allar hesar høvuðskontur. Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at tá ið roknskaparreglurnar vóru gjørdar, fóru hesi viðurskifti at koma í rættlag.

Á fundi 17. juni 2002 kunnaði aðalstjórin um, at í sambandi við bygnaðarbroytingar var fíggjardeildin niðurløgd. Bókingaruppgávurnar, sum Ráðið hevði havt fyri Landssjúkrahúsið, Serforsorgina og Heimarøktina, vóru miðfirraðar hesum stovnum. Ein formlig eftirlits- og góðkenningarmannagongd fór at verða sett í verk, tá ið roknskaparreglurnar vóru gjørdar. Nakrar reglugerðir vóru lidnar og væntandi fóru allar at verða lidnar í september 2002.

Landsstýrismaðurin í almannamálum boðaði í september 2002 frá, at á hansara málsøki var reglugerðin fyri Vanlukkutryggingarráðið og fyri Stovnin fyri ung við atferðartrupulleikum góðkend. Uppskot til roknskaparreglugerðir fyri Almannastovuna, Føroya Barnaheim, Serforsorgina, Røktar- og Vistarheim, Heimarøktina og Heilsusystrarnar vóru komin Trivnaðarmálaráðnum í hendi, men vóru ikki endaliga góðkend. Roknskaparreglugerð fyri Trivnaðarmálaráðið og Javnstøðunevndina var í gerð.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum boðaði í september 2002 frá, at á hansara málsøki vóru reglugerðirnar fyri Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar Sjúkrahús, Suðuroyar Sjúkrahús, Apoteksverkið og Hvíldarheimið Naina góðkendar.

Uppskot til roknskaparreglugerðir fyri Sjúkrakassar, Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu, Fyribyrgingarráðið og Vísindasiðseminevndina vóru komin Trivnaðarmálaráðnum í hendi, men vóru ikki endaliga góðkend. Reglugerðir vantaðu fyri Sjúklingahotellið Tórshavn, Blákrossheimið og Heilbrigdið.

Vantandi góðkenning av greinaroknskapum

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at síðani mars mánað 2001 er álagt aðalstjórunum mótvegis Fíggjarmálaráðnum at góðkenna greinaroknskapin á serligum góðkenningarskjali. Trivnaðarmálaráðið hevur ikki góðkent greinaroknskapirnar í 2001 fyri § 8 Almanna- og Heilsumál.

Landsstýrismaðurin í Almannamálum og landsstýrismaðurin í Heilsumálum hava í september 2002 kunnað um, at síðani mai 2002 hevur Trivnaðarmálaráðið góðkent greinaroknskapin fyri § 8.

Edv-nýtsla/edv-trygd

Trivnaðarmálaráðið hevur eitt millumstovnanet, ið fevnir um netið millum Trivnaðarmálaráðið, sjúkrahúsini, Almannastovuna, Landsapotekaran, øll apotekini, og flestu stovnar innan Heimarøktina og Serforsorgina. Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at allir stovnar, sum eru á netinum, hava ein felags "firewall", ið skal forða fyri, at óviðkomandi fáa atgongd. Allir stovnarnir hava eisini felags samband við DNL. Frammanundan ásettu stovnarnir í stóran mun sjálvir, hvørjar edv-trygdarreglur vóru galdandi.

Á fundi 17. juni 2002 greiddi aðalstjórin frá, at ætlanin var at trygdin skuldi taka støði í altjóða standardi BS 7799 og skuldi m.a. fevna um fysiska trygd, logiska trygd, umsitingarliga trygd

Fysisk trygd

Ætlanin er gera eitt felags ambætararúm fyri alt Trivnaðarmálaráðið, har allir ambætarar hjá ráðnum verða miðsavnaðir. Ein onnur ætlan er at fáa atgongd til bygningar, og har fáa til vega eina SmartCard-loysn, ið skal verða nýtt til at eyðmerkja og authentificera.

Logisk trygd

Talan er um at tryggja, at bert brúkarar við neyðugum loyvi fáa atgongd til teldur, og at ongar óviðkomandi dátur koma inn á AHS-netið uttanífrá. Allar arbeiðsteldur verða settar upp soleiðis, at tær eru tryggjaðar sambært góðum edv-siði. Tað merkir, at stýrisskipanin

er løgd inn og sett upp sambært KT-trygdarpolitikkinum. Eitt firewall-forrit skal verða lagt inn, og eisini skal eitt antivirus-forrit verða lagt inn og verða dagført javnan.

Umsitingarlig trygd

Ætlanin er, at allir brúkarar skulu verða kunnaðir um og skrivliga hava viðurkent KT-trygdarpolitikkin. Væntandi fer at verða greitt frá hesum viðurskiftum á árligum starvsfólkafundi. Starvsfólk skal verða til taks í Trivnaðarmálaráðnum, sum hevur ta vitan, ið til eina og hvørja tíð krevst til at røkja og menna KT-økið.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 tóku vit samanum samskifti okkara við løgmann um vantandi stjórnan av kunningartrygd. Í oktober 2001 vísti løgmaður á, at eingin felags kunningar- ella trygdarpolitikkur enn er ásettur. Síðani landsumsitingin varð umskipað í 1996/97, hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum havt ábyrgdina av málsøkinum kunningartøkni.

Løgmaður vísti á, at yvirskipaða lýsingin av KT-trygd er ábyrgdarøki hjá landsstýrismanninum í vinnumálum. Stovnar og landsstýrismenn skulu sostatt ikki hvør í sínum lagi seta yvirskipaði krøv, men taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar, sum Vinnumálaráðið setur.

Landsstýrismaðurin í almannamálum og landsstýrismaðurin í heilsumálum vístu í september 2002 til eina frágreiðing frá Landsapotekaranum, ið hevur millumstovnanetið um hendi0. Sambært Landsapotekaranum tekur arbeiðið viðvíkjandi trygd støði í altjóða standardum. Harafturat hevur Landsapotekarin gjøgnum KT-forum kunnað umboð í hinum Aðalráðunum um arbeiðið. Sambært Landsapotekaranum hevði verið ynskiligt, um Vinnumálaráðið hevði boðað frá, hvør KT-trygdarpolitikkur er galdandi innan almennar stovnar í Føroyum, soleiðis at trygd var fyri, at arbeiðið, sum Landsapotekarin ger, er innanfyri karmarnar av ásetta KT-trygdarpolitikkinum.

Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum

Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum" kom í gildi 1. januar 2002 .

Í § 31, stk. 1, stendur, at *"dátuábyrgdari, sum letur dátuviðgera ella øðrum, tað veri seg persónum ella virkjum, sum gera arbeiði fyri dátuábyrgdaran, atgongd til persónsupplýsingar, skal tryggja, at persónsupplýsingarnar bert verða viðgjørdar eftir fyriskipan dátuábyrgdarans, og at viðgerðin er samsvarandi stk. 3-5 uttan so, at lógarheimild er fyri øðrum."*

Viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum krevur sambært § 35 loyvi frá Dátueftirlitinum. Undir hugtakið "viðkvæmar upplýsingar sambært § 2, nr. 9" koma: *"Upplýsing um lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsliga tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti."*

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið eru hugtøkini neyvari lýst t.d.:

"Heilsustøða fevnir um ta núverandi, komandi og fyrrverandi kropsligu og sálarligu heilsustøðuna hjá einum persóni og somuleiðis um upplýsingar um misnýtslu av heilivági, rúsevni, narkotika, rúsdrekka og øðrum njótingarevnum. Hugtakið fevnir eisini um genetisk viðurskifti.

Í galdandi skrásetingarlóggávu er misnýtsla av njótingarevnum nevnd sum eitt punkt fyri seg, men er nú í staðin tikin við undir heilsustøði, sum nú eisini fevnir um misnýtslu av njótingarevnum.

Yrkisfelagsligt tilknýti fevnir um upplýsingar um limaskap í yrkisfelag.

Munandi sosialir trupulleikar fevnir m.a. um álvarsliga ósemju millum hjún ella millum foreldur og børn, upplýsingar um, at persónur hevur verið fyri óhappi við munandi persónligum ella sosialum avleiðingum, persónsupplýsingar um drúgt arbeiðsloysi ella persónsupplýsingar um, at persónur í longri tíðarskeið hevur fingið serliga tørvandi almannastuðul.

Onnur heilt privat viðurskifti fevna t.d. um sundurlesing, umsókn um skilnað, ættleiðing, familjuklandur o.a."

Sambært § 47 fær lógin gildi 1. januar 2002, og sambært § 48 skulu skráir, sambært lógini um evnisskráir hjá almennum myndugleikum og lógini um privatar skráir v.m., í seinasta lagi 6 mánaðir eftir gildiskomuna lúka treytirnar í hesi lóg.

Landsstýrismaðurin í almannamálum og landsstýrismaðurin í heilsumálum kunnaðu í september 2002 um, at Dátueftirlitið hevði gjørt av at leingja freistina fyri fráboðan til 1. november 2002, tí trygdarkunngerðin ikki enn var gjørd. Sambært Løgmálaráðnum fer kunngerðin at verða lýst í februar 2003.

8.3 Umsiting av stuðulsjáttanum (GL 2000/2 07 5-1)

Vit hava í 2002 grannskoðað umsitingina av stuðulsjáttanum í Trivnaðarmálaráðnum.
Nógvar stuðulsjáttanir á almannaøkinum hava ikki heimild í serstakari stuðulslóggávu, men eru bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingunum til fíggjarlógina. Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2002 eru tilsamans játtaðar 25 mió.kr. til stuðul til feløg o.a.

Felags fyri flestu játtanirnar er, at navnið á einum felag/stovni er einasta ábending um, hvør skal hava peningin. Einki er ásett um t.d.: endamál við stuðlinum, hvat felagið/stovnurin kann brúka peningin til, treytir fyri stuðlinum so sum fíggjarætlan, roknskaparuppsetan, eftirlit, grannskoðan, upplýsingarskyldu, møgulig afturrindan av stuðuli o.s.fr.

Summar játtanir eru til meginfeløg, sum síðani játta studning víðari til undirliggjandi feløg uttan neyvari ásetingar frá landsstýrismanninum.

Umsitingin av studninginum er merkt av vantandi skrivligum reglum viðvíkjandi málsviðgerð, fíggjarætlan, útgjalding, treytum fyri studningi og roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum. Einasta treyt, sum Trivnaðarmálaráðið setir, er, at grannskoðaður roknskapur saman við grannskoðanarprotokoll fyri árið frammanundan verður sendur inn fyri 1. apríl.

Tá ið roknskapurin er innkomin, verður skriv sent studningsmóttakaranum um at roknskapurin er viðgjørdur, og sum oftast, at ongar viðmerkingar eru til roknskapin. Sambært Trivnaðarmálaráðnum verður hugt eftir inntøkunum, útreiðslunum, fíggjarstøðuni og um peningurin á skynsaman hátt er nýttur til endamálið. Í málinum sæst ikki, hvussu roknskapurin er viðgjørdur, ella hvat ítøkiliga er gjøgnumgingið og mett um.

Í nógvum førum vísir roknskapurin eitt "rakstraravlop" upp til fleiri 100 t.kr. Summi feløg hava eina "stóra" eginogn. Dømi er um felag, ið hevur uml. 3 mió.kr. í eginogn. Vit hava víst á, at vit ivast í um tað er rætt, at feløg og felagsskapir kunnu samla upp almennan pening. Trivnaðarmálaráðið er samt við okkum í, at í prinsippinum er tað ikki røtt mannagongd, og Trivnaðarmálaráðið fer at taka spurningin upp við landsstýrismannin.

Eins og á øðrum málsøkjum er stuðulslóggávan á almannaøkinum ikki fullfíggjað og er merkt av tvørrandi heimild at seta neyvari reglur og krøv. Í fleiri førum er einasta stuðulsgrundarlagið stuttar og ofta ógreiðar viðmerkingar til eitt fíggjarlógaruppskot. Vit halda, at eisini á almannaøkinum er tørvur á at bøta um stuðulsgrundarlag/-lóggávu, so endamál, treytir, heimildir o.a. verða greiðari. Tørvur er eisini á at bøta um stuðulsumsitingina.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at hann hevur heitt á Fíggjarmálaráðið um at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til reglur um stuðulsumsiting.

Sum neyvari lýst í frágreiðing okkara undir Løgmansfyrisitingini "Alment um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting," hevur løgmaður heitt á Fíggjarmálaráðið um at seta ein arbeiðsbólk við starvsfólki úr miðfyrisitingini at bøta um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting. Vit hava mælt til, at arbeiðsbólkurin eisini fær litið upp í hendi at viðgera trupulleikarnar viðvíkjandi lóggávu og umsiting av stuðulsjáttanum undir trivnaðarmálum.

8.4 Almannastovan (GL 2002 / 2 07 1-2)

Roknskaparviðurskifti

Í september 2002 hava vit grannskoðað roknskaparviðurskiftini á Almannastovuni. Síðani november 1999 hevur Almannastovan bókað í FSL-skipanini. Vit hava fyrr vístá, at eingin reglugerð er gjørd fyri, hvussu roknskaparhaldið skal vera fyriskipað. Í februar 2001 kunnaði almannastjórin um, at viðurskiftini væntandi fóru at koma í rættlag skjótt. Í oktober 2001 sendi Almannastovan Almanna- og Heilsumálaráðnum uppskot til roknskaparreglugerð til góðkenningar. Í oktober 2002 var reglugerðin ikki góðkend av Trivnaðarmálaráðnum, og hon er ikki sett í gildi enn.

Landsstýrismaðurin kunnaði í november 2002 um, at Trivnaðarmálaráðið var ikki liðugt at viðgera roknskaparreglugerðina. Hann vónaði, at hon kundi verða góðkend fyri árslok 2002.

Ferðaforskot

Í sambandi við eftirlitið gingu vit ígjøgnum ferðaforskotskontuna. Ultimo august 2002 var saldan á ferðaforskotskontuni kr. 62.467. Av teimum ferðaforskotum, ið ikki endaliga vóru gjørd upp, vóru 10 eldri enn 1 mánað, av teimum var 1 eldri enn 2 ár og 2 vóru eldri enn 1 ár. Sambært galdandi reglum skal ferðin verða gjørd upp í seinasta lagi 3 vikur eftir heimkomu. Almannastjórin hevur í september 2002 boðað frá, at Almannastovan fer at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í november 2002 gjørdi landsstýrismaðurin vart við, at hann helt ikki umsitingina av ferðaforskotum á Almannastovuni vera nøktandi, og fór at heita á almannastjóran um at fáa viðurskiftini í rættlag skjótast gjørligt.

Fartelefonir

Á Almannastovuni eru skrásettar 21 fartelefonir, sum starvsfólkini nýta í sínum dagliga arbeiði.

7. februar 2002 sendi Løgmansskrivstovan út rundskriv nr. 1/2002 "um nýtslu av fartelefonum", og 12. januar 2001 sendi Toll og Skattstova Føroya út rundskriv nr. 2/2001 "um fartelefonir". Sambært hesum reglum er talan um skattskyldugar ágóðar, tá ið arbeiðsgevari letur starvsfólkum telefon at nýta ókeypis. Verður fartelefonin bert nýtt í sambandi við arbeiðið, verður skattur ikki álíknaður.

Almannastjórin hevur í september 2002 greitt frá, at Almannastovan ikki miðvíst hevur arbeitt eftir hesum rundskrivi. Ein neyvari kanning fer at verða gjørd av nýtsluni av øllum fartelefonum frá 1. januar 2002.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fór at heita á almannastjóran um at fylgja reglunum um nýtslu av fartelefonum.

Leasing

Almannastovan hevur sáttmála um at leasa 7 kopimaskinur. Sáttmáli er undirskrivaður 31. august 2000. Gjaldið er kr. 38.997 í 12 ársfjórðingar, samanlagt kr. 467.964. Tá ið leigu tíðarskeiðið er úti, kann Almannastovan keypa maskinurnar fyri avtalaðan keypsprís 99.000 kr.

Í september 2002 ásannaði Almannastjórin, at Almannastovan hevur ikki hildið ásetingarnar í játtanarskipanini um fíggjarliga langtíðarleigu. Vísandi til at sáttmálin gongur út í august 2003, helt almannastjórin, at tað loysti seg ikki at siga sáttmálan upp tá.

Í november 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at heita á almannastjóran um at halda ásetingarnar í játtanarskipanini um langtíðarleigu.

Yvirlit yvir ognir

Almannastovan hevur eitt yvirlit yvir ognir, sum er frá 1991. Yvirlitið er bert lutvíst dagført síðani. Vit hava fleiri ferðir mælt til at dagføra yvirlitið so hvørt ognarlutir verða keyptir, seldir ella burturbeindir.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fór at heita á almannastjóran um at gera mannagongdir, sum tryggja, at ognaryvirlitið javnan verða dagført.

Edv-viðurskifti

VFS-skipanin á Almannastovuni er ein journal-, málsviðgerðar-, útrokningar- og útgjaldsskipan, ið varð tikin í nýtslu 1. januar 2000. Vit gjøgnumgingu skipanina í 2000 við støði í FSR-grannskoðanarvegleiðing nr. 14, "Vejledning om revision i virksomheder, som anvender edb". Vit løgdu høvuðsdentin á at kanna generella tryggleikan í og rundan um edv-skipanina. Í frágreiðing, latin landsstýrismanninum í juli 2000, vístu vit á, at edv-viðurskiftini á Almannastovuni ikki vóru nóg trygg, og vit mæltu til fleiri ábøtur.

Í september 2000 vísti landsstýrismaðurin til eina verkætlan, har lýst varð, hvussu ætlanin var at bøta um viðurskiftini. Vit hava síðani havt skrivligt samskifti við landsstýrismannin um, hvørji tiltøk eru sett í verk, og hvussu gongst við arbeiðinum. Vit hava eisini í januar/februar 2003 havt fundir og skrivligt samskifti við leiðsluna á Almannastovuni fyri at kunna okkum um einstøk mál í frágreiðingini frá juli 2000:

1. Funktiónsskilnaður

Í juli 2000 varð mælt til at gera greiðar reglur fyri ábyrgd og heimild hjá starvsfólkunum á edv-deildini.

Ábyrgdarøkini eru partvís lýst, men Almannastovan hevur ikki gjørt sær eina greiða mynd av, hvørjar edv-uppgávur ikki kunnu verða røktar av sama fólki, og tað eru ongar skrivaðar reglur fyri tí.

Á edv-deildini á Almannastovuni eru 2 edv-fólk. Tey hava hvør sín lista yvir dagligar, vikuligar og mánaðarligar uppgávur. Almannastjórin hevur greitt frá, at hesir listar tryggja funktiónsskilna, tí starvsfólkini hava fingið boð um, at tey einans mugu røkja uppgávurnar á sínum egna lista.

Eftir okkara tykki eru viðurskiftini ikki nøktandi.

2. Førleiki á edv-deildini

Í juli 2000 varð mælt til, at hóskandi útbúgving varð bjóðað starvsfólkunum á edv-deildini, serliga til at umsita brúkarar og at logga.

Sambært almannastjóranum hava starvsfólkini verið á hóskandi eftirútbúgvingum, og eftir ætlan heldur eftirútbúgvingin av starvsfólkunum fram.

3. Eftirlit og reglur fyri at logga

Í juli 2000 varð mælt til at bøta um eftirlitið við feilum og misnýtslu, herímillum lýsa loggmøguleikar og áseta reglur fyri at logga.

Almannastjórin hevur greitt frá, at ongar skrivaðar reglur eru fyri, hvat skal verða loggað, hvør skal gjøgnumganga loggin, og hvussu loggurin skal verða viðgjørdur o.t.

Sambært almannastjóranum *"var tað vanligt fyrr at krevja, at loggir javnan vóru eftirkannaðir, hetta er ikki vanligt í dag, og Almannastovan nýtir í dag aðrar mannagongdir at kanna, um okkurt óregluligt fer fram í skipanini hjá Almannastovuni, sum t.d. dagslistar o.t." Eisini vísir Almannastjórin á, at "alt skal verða loggað."*

Eftir okkara tykki tryggja hesar mannagongdir ikki nøktandi eftirlit við feilum og misnýtlsu.

4. Sáttmálaviðurskifti

Í juli 2000 varð mælt til at allýsa tørvin á veitingum frá høvuðsveitaranum av edv-tænastum, og síðani fáa sáttmálaviðurskiftini í rættlag. Almannastovan er heft at hesum veitaranum, bæði til at reka, menna og broyta skipanina.

Almannastjórin hevur greitt frá, at eingin sáttmáli er gjørdur, men at sáttmáli eftir ætlan verður undirskrivaður fyrst í 2003, verður tað møguligt fíggjarliga.

5. Broytingarmannagongd

Í juli 2000 varð mælt til, at gera reglur fyri, hvussu farast skal fram, tá ið skipanin skal verða broytt. Reglurnar skulu tryggja, at broytingar fara fram undir skipaðum viðurskiftum, at skjalfesting verður útvegað, og at krøv verða sett til skjalfestingina.

Almannastjórin hevur greitt frá, at ongar skrivaðar reglur eru fyri, hvussu broytingar í VFS-skipanini skulu verða gjørdar.

Eftir okkara tykki eru viðurskiftini ikki nøktandi.

6. Javnan skifta atlát

Í juli 2000 varð mælt til, at VFS-skipanin varð broytt, so hvør brúkari javnan skal skifta atlát. Sambært veitaranum kann verandi skipan ikki noyða fólk at skifta atlát. Almannastjórin hevur greitt frá, at onnur trygdartiltøk eru ikki sett í verk, so sum at áleggja starvsfólkunum javnan at skifta atlát í VFS, ella at kanna eftir um tað verður gjørt.

Almannastjórin hevur í februar 2003 kunnað um, *"at skipanin verður broytt, tá Almannastovan hevur fingið fíggjarligan møguleika at uppgradera skipanina, og verður tað væntandi í 2003."*

Eftir okkara tykki eru viðurskiftini ikki trygg, og vit hava mælt til at seta onnur tiltøk í verk.

7. Umsita brúkararættindi

Í juli 2000 varð mælt til at gera greiðar reglur fyri at umsita brúkararættindi. Hetta fyri at tryggja dátur og skipan og at fyribyrgja misnýtslu.

Skrivaðar reglur eru ikki fyri, hvørji edv-rættindi tey ymisku størvini skulu hava, og skrivaðar reglur eru heldur ikki fyri at umsita brúkararættindi, t.d. um at rættindini javnan skulu verða kannað.

Eftir okkara tykki eru viðurskiftini ikki nøktandi.

8. Uttanhýsis samskiftislinjur

Eingin skrivlig lýsing er av uttanhýsis samskiftislinjunum. Í 2000 varð mælt til at gjøgnumganga uttanhýsis samskiftislinjurnar fyri at tryggja Almannastovuna ímóti óynsktari atgongd.

Sambært Almannastjóranum er ein brandmúrur settur upp, men eingi skrivlig krøv eru til, hvussu brandmúrurin skal verða umsitin. T.d. verður ikki kannað, um óheimilað samskifti fer fram, og eingin skrivlig avtala um brandmúrin er við veitaran.

9. Fysisk trygd

Í juli 2000 varð mælt til at umhugsa tørvin á fyribyrgjandi tiltøkum í maskinrúminum, og at meta um tørvin á einari neyðætlan.

Kotulás er sett á maskinrúmið. Almannastovan hevur greitt frá, at harvið er atgongdin avmarkað til 4 fólk, umframt náttarvaktina.

Á fundi 27. januar 2003 kunnaði almannastjórin um, at neyðætlan er gjørd. Almannastjórin skuldi geva okkum avrit av neyðætlanini, men vit hava onga ætlan fingið.

10. Skjalfesta skipan og mannagongdir

Í juli 2000 varð mælt til sum skjótast at greina krøvini til at skjalfesta skipan og mannagongdir, at savna og skipa skjalfestingina á Almannastovuni, og at gera reglur fyri at varðveita og dagføra hana.

Almannastjórin hevur greitt frá, at eingin skrivlig krøv eru sett til at skjalfesta skipan og mannagongdir.

Ávíst tilfar er savnað á Almannastovuni, men einki yvirlit er yvir hesa skjalfesting, og ongar skrivaðar reglur eru fyri, hvussu skjalfestingin skal verða skipað, varðveitt og dagførd. Eisini hevur almannastjórin kunnað um, at av fíggjarligum ávum kann Almannastovan ikki fáa neyðuga førleikan til at seta krøv til skjalfestingina.

11. Trygdaravrit

Í juli 2000 varð mælt til at gera skrivligar reglur fyri mannagongdum í sambandi við trygdaravrit.

Sambært almannastjóranum eru ongar skrivligar reglur, men trygdaravrit verða tikin dagliga, og tey verða goymd á øðrum stað enn á Almannastovuni.

Eftir okkara tykki eru viðurskiftini ikki nøktandi.

12. Edv-politikkur/strategi

Í juli 2000 varð mælt til, at Almannamálaráðið í samstarvi við Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovuna orðaði ein edv-politikk viðvíkjandi menning av lokalskipanum á stovnum undir ráðnum, herundir á Almannastovuni.

Í september 2000 vísti landsstýrismaðurin til eina verkætlan, har ítøkiligur edv-politikkur skuldi verða gjørdur innan árslok 2000, men í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at eingin edv-politikkur var orðaður enn.

Í juli 2000 mælti Landsgrannskoðanin til, at Almannastovan ikki fór víðari við at gera sáttmála um menning av forsorgar-, dagpeninga- og alimentatiónsskipan, fyrr enn ein ítøkilig kravfesting var viðgjørd ímillum Almannamálaráðið, Almannastovuna, Fíggjarmálaráðið og Føroya Gjaldstovu, har eisini alternativir møguleikar vórðu viðgjørdir.

Í august 2002 heitti landsstýrismaðurin á aðalstjóran um at seta ein arbeiðsbólk, mannaðan við kønum fólki úr Almannamálaráðnum, Almannastovuni og Føroya Gjaldstovu, at finna loysnir til trupulleikarnar við útgjaldsskipanum á Almannastovuni. Arbeiðsbólkurin skuldi viðgera pensjónsskipanina, útgjald av dagpeningi, barnapeningi o.ø. Okkum vitandi varð hesin arbeiðsbólkur ikki settur.

Í september 2002 var fundur millum umboð frá Almannamálaráðnum, Almannastovuni og Føroya Gjaldstovu, har avtalað varð at heita á veitaran um at gera eina kravfesting, sum viðgjørdi, hvørt nýggja dagpeningaskipanin skuldi verið ment í VFS-skipanini ella í nýggju lønarskipanini hjá Føroya Gjaldstovu. Kravfestingin varð tó ikki gjørd.

Hóast eingin edv-politikkur er orðaður, og uttan at aðrir møguleikar eru kannaðir, varð gjørt av á fundi millum Almannastjóran og Almannamálaráðið 7. januar 2003 at byggja VFS-skipanina út, so hon eisini fevndi um nýggja dagpeningaskipan. Sambært Almannastjóranum er avgerðin grundað á, at veitarin, sum eisini er veitari til lønarskipanina hjá Gjaldstovuni, helt tað vera skilagott at menna skipanina í VFS. Sambært Almannastjóranum varð, í samráð við Almannamálaráðið, av fíggjarligum grundum gjørt av at sleppa ætlanini um ítøkiliga kravfesting. Sambært almannastjóranum varð eingin fundarfrágreiðing skrivað, og einki skrivligt finst um avgerðina.

Okkum vitandi hevur einki samskifti verið við Fíggjarmálaráðið um avgerðina 7. januar 2003, og Landsgrannskoðanin varð ikki kunnað, sum ásett í § 23, stk. 2, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

13. Loyvi til egnar búskaparskipanir

Í skrivi til Almannamálaráðið í september 1999 vístu vit á, at sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini skulu stovnar hava loyvi frá Fíggjarmálaráðnum fyri at nýta egnar búskaparskipanir. Almannastovan søkti ikki um tílíkt loyvi, áðrenn skipanin varð tikin í nýtslu 1. januar 2000.

Í september 2000 vísti landsstýrismaðurin á, at Almannamálaráðið fer at bera so í bandi, at menning/broyting av búskaparskipanum undir ráðnum í framtíðini fer at fara fram samsvarandi ásetingunum í § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini.

Almannastjórin hevur 20. desember 2002 spurt Gjaldstovuna, *"hvat tilfar skal fáast til vega fyri at Gjaldstovan kann góðkenna EDV-skipan Almannastovunnar."*

Eftir okkara tykki er tað ikki nøktandi, at so long tíð er liðin, áðrenn samskifti verður tikið upp við Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovuna um hesi viðurskifti.

14. Góðkenning av evnisskráum/Persónsupplýsingar

Í juli 2000 varð mælt til, at fáa skráirnar formliga góðkendar sambært §§ 4-8 í Ll. nr. 62/1984 v.s.b. "um evnisskráir hjá almennum myndugleikum". Løgtingslógin fór úr gildi 1. januar 2002, tá ið Ll. nr. 73/2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum" kom í gildi.

Sambært § 31, stk. 1, skal dátuábyrgdari tryggja, at persónsupplýsingarnar bert verða viðgjørdir eftir fyriskipan dátuábyrgdarans, og at viðgerðin er samsvarandi stk. 3-5, uttan so at lógarheimild er fyri øðrum.

Í § 31, stk. 3, er ásett, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu við væl skipaðum tiltøkum tryggja, at viðgerðin av upplýsingum nøktar tær treytir, henda lóg setir um trúnað, sjálvræðisrætt og innlit, eins og við tekniskum og fyriskipanarligum tiltøkum skal verða tryggjað, at persónsupplýsingar ikki av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar ella minka í virði, og at ikki óviðkomandi fáa kunnleika til persónsupplýsingarnar, misbrúka tær ella ólógliga viðgera tær. Skjalprógv um skipað tiltøk skulu vera atkomulig fyri starvsfólkum dátuábyrgdarans og dátuviðgerans eins og fyri dátueftirlitinum. Dátuábyrgdarin skal viðlíkahalda tiltøk, sum henda lógin treytar.

Sambært § 48, skulu skráir sambært lógini um "evnisskráir hjá almennum myndugleikum" og lógini um "privatar skráir v.m." í seinasta lagi 6 mánaðir eftir gildiskomu lógarinnar lúka treytirnar í hesi lóg.

Sambært § 31, stk. 7, kann landsstýrismaðurin áseta neyvari reglur um trygdartiltøk, men kunngerðin er ikki lýst enn. Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur kunnað um, at kunngerðin byggir á grundreglur í enska standardinum BS-7799. Kunngerðin fer væntandi at verða lýst í februar 2003.

Sambært almannastjóranum verða stig tikin til at halda ásetingarnar í lógini, tá ið neyvari reglur um trygdartiltøk eru settar.

Sambært § 35 í nýggju lógini krevur viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum harumframt viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Undir hugtakið "viðkvæmar persónsupplýsingar" koma sambært § 2, nr. 9: m.a. upplýsingar um munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Sambært almannastjóranum, fer Dátueftirlitið ikki at viðgera eina umsókn um viðgerðarloyvi, fyrr enn kunngerðin er lýst.

Niðurstøða

Eftir seinastu fundirnar við Almannastjóran í januar 2003 halda vit samanumtikið, at Almannastovan og Almannamálaráðið hava bøtt um viðurskiftini á summum økjum, men á týðandi økjum eru ikki framdar nøktandi ábøtur samsvarandi tilmælum okkara frá juli 2000. Vit halda framvegis, at skipanin er ikki nóg trygg, og vit halda tað verða lítið sannlíkt, at Almannastovan lýkur allar treytirnar í § 31, stk. 3, í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum/komandi kunngerðini um trygdartiltøk.

Málsviðgerð

Vit hava fleiri ferðir fyrr mælt leiðsluni á Almannastovuni til at áseta minstukrøv til málsviðgerð, herímillum hvørji skjøl, upprit o.a. skulu verða til skjals í einum máli, eisini fyri at tryggja, at málsviðgerðin lýkur krøvini um vegleiðing, partshoyring, skyldu at skriva upp o.a. í ávikavist Ll. nr. 132/1993 "um fyrisitingarlóg" og Ll. nr. 133/1993 "um innlit í fyrisitingina".

Landsstýrismaðurin kunnaði okkum í februar 2002 um, at ein prosjektbólkur á Almannastovuni er farin til verka, og sambært almannastjóranum skuldi arbeiðið verða liðugt medio 2002. Sambært Almannastovuni varð arbeiðið av fíggjarligum ávum raðfest lægri í 2002, men fer at verða tikið uppaftur í 2003.

8.5 Almannapensjónir (GL 2001/2 07 2 -6)

Í frágreiðing okkara, ið varð latin løgtingsgrannskoðarunum í mars 2001, vórðu umrødd ivamál um inntøkujavning av almannapensjónum, og kunnað varð um, at almannastjórin hevði boðað frá, at hann fór at taka spurningarnar upp við Almannamálaráðið, hvørt tørvur var á lógarbroyting fyri at greiða reglurnar.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 1999 (Lm. nr. 62/2000), sum varð samtykt 24. apríl 2001, varð heitt á landsstýrismannin í almannamálum um at greiða ivaspurningarnar um inntøkujavning og umrokning av almannapensjón.

Landsgrannskoðanin fór í august 2002 undir eina gjøgnumgongd av pensjónsútgjaldingum. Í fyrsta umfari kunnaðu vit okkum um broytingar í lógum og fyriskipanum, mannagongdum, roknskapar- og eftirlitsskipanum o.a. Vit høvdu eisini fundir við Almannastovuna, har vit kunnaðu okkum um viðurskiftini. Vit komu fram á, at Almannastovan helt seg hava so stórar trupulleikar av at umsita ásetingarnar í §§ 21-23 í pensjónslógini, sum fevna um umrokning, eftirrokning, aftur- og eftirgjald o.a., at partar av hesum arbeiði er ikki gjørt í 2002, hóast § 21, stk. 6, í lógini áleggur, at eftirroknað skal verða, tá ið inntøkan er álíknað. Vit mæltu í september 2002 landsstýrismanninum til at kunna seg neyvari um málið og eftirsíðan boða frá, hvørji stig hann fer at taka fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2003 um, at sambært Almannastovuni vóru 154 mál viðvíkjandi 2001 um eftirrokning og afturgjald. Almannastovan var í oktober mánaði farin undir at senda pensjónistum skriv um afturgjaldskrøv sambært § 23, og skuldi í januar 2003 fara í holt við at senda skriv um eftirrokningarnar sambært § 21, stk. 6. Landsstýrismaðurin fer í næstum at heita á Almannastovuna um at avgreiða tílík mál skjótari, so pensjónistar ikki skulu ganga í óvissu í nærum eitt ár, áðrenn Almannastovan ger vart við seg.

Vantandi leiðbeiningar

Longu í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í juli 2000 gjørdu vit vart við, at í fleiri førum er ógreitt, hvussu ásetingar í §§ 21-23 í Ll. nr. 48/1999 "um almannapensjónir o.a." skulu verða tulkaðar. Tí bar ikki til hjá okkum at kanna, um útgoldnu pensjónirnar samsvara við galdandi lóggávu. Almannamálaráðið hevði ikki latið Almannastovuni nakra leiðbeining, og

leiðslan á Almannastovuni hevði ikki gjørt nakra innanhýsis leiðbeining um, hvussu § 21, sum fevnir um umrokning, eftirrokning, aftur- og eftirgjald o.a., skal verða tulkað.

Vit vístu á, at § 21 hevði sera stóran umsitingarligan týdning, og eisini stóran fíggjarligan týdning fyri tann einstaka pensjónistin. Eftirsum stórur ivi var um tulkingina, og eftirsum vit harafturat høvdu staðfest, at stórur munur var á praksis hjá málsviðgerunum, heittu vit á landsstýrismannin um at taka neyðug stig til at greiða viðurskiftini, og eisini umhugsa at endurskoða lóggávuna, so tað greitt gongur fram av lóg og viðmerkingum, hvat tað er, Løgtingið hevur samtykt.

Í svarskrivi sínum í september 2000 vísti landsstýrismaðurin á, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevði ikki latið Almannastovuni nakra leiðbeining, av tí at teimum vantaði arbeiðsorku, men at ein leiðbeining var á veg.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin okkum um, at Almanna- og Heilsumálastýrið 31. august 2001 hevði sent Almannastovuni eitt vegleiðandi skriv viðv. umrokning og eftirrokning av almannapensjónum, og at Almannastovan hevði praktiserað reglurnar í pensjónslógini í samsvar við "vegleiðingina" frá Almannamálaráðnum.

Kærunevndaravgerðir

Vit hava gjøgnumgingið kærunevndaravgerðir í 2001/2002. Har sæst, at tað framvegis eru sera nógv ivamál, og at í nógvum málum verða avgerðir hjá Almannastovuni settar til viks.

Í skrivi í juli 2002 til Trivnaðarmálaráðið, viðvíkjandi gongdini í 2001, vísti Kærustovnurin m.a. á, at á hagtølunum sást, at avgerðir hjá Almannastovuni bert vórðu staðfestar í 46% av málunum. Størsti parturin av málunum, sum kærustovnurin hevði broytt, var um afturgjald av ov nógv útgoldnari pensjón. Sambært Kærunevndini hevur Almannastovan havt skeivar viðgerðarmannagongdir, og hevur ikki nóg skjótt tikið kærunevndaravgerðir til eftirtektar.

Um teir nógvu ivaspurningarnar um ov nógv goldna pensjón heldur Kærustovnurin, at økið er í so ógreitt lógarregulerað. Bæði Almannastovan, Kærustovnurin og Kærunevndin í almannamálum hava brúkt nógva orku at finna fram til, hvussu reglurnar eiga og kunna verða umsitnar. Kærustovnurin heldur tað enn vera so mong ivamál, at antin eigur lógarásetingin at verða endurskoðað, ella eigur kunngerð/vegleiðing at verður gjørd um, hvussu ein eftirrokning skal fara fram, úr enda í annan.

Almannastovan setti seg í november 2002 í samband við ein advokat, og bað hann gera eina nýggja innanhýsis leiðbeining í mun til kærunevndaravgerðirnar. Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2003 frá, at Almannastovan frá november 2002 var farin at broyta mannagongdirnar samsvarandi nýggju leiðbeiningini. Landsstýrismaðurin fer at kanna, um nýggja leiðbeiningin og mannagongdin á Almannastovuni samsvara við almannapensjónslógina og tað, sum Almannamálaráðið áður hevur boðað Almannastovuni frá.

8.6 Stuðul til umsorganararbeiði fyri pensjónistar (GL 2002/ 2 07 2-7)

Vit hava í oktober 2002 grannskoðað útreiðslur á høvuðskontu 8.21.8.06. "Umsorganararbeiði". Niðanfyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Vantandi ásetan av reglum

Stuðul til umsorganararbeiði verður veittur við heimild í Ll. nr. 48/1999 "um almannapensjónir o.a." v.s.b. Talan er um § 12, stk. 5, í kap. 4 um "Viðbøtur". § 12, stk. 1-4, fevnir um persónliga viðbót til pensjónistar, sum hava serliga trupul kor. Í stk. 5 er ásett: *"Stuðul kann harumframt veitast til umsorganararbeiði fyri pensjónistar."*

Sambært § 12, stk. 6, ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur fyri stuðli til umsorganararbeiði eftir stk. 5. Hóast lógin áleggur landsstýrismanninum at gera tað, eru ongar reglur

ásettar. Vit hava í januar 2003 spurt landsstýrismannin, nær viðurskiftini fara at koma í rættlag.

Stuðulsendamál

Einki stendur í viðmerkingunum til lógina, hvat "umsorganararbeiði" fevnir um, hvør kann fáa stuðul, hvat stuðul kann verða veittur til ella hvussu nógvur stuðul kann verða latin. Á høvuðskontu 8.21.8.06 "Umsorganararbeiði" eru viðmerkingarnar til fíggjarlógina fyri 2002 í stóran mun ein samandráttur av kunngerð nr. 49/1994 "um umsorganararbeiði fyri pensjónistar", sum varð ásett við heimild í gomlu pensjónslógini, ið fór úr gildi 1. januar 2000.

Eftir okkara tykki hevur stuðulin til umsorganararbeiði einki við viðbøtur til pensjónistar at gera. Stuðulin verður umsitin sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina, og talan er um stuðul til felagsskapir, dagtilhald, kommunur o.o. Soleiðis sum játtanin verður umsitin, hevði kanska verið rættast at gjørt eina serliga lóg um stuðul til umsorganararbeiði, har játtanarslagið verður "onnur játtan". Almannastovan er samd við okkum. Vit hava í januar 2003 spurt landsstýrismannin um hansara sjónarmið.

Stuðul til mattænastu

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2003 verður undir høvuðskontu 12.21.6.04 "Eldrarøkt", á undirkontu 20 Ellis- og røktarheim viðmerkt:

"Í ár 2003 eru 1 mió.kr. settar av til mattænastu og dagstovnatilboð til heimabúgvandi. Ætlanin við hesum tiltaki er at minka um tørvin á røktarheimsplássum."

Spurd, um stuðul til mattænastu frá 2003 ikki skal verða játtað sum stuðul til umsorganararbeiði, svaraði Almannastovan, *"at hildið verður fram í 2003 sum higartil at veita stuðul sum umsorganararbeiði til hetta øki, men arbeitt verður samstundis við at umskipa økið."* Vit hava í januar 2003 spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru á hesum øki.

Lógarbundin játtan

Á løgtingsfíggjarlógini er stuðul til umsorganararbeiði áður játtaður undir høvuðskontu fyri fólkapensjón, sum var ein lógarbundin játtan. Síðani 2002 er stuðulin játtaður á egnari høvuðskontu 8.21.8.06 Umsorganararbeiði (lógarbundin játtan). Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2002, hevur umsorganararbeiðið nú heimild í almannapensjónslógini, sum er galdandi bæði fyri fyritíðarpensjónistar og fólkapensjónistar. Eftir okkara tykki lýkur lógarásetingin um stuðul til umsorganararbeiði ikki treytirnar í játtanarskipanini fyri at vera lógarbundin játtan. Játtanarslagið "lógarbundin játtan" verur nýtt, tá ið tað er bindandi ásett í aðrari lóg, hvør kann fáa pening, og hvussu stór upphæddin skal vera. T.v.s. at móttakarin skal hava rættarkrav til ávísan stuðul, og upphæddin ella útrokningargrundarlagið skal vera ásett í lóg ella sambært lóg. Vit hava í januar 2003 spurt landsstýrismannin um hansara sjónarmið.

Krøv til roknskap, grannskoðan o.a.

Spurd, hvørji krøv verða sett stovnum og felagsskapum, ið skulu lata Almannastovuni roknskap, t.d. krøv um bókhald, fíggjarætlan, roknskaparuppseting, hagtøl/virksemisyvirlit, grannskoðan, o.a., vísir Almannastovan á umfarsskriv sítt 1. november 1994. Skrivið fevnir ikki um umsorganararbeiði, men um grannskoðan av dagrøktarskipanum og dag- og døgnstovnum fyri børn og ung, umframt grannskoðan av ellis-, vistar-, frítíðar- og umlættingarheimum.

Vanliga er eitt rundskriv (umfarsskriv) frá einum myndugleika, sum er yvir, til ein myndugleika, sum er undir. Er ætlanin at áseta neyvari ella avmarkandi reglur mótvegis

triðjamanni, krevst vanliga lógarheimild, og verða reglurnar tá at áseta í kunngerð. Vit hava í januar 2003 spurt landsstýrismannin um hansara sjónarmið.

Umsóknir og játtanarskriv

Umsókn um stuðul til umsorganararbeiði fyri pensjónistar verður send Almannastovuni. Almannastjórin ger sjálvur av, um ein umsókn skal verða játta ella sýtt. Málsviðgerin sendir síðani játtanar-/sýtingarskriv sambært avgerð almannastjórans. Í játtanarskrivunum verður ikki víst til lógarheimild og treytir fyri stuðlinum. Verður umsóknin játtað, fyllir málsviðgerin út eitt útgjaldingarskjal, ið verður latið almannastjóranum at ávísa.

Vit hava heft okkum við, at upp til 9 mánaðir kunnu ganga, áðrenn umsóknir verða svaraðar. Eftir okkara tykki er tað ikki í tráð við góðan fyrisitingarsið. Drúgva viðgerðartíðin hevur fört við sær, at í summum førum verður stuðulin bókaður í einum seinni fíggjarári. Til dømis vórðu 3 útgjøld, tilsamans kr. 83.857,75, ið viðvíktu stuðli í 2000, bókað í 2001. Sambært Almannastovuni eigur slíkt ikki at henda, og Almannastovan vil taka fyrivarni fyri hesum.

Journalviðurskifti o.a.

Í § 7 í Ll. nr. 49/1992 "um Føroya Landsskjalasavn" er ásett, at almennir stovnar, undir eftirliti av Landsskjalasavninum, hava ábyrgdina av, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt. Innkomin og útfarin postur viðvíkjandi stuðli til umsorganararbeiði verður ikki journaliseraður. Sambært Almannastovuni verður skipað fyri, at fáa viðurskiftini í rættlag.

Kærunevndaravgerðir

Í 1998 noktaði Almannastovan stuðul 350 t.kr. til ljóðbókaframleiðslu við tí grundgeving, at játtanin til umsorganararbeiði á løgtingsfíggjarlógini ikki rakk til. Kærunevndin vísti á, at játtanin til umsorganarbeiði er "lógarbundin játtan" á fíggjarlógini. Tí kann Almannastovan ikki geva avslag, vísandi til at peningur ikki er tøkur. Almannastovan kann tó meta um, hvussu stóran stuðul, hon skal játta einum tiltaki, hvussu tiltakið skal verða skipað o.s.v. tí Almannastovan skal sambært kunngerðini seta reglur fyri tiltøkum.

Sum víst á frammanfyri halda vit ikki, at játtanin til umsorganararbeiði lýkur treytirnar í játtanarskipanini fyri at vera ein "lógarbundin játtan".

Í 2001 noktaði Almannastovan einum røktarheimi stuðul til at keypa bil til mattænastuna fyri heimabúgvandi pensjónistar. Kærunevndin ivast tó í, um bilurin eigur at verða játtaður sum umsorganararbeiði ella sum ein meirjáttan til røktarheimið, og beinir málið til nýggja viðgerð hjá Almannastovuni. Kærunevndin viðmerkir í avgerðini frá september 2002, at "eftir gomlu kunngerðini var heimild at játta stuðul til at seta virksemi í gongd umframt til rakstur av virkseminum. Lógarheimildin er einki broytt við nýggju lógini, og tað sæst heldur einki í viðmerkingunum til lógaruppskotið um nýggju almannapensjónslógina, at nøkur broyting av táverandi siðvenju var ætlað. Sostatt má roknast við, at tað eisini í dag er heimild til at veita stuðul bæði til íløgu og rakstur av umsorganartiltøkum."

Ógreitt lógargrundarlag

Lógargrundarlagið er ikki nóg greitt, og lógarásetta kunngerðin er ikki gjørd. Eisini á hesum - øki er tørvur á at bøta um stuðulsgrundarlag/-lóggávu, so endamál, treytir, heimildir o.a. verða greiðari. Vit hava í januar 2003 spurt landsstýrismannin um hansara sjónarmið.

8.7 Ansingarsamsýning (GL 2002/2 07 3-7)

Útreiðslur til "ansingarsamsýning" verða hildnar við heimild í Ll. nr. 64 frá 5. juni 1984 "um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima", seinast broytt við Ll. nr. 52 frá 28. apríl 2000. Vit hava í 2001 grannskoðað 20 tilvildarliga vald mál. Niðanfyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Vantandi ásetan av reglum

Sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 64/1984 *"setir landsstýrismaðurin nærri reglur fyri, hvussu hendan lóg verður umsitin."* Hóast liðin eru nærum 20 ár, síðan lógin kom í gildi, og tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at seta reglur, hevur landsstýrismaðurin enn ongar reglur sett. Vit hava í november 2002 spurt landsstýrismannin, nær viðurskiftini fara at koma í rættlag, men vit hava einki svar fingið.

Samsýningarupphædd

Upphæddin 1. januar 2000 – 31. januar 2001

Upprunaliga var ansingarsamsýningin sett at vera samsvarandi einkjupensjón við fullari uppískoytisveiting. Ásetingarnar um einkjupensjón, sum høvdu heimild í §§ 27-31 í forsorgarlógini, fóru úr gildi, tá ið almannapensjónslógin kom í gildi 1. januar 2000.

Við Ll. nr. 52 frá 28. apríl 2000 "um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima" varð samsýningin sambært § 1 broytt til at verða *"tann sama sum miðal fyritíðarpensjón."* Sambært § 2 hevur lógin virkað frá 1. januar 2000.

Sambært viðmerkingunum til Ll. nr. 52/2000 "svarar miðal fyritíðarpensjón til kr. 87.984 um árið ella kr. 7.332 um mánaðin."

Sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum", sum kom í gildi 1. januar 2000, var árliga miðal fyritíðarpensjón fyri støk sett saman av einari grundupphædd og einari viðbót.

Sambært § 8 í kunngerð nr. 8 frá 11. februar 2000 "um persónliga viðbót sambært løgtingslóg um almannapensjónir" varð ein serlig persónlig viðbót latin (sjúkrakassaviðbót) kr. 160 um mánaðin (kr. 1.920 árliga), sum endurgjald fyri gjaldið til sjúkrakassarnar.

Av hesum kann verða slúttað, at samlaða árliga upphæddin, sum er nevnd í viðmerkingunum, er soleiðis sett saman:

Grundupphædd	kr. 50.028
Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk	kr. 36.036
Sjúkrakassaviðbót	kr. 1.920
Samsýning tilsamans	kr. 87.984

Svarandi til kr. 7.332,00 um mánaðin.

Í 2000 hevur Almannastovan rindað kr. 7.172,- í ansingarløn um mánaðin. Sostatt hevur Almannastovan ikki roknað sjúkrakassaviðbótina kr. 160 um mánaðin við. Spurdur, svaraði Almannastjórin, at Almannastovan ikki helt, at sjúkrakassaviðbótin skuldi verða tikin við.

Vit hava ilt við at skilja svarið, vísandi til at Løgtingið í viðmerkingunum til Ll. 52/2000 varð kunnað um, at ansingarsamsýningin svaraði til kr. kr. 7.332,00 um mánaðin. Vit hava í november 2002 spurt landsstýrismannin um hansara sjónarmið, men vit hava einki svar fingið enn.

Upphæddin síðani 1. februar 2001

25. januar 2001 samtykti Løgtingið tvey lógaruppskot um broytingar á almannapensjónsøkinum. Í Almannapensjónslógini vórðu heitini avlamisviðbót og avlamisveiting sett inn í lógina, og í løgtingslógini um áseting og javning av almannaveitingum vórðu gjørdar broytingar, so at sjúkrakassaviðbótin varð tikin við í viðbótina. Við K. nr. 2/2001 frá 25. januar 2001 varð K. nr. 8/2000 broytt, m.a. varð § 8 um serliga persónliga viðbót (sjúkrakassaviðbótin) strikað.

Við støði í Ll. nr. 4/2001 "um áseting og javning av almannaveitingum" hevur Almannastovan roknað út árligu ansingarsamsýningina (við gildi frá 1. februar 2001) soleiðis:

Grundupphædd	kr. 50.028
Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk	kr. 16.140
Avlamisviðbót	kr. 23.340
Miðal fyritíðarpensjón tilsamans	kr. 89.508

Svarandi til kr. 7.459,00 um mánaðin.

Sum nevnt er samsýningin sambært § 1 í Ll. nr. 52/2000 *"tann sama sum miðal fyritíðarpensjón."* Eftir okkara tykki er orðingin "miðal fyritíðarpensjón" ikki nóg neyv, og ivi kann verða um, hvørjar viðbøtur skulu verða tiknar við. Tað hevði verið greiðari, um samsýningin varð ásett samsvarandi kendum hugtøkum í pensjónslógini/ásetingarlógini.

Í viðmerkingunum til Ll. nr. 52/2000 verður Løgtingið kunnað um, at *"landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ætlar at endurskoða lógina í síni heild seinni í ár, so møguligar lógarbroytingar fáa gildi frá ár 2001."* Enn er eingin endurskoðað lóg løgd fyri tingið. Vit hava í november 2002 spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru á hesum øki, men vit hava einki svar fingið.

Málsviðgerð

Málsviðgerðin fer fram sambært leiðbeinandi innanhýsis reglum frá 1990. Vit hava kannað, um málsviðgerðin er í tráð við ásetingar í lógini og í innanhýsis reglunum.

Í einum máli komu vit fram á, at fráboðan var komin frá einum røktarheimi um, at tann óhjálpni hevði fingið fast búpláss á heiminum. Hóast hesa fráboðan, steðgaði Almannastovan ikki ansingarsamsýningini, ið varð goldin út hvønn mánað í 2 ár og 8 mánaðir. Tá ið Almannastovan varnaðist mistakið, varð samsýningin steðgað, og ansarin varð kravdur eftir uml. 240 t.kr.

Sambært almannastjóranum hevur málsviðgerin ábyrgdina av, at samsýningin verður steðgað, tá ið tílíkar fráboðanir koma. Eftir okkara tykki kundi Almannastovan, t.d. í samstarvi við Heimarøktina, regluliga kannað, um fólkini framvegis búgva heima.

8.8 Forsorgarútreiðslur (GL 2002/2 07 3-4)

Nettoløn uttanum A-skattaskipanina

Í seinastu frágreiðing frá februar 2002 vístu vit á, at vit vóru komin fram á fleiri mál, har løn var goldin út uttanum A-skattaskipanina í p-talinum hjá viðskiftafólkinum, til at rinda fyri arbeiðsgentu-/húshjálp. Almannastjórin kunnaði í desember 2001 um, at siðvenjan nú varð broytt, soleiðis at allar lønarútgjaldingar vórðu fluttar um A-skattaskipanina. Fyri at steðga møguligum øðrum gomlum veitingum fór Almannastovan at gera kanningar á øllum økisdeildum.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at sambært Almannastovuni verða allar lønir nú fluttar um skattaskipanina.

Ikki brúktur barnafrádráttur

Í seinastu frágreiðing frá februar 2002 umrøddu vit, at avlopsskattur, sum stendst av ikki brúktum barnafrádrátti, verður ikki mótroknaður í teimum veitingum, sum fólk fáa eftir forsorgarlógini.

Vit skiltu ikki, hví Almannastovan helt seg til eini boð frá landsstýrismanninum í 1997, í staðin fyri at fylgja einari avgerð frá Kærunevndini og einari fráboðan frá landsstýrismanninum í 1999. Sambært almannastjóranum í januar 2002 hevur Almannastovan ikki fingið boðini í 1999 frá landsstýrismanninum, og Almannastovan heldur tí skrivið í 1997 frá landsstýrismanninum framvegis vera í gildi.

Landsstýrismaðurin kunnaði í oktober 2002 um, at hann í næstum fór at geva boð um, at útgoldin barnafrádráttur skal verða mótroknaður í forsorgarveitingini. Broytingin fær gildi frá komandi útgjalding av avlopsskatti.

Útrokning av nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkinum

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit útrokningina av nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkinum sambært § 9, og vit vístu á, at útrokningin er sera orkukrevjandi. Nógv arbeiðsorka verður nýtt til at fáa til vega prógv fyri útreiðslum, at rokna út veitingarupphædd og at tøppa veitingarupphæddirnar inn í VFS-skipanina. Vit vístu eisini á, at ásetingarnar um nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið sambært § 9 í forsorgarlógini kundu verið gjørdar einfaldari, um veitingarnar vórðu broyttar til bruttoupphæddir. Spurdur, svaraði landsstýrismaðurin í februar 2002, at hann hevði ikki nakra ítøkiliga ætlan um at broyta § 9.

Landsstýrismaðurin kunnaði í oktober 2002 um, at í viðmerkingunum til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2003 verður boðað frá, at landsstýrismaðurin vil styrkja um fíggjarstýringina og útgjaldsskipanina hjá Almannastovuni, og at tað skal verða framt við lógarbroytingum, ið gera skipanina einfaldari. Landsstýrismaðurin hevur í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2003 sett 500 t.kr. av til arbeiðið at gera nýggja forsorgarlóg. Í tí sambandinum verður spurningurin um bruttoveitingar viðkomandi.

Kirkjuskattur

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit, at kirkjuskattur framvegis ikki verður tikin við í útrokningina, tá ið nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið verður roknað út, og verður heldur ikki tikin við í útrokningina av nettoendurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku.

Landsstýrismaðurin staðfestir í oktober 2002, at kirkjuskattur framvegis ikki verður tikin við í útrokningina. Hann fer tí at taka stig til at vegleiðingin, ið ásetir útrokningarháttin, frá 1. januar 2003 verður broytt, soleiðis at kirkjuskattur verður tikin við í útrokningina.

Treytir fyri hjálp sambært § 10

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at vit halda tað vera ivasamt, um Almannastovan hevur heimild til at treyta sær, at fólk skulu prógva, at tey søkja arbeiði. Vit grundgóvu í januar 2002 neyvari fyri okkara sjónarmiði og spurdu landsstýrismannin um hansara sjónarmið, men vit fingu einki svar.

Í oktober 2002 svaraði landsstýrismaðurin, at hann heldur neyðugu heimildina vera í § 10 í forsorgarlógini. Vit halda ikki svarið vera nøktandi, tí landsstýrismaðurin grundgevur ikki fyri svari sínum.

Ráðgeving/endurmeting sambært § 12

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at framvegis verður eingin endurmeting/ráðgeving smb. § 12 gjørd. Almannastjórin kunnaði í desember 2001 um, at hann fór at taka spurningin upp við Trivnaðarmálaráðið.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at sambært Almannastovuni verður ein eftirmeting/ráðgeving nú gjørd innan 3 mánaðir.

Forsorgarveitingar sambært § 17 – mist arbeiðsinntøka

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit ivasomu heimildina í § 17 at veita endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.

Longu í 1993 vístu vit á, at soleiðis sum § 17 í forsorgarlógini var orðað, varð hildið, at siðvenjan hjá Almannastovuni at veita endurgjald fyri inntøkumiss var ikki í tráð við lógina.

Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin í apríl 1999 legði fyri tingið til aðalorðaskiftis, varð spurningurin eisini umrøddur. Víst varð á, at møguleikin átti at verið har, men neyðugt var tó at gera eina aðra greiðari heimild til tess.

Í svarskrivi til Trivnaðarnevndina í mars 2001 viðv. Lm. nr. 50/2000 "uppskot til løgtingslóg um dagpening vegna sjúku", umrøddi landsstýrismaðurin eisini ivasomu heimildina og kunnaði um, at Almanna- og Heilsumálastýrið vildi kanna spurningin neyvari beinanvegin.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 greitt frá, at spurningurin um heimild at veita endurgjald fyri mista inntøku verður tikin upp í sambandi við gerð av nýggjari forsorgarlóg. Eftir hesum at døma er einki hent í málinum.

Í frágreiðingini vístu vit eisini á nógv ógreið viðurskifti, vantandi heimild til at veita eina fasta upphædd til eykaútreiðslur uttan skjalprógv, vantandi heimild at áseta eitt minstamark fyri stuðli. Inntøkugrundarlagið, at rokna út mista arbeiðsinntøku, tyktist tilvildarligt, og víst varð á fleiri dømi. Landsstýrismaðurin ætlaði at kanna viðurskiftini neyvari í 2002.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 greitt frá, at enn er eingin endalig niðurstøða gjørd í hesum máli.

Forsorgarveitingar sambært § 18 – endurbúgving

<u>Vantandi reglur fyri endurbúgving</u>

Í seinastu í frágreiðing vístu vit enn einaferð á, at hóast 10 ár eru liðin, síðani vit fyrstu ferð heittu á Landsstýrið um at seta reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini, eru tær ikki enn gjørdar.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 1999 (Lm. nr. 62/2000), sum varð samtykt 24. apríl 2001, átalaði Løgtingið, at hesin trupulleiki ikki var loystur, hóast hann hevði verið umrøddur í frágreiðingum í áravís.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 2000 (Lm. nr. 85/2001), sum varð samtykt 12. mars 2002, átalaði Løgtingið, at neyvari reglur framvegis ikki vóru gjørdar fyri veitingum eftir § 18 í forsorgarlógini.

Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at *"orka er ikki til staðar í løtuni til at gera nýggja forsorgarlóg, og tí er ætlanin at gera ávísar broytingar ella vantandi kunngerðir á økinum ístaðin. Kunnast skal eisini um, at ein leiðbeining um vard størv er sett í gildi."*

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 greitt frá, at eitt uppskot til vegleiðandi reglur um endurbúgving smb. § 18 í forsorgarlógini fór at verða sent til hoyringar seinast í árinum. Okkum kunnugt er einki uppskot sent til hoyringar.

ALV-skúlin

Í seinastu í frágreiðing vístu vit enn einaferð á, at hóast tað fyri nógvum árum síðani varð staðfest, at eingin lógarheimild var í almannalóggávuni at rinda fyri undirvísing á ALV-skúlanum, tí skúlin mátti haldast at hoyra undir undirvísingarverkið, varð framhaldandi rindað fyri undirvísing á ALV-skúlanum.

Í august 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Trivnaðarmálaráðið var í ferð við at manna ein arbeiðsbólk við umboðum fyri Mentamálaráðið, Trivnaðarmálaráðið, Almannastovuna og ALV-stýrið. Hesin arbeiðsbólkur skuldi, helst í 2001, koma við einum tilmæli um framtíðina hjá ALV-skúlanum. Álitið varð latið landsstýrismanninum 20. mars 2002.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 greitt frá, at í uppskoti til løgtingsfíggjarlóg fyri 2003 er ALV-skúlin settur á fíggjarlógina á serskildari høvuðskontu við játtanarslagnum rakstrarjáttan. Samráðingar eru tiknar upp við Mentamálaráðið um framtíðarvirksemi skúlans.

Kontering av forsorgarveitingum

Í seinastu í frágreiðing greiddu vit frá, at vit til fánýtis øll nítiárini hava víst á, at konteringarnar eru alt ov tilvildarligar, og at ein orsøk er, at eingin konteringarleiðbeining finst. Sambært Almannastovuni hevði Almanna- og Heilsumálaráðið fyrst í 2001 boðað frá, at Stýrið fór at taka neyðug stig til at broyta kontuskipanina á forsorgarøkinum.

Vit spurdu í januar 2002 landsstýrismannin, nær ein konteringarleiðbeining væntandi fór at verða liðug, men vit fingu einki svar.

Landsstýrismaðurin boðaði í oktober 2002 frá, at hann tíverri má staðfesta, at eingin konteringarleiðbeining var gjørd á forsorgarøkinum; men arbeiðið fer at verða raðfest høgt, so vegleiðingin væntandi fer at verða liðug innan ½ ár.

8.9 Barnaforsorgarútreiðslur (GL 2002/2 07 3-3)

Útreiðslur hildnar av kommunum

Barnaforsorgarlógin ásetir, at í kommunum við fleiri enn 2000 íbúgvum tekur býráðið, ella nevnd sett av býráðnum, vegna Landsstýrið avgerð um fyribyrgjandi tiltøk eftir § 22, stk. 2 og 3. Sambært § 43 í barnaforsorgarlógini verða hesar útreiðslur goldnar av landskassanum. Í 2000 var endurgjaldið til kommunur uml. 25 mió.kr., svarandi til uml. 80% av barnaforsorgarútreiðslunum.

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 vístu vit á, at eftir okkara tykki var kontuskipanin á Almannastovuni til barnaforsorgarútreiðslur ikki nóg góð. Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur hava onga konteringarleiðbeining, og tí er vandi fyri, at konteringin ikki verður einsháttað. Í lógini stendur einki um, hvørt kommunurnar skulu hava endurgjald, tilskot ella acontogjøld. Eisini vístu vit á, at roknskapirnir og grannskoðanin hjá Tórshavnar og Klaksvíkar kommunum vóru ikki einsháttað, konteringarnar samsvaraðu ikki við kontuskipanina á Almannastovuni, og ongar reglur vóru fyri umsiting, journalviðurskifti, roknskap ella grannskoðan o.a.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur mótvegis Løgtinginum ábyrgdina av, at útreiðslurnar sambært barnaforsorgarlógini, eisini tær sum kommunurnar umsita, eru rættar, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt. Almannastjórin hevur ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum av rættleikanum av útreiðslunum. Einki er sett í barnaforsorgarlógini um, at Almannastovan skal hava eftirlit við umsitingini hjá kommununum.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 boðað frá, at Trivnaðarmálaráðið hevur gjørt uppskot til eina uppgerð við støði í uppgerðini, sum Tórshavnar kommuna nýtir. Ætlanin er, at kommunurnar hvørt ár skulu senda Almannastovuni uppgerðina, soleiðis at Almannastovan fær møguleika fyri at gera hagtøl og virksemisyvirlit. Sambært landsstýrismanninum skuldi

tað loyst ein part av trupulleikanum, so at landsstýrismaðurin kann fylgja við, um kommunurnar umsita barnaforsorgarútreiðslur á lógligan hátt.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at hann arbeiðir við at tilevna eina nýggja barnaverndarlóg, sum skuldi loyst framman fyri nevndu trupulleikar. Sambært landsstýrismanninum er tó ringt at siga, nær lógaruppskotið verður liðugt viðgjørt, tí politisk semja er ikki um, hvørt økið skal verða landsuppgáva ella kommunaluppgáva burturav.

Tiltøk sambært § 22, stk. 2 og 3

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at Almannastovan hevur ongar reglur, ið lýsa neyvari, hvørji tiltøk talan kann verða um. Í januar 2002 boðaði Almannastovan frá, at ætlanin var at gera greiðar vegleiðingar til barnaverndirnar, eisini viðvíkjandi tiltøkum sambært § 22. Væntandi fóru vegleiðingarnar at verða lidnar medio 2002.

Landsstýrismaðurin kunnaði í oktober 2002 um, at Almannastovan hevði ikki havt orku at gera vegleiðingarnar. Eftir svarinum at døma er einki hent í málinum.

Tørvsmeting sambært § 22, stk. 2 og 3

Í sambandi við grannskoðanina varð staðfest, at eingin fíggjarlig tørvsmeting varð gjørd, áðrenn tiltøk vórðu sett í verk eftir § 22, stk. 2 og 3, og at einki skjalprógv fanst fyri fíggjar- og ognarviðurskiftum. Almannastovan ásannaði í januar 2002, at henda siðvenja var beinleiðis í andsøgn til ásetingina í § 22. Almannastovan fór at gera innanhýsis reglur, og eftir ætlan skuldu reglurnar at verða lidnar í mars 2002. Tíðarætlanin helt ikki.

Landsstýrismaðurin kunnaði í oktober 2002 um, at Almannastovan í næstum fór at gera leiðbeinandi reglur.

Spælistovur

Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur hava sokallaðar spælistovur/stuðulsstovur. Í 1991 umrøddu vit fyrstu ferð stovnslíknandi tiltøk eftir § 22. Eftir drúgt brævaskifti við Almannastovuna/Landsstýrið og "Socialministeriet", varð niðurstøðan, at § 22 ikki heimilar stovnsrakstri. Almannastovan segði seg í januar 2002 vera samda við okkum í, at tað er sera ivasamt, um heimild er fyri hesum útreiðslum sambært § 22, og Almannastovan fór at taka spurningin upp við Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at Almannastovan hevur havt fund við Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur fyri at staðfesta, hvørjar útreiðslur kunna verða rindaðar sambært barnaforsorgarlógini, men enn er arbeiðið ikki liðugt.

Samsýning o.a.

Samsýning o.a. til fosturforeldur varð ásett í § 5, stk. 5, í K. nr. 50 frá 25. mars 1993 "um barnaforsorg" við støði í táverandi donskum upphæddum, sum verða ásettar av "Kommunernes Landsforening", og javnførdar á hvørjum ári. Í Føroyum eru upphæddirnar ikki javnførdar síðani kunngerðin kom í gildi 26. mars 1993.

Landsstýrismaðurin kunnaði í januar 2002 um, at hann fór at leggja fram uppskot um at broyta barnaforsorgarlógina, soleiðis at ein greið heimild fekst til at áseta gjøldini, og síðani at javna tey.

Uppskot til løgtingslóg um broytingar í barnaforsorgarlógini varð samtykt 4. mars 2002, og K. nr. 79/2002 "um samsýning til fosturforeldur" varð sett í gildi 9. september 2002.

Útgjald og útrokning av pleygulønum o.a.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á nógvar villur, í sambandi við at Almannastovan hevði roknað og goldið út pleygulønir o.a. Vit spurdu í juni 2002, hvat var hent í málinum, og um viðurskiftini vóru komin í rættlag.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at *"Almannastovan er farin í holt við at gera eina leiðbeining, sum eisini viðger útrokning og útgjald av samsýning til fosturforeldur."* Eftir svarinum at døma er óvist, um Almannastovan hevur rættað villurnar.

Eftirlitsspor og málsviðgerð

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at eftir okkara tykki luku skrásetingarnar av samsýningum o.a. ikki ásetingarnar í § 11 í roknskaparkunngerðini um eftirlitssporið. Í januar 2002 segði Almannastovan seg vera samda við okkum og segði, at øll barnaforsorgarmál fóru at verða skrásett umaftur í journalskipanini.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at Almannastovan er í ferð við at umskráseta málini.

Útreiðslur samsvarandi tørvi

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at í einum máli hevði Almannastovan í apríl 2000 gjørt av at rinda eftirstøðu fyri ravmagn, olju og sjúkrakassa. Almannastovan hevði roknað veitingina út samsvarandi ásetingunum í § 9 í forsorgarlógini, og hevði veitt eina ávísa upphædd í 4 mánaðir. Líkt var til, at Almannastovan hevði blandað forsorgar- og barnaforsorgarlógina saman. Eftir okkara tykki heimilar hvørki § 22 ella onnur grein í barnaforsorgarlógini fíggjarliga hjálp eftir tørvi. Vit bóðu í desember 2001 landsstýrismannin um eina frágreiðing, men vit fingu einki svar.

Vit hava í juni 2002 aftur biðið um eina frágreiðing, men hava framvegis einki svar fingið.

Virksemi/hagtøl

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg er einki virksemisyvirlit í viðmerkingunum til játtanina til barnaforsorgarútreiðslur. Eftir øllum at døma er eingin skipað skráseting av hagtølum fyri virkseminum. Í seinastu frágreiðing vístu vit á dømi um hagtøl í hinum norðurlondunum. Sambært almannastjóranum skuldi Almannastovan í 2002 fara undir at útvega og savna inn dátur, soleiðis at neyðug hagtøl kunnu verða gjørd.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at í sambandi við umskrásetingina av málunum, verða leitiorð sett inn í skipanina, so gjørligt verður at gera hagtøl.

Niðurstøða

Í januar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá nógvum tiltøkunum og ætlanum um ábøtur viðvíkjandi umsitingini av barnaforsorgarútreiðslum. Sum greitt frá frammanfyri, vanta ábøtur á fleiri økjum.

8.10 <u>Dagpeningaútreiðslur</u> (GL 2000/2 07 3-6)

Í seinastu frágreiðing varð víst á, at lógarásettu kunngerðirnar vóru ikki gjørdar og leiðbeiningar vanta. Tørvur var á at bøta um: journalviðurskifti, uppritabløð og skjalprógv fyri útrokningum og innanhýsis eftirliti. Gjald og reglur fyri sjálvbodnu tryggingina vóru ikki ásett, og nýggju umsóknarbløðini vóru nógv seinkað. Ein fulltrúi var settur burturav til at greiða vantandi kunngerðir/vegleiðingar. Niðanfyri verður kunnað um, í hvønn mun viðurskiftini eru komin í rættlag.

Vantandi ásetan av reglum

Hóast tað í sjúkradagpeningalógini er álagt landsstýrismanninum at seta reglur sambært § 2, stk. 2, § 15, stk. 2, og § 24, stk. 2, eru ongar reglur settar.

Í januar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Trivnaðarmálaráðið er í ferð við at broyta lógina, og ætlaði í hesum sambandi at gera neyvari reglur og kunngerðir. Eftir ætlan skuldi arbeiðið verða liðugt á vári 2002.

Í november 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Trivnaðarmálaráðið, so skjótt sum til bar, fór at gera tær kunngerðir, sum sambært lógini vóru álagdar landsstýrismanninum at gera. Væntandi fóru kunngerðirnar sambært § 24, stk. 2, um áseting av innihaldinum í læknaváttanum, og sambært § 6, stk. 2, um undantøk fyri treytini viðvíkjandi føstum bústaði og fullari skattskyldu í Føroyum, at verða lidnar í árinum.

Ein atvold til, at landsstýrismaðurin heldur tað hava skund at áseta undantøkini sambært § 6, stk. 2, eru ásetingarnar í "Nordisk Konvention om Social Sikring", har Løgtingið hevur bundið seg til at veita dagpening til norðurlendskar borgarar á jøvnum føti við føroyskar borgarar. Sambært § 55 í stýrisskipanarlógini hevur løgtingslóg ikki gildi, gongur hon ímóti millumtjóðasáttmála, sum Føroyar hevur gjørt við onnur lond.

Journalviðurskifti

Higartil hevur innkomin og útfarin postur ikki verið journaliseraður. Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 boðað frá, at frá 1. januar 2003 verða øll dagpeningamál journaliserað.

Umsóknarbløð

Í grannskoðanarfrágreiðingum hava vit áður mælt til at broyta og dagføra umsóknarbløðini. Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 boðað frá, at síðani fyrst í 2002 hava nýggj umsóknarbløð verið nýtt.

Uppritabløð og skjalprógv fyri útrokningum

Vit hava víst á, at eftir okkara tykki vóru upplýsingarnar í uppritabløðunum ikki nøktandi. Uppritabløðini geva ikki innlit í, hvussu málsviðgerin hevur roknað dagpeningaupphæddina, og váttað verður ikki altíð í uppritabløðunum, um inntøkuviðurskiftini eru kannað. Vit hava mælt til, at útrokningin av dagpeningaupphæddini verður skjalprógvað í málinum, so eitt eftirlitsspor finst, sum eisini kann vera við til at tryggja, at allar umsóknir verða viðgjørdar eins.

Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at málið fór at verða tikið upp við Almannastovuna, og at hann fór at mæla Almannastovuni til, at útrokningin av dagpeningaupphæddini verður skjalprógvað.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at Dagpeningadeildin á Almannastovuni hevur lagt seg eftir at skriva meira nágreiniliga í uppritabløðini. Ein teigur á umsóknarblaðnum er gjørdur til málsviðgeran at fylla út, tá ið hann roknar út lønarinntøkuna.

Innanhýsis eftirlit og leiðbeining

Vit hava áður í grannskoðanarfrágreiðingum mælt til eina meira skipaða nýtslu av dagslistunum, so tað t.d. sæst, hvør hevur kannað hvat og nær, at øll vita, hvussu listarnir skulu verða nýttir, og at summir listar verða gjørdir til ávís eftirlit. Nøkur fyribrigdi áttu altíð at verið kannað, t.d. broytt bankakontunummur og nýggj mál. Eisini áttu við stakroyndum mál at verið vald út hjá teimum ymisku málsviðgerunum fyri at tryggja eina einsháttaða málsviðgerð.

Í januar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, *"at í sambandi við nýggju lógina verður farið undir at gera leiðbeiningar/vegleiðingar fyri dagpeningaøkið. Farið verður undir hetta arbeiði so skjótt, sum lógin er viðtikin, og í hesum sambandi verður spurningurin um eftirlit og innanhýsisreglur eisini tikin við."*

Í skrivi í oktober 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá *"at arbeitt hevur verið í fyrsta umfari við umsóknarbløðunum, og tí er enn einki gjørt við at gera reglur um innanhýsis eftirlit. Landsgrannskoðarin er vitandi um, at løgfrøðiliga orkan í Stýrinum hevur verið ógvuliga avmarkað, men frá 1. oktober 2001 koma 2 løgfrøðingar afturat. Hetta viðførir størri orku, og Almanna- og Heilsumálaráðið hevur sett sum mál, at reglur um innanhýsis eftirlit verða gjørdar áðrenn ársenda."*

Vit vístu í desember 2001 á, at tær vegleiðingar, sum landsstýrismaðurin hevði boðað frá í januar 2001, vóru ikki gjørdar. Tá ið ongar vegleiðingar eru, og eingin skipað nýtsla av kærunevndaravgerðum er sett í verk, er vandi fyri, at allir borgarar verða ikki viðgjørdir eins. Í februar 2002 greiddi landsstýrismaðurin frá, at viðurskiftini fóru at verða tikin upp í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skuldu verða gjørdar um várið 2002.

Landsstýrismaðurin kunnaði í november 2002 um, at flestu kunngerðir og vegleiðingar fóru væntandi at verða lidnar í 2002.

Landsgrannskoðanini kunnugt eru kunngerðir og leiðbeiningar ikki lidnar.

Edv-skipanin

Almannastovan nýtir eina gamla edv-skipan, ið er lagað til málsviðgerðina. Funktiónsskilnaður vantar í skipanini. Leiðarin tekur sær av at áseta dagpeningahámark o.a. í skipanini. Málsviðgerin skrásetir sjálvur stamdátur so sum p-tal, kontunummar o.a., og sami málsviðgeri tøppar inn útgjaldingartíðarskeiðið og inntøkugrundarlagið. Eingin brúkaravegleiðing tryggjar, at brúkararnir nýta skipanina rætt og eins. Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at arbeitt verður við at rinda veitingarnar um VFS-skipanina á Almannastovuni.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at alt tað fyrireikandi edv-arbeiðið er gjørt. Arbeiðið er tó fyribils steðgað, tí *"kannað verður í løtuni um dagpeningaøkið kann verða lagt inn í FSL-skipanina á Føroya Gjaldstovu."*

Sum umrøtt undir edv-viðurskiftunum á Almannastovuni, hevur Almannamálaráðið gjørt av at menna eitt dagpeningamótul í VFS-skipanini.

Inntøkugrundarlagið

Sambært § 8 er høvuðsreglan, at miðalinntøkan tær seinastu 5 vikurnar er inntøkugrundarlagið fyri dagpeningaveitingini.

Í frágreiðing 22. juli 1999 til landsstýrismannin umrøddu vit útrokningina av miðalinntøkuni. Vit vístu á, at Almannastovan dregur frídagar umframt halgidagar, sum liggja gerandisdagar, frá teimum 5 vikunum, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út. Tá ið t.d. jól, nýggjár ella páskir eru í 5-viku tíðarskeiðnum, verða frídagarnir drignir frá, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út. Sama ger seg galdandi við verkfalsdøgum. Vit hildu hetta ikki vera rættan útrokningarhátt, og vístu á, at dagpeningaveitingarnar í hesum førum verða ov høgar.

Í svarskrivi 27. september 1999 var landsstýrismaðurin samdur við okkum og segði, at hann fór at boða Dagpeningadeildini frá sínari støðu. Sambært Almannastovuni hevur Trivnaðarmálaráðið ikki boðað Dagpeningadeildini frá sínari støðu. Í skrivi í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevði ikki broytt støðu, og at Almannastovan fór at fáa boð í næstum.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at hann 1. november 2002 hevði givið Almannastovuni boð um at broyta útrokningarháttin.

Útrokning av dagpeningi

Tá ið dagpeningur verður goldin út, verður støði tikið í:

at arbeiðsvikan er 40 tímar,

at arbeiðsvikan gongur frá mánadegi til fríggjadag, og

at at goldið verður fyri 5 dagar um vikuna uttan fyrilit fyri halgidøgum, sum liggja gerandisdagar.

Er onkur sjúkrameldaður t.d. í páskavikuni, fær hann/hon sjúkradagpening fyri skírhósdag, langafríggjadag og 2. páskadag.

Eftir okkara tykki er útrokningarhátturin ikki rættur, tí sambært § 1 í dagpeningalógini *"hevur lógin til endamáls at veita fíggjarligan stuðul í sambandi við mista inntøku og/ella sjálvbodna trygging vegna sjúku, skaðatilburð og fráveru áðrenn føðing vegna heilsuvanda fyri móður ella barn."*

Ein tílíkur útrokningarháttur hevur við sær, at rindað verður fyri halgi- og frídagar í útgjaldingartíðarskeiðnum, samstundis sum frídagarnir verða drignir frá inntøkutíðarskeiðnum, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út. Soleiðis verða útgjaldingarnar ov høgar. Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at tað var rættast bert at nýta arbeiðsdagar, tá ið miðalinntøkan varð roknað út, og ikki at gjalda fyri halgi- og frídagar. Landsstýrismaðurin gjørdi samstundis vart við, at sambært kærunevndaravgerð var 7 daga vika galdandi fyri sjómenn.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at hann 1. november 2002 hevur givið Almannastovuni boð um ikki at rinda dagpening fyri halgidagar, sum liggja gerandisdagar.

Inntøkuviðurskifti og aðrar inntøkur í dagpeningatíðarskeiðinum

Dagpeningadeildin kannar inntøkuviðurskiftini við støði í fyribilsskattaskránni. Eftirlitið er í tveimum pørtum. Fyrri parturin er at kanna, um fráboðaða inntøkan í 5-viku tíðarskeiðinum samsvarar við fyribils skattaskránna. Seinni parturin er smb. § 9, stk. 5, at kanna, um møgulig inntøka í dagpeningatíðarskeiðinum, saman við dagpeninginum, er hægri enn miðalinntøkan sambært § 8. Sambært Almannastovuni verða inntøkuviðurskiftini bert kannað hjá uml. 1 av 10 umsøkjarum.

Sambært skrivi frá landsstýrismanninum í oktober 2001 var ikki orka at gera meira við at kanna inntøkuviðurskiftini, sum vit hava mælt til í grannskoðanarfrágreiðingum. Landsstýrismaðurin vísti á, at sambært dagpeningalógini kunnu skeivar ella vantandi upplýsingar frá umsøkjarum føra til, at ov nógv goldin dagpeningur verður kravdur aftur.

Í desember 2001 vístu vit á, at vit framvegis ikki halda inntøkuviðurskiftini verða nóg væl kannað, og vit mæltu til at fáa mannagongdirnar í eina trygga legu. Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skulu verða gjørdar á vári 2002, fara viðurskiftini at verða tikin upp.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 greitt frá, at vegna vantandi arbeiðsorku er einki hent í málinum, men viðurskiftini fara at verða tikin upp í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar eftir ætlan verða gjørdar lidnar síðst í 2002.

Landsgrannskoðanini kunnugt, eru kunngerðir og leiðbeiningar ikki lidnar.

Málsviðgerð í sambandi við sjálvbodna trygging

Sambært § 12, stk. 2, verður dagpeningur í mesta lagi veittur í 40 vikur í einum 12 mánaða skeiði.

Hevur sjálvboðin tryggjaður brúkt dagpeningarættin sambært § 12, stk. 2, skal hann sambært § 13, stk. 2, prógva, at hann hevur verið arbeiðsførur í minst 5 vikur eftir seinastu sjúkramelding, áðrenn hann aftur er vorðin sjúkrameldaður.

Almannastovan umsitur "prógv" sambært § 13, stk. 2, soleiðis, at tryggjaði skal skriva undir eina váttan um, at hann hevur verið arbeiðsførur í 5 vikur eftir seinastu sjúkramelding. Vit halda ikki hesa mannagongd vera nøktandi, men vit halda, at støða átti at verið tikin út frá læknaligum upplýsingum.

Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skulu verða gjørdar á vári 2002, fara viðurskiftini í sambandi við sjálvbodna trygging eisini at verða tikin upp.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at vegna vantandi arbeiðsorku er einki hent í málinum, men viðurskiftini fara at verða tikin upp í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar eftir ætlan verða gjørdar lidnar síðst í 2002.

Landsgrannskoðanini kunnugt, eru kunngerðir og leiðbeiningar ikki lidnar.

Gjald til sjálvbodnu tryggingina

Sambært § 21 *"verða gjøld til sjálvbodnu tryggingina eftir nærri reglum ásett av landsstýrismanninum fyri eitt ár í senn. Gjøldini verða ásett í mun til støddina av tryggjaða dagpeninginum, soleiðis at tey samlaðu inngjøldini verða mett at rinda 2/5 (40%) av útreiðslunum av sjálvbodnu tryggingunum sambært kap. 7."*

Gjaldið er seinast sett í K. nr. 159 frá 6. desember 1995 "um gjald til sjálvbodnu dagpeningatryggingina" við heimild í "Lovbekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988 om lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel". Lógarkunngerðin er farin úr gildi 1. juni 2001 sambært § 30, stk. 2, í Ll. nr. 74/2001.

Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skulu verða gjørdar á vári 2002, fóru eisini viðurskiftini viðvíkjandi sjálvbodnu tryggingina at verða tikin upp,

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at vegna vantandi arbeiðsorku er einki hent í málinum, men viðurskiftini fara at verða tikin upp í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar eftir ætlan verða gjørdar lidnar síðst í 2002.

Landsgrannskoðanini kunnugt, eru kunngerðir og leiðbeiningar ikki lidnar.

Upptøkutreytir og strikan úr skipanini

Sum áður sagt frá, skal landsstýrismaðurin sambært § 15, stk. 2, í sjúkradagpeningalógini í kunngerð áseta neyvari reglur fyri sjálvbodnu tryggingina.

Hóast vit fleiri ferðir í skrivum og í grannskoðanarfrágreiðingum hava gjørt vart við, at landsstýrismaðurin sum skjótast átti at ásett neyvari reglur um treytir/rættindi, bæði í sambandi við upptøku í og strikan úr skipanini, eru ongar reglur gjørdar.

Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at hesi viðurskifti fóru at verða tikin upp, í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skuldu verða gjørdar á vári 2002.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at vegna vantandi arbeiðsorku er einki hent í málinum, men viðurskiftini fara at verða tikin upp í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar eftir ætlan verða gjørdar lidnar síðst í 2002.

Landsgrannskoðanini kunnugt, eru kunngerðir og leiðbeiningar ikki lidnar.

Niðurstøða

Í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá nógvum tiltøkum og ætlanum um ábøtur, sum flest allar skuldu verða framdar á vári 2002. Lógarásettu kunngerðirnar eru framvegis ikki gjørdar, og enn vanta leiðbeiningar. Gjald og reglur fyri sjálvbodnu tryggingina eru framvegis ikki ásettar, og einki er hent viðvíkjandi innanhýsis eftirlitinum.

8.11 Barnapeningur veittur í forskoti (GL 2000/2 07 2-5)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." seinast broytt við Ll. nr. 6 frá 25. januar 2001.

Journalviðurskifti

Í seinastu frágreiðing frá februar 2002 vístu vit á vantandi journalisering, og vit vístu á, at journaluppritabløð, har greitt verður frá gongdini í málinum, verða ikki nýtt. Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 boðað frá, at arbeitt verður við málinum. Eftir svarinum at døma er einki hent.

Tá ið ein áheitan kemur um barnapening, sum kann verða sammett við eina umsókn, verður hon ikki goymd á Almannastovuni, men verður send Toll- og Skattstovu Føroya saman við umbøn um innheintan. Hesi viðurskifti eru eftir okkara tykki ikki nøktandi og Toll- og Skattstova Føroya var samd við okkum, tí kann peningurin ikki verða kravdur inn, skal Almannastovan gera av, hvat eftirsíðan skal henda, og tá hevur Almannastovan brúk fyri upprunaskjølunum.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at áheitanirnar verða nú varðveittar á Almannastovuni.

Málsgongd og útgjald

Málsviðgerin kannar útrokningina og rættar, er okkurt skeivt, men viðgerðin verður ikki váttað við átekning á útskriftina. Í flestu førum verður útskriftin ikki goymd.

Í sambandi við nýtslu av dagslistunum hevur Landsgrannskoðanin áður í grannskoðanarfrágreiðingum mælt til, at tað á listunum sæst, hvør hevur kannað hvat og nær. Í hesum føri er tað sama fólkið, sum ger alt arbeiðið. Almannastovan hevur í februar 2002 boðað frá, at í longri tíð hevur verið arbeitt við at broyta bygnaðin. Í nýggja bygnaðinum verður persónsskilnaður millum skráseting og útgjalding.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at nýggi bygnaðurin eftir ætlan kemur at virka fyri 1. januar 2003. Okkum kunnugt, er støðan óbroytt.

Vit vístu á, at mannagongdin krevur nógva arbeiðsorku og kundi verið gjørd einfaldari. Almannastovan boðaði frá í februar 2002, at verandi skipan fór at verða løgd niður í 2002, og at viðurskiftini fóru at verða broytt í nýggju skipanini.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at eingin nýggj skipan er gjørd, og verandi skipan heldur fram.

Innheintan av barnapeningi

Eftirstøður

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at broytingarnar í eftirstøðunum ikki samsvaraðu við munin ímillum afturrindan og forskotsrindan. Almannastovan boðaði í februar 2002 frá, at hon var farin undir at kanna hetta ósamsvar.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at kanningin er ikki liðug.

Innheintan av krøvum uttanfyri Norðurlond

Vit vístu á, at barnapeningur verður ikki heintaður inn uttanfyri Norðurlond, hóast tað sambært konventiónum kann lata seg gera. Almannastovan vísti í februar 2002 á, at sambært § 7, stk. 3, í "Bekendtgørelse nr. 433 af 17. desember 1965 om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til den af De Forenede Nationer vedtagne konvention af 20. juni 1956", er tað Almannastovan, sum kann biðja um, at krøv verða kravd inn í útlondum. Hinvegin er tað Toll-

og Skattstova Føroya, sum skrásetir krøvini. Fundur hevur verið millum partarnar fyri at fáa eina greiða mannagongd fyri, hvussu krøvini kunnu verða kravd inn.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at einki kom burturúr fundinum, og tí er einki broytt.

Eftirgeving og fyrning

Vit vístu á, at barnapeningur ongantíð er eftirgivin. Fylgt verður ikki við, um krøv fyrnast. Vit mæltu til at fremja neyðugar tekniskar broytingar, so til bar at skráseta aldur og aðrar upplýsingar, sum skuldu til, fyri at ein effektiv innheintan og mótrokning kundi verða gjørd. Síðani verður neyðugt at gjøgnumganga krøvini og finna fram til, hvørji krøv eru fyrnað. Almannastovan var samd við okkum og boðaði í februar 2002 frá, at fundur hevði verið við Toll- og Skattstovu Føroya, har gjørt varð av at kanna krøvini í skipanini.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at Almannastovan hevur ikki tikið lut í nakrari kanning hjá Toll- og Skattstovu Føroya av málunum.

Frágreiðing um ábøtur

Vit umrøddu eina frágreiðing frá 1996 frá "Kommunedata" um mannagongdirnar á Almannastovuni og á Føroya Gjaldstovu. Har varð mælt til, at útgjalding og innheintan av barnapeningi varð samlað á einum stað, og mælt varð til at samskipa dátumannagongdirnar í edvskipanunum fyri at forða fyri dupultarbeiði. Toll- og Skattstova Føroya, ið síðani hevur tikið yvir innheintanina, kunnaði í november 2001 um, at eingin roynd sást vera gjørd at samskipa arbeiðið millum innheintanina og Almannastovuna, men at fundur var avtalaður við Almannastovuna at viðgera spurningarnar.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at einki er hent í málinum.

Niðurstøða

Í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá nógvum tiltøkum og ætlanum um ábøtur í umsitingini av útgjaldingini og innkrevjingini av barnapeningi. Vísandi til tað, sum stendur frammanfyri, er á fleiri økjum einki hent.

8.12 Stuðul til uppihaldspening (GL 2001/2 07 5-2)

Journalviðurskifti

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 vístu vit á vantandi journalisering, og vit vístu á, at journaluppritabløð, har greitt verður frá gongdini í málunum, verða ikki nýtt.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 boðað frá, at arbeitt verður við málinum. Eftir svarinum at døma er einki hent.

Málsgongdin

Vit vístu á, at persónsskilnaður er ikki millum skráseting og útgjald. Almannastovan boðaði í februar 2002 frá, at í longri tíð hevur verið arbeitt við at broyta bygnaðin. Í nýggja bygnaðinum verður persónsskilnaður millum skráseting og gjalding. Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 kunnað um, at nýggi bygnaðurin er enn ikki komin at virka, men at fyri 1. januar 2003 fara viðurskiftini at vera komin endaliga upp á pláss. Okkum kunnugt, er støðan óbroytt.

Tvørrandi samskipan

Vit vístu á tvørrandi samskipan millum tríggjar fyrisitingar, ið umsita forskotsrindan, innheintan av barnapeningi og stuðul til uppihaldspening. Almannastovan kunnaði í februar 2002 um, at hon í 2002 fór at taka spurningin upp við Toll- og Skattstovu Føroya fyri at fáa arbeiðið meira samskipað.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2002 boðað frá, at einki er hent í málinum.

Niðurstøða

Í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá ætlanum um ábøtur í umsitingini av stuðli til uppihaldspening. Vísandi til tað, sum stendur frammanfyri, er at kalla einki hent.

8.13 Barnagjald til einsamallar uppihaldarar (GL 2002/2 07 3-8)

Útreiðslurnar av barnagjaldi verða hildnar við heimild í Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar", seinast broytt við Ll. nr. 6 frá 25. januar 2001.

Sambært § 22 "kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um fyrisitingina av hesi lóg." Hóast liðin eru 6 ár, síðan lógin kom í gildi, eru ongar reglur settar.

Barnagjaldsupphæddir o.a.

Sambært § 15 í Ll. nr. 71/1996 *"rindar tað almenna árliga eitt gjald til barnsins uppihald, um einans annað av foreldrum barnsins er á lívi. Sama gjald verður rindað til eitt barn, føtt uttan fyri hjúnalag, tá faðirskapurin ikki er staðfestur. Til faðir- og móðurloysingar verður rindað eitt árligt gjald."*

Árliga barnagjaldið er seinast ásett í K. nr. 95 frá 16. desember 2002 "um áseting og javning av almannaveitingum":

Vanligt barnagjald	kr. 9.732,00
Barnagjald til faðir- og móðurloysingar	kr. 19.464,00

Sambært § 19 í Ll. nr. 71/1996 *"kann Almannastovan eftir kanning í hvørjum einstøkum føri veita stuðul til útreiðslur í samband við barnsins dóp, konfirmatión, sjúku og jarðarferð ella av øðrum serstøkum orsøkum."*

Sambært innanhýsis leiðbeinandi reglum kann ein upphædd, sum svarar til mánaðarliga barnagjaldið, verða latin í sambandi við dóp. Til konfirmatión kann verða latið í stuðli tríggjar ferðir mánaðarliga barnagjaldið. Veitingar í sambandi við sjúku og jarðarferðarhjálp verða viðgjørdar í hvørjum einstøkum føri, og lagaðar eftir inntøkuviðurskiftunum.

Grannskoðan av málum

Við støði í einum lista yvir útgoldin barnagjøld í 2002 vórðu 20 mál tilvildarliga vald út at kanna neyvari.

Í fleiri málum vóru eingi navnabrøv. Almannastovan hevur í desember 2002 greitt frá, at í sambandi við at ein nýggj málsviðgerðarskipan varð tikin í nýtslu 1. januar 2001, hevði Almannastovan fingið atgongd til skipanina hjá Landsfólkayvirlitinum. Samstundis varð mannagongdin broytt, soleiðis at tað ikki varð sett sum krav, at navnabrøv skuldu vera í málunum, ella at umsøkjari skuldi senda inn navnabræv. Umsóknarbløð og innanhýsis reglur eru tó ikki broyttar samsvarandi.

Eftir okkara tykki eigur tað at vera skjalprógvað í málinum, nær og hvørjar upplýsingar ein málsviðgeri hevur kannað í skipanini hjá Landsfólkayvirlitinum. Landsstýrismaðurin hevur í januar 2003 boðað frá, at í framtíðini fer Almannastovan at krevja navnabrøv.

Í 2 málum var av misgáum goldið út í p-talinum hjá barninum, og í 2 málum vóru munir í útgjaldingunum. Almannastovan hevur í desember 2002 kunnað um, at viðurskiftini eru komin í rættlag.

8.14 Hjálpartólamiðstøðin (GL 2000/2 07 4-8)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2001 umrøddu vit grannskoðan av Hjálpartólamiðstøðini. Á fleiri økjum mæltu vit til at fáa ávís viðurskifti í rættlag, og vit vístu á fleiri ivamál um lánsveitingar og umsiting av lánum.

Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið, í samráð við Almannastovuna, fór at greiða heimildarspurningin, og fór at arbeiða víðari við at fáa vantandi reglugerðir gjørdar.

Í august 2001 spurdu vit, hvat var hent í málinum, og nær arbeiðið fór at verða liðugt. Landsstýrismaðurin svaraði í september 2001, *"at viljin er til staðar, men Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ikki enn fingið fleiri starvsfólk, millum annað til at arbeiða við hesum máli."*

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsrokskapin fyri fíggjarárið 1999 (Lm. nr. 62/2000), sum varð samtykt 24. apríl 2001, átalaði Løgtingið, at tað tók upp í 3 mánaðir at avgreiða eina umsókn um vanligt hjálpartól. Heitt varð á landsstýrismannin um beinanvegin at loysa trupulleikarnar. Løgtingið átalaði eisini, at einki goymsluyvirlit var, hóast stovnurin í 1997 hevði fingið eina játtan til endamálið. Løgtingið mælti landsstýrismanninum til at greiða ivamálini um lánsveitingar og umsiting av lánum.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001), sum varð samtykt 12. mars 2002, varð víst á, at goymsluyvirlitið var ikki liðugt, at avgreiðslutíðin var framvegis ov long, til stóran bága fyri brúkararnar, og at einki var hent í málinum um heimildarspurningar.

Niðanfyri verður kunnað um gongdina í málinum.

Umsókn um hjálpartól

Landsstýrismaðurin hevur í september 2002 greitt frá, at síðani 1. apríl 2002 eru málini raðfest í bráðmál, snarmál og vanlig mál.

Bráðmál skulu verða skrásett og viðgjørd beinanvegin. Hjálpartólið eigur at verða latið í seinasta lagi 2-3 arbeiðsdagar eftir, at málið er skrásett.

Snarmál eru mál, ið verða skrásett beinanvegin og viðgjørd í seinasta lagi 2 arbeiðsdagar eftir, at málið er skrásett. Hjálpartólið skal tó verða latið í seinasta lagi 10 arbeiðsdagar eftir, at málið er skrásett.

Bíðitíðin fyri vanlig mál er ymisk frá máli til mál. Í 2002 eru higartil avgreidd 1.343 mál, ein vøkstur 37% í mun til 2001, tá 977 mál vórðu avgreidd.

Vørugoymsla

Sambært § 19 í roknskaparkunngerðini áliggur tað stovnum at føra serstakt yvirlit yvir vørugoymslur. Vit vístu á, at í 1997 hækkaði Fíggjarnevndin játtanina 250 t.kr. til at keypa eina skipan til goymslustýring. Hóast hesa hækkaðu játtan, hevur Hjálpartólamiðstøðin ikki nakað goymsluyvirlit.

Landsstýrismaðurin vísti í september 2002 á, at tað lutvíst er rætt, at 250 t.kr. vórðu játtaðar til goymsluskipan. Talan var um 2 skipanir, eina journal- og eina goymsluskipan. Partur av journalskipanini varð sett í verk í 1998, og í januar 2001 varð øll skipanin tikin í nýtslu. Av vantandi orku, er goymsluskipanin ikki heilt sett í verk. Fleiri starvsfólk eru sett at arbeiða á goymsluni, og í løtuni verður arbeitt við at skipa hana fysiskt. Tá ið tað arbeiðið er liðugt, verður farið í gongd við fullvegis at seta goymsluskipanina í verk. Eftir ætlan verður arbeiðið liðugt innan fyri komandi ½ árið.

Stuðul til avlamisbilar

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini veitir Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin studningslán til avlamisbilar, sum verður niðurskrivað yvir 6 ár. Harafturat verður veitt rentufrítt lán yvir 6 ár.

Við broyting í forsorgarlógini sambært lov 718/1987 varð ásett í § 18, stk. 6, at, *"Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om ydelser efter stk. 1-5."* Ongar reglur vórðu ásettar. Hesin trupulleiki varð á fyrsta sinni umrøddur í grannskoðanarfrágreiðingini í 1990. Á fundi 26. september 1992 millum Landsstýrið og "Socialministeriet" játtaði Landsstýrið, at reglurnar skuldu verða ásettar fyri 1. apríl 1993. Reglurnar eru ongantíð ásettar.

Við Ll. nr. 177/1997 "um broyting í lóg um almenna forsorg", við gildiskomu 1. januar 1998, varð eftir síðsta pkt. í § 18, stk. 6, *"Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om ydelser efter stk. 1-5" sett: "íroknað reglur um egingjald og nær stuðul til hjálpartól kann veitast sum lán."*

Í viðmerkingunum til uppskotið um broyting stendur:

"Hetta er eisini ein neyvari orðing, har heimildin til at áseta egingjald, og at stuðul til hjálpartól kann veitast sum lán, beinleiðis verður nevnd."

Landsstýrismaðurin hevur ikki sett nakrar reglur um egingjald, ella nær stuðul til hjálpartól kann verða veitt sum lán. Tí er ivasamt, um Hjálpartólamiðstøðin hevur heimild at veita stuðul við afturgjaldsskyldu.

Landsstýrismaðurin vísti í september 2002 á, at arbeitt varð við nýggjari lóggávu, har heimildarspurningurin fór at verða viðgjørdur. Landsstýrismaðurin harmaðist um støðuna og staðfesti, at reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini ikki vóru ásettar.

Eftir svarinum at døma hevur landsstýrismaðurin ongar ætlanir um at greiða heimildarspurningin í verandi lóg, og hevur heldur ongar ætlanir um at áseta neyvari reglur í kunngerð.

<u>Skrásetingargjald</u>

Sambært § 9 í Ll. nr. 175/1992 "um skrásetingargjald á motorakførum o.ø.", ið varð sett úr gildi 1. januar 2001, var einki skrásetingargjald á avlamisbilum. Fíggjarmálaráðið setti tó ávísar treytir í játtanarskrivum til umsøkjarar, ið søktu um at sleppa undan at rinda skrásetingargjald av avlamisakførum, m.a.:

- hámark fyri virðisgrundarlagi kr. 73.500, áður kr. 60.000,
- krav um, at skrásetingargjald skal verða rindað, verður avlamisbilurin avhendaður innan 6 ár. Skrásetingargjaldið verður at rinda lutfalsliga, svarandi til tað, ið restar í tey 6 árini,
- trygd fyri kravi landskassans uppá skrásetingargjaldið, verður bilurin seldur ella skiftir eigara, ella nýta onnur enn eigarin ella húski hansara bilin.

Í oktober 2000 spurdu vit Fíggjarmálaráðið, hvørja heimild Fíggjarmálaráðið hevði at seta tílíkar treytir. Fíggjarmálaráðið svaraði í januar 2001, at talan var bert um siðvenju. Treytirnar stóðu ikki í lóg ella kunngerð, og eingin lógarheimild var fyri at seta tílíkar treytir.

1. februar 2001 samtykti Løgtingið at strika § 9 í skrásetingarlógini. Eftir broytingina rindar Hjálpartólamiðstøðin skrásetingargjaldið, er talan um avlamisbilar.

Bústaðarbroytingar til eldri og brekað

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini veitir Hjálpartólamiðstøðin/Almannastovan stuðul at broyta bústað, tá ið broytingar verða hildnar at vera neyðugar fyri, at eldri ella brekað kunnu verða verandi í heiminum. Hesin stuðul verður veittur heilt ella lutvíst við afturgjaldsskyldu.

§ 18, stk. 5, í forsorgarlógini, sum fevnir um stuðul til hjálpartól, fekk sína orðing við lógarbroytingini í Lóg nr. 718 frá 18. november 1987 um "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser" við gildi 1. januar 1988.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:

"Forslaget til § 18, stk. 5, svarer til bestemmelserne om hjælpemidler i den færøske invalidepensionslovs kapitel VII. Formuleringerne i de nuværende bestemmelser i invalidepensionsloven er ikke tidssvarende, hvorfor der er behov for at foretage en sproglig modernisering, således at der anvendes samme formuleringer, som i den danske bistandslov.

Bestemmelserne om ydelser efter forslagets § 18 svarer således til den danske bistandslov alene med de ændringer, der følger af anderledes administrative forhold på Færøerne."

Fyri 1. juli 1992 var eingin heimild í føroysku almannalóggávuni at veita afturgjaldsskyldugar veitingar til bústaðarbroytingar. Heimildin varð fingin til vega við lóg nr. 393 frá 20. mai 1992 "Lov om ændringer af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser". Talan var um broyting í forsorgar-, barnaforsorgar-, fólkapensjóns- og avlamispensjónslógini. Við kunngerð nr. 43 frá 24. mars 1993 "um afturgjaldsskyldu viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað" vórðu neyvari reglur settar við heimild í somu lóg.

Tað tykist sum lógarbroytingin smb. lóg nr. 393/1992 og kunngerðin nr. 43/1993 eru einastu heimildir at rinda stuðul við afturgjaldsskyldu til bústaðarbroytingar.

Hesar reglur hava einki við § 18, stk. 5, í forsorgarlógini at gera. Helst hevur ongantíð verið ætlanin, at § 18, stk. 5, skuldi fevna um stuðul til bústaðarbroytingar, eisini vísandi til viðmerkingarnar til "lov nr. 718/1987", tá ið § 18, stk. 5, fekk ta orðing, sum hon nú hevur.

Landsstýrismaðurin vísti í september 2002 á, at arbeitt varð við nýggjari lóggávu, har heimildarspurningurin fór at verða viðgjørdur. Eftir svarinum at døma hevur landsstýrismaðurin ongar ætlanir um at greiða heimildarspurningarnar í verandi lóg.

Bústaðarbroytingar til pensjónistar

Sambært § 12, stk. 2, í almannapensjónslógini *"kann avgerð takast um, at persónlig viðbót eftir stk. 1 viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað, skal gjaldast aftur. Afturgjaldskravið kann avskrivast, tá tað innan fyri eitt rímiligt áramál aftaná, at kravið er sett fram, verður mett, at eingin fíggjarligur møguleiki er fyri at fremja kravið."*

Landsstýrismaðurin hevur ásett í § 7 í kunngerð nr. 8 frá 11. februar 2000 "um persónliga viðbót", at tá ið persónlig viðbót verður veitt til útreiðslur til egnan bústað, verður hon treytað av, at ein afturgjaldsskipan verður gjørd. Vit hava vístá viðmerkingarnar til § 12 í lógaruppskotinum um almannapensjónslógina:

"Eftirsum persónlig viðbót einans verður veitt, tá viðurskiftini hjá pensjónistinum eru sera trupul, er sum høvuðsregla ikki grund til at rokna við, at pensjónisturin seinni verður førur fyri at gjalda aftur tað, ið veitt er. Tí verður tað einans í ávísum serligum førum, at afturgjald kann verða kravt."

Eingin grein í almannapensjónslógini heimilar landsstýrismanninum at áseta, at persónlig viðbót til útreiðslur til egnan bústað, skal vera treytað av, at ein afturgjaldsskipan verður gjørd. Sambært § 12, stk. 2, kann avgerð verða tikin um, at ein afturgjaldsskipan verður gjørd. T.v.s. at ein ítøkilig meting skal verða gjørd í hvørjum einstøkum máli. Í hesum førinum ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð fastar reglur fyri veitingum, ið sambært lógini skulu verða veittar eftir einari ítøkiligari meting.

Vit halda ikki, at landsstýrismaðurin við kunngerð kann avmarka lógarásett rættindini hjá pensjónistum uttan beinleiðis við heimild í galdandi lóg. Kunngerðin er heldur ikki í tráð við viðmerkingarnar til lógina. Í viðmerkingunum stendur, at tað einans er í "ávísum serligum førum" at afturgjald kann verða kravt.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at hann er ikki samdur við okkum, og ivast ikki í, at heimildin er til staðar. Landsgrannskoðanin er ikki nøgd við svarið, tí landsstýrismaðurin grundgevur ikki fyri sínum sjónarmiðum, men vísir einans til § 12, stk. 2, í almannapensjónslógini.

Sambært § 7, stk. 3, í K. nr. 8/2000 verða treytirnar fyri afturgjaldi settar í aðrari kunngerð. Hesir treytir eru ikki ásettar.

Bústaðarbroytingar hjá foreldrum at brekaðum børnum

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini hevur Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin síðani 1988 veitt rentufrí lán til bústaðarbroytingar hjá foreldrum at brekaðum børnum. Ein treyt er, at lánið verður tinglýst í ognini hjá foreldrunum, og at lánið er avdráttarfrítt til barnið er 15 ár. Tá verður støða tikin til afturgjaldsskipan, um barnið fær pensjón alla aðra inntøku.

Tá ið barnið hevur fylt 15 ár, og hevur fingið avlamispensjón, hevur Almannastovan í fleiri førum hvønn mánað hildið aftur 20% av pensjónini, sum afturgjald av láninum til bústaðarbroytingina hjá foreldrunum. Í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í februar 2001 hildu vit tað vera ivasamt, um henda mannagongd var lóglig.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at hann eisini ivaðist í, um mannagongdin var lóglig, og at hann fór at taka spurningin upp við Almannastovuna.

Niðurstøða

Í februar 2001 sendu vit landsstýrismanninum frágreiðing um grannskoðan á Hjálpartólamiðstøðini. Saman við frágreiðingini sendu vit eitt notat, har vit neyvari greinaðu út ivaspurningarnar um heimildina at veita stuðul til bústaðarbroytingar og avlamisbilar treytað av afturgjaldsskyldu. Vit hava síðani fleiri ferðir mint landsstýrismannin á skriv okkara. Landsstýrismaðurin svaraði í september 2002.

Hóast nærum 2 ár eru liðin, hevur landsstýrismaðurin ikki tikið stig til at greiða heimildarspurningarnar í verandi lóggávu, t.d.:

- er heimild at veita stuðul við afturgjaldsskyldu til avlamisbilar,
- koma bústaðarbroytingar undir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini,
- kann landsstýrismaðurin í § 7 í K. nr. 8/2000 "um persónliga viðbót" áseta, at tá ið persónlig viðbót verður veitt til útreiðslur til egnan bústað, verður hon treytað av, at ein afturgjaldsskipan verður gjørd,
- ásett reglur sambært § 18, stk. 5, í forsorgarlógini um egingjald, og nær stuðul til hjálpartól kann verða veittur sum lán, og
- ásett reglur sambært § 12, stk. 2, í pensjónslógini um treytirnar fyri at rinda aftur lán til útreiðslur til egnan bústað.

8.15 Heimarøktin (GL 2002/2 07 4–12)

Í frágreiðing í mars 2001 umrøddu vit grannskoðanina av Heimarøktini og Eldrarøktini í Sandoynni. Á fleiri økjum mæltu vit til at bøta um viðurskiftini, og í seinastu frágreiðing í februar 2002 umrøddu vit, í hvønn mun viðurskiftini vóru komin í rættlag. Niðanfyri verður greitt frá, hvat er hent í málinum.

Vantandi reglur fyri mannagongdum á roknskaparøkinum

Eingin reglugerð finst fyri, hvussu roknskaparhaldið skal vera fyriskipað. Reglugerðin skal vera samsvarandi rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001, og skuldi verða góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001. Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at Heimarøktin hevði sent uppskot til roknskaparreglugerð at góðkenna.

Í november 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Trivnaðarmálaráðið hevði gjøgnumgingið uppskotið frá Heimarøktini, men helt, at ávísar rættingar skuldu verða gjørdar. Heimarøktin hevði í september 2002 sett fyribils roknskaparreglugerðina í verk.

Landsstýrismaðurin ásannar, at hetta síðsta árið hevur arbeiðsbyrðan í Trivnaðarmálaráðnum verið ógvuliga stór, og Ráðið hevur valt at raðfesta aðrar uppgávur framum. Tað er tí mest sannlíkt, at reglugerðin ikki verður endalig góðkend fyrr enn umleið 1. januar 2003.

Roknskaparhald, -eftirlit og -góðkenning

Vit hava víst á, at Heimarøktin, Heilsusystratænastan og Eldrarøktin í Sandoynni eru skipað í serskildar roknskapareindir, at eingin stovnur váttaði mánaðarroknskapin mótvegis stjóranum, og at stjórin váttaði ikki mánaðarroknskapin mótvegis hægri myndugleika, sum ásett er í roknskaparkunngerðini. Í november 2001 helt stjórin framvegis ikki eftirlits- og góðkenningarviðurskiftini vera nøktandi. Hann boðaði frá, at ein skipað eftirlits- og góðkenningarmannagongd á roknskaparøkinum fór at verða sett í verk, tá ið roknskaparreglugerðin varð endaliga góðkend í Trivnaðarmálaráðnum.

Landsstýrismaðurin vísti í november 2002 á, at Heimarøktin í september 2002 hevði sett fyribils roknskaparreglugerðina í verk.

Roknskapargóðkenning

Í starvslýsingini 15. apríl 1996 fyri økisleiðarar stendur m.a., at økisleiðarin skal:

- hava eftirlit við tímaroknskapinum hjá gjaldandi brúkarum og lønarseðlunum hjá starvsfólkunum,
- hava eftirlit við goymslum,
- gera yvirlit, roknskap og hagtøl til Meginskrivstovuna og Almannastovuna.

Vit hava víst á, at roknskapirnir verða ikki góðkendir, og at ásetingarnar í starvslýsingini um roknskaparhaldið eru ikki nóg neyvar. Í frágreiðingini í mars 2001 mæltu vit til at seta greiðari reglur. Í november 2001 kunnaði stjórin um, at einki var gjørt, men hann vísti til ásetingarnar í komandi roknskaparreglugerð. Í februar 2002 helt landsstýrismaðurin, at trupulleikarnir fóru at verða loystir, tá ið roknskaparreglugerðin varð góðkend og sett í verk.

Landsstýrismaðurin vísti í november 2002 á, at Heimarøktin í september 2002 hevði sett fyribils roknskaparreglugerðina í verk.

Brúkaragjald

Vit hava síðani 1994 í grannskoðanarfrágreiðingum víst á, at mannagongdin í sambandi við brúkaragjøld var óneyðuga tung og arbeiðskrevjandi. Hon hevði við sær dupultinntøppingar og nógvar vandar fyri feilum av manuellum samanteljingum, útrokningum, yvirføringum av tølum o.ø.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 1995-1998 (Lm. nr. 53/1999), sum varð samtykt 3. mai 2000, átalaði Løgtingið, at einki var gjørt fyri at bøta um hesi viðurskifti.

Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at hann helt, at viðurskiftini máttu koma uppá pláss so skjótt sum gjørligt. Kannast mátti, um umsitingin av brúkaragjøldum kundi verða gjørd í nýggju forskipanini til lønarskipanina, áðrenn endalig avgerð kundi verða tikin um, hvat skuldi verða gjørt við trupulleikan. Landsstýrismaðurin hevði fingið at vita, at skipanin fór at verða tikin í nýtslu einaferð í 2002, og hann vildi tá venda aftur til málið.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at arbeitt verður við at fáa forskipanina setta í verk. Ilt er at meta um, nær arbeiðið verður liðugt. Landsstýrismaðurin heldur tað ikki vera ráðiligt at fara undir spurningin um brúkaragjald, fyrr enn forskipanin verður liðug, og hann vil tá venda aftur til spurningin.

Ársfrágreiðing

Sambært § 5 í rundskrivi 1. september 1997 um Heimarøktina skal leiðarin skriva eina ársfrágreiðing. Í november 2000 boðaði stjórin frá, at ársfrágreiðingin fyri fíggjarárið 2000 væntandi fór at koma út eftir árslok 2000. Eingin frágreiðing varð tó gjørd, og í november 2001 kunnaði stjórin um, at ætlanin var at gera eina ársfrágreiðing fyri 2001.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 boðað frá, at heldur eingin ársfrágreiðing verður gjørd fyri 2001. Orka er ikki í løtuni at gera slíkar frágreiðingar, og nógvar – meira týðandi – uppgávur liggja á láni, sum verða raðfestar framum ársfrágreiðingina.

Arbeiðsreglugerð

Sambært § 4 rundskrivinum verður álagt leiðaranum at skipa fyri arbeiðsreglugerðum, ið lýsa, hvussu dagliga arbeiðið í Heimarøktini verður lagt til rættis og útint. Í november 2000 kunnaði stjórin um, at arbeiðið er tengt at, nær ein fakligur leiðari verður settur. Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at ein fakligur leiðari fór at verða settur á vári 2002, og spurningurin fór tá at verða tikin upp.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at ein fakligur leiðari er settur í starv í september 2002. Arbeiðið við arbeiðsreglugerðum er farið í gongd, og verður eftir ætlan liðugt um einar 6 mánaðir.

Stevnumið fyri Heimarøktina

Sambært § 1, stk. 2, í rundskrivinum *"ásetir landsstýrismaðurin stevnumiðini fyri Heimarøktina."* Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, *"at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ongar ætlanir í hesum sambandi í løtuni."* Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at ein fakligur leiðari fór at verða settur á vári 2002, og spurningurin fór tá at verða tikin upp.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 kunnað um, at Heimarøktin eingi stevnumið hevur fingið stungið út í kortið. Kortini arbeiðir Heimarøktin eftir eini siðvenju, ið er bygd upp eftir fleiri árum. Sambært landsstýrismanninum fara Almannamálaráðið og Heimarøktin í næstum at umrøða spurningin.

8.16 Serforsorgin (GL 2002/2 07 4–11)

Vit hava í 2002 vitjað verkstaðir, bústovnar og sambýlir innan Serforsorgini, og niðanfyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Kunngerðir/rundskriv

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at í skrivi frá Almanna- og Heilsumálaráðnum í mai 1998 til Almannastovuna helt Ráðið, at lógirnar, kunngerðirnar og reglugerðirnar viðvíkjandi húsfólki í sambýlum vóru ógreiðar. Ætlanin var at gera skipanina greiðari fyri allar partar, ikki minst fyri starvsfólkini, og at seta neyvari reglur fyri, hvussu peningurin hjá búfólkunum skuldi verða umsitin.

Vit vístu eisini á, at Serforsorgin 1. juli 1998 fyrisitingarliga varð flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið, og at síðani 1. apríl 1999 hevði felags leiðsla verið fyri Serforsorgina & Heimarøktina. Í kunngerðum og rundskrivum verður tó framvegis víst til Almannastovuna sum eftirlitsmyndugleika. Sostatt eru fleiri kunngerðir/rundskriv at kalla meira villleiðandi enn vegleiðandi.

Í august 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanir vóru um at gera kunngerðir fyri bústovnar og sambýlir um heystið 2001. Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at arbeitt varð við at rætta kunngerðir og rundskriv, og at Almanna- og Heilsumálaráðið var í

ferð við at leggja seinastu hond á kunngerðina um vardar verkstaðir og aðrar fyriskipanir, sum eftir ætlan fór at verða liðug heilt skjótt.

Vit hava í juni 2002 spurt, hvat er hent í málinum, og nær viðurskiftini koma í rættlag. Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2003 um, at arbeiðið vantandi fór at verða liðugt á vári 2003.

Stuðul frá Happadráttargrunninum

Vit hava fleiri ferðir í grannskoðanarfrágreiðingum vístá, at tørvur er á at seta greiðar og einsháttaðar reglur fyri stuðli úr Happadráttargrunninum. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at umhugsað verður at taka grunnin í síni heild upp til viðgerðar.

Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2003 um, at tað hevur ikki verið orka til at gera nakað við hetta málið. Hann vísti á, at avgerð skal verða tikin um framtíðar skipanina av Happadráttargrunninum, sum landsstýrismaðurin í lógarmálum varar av.

Skráseting og eftirlit

Á teimum stovnum vit hava vitjað, verða avrit tikin av skjølum, ið verða send Serforsorgini at bóka. Í flestu førum verður kannað, um bókingarnar samsvara við undirliggjandi skjøl. Tó verður bert í fáum førum váttað við átekning á mánaðarroknskapin. Vit hava mælt til, at tað verður gjørt.

Stovnarnir nýta lønarskipanina á Serforsorgini. Flestu teirra kanna, um samsvar er millum lønarútgjaldingarnar og bókingarnar í mánaðarroknskapinum. Tó verður bert í fáum førum váttað við átekning á mánaðarroknskapin. Vit hava mælt til, at tað verður gjørt.

Vit eru kunnað um, at stovnsleiðararnir vátta mánaðarroknskapirnar mótvegis Serforsorgini á einum standardiseraðum góðkenningarskjali.

Vantandi reglugerð fyri mannagongdum á roknskaparøkinum

Stovnarnir hava onga reglugerð fyri, hvussu roknskaparhaldið skal vera fyriskipað. Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 skuldi ein roknskaparreglugerð verið gjørd og góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001. Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at Serforsorgin hevði sent uppskot til roknskaparreglugerð at góðkenna.

Vit hava í juni 2002 spurt, hvat eftirsíðan er hent í málinum, og nær viðurskiftini fara at koma í rættlag.

Í januar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Trivnaðarmálaráðið hevði gjøgnumgingið uppskotið frá Serforsorgini. Trivnaðarmálaráðið helt, at ávísar rættingar áttu at verið gjørdar. Serforsorgin hevur sett fyribils reglugerðina í verk í september 2002.

Hetta síðsta árið hevur arbeiðsbyrðan í Trivnaðarmálaráðnum verið ógvuliga stór, og Ráðið hevur valt at raðfesta aðrar uppgávur framum. Tað er tí mest sannlíkt, at reglugerðin ikki fer at verða endalig góðkend fyrr enn til várs sigur landsstýrismaðurin í februar 2003.

Kassakontur

Á fleiri stovnum vóru smáir kassamunir, og kassarnir vórðu ikki regluliga gjørdir upp. Serforsorgin hevur í desember 2002 kunnað um, at skriv er sent øllum stovnunum um at gera kassarnar upp 31. desember 2002. Í framtíðini skulu kassarnir verða gjørdir upp eftir tørvi og minst einaferð um ársfjórðingin.

Yvirlit yvir ognir

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovnunum vera eitt yvirlit yvir innbúgv og útbúnað. 4 av teimum stovnum, ið vit vitjaðu, høvdu einki yvirlit. Hinir stovnarnir høvdu

yvirlit, sum tó ikki vóru dagførd. Vit hava mælt til at fáa viðurskiftini í rættlag, og hava víst á pkt. 9 í roknskaparrundskrivinum, har ásett er, hvørjar upplýsingar ognaryvirlit í minsta lagi skulu fevna um.

Vørugoymslur

Í størri og minni mun hava verkstaðirnir vørugoymslur, men teir hava ikki yvirlit yvir vørugoymslumar, sum ásett er í § 19 í roknskaparkunngerðini. Á 3 verkstøðum hava vit mælt til, at yvirlit verða gjørd. Vit hava í hesum sambandi víst til pkt. 9 í roknskaparrundskrivinum, har neyvari er ásett um at fyrisita vørugoymslur.

Aðrar viðmerkingar

Vit hava fyrr í frágreiðingum víst á, at ikki allar peningastovnskontur vórðu skrásettar í bókhaldinum, og tí vístu fleiri stovnsroknskapir ikki eina fullfíggjaða mynd av virkseminum. Mælt varð til, at allar kontur skuldu verða skrásettar ella gjørdar upp. Enn eru ikki allar peningastovnskonturnar skrásettar í bókhaldinum.

Á einum verkstað vóru peningastovnskonta og kassapeningur blandað saman. Á einum øðrum verkstað vórðu ásetingarnar í rundskrivinum um umsiting av kassum ikki hildnar. Á einum verkstað hevði leiðarin eftir øllum at døma ikki skilt, hvussu kassauppgerðarskjalið skuldi verða nýtt. Vit mæltu honum til at seta seg í samband við Serforsorgina fyri at fáa leiðbeining.

Tryggingarfelagið Føroyar flutti í juni 1999 verkstaðnum Vón 300 t.kr. til nýggjar maskinur og onnur tól. Peningurin verður nýttur, so hvørt tól verða keypt. Vit hava fyrr víst á, at inn- og útgjøld verða ikki skrásett í kassafrágreiðing ella í bókhaldinum, og tí vísir roknskapurin ikki eina rætta mynd av virkseminum.

Á serstovnadeildini kannaðu vit ferðaforskotskontuna, sum ultimo mai 2002 var kr. 16.000. Tvey ferðaforskot frá januar 2002 vóru ikki endaliga gjørd upp.

8.17 Stuðulsfólkaøkið (GL 1998/2 07 4-7)

Lønarumsiting og roknskaparhald

Í sambandi við bygnaðarbroytingarnar innan almannaverkið yvirtók Almannamálaráðið 1. juli 1998 umsitingina av lønum til stuðulsfólk hjá børnum og vaksnum frá Almannastovuni. Í frágreiðing okkara í mars 2001 til løgtingsgrannskoðararnar vístu vit á nógvar veikleikar/trupulleikar í sambandi við umsitingina av lønunum. Hóast lønarútreiðslurnar á stuðulsfólkaøkinum frá 1995 til 2000 vóru nærum trífaldaðar til uml. 20 mió.kr., var einki eftirlit við lønarútgjaldingunum, fíggjarstøðan varð ikki stemmað av, mánaðarroknskapurin varð ikki váttaður mótvegis hægri myndugleika, og eisini var ógreitt, hvørt Almannastovan, sum hevði ræðisrættin, ella Almannamálaráðið hevði ábyrgd av hesum viðurskiftum.

Í september 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeitt varð við at bøta um roknskaparhaldið og lønarumsitingina á stuðulsfólkaøkinum.

Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2003 um, at lønir verða ikki goldnar út uttan setanarbræv ella aðra váttan frá Almannastovuni. Stemmað verður nú av hvønn mánað, at samsvar er millum útgjald og bókingar, og mánaðarroknskapurin verður nú váttaður av Almannastovuni mótvegis Almannamálaráðnum.

Umsitingin av løn til stuðulsfólk hjá vaksnum er 1. januar 2003 flutt úr Almannamálaráðnum til eina Stuðulsfólkaskipan, sum er partur av Serforsorgini/Heimarøktini. Sambært landsstýrismanninum er endamálið við broytingunum at samskipa raksturin av stuðulsfólkum og m.a. bøta um fíggjarstýringina.

Okkum kunnugt, er umsitingin av løn til stuðulsfólk hjá børnum og ungum frá 1. januar 2003 flutt úr Almannamálaráðnum og aftur til Almannastovuna.

Heimildar-/lógargrundarlagið undir stuðulsfólkaøkinum

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit ivasomu heimildina í § 17 at løna stuðulsfólki. Longu í 1993 vístu vit á, at soleiðis sum § 17 í forsorgarlógini var orðað, varð praksis hjá Almannastovuni at løna stuðulsfólki ikki hildin at vera í tráð við lógina.

Í 1994 vístu vit fyrstu ferð á ivasomu heimildina, at veita avlamispensjónistum samdøgursansing og at løna stuðulsfólki eftir reglunum um persónligt ískoyti í almannapensjónslógini.

Í skrivi frá Almannastovuni í desember 1994 varð m.a. fört fram, at heimildin átti at ligið aðrastaðni enn undir persónligum ískoyti, og víst varð á, at ein sjálvstøðug lógargrein átti at verið gjørd, sum tænti endamálinum.

Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin 16. apríl 1999 legði fyri tingið til aðalorðaskiftis, helt landsstýrismaðurin, at útreiðslan til at løna stuðulsfólk hjá børnum sambært § 17 í forsorgarlógini, og útreiðslan til at løna stuðulsfólk hjá vaksnum, ið verður latin sum persónligt ískoyti til pensjónina, átti at ligið aðrastaðni, fyri ein part hjá serforsorgini, heimarøktini ella sum eykanormering til dagstovnar. Landsstýrismaðurin helt eisini, at tá ið tað ikki er møguligt at økja játtanina til stovnsendamál, so sæst tørvurin aftur í nógv øktu lønarútreiðslunum á lógarbundnum veitingum til einstaklingar.

Í mars 1999 legði landsstýrismaðurin fyri tingið uppskot um nýggja pensjónslóg. Hon var við ávísum broytingum samtykt 23. apríl 1999. Ásetingin um persónligt ískoyti/persónliga viðbót var ikki broytt grundleggjandi í nýggju pensjónslógini, og eingin tilskilað lógargrein heimilaði at rinda fyri stuðulsfólk til pensjónistar.

Landsstýrismálanevndin tók í august 2001 ivamálini viðvíkjandi stuðulsfólkaøkinum til viðgerðar, og bað m.a. Landsgrannskoðanina um eina frágreiðing.

Í frágreiðing til Landsstýrismálanevndina í november 2001 vísti vit m.a. á, at eftir okkara tykki er talan um eitt mál, har Almannastovan og Almannamálaráðið í fleiri ár hava vitað, at umsitingin og lógargrundarlagið vóru ikki nøktandi. Í fráboðan í desember 2001 um endaligu niðurstøðuna tekur Landsstýrismálanevndin undir við niðurstøðunum hjá Landsgrannskoðanini.

11. desember 2001 samtykti Løgtingið at broyta almannapensjónslógina, so heimilað verður Almannastovuni at veita persónligan stuðul í heiminum til fyritíðarpensjónistar við serligum tørvi. Heimildin var tíðaravmarkað til 1. desember 2002.

Løgtingið samtykti 11. desember 2002 at broyta forsorgarlógina, soleiðis at ein stuðulsfólkaskipan fyri vaksin skuldi verða sett á stovn 1. januar 2003. Endamálið við stuðulsfólkaskipanini er at stuðla vaksnum heimabúgvandi, 18 til 66 ár, við serligum tørvi, sum eru rørslutarnað ella hava avmarkaðan sálarligan førleika, so at tey hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív.

27. november 2002 samtykti Løgtingið at leingja heimildina, at rinda fyri stuðulsfólk smb. almannapensjónslógina, til 1. august 2003 fyri at tryggja, at heimild var fyri verandi stuðulsfólkaskipan í uppsagnartíðini hjá stuðulsfólkunum. Uppsagnartíðin er í mesta lagi 6 mánaðir.

6. februar 2003 samtykti Løgtingið at broyta forsorgarlógina, so Almannastovuni verður heimilað at játta stuðulsfólk til heimabúgvandi børn við serligum tørvi vegna sálarligt ella likamligt brek. Heimildin er tíðaravmarkað frá 1. januar 2003 til 31. desember 2004. Sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið er ætlanin í hesum tíðarskeiði at kanna neyvari, m.a. hvar heimildin skal vera í framtíðini, hvør stovnur skal taka sær av stuðulsfólkunum, viðurskiftini millum land og kommunu á dagstovnaøkinum og viðurskiftini millum almannaøkið og skúlaøkið, eftir at børnini eru farin í skúla.

8.18 Útreiðslur viðv. føroyingum á stovni í Danmark o.a. (GL 2002/2 07 4-11)

Niðanfyri verður tikið samanum grannskoðanina av útreiðslum í 2001 viðvíkjandi føroyingum á stovni í Danmark o.a. á kontu 8.21.6.01, Serforsorg:

undirkonta 21: Stovnsuppihald o.a í Danmark

undirkonta 22: Endurgjald av pensjón

undirkonta 23: Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi

undirkonta 24: Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk

Roknskaparviðurskifti

Donsku kommunurnar senda rokning til Serforsorgina fyri føroyingar, sum eru á stovnsuppihaldi o.a. í Danmark. Umsitingarleiðarin váttar rokningarnar, og stjórin ávísir tær. Serforsorgin bókar sjálv í Fíggjarstýringarskipan landsins. Kannað verður ikki eftir, um bókingarnar samsvara við undirliggjandi skjøl. Vit hava mælt til at kanna bókingarnar og at vátta við átekning á mánaðarroknskapin.

Føroyingar á stovnsuppihaldi o.a. í Danmark (16,8 mió. kr.)

Útreiðslurnar til føroyingar á stovnsuppihaldi í Danmark o.a. verða hildnar sambært lóg nr. 719 frá 18. november 1987 "om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne".

Vísandi til kunngerð nr. 888 frá 11. desember 1986 frá "Socialministeren" *"om pligt til at modtage færinger og grønlændere på bistandslovens institutioner under amtskommunerne for personer med vidtgående fysiske eller psykiske handicap"* kann Almannastovan senda fólk, við víttfevnandi likamligum ella sálarligum brekum, á stovnsuppihald í Danmark.

Við bygnaðarbroytingunum innan almannaverkið varð Serforsorgin 1. juli 1998 fyrisitingarliga flutt frá Almannastovuni. Í kunngerðum og rundskrivum verður tó framvegis víst til Almannastovuna sum eftirlitsmyndugleika. Vit hava í mai 2002 spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir hann hevur um at taka upp samband við "Socialministeren" fyri at broyta B. 888/1986.

Landsstýrismaðurin svaraði í januar 2003, at hann, so skjótt sum til ber, fer at heita á "Socialministeriet" um at broyta kunngerðina.

Sambært skjali A í lóg nr. 717 frá 18. november 1987 "om tilskud til Færøernes Hjemmestyre på det sociale område" rindar landskassin útreiðslurnar frá 1. januar 1988.

29 føroyingar eru á stovni í Danmark, mest eldri fólk, sum vórðu send til Danmarkar, tá ið tey vóru børn/ung. Nøkur eru tó í áttati- og nítiárunum send á stovn í Danmark sum vaksin. Miðalkostnaðurin fyri stovnsuppihald var í 2001 uml. 579 t.kr. um árið. Lægsta gjaldið fyri eitt stovnspláss var uml. 100 t.kr. og hægsta gjaldið uml. 2,6 mió. kr.

Endurgjald av pensjón til føroyingar í Danmark (1 mió.kr.)

Sambært viðmerkingunum til lóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sociale ydelser på Færøerne" endurrindar landskassin donskum kommunum pensjónsútreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark. Vit halda ikki viðmerkingar til eitt lógaruppskot vera haldgott grundarlag at játta pening á løgtingsfíggjarlógini.

Landsstýrismaðurin hevur í januar 2003 svarað, at hann er samdur við okkum. Hann fer tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Í 2001 varð bert endurrindað fyri pensjónsútreiðslur til 10 fólk, hóast talan var um 29 fólk, sum eru á stovni í Danmark.

Sambært § 54 í lógarkunngerð nr. 615 frá 26. juni 2001 "Bekendtgørelse af lov om social pension":

"fastsætter Socialministeren efter aftale med Færøernes landsstyre regler om afholdelse af udgifter til pension efter denne lov til personer, der på foranledning af færøske sociale myndigheder får ophold i Danmark, og om afholdelse af udgifter til pension til personer, der fra Danmark får ophold på Færøerne formidlet af danske sociale myndigheder."

Reglurnar eru ikki ásettar. Vit hava í mai 2002 spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir hann hevur um at taka upp samband við "Socialministeren" fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Í januar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at samráðingar vóru byrjaðar millum "Socialministeriet" og Almannamálaráðið, í sambandi við at semja skuldi finnast um, hvussu viðurskiftini skuldu verða skipað, tá ið føroyskir ella danskir pensjónistar flyta millum ríkispartarnar.

Ferðaútreiðslur til viðskiftafólk og avvarðandi (71 t.kr.)

Sambært skjali A í lóg nr. 717 frá 18. november 1987 "om tilskud til Færøernes Hjemmestyre på det sociale område" rindar landskassin frá 1. januar 1988 ferðaútreiðslur til føroyingar á stovni í Danmark og avvarðandi teirra. 11 fólk fingu í 2001 endurrindað ferðaútreiðslur til og úr Danmark. Ongar reglur eru fyri, hvussu játtanin skal verða umsitin, t.d. fyri skjalprógvi o.ø., ella hvussu oftani um árið viðskiftafólkini kunnu ferðast. Vit hava í mai 2002 mælt Serforsorgini til at seta neyvari reglur.

Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk (264 t.kr.)

Sambært skjali A í lóg nr. 717 frá 18. november 1987 "om tilskud til Færøernes Hjemmestyre på det sociale område" rindar landskassin frá 1. januar 1988 útreiðslur viðvíkjandi "klienter under ekstern forsorg".

Talan er um viðbót til foreldur, ið heima forsyrgja barni/børnum við víðfevndum likamligum ella sálarligum breki. Viðbótin verður veitt fyri eykaútreiðslur og stríð, ið stendst av brekinum. Almannastovan ger av, hvør skal hava viðbót, og gevur Serforsorgini boð um at rinda upphæddina. Í 2001 var viðbótin kr. 2.000 fyri hvørt barnið. Rindað varð fyri 11 børn.

Í fylgiskjølum til fíggjarløgtingslógaruppskotið fyri 1992 vísti Almannastovan m.a. á, "at henda játtan er ein leivd frá tíðini í donsku umsitingini, og finst hon ikki aðrastaðni." Vit hava vístá, at eingin heimild er í almannalóggávuni at rinda hesar útreiðslur.

Í svari í januar 2003 segði landsstýrismaðurin seg vera samdan við okkum. Hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

8.19 Ellis- og røktarheim o.a. (GL 2002/2 07 4-13)

Ein stórur partur av útreiðslunum innan almannamál fer til rakstur av sjálvsognarstovnum, sum hava sínar egnu roknskapir:

Játtanar og roknskapartøl (1.000 kr):

	Kontu nr. á fíggjarlóg	Stovnar	Játtanarslag	Játtan 2001	Roknskapur 2001
1	8.21.3.07./20	Føroya Barnaheim	Rakstrarjáttan	6.170	4.497
2	8.21.6.04./20	Ellis- og røktarheim	Rakstrarjáttan	97.017	97.417
3	8.21.6.04./21	Tórshavnar Privata Vistarheim	Rakstrarjáttan	5.104	4.129
4	8.21.6.01./20	Ymiskar serforsorgarstovnar	Rakstrarjáttan	9.891	9.426
	Tilsamans			**118.182**	**115.469**

Vit hava samanborið roknskapartølini í landsroknskapinum við eksternu roknskapirnar.

Norðoya Ellis- og Vistarheim og Umlættingarheimið "Dáin"

Vit hava heft okkum við, at minninýtslan ikki er skrásett í roknskapinum sum ein (stuttfreistað) skuld, men sum eitt "yvirskot." Tað gevur ikki rætta mynd, hvørki av rakstrarroknskapinum ella fíggjarstøðuni.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 boðað frá, at hann hevur kunnað grannskoðaravirkið, Norðoya Ellis- og Vistarheim og Umlættingarheimið um hesi viðurskifti.

Tórshavnar Privata Vistarheim

Byggiætlan

Heimið keypti í 2000 eitt grundøki (5778 m2) í Livulág í Tórshavn fyri kr. 1.351.450. Sambært grannskoðanarprotokollini fyri 2001 er ætlanin *"at byggja nýtt vistarheim. Keypið er fíggjað við kontantgjaldi kr. 551.450 av uppspardum peningi og lántøku í Føroya Sparikassa kr. 800.000. Lánið skal gjaldast aftur eftir 15 árum, rentan er 6,5% p.a. Rentan verður útreiðsluførd undir eginpeninginum."*

Spurdur, hevur landsstýrismaðurin í november 2002 kunnað um, at Trivnaðarmálaráðið ongan leiklut hevur í byggiætlanini. Trivnaðarmálaráðið boðaði í 2000 Vistarheiminum frá, at peningur er ikki tøkur til verkætlanina innanfyri fíggjarkarmin, landsstýrismaðurin hevur at ráða yvir.

Gjaldføri

Endaliga avrokningin av rakstrarstudninginum fyri 2001 vísti eina minninýtslu kr. 945.215, sum Vistarheimið sostatt skal rinda aftur, men við árslok 2001 var peningur ikki tøkur. Øll tey seinnu árini er ein partur av rakstrarstudninginum nýttur til at afturrinda ov nógv goldnan rakstrarstudning frá árinum fyri. Sostatt skumpar Vistarheimið eitt likviditetshall framman fyri sær.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 boðað frá, at hann hevur heitt á stjóran í Heimarøktini og Serforsorgini um at finna út av, hvat atvoldin er.

Sambýlið "Eysturstræti 4"

Sambýlið heldur til í einum bygningi hjá felagnum Sinnisbata. Í seinastu frágreiðing umrøddu vit, at eingin leigusáttmáli var gjørdur, og at bygningur og lán vóru tikin við í roknskapin fyri 2000 hjá sambýlinum.

Landsstýrismaðurin kunnaði í apríl 2001 um, at hann hevði góðtikið, at rentur og avdráttir vórðu goldnar av rakstrarjáttanini í 2000. Grundin til avgerðina var ætlanin hjá Sinnisbata og Íbúðagrunninum at seta á stovn sjálvsognarstovn, ið skuldi eiga og reka ognirnar á Sólteigi 11 og í Eysturstræti 4.

Sambært grannskoðanarprotokollini fyri 2001 er bygningurin í 2001 skeytaður til nýggja Sjálvsognarstovnin "Sólstræti". Tað hevur við sær, at rentur og avdráttir av lánum, sum hava verið útreiðsluførd í roknskapinum, í framtíðini fella burtur, tí sambýlið kemur at leiga frá Sjálvsognarstovninum "Sólstræti".

8.20 Blákrossheimið (GL 1996/2 08 4-1)

Í frágreiðing okkara í mars 2000 settu við landsstýrismanninum fleiri spurningar, og mæltu til at fáa viðurskifti á fleiri økjum í rættlag.

Niðanfyri verður greitt frá, hvat er hent í málinum.

Játtanarslag

Í frágreiðingini spurdu vit, hví játtanarslagið "rakstrarjáttan" ikki varð nýtt, tá ið landið fíggjaði allan raksturin og spurdu, hvørjar ætlanirnar vóru um, at almennu roknskapar-reglurnar sambært § 2, stk. 2, í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m.", eisini skuldu galda fyri stovnar sum Blákrossheimið.

Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, at í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2002 varð arbeitt við at fáa broytt játtanarslagið til rakstrarjáttan. Játtanin í 2002 varð tó ikki broytt.

Í løgtingsfíggjarlógini fyri 2003 er játtanin broytt til rakstrarjáttan.

Vantandi ásetan av reglum

Í frágreiðingini vístu vit á, at hóast tað í lógini var álagt landsstýrismanninum at seta reglur fyri, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið og tess virki, sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 89 frá 4. juni 1996 "um Sjúkrahúsverk Føroya", eru ongar reglur settar.

Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, "*at talan er um eitt mál, sum hevur verið ein politisk diskussión í nógv ár. Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiðir ikki í løtuni við hesum máli.*"

Tá ið tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at seta reglur, spurdu vit aftur í desember 2001 landsstýrismannin, nær reglurnar fóru at verða gjørdar. Landsstýrismaðurin svaraði í februar 2002, at tað fór at verða tikið upp, men at enn var støða ikki tikin til, um Blákross-heimið fór at verða ein av stovnunum.

Vit vístu síðani á, at í viðmerkingunum til § 2, stk. 3, í uppskoti til løgtingslóg um Sjúkra-húsverk Føroya (Lm. nr. 104/1995) stendur m.a.:

> *Teir stovnar, sum í framtíðini kunnu koma at hoyra undir sjúkrahúsverkið, eru t.d. stovnar fyri rúsevnismisnýtarar og stovnar til eftirbata (rekreatión). Landsstýrið fer at áseta nærri reglur fyri hesar stovnar.*

Landsstýrismaðurin boðaði í oktober 2002 frá, at hann ikki hevði havt møguleika at seta seg inn í júst hetta málið. Hann fór at taka málið sum heild upp, og fór sjálvandi at skipa fyri, at allar lógarásetingar á hansara øki verða fylgdar, og at vantandi reglugerðir fóru at verða gjørd-ar. Tó var ilt var siga, hvørt umsitingin megnaði at fáa arbeiðið gjørt í 2002.

8.21 Heilbrigdið (GL 1996/2 08 4-1)

Í frágreiðing okkara í mars 2000 settu vit landsstýrismanninum fleiri spurningar, og á fleiri økjum mæltu vit til at fáa ávís viðurskifti í rættlag.

Niðanfyri verður greitt frá, hvat er hent í málinum.

Viðmerkingar frá roknskapargrannskoðanini

Vit hava víst á, at sambært grannskoðanarprotokollini fyri 1998 var ivasamt, um ymiskir ágóðar og lønarforskot á 34.595 kr. høvdu fult virði, og at goldnar vóru uml. 70.000 kr. í koyripeningi fyri at koyra rusk, vaskiklæði, breyð og sjúklingar. Sambært grannskoðaraprotokollini varð "verulig frásøgn eftir reglum Toll- og Skattstovunnar ikki førd, men er upplýst, at kilometurpeningurin verður goldin út sb. avlesing av kilometurteljara á bilinum."

Landsstýrismaðurin kunnaði í august 2001 um, at hann hevði sent skriv til roknskapar-grannskoðaran, har biðið varð um eina frágreiðing. Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at hann hevði ikki fingið svar frá roknskapargrannskoðaranum.

Landsstýrismaðurin kunnaði í oktober 2002 um, at hann tíverri framvegis ikki hevði fingið svar frá roknskapargrannskoðaranum. Landsstýrismaðurin skuldi alt fyri eitt at taka málið upp, og vildi tryggja sær, at málið fór at verða loyst innan desember 2002.

Játtanarslag

Í frágreiðingini spurdu vit, hví játtanarslagið "rakstrarjáttan" ikki varð nýtt, tá ið landið fíggjaði allan raksturin og spurdu, hvørjar ætlanirnar vóru um, at almennu roknskaparreglurnar sambært § 2, stk. 2, í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m.", eisini skuldu galda fyri stovnar sum Heilbrigdið.

Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, at í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2002 varð arbeitt við at fáa broytt játtanarslagið til rakstrarjáttan. Játtanin í 2002 varð tó ikki broytt. Í løgtingsfíggjarlógini fyri 2003 er játtanin broytt til rakstrarjáttan.

Vantandi ásetan av reglum

Í frágreiðingini vístu vit á, at hóast tað í lógini var álagt landsstýrismanninum at seta reglur fyri, hvørjir serligir stovnar hoyrdu undir sjúkrahúsverkið og tess virki, sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 89 frá 4. juni 1996 "um Sjúkrahúsverk Føroya", eru ongar reglur settar.

Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, *"at talan er um eitt mál, sum hevur verið ein politisk diskussión í nógv ár. Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiðir ikki í løtuni við hesum máli."*

Tá ið tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at seta reglur, spurdu vit aftur í desember 2001 landsstýrismannin, nær reglurnar fóru at verða gjørdar. Landsstýrismaðurin svaraði í februar 2002, at tað fór at verða tikið upp, men at enn var støða ikki tikin til, um Heilbrigdið fór at verða ein av stovnunum.

Vit vístu síðani á, at í viðmerkingunum til § 2, stk. 3, í uppskoti til løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya (Lm. nr. 104/1995) stendur m.a.:

> *Teir stovnar, sum í framtíðini kunnu koma at hoyra undir sjúkrahúsverkið, eru t.d. stovnar fyri rúsevnismisnýtarar og stovnar til eftirbata (rekreatión). Landsstýrið fer at áseta nærri reglur fyri hesar stovnar.*

Landsstýrismaðurin boðaði í oktober 2002 frá, at hann ikki hevði havt møguleika at seta seg inn í júst hetta málið. Hann fór at taka málið sum heild upp, og fór sjálvandi at skipa fyri, at allar lógarásetingar á hansara øki verða fylgdar, og at vantandi reglugerðir fóru at verða gjørdar. Tó var ilt var siga, hvørt umsitingin megnaði at fáa arbeiðið gjørt í 2002.

8.22 Kommunulækna- og skúlalæknaskipanin (GL 2001/2 08 4-2)

Kommunulæknaskipanin

Lógargrundarlagið undir kommunulæknaskipanini er Ll. nr. 28 frá 23. apríl 1999, ið varð sett í gildi 1. juli 1999. Hóast tað í lógini smb. § 6, stk. 2, § 7, stk. 2, og § 8, stk. 2, er álagt landsstýrismanninum at seta reglur, eru ongar reglur gjørdar. Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, at eitt uppskot fór at verða tilevnað og sent til hoyringar, og at samráðingar skuldi verða partanna millum um uppskotið. Hvussu langa tíð tað fór at taka, visti landsstýrismaðurin ikki at siga.

Landsstýrismaðurin kunnaði í november 2002 um, at arbeitt verður við lógarbroytingum, og tí hevði hann gjørt av at bíða við at seta reglur.

Eftir svarinum at døma hevur landsstýrismaðurin ongar ætlanir um at seta reglur sambært verandi lóggávu.

Skúlalæknaskipanin

Skúlalæknaskipanin var partur av rammuavtaluni frá 1995 við donsku stjórnina, og sambært avtaluni hevði heimastýrið skyldu til at gera føroyska lóg á økinum í seinasta lagi í 1997. Sambært frágreiðing frá Trivnaðarmálaráðnum í 1999: "Lýsing og niðurstøða av málsøkinum hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum" var ætlanin at gera eina lóg, sum líktist

tí donsku lógini um "forebyggende foranstaltninger for børn og unge", og at leggja uppskot til løgtingslóg fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000. Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, at ætlanin var at leggja eitt lógaruppskot fyri tingið so skjótt sum til bar.

Lógaruppskot "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung" varð lagt fyri tingið 4. mars 2002. Uppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn Løgtingið fór heim undan løgtingsvalinum 30. apríl 2002. Landsstýrismaðurin hevur í november 2002 boðað frá, at hann hevur biðið umsitingina endurskoða lógaruppskotið.

Í Føroyum eru 11 læknadømi. Ein skúlalækni eigur at vera í hvørjum læknadømi. Kommunulæknarnir røkja summi av hesum størvum. Lønar- og setanarviðurskifti hava verið ásett samsvarandi galdandi skúlalæknasáttmála millum "Kommunernes Landsforening" og "Den alm. Danske Lægeforening".

Skúlalæknin fær mánaðarløn, eitt ávíst gjald fyri hvønn næming í 1. til 9. flokk í skúlalæknaøkinum, sum hann hevur umsjón við. Gjøldini eru hækkað samsvarandi broytingum í Danmark. Í 2000 fingu 6 kommunulæknar, ið høvdu umsjón við uml. 2.300 næmingum, útgjald úr skipanini. 6.900 næmingar vóru í 1.–9. flokki í skúlaárinum 2000/01. Sostatt er tað bert ein triðingur av næmingunum, sum í dag koma undir lógarásettu skúlalæknaskipanina.

Eingin føroyskur sáttmáli er gjørdur, og tí hevur Kommunulæknafelagið noktað limum sínum at taka á seg leys størv í skipanini. Teir fáu kommunulæknarnir, sum enn eru í skipanini, fáa tó loyvi at halda fram. Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, at ætlanin var at samráðast um lønar- og sáttmálaviðurskiftini, tá ið nýggja lógin varð samtykt. Landsstýrismaðurin kunnaði í november 2002 um, at henda støða framvegis er galdandi.

8.23 Sjúkrakassar (GL 2001/2 08 3-1)

Vantandi ásetan av reglum

Sambært § 22, stk. 2-4, í sjúkratryggingarlógini kann Landsstýrið seta neyvari reglur um ávís viðurskifti, og sambært § 25 er álagt Landsstýrinum at seta neyvari reglur viðvíkjandi eftirliti við rindan av limagjaldi. Vit spurdu landsstýrismannin í oktober 2001, hvørjar ætlanir vóru um at áseta hesar reglur.

Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at arbeitt verður við at gera nýggja lóggávu, og eftir ætlan fór støða at verða tikin til, um slíkar reglur skulu verða ásettar í nýggju lógini. Eftir svarinum at døma eru ongar ætlanir um at áseta reglur sambært verandi lóg.

Landsstýrismaðurin vísti í september 2002 á, at støðan var óbroytt, og at arbeitt varð við nýggjari lóggávu.

Ábyrgdar- og arbeiðsbýti

Í sjúkratryggingarlógini verður vístur til Almannastovuna sum eftirlitsmyndugleika, og Almannastovan er nevnd 36 ferðir í lógini í sambandi við eftirlit, góðkenning av høvuðsviðtøkum, roknskapar- og grannskoðaraviðurskiftum o.ø.

Vit sendu tí í august 2001 fyribilsfrágreiðing okkara til stjóran á Almannastovuni til viðmerkingar. Deildarleiðarin á roknskapardeildini vísti í svarskrivi á, at sjúkrakassaviðurskiftini vórðu flutt frá Almannastovuni til Trivnaðarmálaráðið fyri nøkrum árum síðani.

Sum vit duga at síggja, hevur almannastjórin havt ræðisrættin fram til fyrst í 1999, tá ið hann varð latin fíggjarstjóranum í Trivnaðarmálaráðnum. Vit spurdu í oktober 2001 landsstýrismannin, hvussu ábyrgdar- og arbeiðsbýtið var millum Almannastovuna og Trivnaðarmálaráðið, og hvønn leiklut Almannastovan/almannastjórin hevði. Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at Almannastovan hevði eftirlit við sjúkrakassunum og roknaði út studningin, meðan Trivnaðarmálaráðið hevði ræðisrættin. Vit hildu ikki svarið vera nøktandi, og vit hildu, at ábyrgdar- og arbeiðsbýtið var ógreitt.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at hann hevði ikki ætlanir um gera broytingar sambært verandi lóggávu, men ætlaði at nýta orkuna til nýggja lóggávu á økinum.

Landsstýrismaðurin helt í desember 2002, at tað mátti vera ein misskiljing, tá ið ein deildarleiðari á Almannastovuni hevði sagt, at sjúkrakassaviðurskiftini vóru flutt frá Almannastovuni til Trivnaðarmálaráðið. Ræðisrætturin varð fluttur frá Almannastovuni til Trivnaðarmálaráðið, men umsitingin og tað vanliga eftirlitið er hjá Almannastovuni.

Í sambandi við at verandi samgonga hevur gjørt av, at 2 landsstýrismenn skulu umsita almanna-, heilsu-, íbúða-, familju- og javnstøðumál ásannar landsstýrismaðurin, at málið er vorðið uppaftur meira fløkt. Avleiðingin er, at sambært sjúkratryggingarlógini hevur ein stovnur, sum hoyrir undir landsstýrismannin í almannamálum, eftirlit við sjúkrakassunum, meðan landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur ræðisrættin til játtanina.

Sambært landsstýrismanninum verður tí beinanvegin neyðugt at endurskoða málið og gera av, hvussu málið eigur at verða loyst. Landsstýrismaðurin harmast um, at ikki er komið longur ávegis við at gera nýggja lóggávu.

Eftirlit, grannskoðan o.a.

Sambært § 32 í sjúkratryggingarlógini hevur Almannastovan eftirlit við sjúkrakassunum, og sambært § 35, stk. 7, *"skal der med passende mellemrum ved Almannastovans foranstaltning foretages en indgående lokalrevision i enhver sygekasse, herunder undersøgelse af kassens regnskabsvæsen og øvrige virksomhed. Ved samme lejlighed skal der ydes kasserne regnskabsmæssig og anden vejledning. Den nærmere ordning af denne revision fastsættes af Almannastovan."*

Almannastovan grannskoðar regluliga sjúkrakassarnar, men arbeiðið verður ikki skjalprógvað, og eingin grannskoðanarfrágreiðing verður gjørd. Almannastovan hevur ikki sett neyvari reglur fyri grannskoðanini smb. § 35, stk. 7.

Tá ið sjúkratryggingarlógin áleggur Almannastovuni at útinna grannskoðan og seta neyvari reglur, er støðan eftir okkara tykki ikki nøktandi. Vit spurdu landsstýrismannin, hvørjar ætlanir vóru um at fáa viðurskiftini í rættlag. Í februar 2002 kunnaði Landsstýrismaðurin um, at *"byrjað varð at arbeiða við at gera nýggja lóg um sjúkrakassar í 2000. Arbeiðið steðgaði upp, men ætlanin er at taka arbeiðið upp aftur í hesum árinum og gera lógaruppskotið liðugt. Í hesum sambandi verður tikið stig til hetta framyvir."*

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at hann hevði ikki ætlanir um fremja broytingar sambært verandi lóggávu, men ætlaði at nýta orkuna til nýggja lóggávu á økinum.

Hóast landsstýrismaðurin er vitandi um, at ein eftirlitsstovnur á hansara øki ikki hevur sett neyvari reglur og ikki skjalprógvar sítt arbeiði, hevur hann ongi tiltøk sett í verk.

Játtanarslag

Stuðul til sjúkrakassar verður veittur á fíggjarlógini sum "onnur játtan". Sambært játtanarskipanini verður *"onnur játtan nýtt í serligum føri, tá játtanarendamálið er ætlað at verða rokkið við at veita stuðul, serstakliga til ítøkiligar studningsjáttanir, veita lán v.m., ella tá talan er um inntøkur, sum ikki eru natúrliga knýttar at rakstrar- og løguvirkseminum. Vanliga verður hetta játtanarslagið nýtt, tá hini játtanarsløgini ikki hóska."* Vit spurdu, um talan var um eina lógarbundna játtan, og vístu til ásetingarnar í § 27, stk. 2, í sjúkratryggingarlógini og til § 2 í K. nr. 145/1993 um, at landskassin skuldi endurrinda sjúkrakassunum ávísar útreiðslur. Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at lógin veitti møguleika fyri, at sjúkrakassarnir smb. § 12 og § 14, stk. 1, sjálvir í sínum viðtøkum ásettu ein part av útrokningargrundarlagnum, og helt tað tí vera ivasamt, um talan var um eina lógarbundna játtan.

Sambært játtanarskipanini er talan um lógarbundnar útreiðslur, tá ið móttakari sambært lóg hevur rættarkrav til ávísan stuðul ella veiting, og tá ið peningaupphæddin ella útrokningargrundarlagið er ásett í lóg ella sambært lóg.

Vit hildu nógv benda á, at talan var um eina lógarbundna játtan, og í juni 2002 heittu vit enn einaferð á landsstýrismannin um at taka spurningin til viðgerðar í samráð við landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at hann seinni í mánaðinum fór at hava fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum um málið. Vit hava ikki frætt frá hesum fundi. Í løgtingsfíggjarlógini fyri 2003 er játtanarslagið óbroytt.

Jarðarferðarhjálpin

Sambært § 20 í sjúkratryggingarlógini skal sjúkrakassin veita jarðarferðarhjálp. Hjálpin er 1. juli 1996 sett til 3.500 kr. Sambært § 20, stk. 1, *"er jarðarferðarhjálpin 3.500 kr., ið skal regulerast hvønn 1. juli, um prístalið gevur 100 kr. meira enn seinastu regulering."*

Sambært Almannastovuni er hjálpin 1. juli 2000 broytt til kr. 3.600. Vit spurdu landsstýrismannin, hvussu komið var fram til hesa upphædd. Landsstýrismaðurin svaraði í februar 2002, at í fleiri ár var einki prístal, og tí varð upphæddin ikki javnað hesi árini.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at tað tíverri ikki var rætt, tá ið hann í februar 2002 hevði sagt, at *"orsøkin til manglandi regulering skyldast vantandi prístal."* Landsstýrismaðurin vísti á, at sambært Meginfelag Sjúkrakassa Føroya varð jarðarferðarhjálpin prístalsviðgjørd í sama mun sum í hinum ríkispartinum, sambært § 22, stk. 1, í "Høvuðssamtykt fyri føroysku sjúkrakassarnar".

Vit spurdu síðani, um landsstýrismaðurin helt eina høvuðssamtykt hava gildi fram um eina løgtingslóg.

Landsstýrismaðurin greiddi í desember 2002 frá, at eftir at hava kannað málið neyvari, var hann komin til ta niðurstøðu, at prístalið, ið verður nevnt í sjúkratryggingarlógini, er tað føroyska prístalið. Landsstýrismaðurin hevur í hesum sambandi heitt á Hagstovu Føroya um at meta um, hvussu javningin skuldi havt verið í tíðarskeiðinum 1. juli 1998 til 1. juli 2002.

8.24 Viðmerkingar

Í 2002 hevur samskiftið við landsstýrismenninar í almannamálum og í heilsumálum um grannskoðanarfrágreiðingar á almanna- og heilsuøkinum ikki verið nøktandi. Dømi eru um skriv, sum hava ligið ósvarað í Trivnaðarmálaráðnum í upp til 6-7 mánaðir, hóast vit fleiri ferðir í áminningarskrivum hava kunnað landsstýrismannin um, at sambært § 20 í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." skulu øll skriv verða svarað innan 6 vikur, verður longri freist ikki sett. Vit halda eisini, at fleiri svarskriv kundu verið meira fullfíggjað og greið. At Trivnaðarmálaráðið ikki heldur svarfreistina, er sera darvandi fyri okkara arbeiði.

Síðani miðskeiðis í nítiárunum hava skiftandi landsstýrismenn í almanna- og heilsumálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at innan fyri stutta tíð fór øll almannalóggáva at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1994 varð avtalað, at Landsstýrið í seinastu lagi ultimo 1995 skuldi leggja fyri tingið uppskot til løgtingslógir á øllum almanna- og heilsuøkinum.

17. mai 1995 kom í gildi "Lov om sociale ydelser på Færøerne" og "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne". Talan er um rammulógir, sum áleggja/heimila heimastýrinum at lóggeva á almanna- og heilsuøkinum. Sambært rammulógunum verða gomlu donsku almanna- og heilsulógirnar í gildi, til nýggjar løgtingslógir loysa tær av.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1995 varð nýggj avtala gjørd. M.a. varð avtalað:

at uppskot um nýggja pensjónslóg skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi ultimo 1995,

at uppskot um nýggja forsorgar-/barnaforsorgarlóg skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi ultimo 1996,

at uppskot um nýggja dagpeningalóg skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi í 1997,

at uppskot um nýggja sjúkratryggingarlóg skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi ultimo 1996,

at uppskot um nýggja lóg fyri kommunulækna- og skúlalæknaskipanina skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi í 1997.

Sambært avtaluni *"bekræfter landsstyret, at der vil blive fremsat forslag um udfyldende lovgivning vedrørende social- og sundhedsområdet i henhold til vedlagte tidsplan. Det er landsstyrets ansvar at sikre gennemførelsen af denne lovgivning i Lagtinget til ikrafttrædelse senest ved udgangen af lagtingssamlingen 1996/97."*

Í avtaluni við donsku stjórnina í juni 1998 vórðu tíðarfreistirnar aftur broyttar.

Í frágreiðing frá Landsgrannskoðanini í desember 1997 varð m.a. víst á, at so at siga somu trupulleikar høvdu ár um ár verið umrøddir í frágreiðingunum. Hildið varð, at tað neyvan tænti nøkrum endamáli framhaldandi at gera djúptøkna grannskoðan og atfinningarsamar grannskoðanarfrágreiðingar fyrr enn munandi ábøtur vórðu gjørdar.

Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin legði fyri tingið til aðalorðaskiftis 16. apríl 1999, varð kunnað um, *"at Landsstýrið hevur sett sær fyri at gera nýggja lóggávu, sum skal loysa galdandi donsku forsorgarlógina og donsku barnaforsorgarlógina av, eins og kunngerðir til lóggávu og fyrisiting. Fyrireikingarnar til lóggávuna á almannaøkinum, sum Landsstýrið skjýtur upp fær felags heitið trivnaðarlóggávan, er farið í gongd, og verður forsorgarlógin og barnaforsorgarlógin eftir ætlan løgd fyri tingið í heyst."* Landsstýrismaðurin kunnaði í desember 1999 um, at ætlanin var at seta alt árið 2000 av til at gera nýggja forsorgar- og barnaforsorgarlóg. Í hesum sambandi vóru eisini ætlanir um at gera greiðar reglur og neyðugar kunngerðir, sum vanta á næstan øllum forsorgarøkinum, eisini viðvíkjandi endurbúgving.

Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, "at ætlanin er at gera nakrar justeringar, tí orka er ikki í løtuni til at fara í gongd við at gera nýggja forsorgarlóg." Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógini 2003 er ætlanin at nýta 500 t.kr. til nýggja forsorgarlóg.

Í sambandi við arbeiðið við "Hvítubók" á vári í 1999 segði landsstýrismaðurin í heilsumálum, *"at føroysk løgtingslóg á sjúkrakassaøkinum verður løgd fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000."* Í februar 2002 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið varð byrjað í 2000, men var steðgað upp. Ætlanin var at taka arbeiðið upp aftur í 2002 og gera lógaruppskotið liðugt.

Hvørki nýggj sjúkratryggingarlóg, forsorgar- ella barnaforsorgarlóg er løgd fyri tingið, bert smáar broytingar eru framdar í forsorgarlógini, og ongar kunngerðir eru gjørdar.

Í 2000 og 2001 komu í gildi ávikavist føroysk pensjónslóg og føroysk dagpeningalóg. Vit hava frammanfyri í frágreiðingini víst á ivamál og vantandi kunngerðir. Eisini hevur Føroya Kærustovnur, í skrivi 8. juli 2002 til Trivnaðarmálaráðið, m.a. gjørt vart við ta óhepnu støðu, sum enn ræður, við vantandi kunngerðum og vegleiðandi reglum hjá Almannastovuni at ganga eftir. Víst varð eisini á, at tá ið nýggja pensjónslógin varð sett í gildi, vórðu ongar reglur gjørdar. Sami trupulleiki var galdandi fyri dagpeningalógina. Í mongum førum vóru heldur ongar kunngerðir gjørdar fyri tær, sum vóru farnar úr gildi.

Vit hava fyrr í grannskoðanarfrágreiðingum, fyrstu ferð í 1990, víst á, at at kalla ongar reglur, so sum kunngerðir, eru fyri ta meira ítøkiligu umsitingina av almannalóggávuni, heldur ikki á økjum har landsstýrið sambært lóg hevði skyldu at gera reglur. Tað hevur m.a. fört við sær, at óvissa hevur valdað viðvíkjandi rættarstøðuni, og sostatt hevur rættartrygdin ikki verið nóg góð. Tó gjørdi Almannastovan í 1989 á fyrsta sinni vegleiðandi innanhýsis reglur á ávísum økjum, men hildið var ikki, at tær vóru nøktandi.

Vit halda, at ein stórur vandi liggur í tí, at skiftandi landsstýrismenn sleppa sær undan at gera kunngerðir og loysa trupulleikar í verandi lóggávu, við ár um ár at skjóta seg inn undir at arbeitt verður við heilt nýggjari lóggávu á økinum. Við at gera nýggjar lógir, uttan at loysa

grundleggjandi trupulleikar í verandi lóggávu, verða bert nakrir trupulleikar loystir, meðan aðrir trupulleikar verða skaptir. Pensjónslógin og dagpeningalógin eru ræðandi dømi.

Landsstýrismaðurin í almannamálum skrivaði í januar 2003: *"Undirritaði og aðrir undanfarnir landsstýrismenn hava víst á, at tað harmar okkum, at tað eru so fáar kunngerðir og leiðbeiningar gjørdar á almannaøkinum. Undirritaði ivast ikki í, at viljin til at fáa hesar reglur gjørdar hevur verið til staðar. Tað hevði munandi lætt um bæði hjá landsstýrismanninum, borgarunum, umsitingini og kærustovnum, hvørt lóggávan var nútímansgjørd, og nærri reglur vóru gjørdar á øllum økjum.*

Sum Landsgrannskoðanini ivaleyst kunnugt, so er almanna- og heilsuøkið frá 1. januar 2003 býtt sundur í tvey ráð. Vónandi fer hetta at bøta um arbeiðsbyrðuna, so betri stundir verða til hetta arbeiðið."

Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at hann vildi virka fyri, í so stóran mun sum gjørligt, at fáa bøtt um viðurskiftini.

Landsgrannskoðanin heldur lógargrundarlagið sum heild vera eitt tað størsta vandamálið í umsitingini. Á fleiri málsøkjum er lógargrundarlagið ófullfíggjað. Hóast tað í nógvum lógum er álagt landsstýrismanninum at seta neyvari reglur, verða tær ikki settar.

Gongdin seinastu nógvu árini hevur víst, at á týðandi økjum megnar landsumsitingin ikki at smíða góðar lógir og kunngerðir. Grundirnar eru nógvar. Í dag hava vit 9 aðalráð við undirliggjandi stovnum, sum hvør sær hava ábyrgdina av at gera lógir. Tað hevur óivað sínar fyrimunir, men sum vit duga at síggja, er ein vansi, at "soðið verður ov tunt". Tað tykist vera torført at manna størv við løgfrøðingum, sum hava førleika og royndir at smíða lógir. Tá ið eindirnar eru so smáar, er ofta eingin upplæring og siðvenja. Tað er kanska aftur ein atvold til starvsfólkaútskifting, og so heldur ónda ringrásin fram.

9. SJÁLVSTÝRISMÁL/LØGMÁL

9.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2001/1 04 1-8)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.", letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 793 t.kr. til rakstur á Landsfólkayvirlitinum. Meirnýtslan er 86 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fóru starvsflytingar fram millum § 2 og Landsfólkayvirlitið, uttan at lønarkarmurin varð tillagaður samsvarandi. Harafturat var ein ávís meirnýtsla til edv-útreiðslur í sambandi við fólkatingsvalið.

9.2 Sjálvstýrisfyrisitingin (GL 2001/2 02 1-1)

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar kunnaðu vit um, at vit høvdu grannskoðað roknskaparviðurskiftini á Sjálvstýrisfyrisitingini. Einki var at finnast at.

Vísandi til lønargrannskoðan okkara umrøddu vit m.a. ósemju millum Fíggjarmálaráðið og Sjálvstýrisfyrisitingina um tulking av ásetingum í lønarsáttmála, og vit mæltu til at greina, hvønn myndugleika Fíggjarmálaráðið/Lønardeildin og Gjaldstovan hava í sambandi við at umsita lønir.

Viðvíkjandi arbeiðinum hjá Grundlógarnevndini umrøddu vit ávís ivamál um nevndar-, fundar- og ferðasamsýning. Eftir okkara tykki stavaðu fleiri av ivamálunum um fundar- og ferðasamsýning frá, at fyrisitingin ikki álegði limunum at fylla út og vátta vanligu uppgerðarskjølini frá Gjaldstovuni og leggja við neyðug skjalprógv.

Í mars 2002 vísti landsstýrismaðurin m.a. á, at løgtingsval skuldi vera, og tí var tað natúrligt at endurskoða allar partar av nevndararbeiðinum og skipanini.

9.3 "Hin føroyski happadrátturin"

Í seinastu frágreiðing frá februar 2002 vístu vit á, at seinastu 10 árini hevur nettovinningurin av Happadráttinum í miðal verið um 1,4 mió.kr. og fyrisitingarútreiðslurnar 0,9 mió.kr. Sostatt hevur árliga yvirskotið í miðal ligið um 0,5 mió. kr. Seinastu árini eru færri seðlar seldir, og m.a. tí er yvirskotið minkandi og var í 2000 einans 20 t.kr. Verður gongdin tann sama, er vandi fyri, at Happadrátturin kemur at geva undirskot.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði sett ein arbeiðsbólk at endurskoða veddingarlógina og evna til uppskot um eina framtíðar veddingarskipan. Vit hava í desember 2002 spurt, hvat er hent í málinum. Í februar 2003 greiddi Løgmálaráðið frá, at arbeiðið hjá nevndini hevði ligið stilt, tí at umboð Løgmálaráðsins í nevndini var farið í annað starv. Arbeiðið at endurskoða veddingarlóggávuna fer at verða tikið uppaftur í vár.

9.4 "Ítróttarvedding" (GL 2001/2 10 1-1)

9.4.1 Veddingarpengar frá A/S Dansk Tipstjeneste

Á høvuðskontu 10.14.3.07 "Ítróttarvedding" undir lógarmálum er í 2001 ein inntøku- og ein útreiðslujáttan, sum eru eins stórar, 6.500 t.kr. Talan er um ætlaðar inntøkur av Føroya parti av yvirskotinum frá A/S Dansk Tipstjeneste. Í § 6 A, stk. 1, í lógarkunngerð nr. 287 frá 8. mai 2002 "Lovbekendtgørelse af lov om visse spil, lotterier og væddemål" er m.a. ásett, hvussu yvirskotið verður at býta. Meginparturin fer til danskar ráharrastovur at umsita, men Grønland og Føroyar fáa ávikavist 0,9 og 0,5% av yvirskotinum. Sambært § 7 í lógarkunngerðini rindar Dansk Tipstjeneste yvirskotið til Finansstyrelsen, sum síðani rindar Gjaldstovuni Føroya part av yvirskotinum.

Sambært § 6 I *"fordeles midlerne til Færøerne og Grønland af de respektive hjemmestyrer til almennyttige formål."* Í uppruna uppskotinum til løgtingslógina um "ítróttarvedding v.m." var í § 9, stk. 2, ásett, at nevndin fyri Sp/f Ítróttarvedding skuldi gera av, hvussu peningurin skuldi verða nýttur. Eftir uppskoti frá Rættarnevndini varð henda áseting tikin burtur úr lógini, vísandi til at leiðslan í ÍSF, Føroya Ungdómsráð og landsstýrismaðurin skuldu gera av, hvussu peningurin skal verða nýttur.

Í § 7 B í umrøddu lógarkunngerð 287/2002 er ásett: *"Det enkelte ressortministerium og hjemmestyrene fastsætter nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision med hensyn til midler, som efter §§ 6 B-6 I fordeles til private organisationer. Til brug for Rigsrevisionen kan ministerierne og hjemmestyrerne indhente yderligere materiale til en nøjere regnskabsgennemgang."*

Í Danmark hevur t.d. Undervisningsministeriet í kunngerðum sett reglur um roknskap og grannskoðan av stuðli m.a. til "Dansk Ungdoms Fællesråd", og eisini sett reglur um roknskap og grannskoðan av teimum ungdómsfeløgum, sum fáa stuðul frá "Dansk Ungdoms Fællesråd".

Í Ll. nr. 34/1999 um "Ítróttarvedding v.m." er ikki álagt/heimilað Landsstýrinum at seta reglur um roknskap og grannskoðan.

Sambært § 10 í Ll. nr. 34/1999 *"hava landsgrannskoðarin og ríkisgrannskoðarin eftirlit við, at tann í § 9 nevndi peningur verður brúktur almannagagnliga, og hava teir í starvi sínum neyðuga lógarheimild at fáa hendur á øllum skjølum fyri at útinna hetta eftirlit.*

Stk. 2. Um so er, at landsgrannskoðarin ella ríkisgrannskoðarin vísa á, at peningur sbr. stk. 1 ikki er nýttur til almannagagnlig endamál, hevur landsstýrismaðurin heimild til við kunngerð at áseta, at tann peningur, sum eftir § 9 skal býtast av Ítróttarsambandi Føroya og Føroya Ungdómsráð, í staðin verður útbýttur av landsstýrismanninum."

Sambært § 11 í Ll. nr. 34/1999 skal Landsstýrið flyta peningin til Sp/f Ítróttarvedding. Partapeningurin í felagnum er kr. 100.000. Ítróttarsamband Føroya (ÍSF) eigur 50%, Føroya Ungdómsráð (FUR) 30% og Føroya Landsstýri 20%. Í nevndini eru 7 limir. 4 eru valdir av ÍSF, 2 av FUR og ein av Føroya Landsstýri.

Eftir at sett er av til fyrisiting, skal felagið sambært § 9, stk. 1, í lógini býta peningin soleiðis:

- 60% til ítróttarendamál (ÍSF)
- 20% til barna- og ungdómsendamál (FUR)
- 20% til landsstýrismannin í mentamálum at stuðla ymiskum barna- og ungdómsarbeiði.

Sambært landsroknskapinum 2001 vóru inntøkurnar 6.882 t.kr. Henda upphædd varð flutt Sp/f Ítróttarvedding. Sambært roknskapinum hjá Sp/f Ítróttarvedding fyri 2001 vóru útreiðslurnar til at umsita felagið 309 t.kr, og 6.650 t.kr. vóru eftir at býta út. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu peningurin varð býttur út í 2000 og 2001 (t.kr):

	2001	**2000**
Ítróttarsamband Føroya	3.990	3.780
Føroya Ungdómsráð	1.330	1.260
Mentamálaráðið (Tiltøk fyri børn og ung)	1.330	1.260
Tilsamans	**6.650**	**6.300**

Vit hava heitt á Mentamálaráðið um at útvega okkum roknskapirnar hjá teimum, sum umsita veddingarpengarnar. Niðanfyri verður í stuttum kunnað um, hvør hevur fingið stuðul. Víst verður eisini á, í hvønn mun annar almennur stuðul er latin.

9.4.2 Ítróttarsamband Føroya

Í roknskapinum hjá ÍSF fyri 2001 eru inntøkuførdar 3.780 t.kr., sum er parturin av veddingarpengunum fyri 2000, sum ÍSF skal umsita. Av stuðlinum fær ÍSF sjálvt 340 t.kr. og rindar 3.440 t.kr. víðari sum stuðul til sersambond, deildarsambond, Oyggjaleika- og OL-nevndina. Vit hava biðið Mentamálaráðið útvega okkum viðtøkur, roknskapir og grannskoðanarfrágreiðingar hjá hesum feløgum.

Ein serstøk játtan á fíggjarlógini 2 mió.kr. ber heitið "ÍSF". Sambært roknskapinum fær ÍSF sjálvt 552 t.kr. og rindar 1.448 t.kr. víðari sum stuðul til ser- og deildarsambond. Harafturat umsitur ÍSF stuðul frá Nordisk Ministerråd, og rindaði í 2001 uml. 300 t.kr. til ser- og deildarsambond og Oyggjaleikanevndina.

9.4.3 Føroya Ungdómsráð

Sambært reglugerðini hjá FUR "um býti av stuðli frá s/pf. Ítróttarvedding til FUR og limafelagsskapirnar" tekur FUR sær av allari umsitingini. Í reglugerðini er m.a. ásett: *"Í februar á hvørjum ári sendir FUR út umsóknarbløð til allar felagsskapir og lokalfeløg, sum hava latið inn skrásetingarblað pr. 31.12. í undanfarna ári. Stuðulin verður býttur út eina ferð árliga í millum teir felagsskapir, sum hava lokið allar treytir og latið umsóknarbløð og neyðug skjøl inn til ásettu tíðarfreist. Felagsskapir, sum ikki hava lokið allar treytir, kunnu søkja aftur árið eftir.*

Saman við umsóknini skulu felagsskapirnir lata inn ársfrágreiðing, grannskoðaðan roknskap, limalista pr. 31.12. í undanfarna ári yvir allar limir undir 30 ár, fíggjarætlan, virkisætlan og/ella skrá og fíggjarætlan fyri verandi ár. Í staðin fyri limalista, kunnu felagsskapir lata inn váttan frá skrásettum grannskoðara um limatal."

<u>Stuðulstreytir</u>

Sambært reglugerðini skulu felagsskapirnir lúka hesar treytir:

1. Hava limaskap í FUR.
2. Barna- og ungdómsfelagsskapurin skal verða landsumfatandi og hava heimstað í Føroyum. Hava í minsta lagi 50 gjaldandi limir undir 30 ár í trimum valdømum. Limagjaldið fyri einstaka limin skal vera í minsta lagi kr. 100 árliga. Galdandi er limatal pr. 31.12. í undanfarna ári. Limagjaldsrokningar skulu verða sendar limunum í undanfarna ári.
3. Felagsskapirnir skulu hava eina fólkaræðisliga reglugerð, har tey ungu hava ávirkan á sína leiðslu.
4. Felagsskapirnir skulu møta regluliga til fundir, tiltøk og landsfund hjá FUR.
5. Lokalfeløg skulu hava limaskap í einum av limafelagsskapum FURs og hava í minsta lagi 10 limir undir 30 ár. Eisini skal lokalfelagið hava egna nevnd og egið virksemi.
6. Næmingafeløg verða ikki at roknað sum lokalfeløg og fáa ein fastan árligan stuðul á kr. 2.000.
7. Stuðul kann ikki verða veittur til ítróttarlig endamál.

<u>Býti av stuðlinum:</u>

Sambært reglugerðini verður stuðulin býttur soleiðis:

<u>FUR:</u>

Umsiting av FUR: 300 t.kr.

Stuðulsgrunnur FURs 10%

<u>Landsfelagsskapir:</u>

Grundstuðul 15%

Stuðul til lokalfeløg 10%

Limastuðul 25%

Lokalfeløg:

Grundstuðul 15%

Limastuðul 25%

Sambært roknskapi fyri veddingarpengar til FUR varð peningurin býttur soleiðis í 2000 og 2001 (t.kr.):

	2001			2000		
Veddingarpengar			1.320			1.520
Kultur/ungdom						97
Sydbank			-			46
Inntøkur tilsamans			*1.320*			*1.663*
Býtt út til feløg o.a.:						
▪ Føroya Ungdómsráð		573			340	
▪ Landsfelagsskapir	356			443		
▪ Lokalfeløg	262	618		305	748	
▪ Næmingafeløg		-			12	
▪ Rentuinntøka		-2			-1	
▪ Kultur/ungdom		-			97	
▪ Flutt stuðul		-			46	
▪ Stuðulsgrunnar		-			170	
Býtt út tilsamans			*1.189*			*1.412*
Avlop			131			251

Sambært roknskapinum er avlopið sett á bankabók. Tilsamans stóðu 388 t.kr. á bók 31. desember 2001, svarandi til avlopini í 2000 og 2001.

Føroya Ungdómsráð

Sum víst á frammanfyri fekk FUR sjálvt 573 t.kr. av veddingarpeningunum í 2001. (Samsvar er ikki við roknskapin hjá FUR, har bert 560 t.kr. er inntøka frá veddingarpeninginum).

Umframt veddingarpengarnar fekk FUR í 2001 150 t.kr. av undirkontu 7.24.1.13.03. "Ungmannafelag og skótarørsla", og 15 t.kr. av játtanini "Tiltøk fyri børn og ung", sum er tann parturin av veddingarpengunum, ið Mentamálaráðið fær í sín lut at býta út.

Samlaðu inntøkurnar hjá FUR vóru í 2001 uml. 780 t.kr. Samlaðu útreiðslurnar í 2001 vóru góðar 800 t.kr., harav lønarútreiðslur 340 t.kr. og umsitingarútreiðslur uml. 300 t.kr.

Stuðulsgrunnur FURs

Ein eyka stuðulsmøguleiki er stuðul úr stuðulsgrunninum hjá FUR, ið sambært reglugerðini hevur upp til kr. 80.000 at ráða yvir árliga. Sambært reglugerðini kann stuðul verða latin limafelagsskapum og lokalfeløgum til serliga góðar verkætlanir fyri børn og ung, ella til samfelagsgagnligar verkætlanir, har børn og ung eru virkin. Stuðul verður bert latin eina ferð fyri sama tiltak.

Í roknskapinum hjá FUR duga vit ikki at síggja roknskap fyri stuðulsgrunnin. Sambært heimasíðuni hjá FUR er stuðul í 2000 latin:

- 5 t.kr.: KFUM & KFUK: TenSing, Sound of Glory,
- 3 t.kr.: KFUM & KFUK: TenSing, Sound of Glory, gospel-kórvenjing,
- 15 t.kr.: Føroya Skótaráð: Knútatalva til børn kring landið í 2. skúlaflokki.

Í 2001 er stuðul latin:

- 10 t.kr.: Landsfelag Føroyinga í Útbúgving: Skeið fyri næmingafeløgini,
- 15 t.kr.: Føroya Skótaráð: Útgáva av knútatalvu til børn í 2. skúlaflokki.

Landsfelagsskapir og lokalfeløg

Av veddingarpengunum, ið FUR býtti út, eru í 2001 tilsamans goldnar 618 t.kr. til landsfelagsskapir og lokalfeløg; í 2000 tilsamans 748 t.kr. Í roknskapinum er greinað, hvør hevur fingið peningin, og niðanfyri hava vit bólkað stuðulsmóttakararnar:

	2001	**2000**
Skótafeløg, KFUM og KFUK	378	463
Blákrossungdómur/avhaldsfeløg	63	88
Unga Tjóðveldi	70	79
Sosialistiskt Ungmannafelag	26	56
Landsfelag Føroyinga í Útbúgving	24	21
CISV – Altjóða Barnalegur	21	23
Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum	15	18
Sølubyngjan hjá KFUM	19	-
Onnur	2	-
Tilsamans	**618**	**748**

Á heimasíðuni hjá FUR er eisini greinað, hvørji feløg hava fingið stuðul. Sambært heimasíðuni hevur Fólkafloksungdómur í 2001 fingið 13 t.kr. og Næmingaráðið á Tekniska skúla í Tórshavn 2 t.kr. Vit duga ikki at síggja hesar upphæddir í roknskapinum.

Skótafeløg

Sum víst á frammanfyri hava skótafeløg í 2001 fingið 378 t.kr. í stuðli av veddingarpengunum umvegis FUR. Harafturat hava skótafeløg fingið í stuðli:

- 200 t.kr. á figgjarlógini av undirkontu 7.24.1.13.03. "Ungmannafelag og skótarørsla",
- 202 t.kr. úr Jólamerkjagrunninum.

Onnur feløg

Sum víst á frammanfyri hava hesi feløg í 2001 fingið samanlagt 123 t.kr. í stuðli av veddingarpengunum umvegis FUR:

- Blákrossungdómur/avhaldsfeløg 63 t.kr.
- Landsfelag Føroyinga í Útbúgving 24 t.kr.
- CISV – Altjóða barnalegur 21 t.kr.
- Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum 15 t.kr.

Harafturat fáa feløgini stuðul frá ymiskum játtanum á løgtingsfiggjarlógini og úr Jólamerkjagrunninum:

- Blái Krossur Føroya: 300 t.kr. av játtanini 8.20.1.07. "Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu", 20 t.kr. úr Jólamerkjagrunninum,
- Blái Krossur Føroya: 200 t.kr. til Blái Krossur Café av játtanini 8.21.1.22. "Stuðul til feløg",
- Fráhaldsfeløg: 296 t.kr. av játtanini 8.20.1.07. "Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu".
- Landsfelag Føroyinga í Útbúgving: 250 t.kr. av játtanini 7.24.1.13.03 "Ungmannafelag og skótarørsla",

- CISV – Altjóða barnalegur: 20 t.kr. av játtanini 7.24.1.13.03 "Ungmannafelag og skótarørsla", 20 t.kr. úr Jólamerkjagrunninum,
- Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum: 900 t.kr. av játtanini 8.21.5.01. "Stuðul til feløg hjá brekaðum".

9.4.4 Mentamálaráðið (Tiltøk fyri børn og ung)

Á høvuðskontu á fíggjarlógini 7.24.1.05 "Tiltøk fyri børn og ung" er í 2001 ein inntøku- og ein útreiðslujáttan, sum eru eins stórar, 900 t.kr. Talan er um væntaða partin av veddingarpengunum, sum verður tillutaður Mentamálaráðnum umvegis Sp/f Ítróttarvedding. Sambært landsroknskapinum vóru veddingarpengarnir í 2001 1.380 t.kr. Peningurin verður eftir umsókn játtaður til verkætlanir og tiltøk fyri børn og ung. Játtanin verður umsitin sambært "Leiðreglum fyri at veita stuðul av veddingarpengunum til barna- og ungdómsarbeiði". Í leiðreglunum er neyvari ásett um endamál og um tiltøk, ið kunnu fáa stuðul, um umsóknarbløð, umsóknarfreistir, treytir o.a.m.

Sambært leiðreglunum eigur frágreiðing við grannskoðaðum roknskapi at verða latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at verkætlanin ella tiltakið er lokið.

Sambært leiðreglunum *er "endamálið við játtanini at stuðla verkætlanum og tiltøkum, sum hava til endamáls at geva børnum og ungum møguleika at taka lut í virksemi, ið kann*

1. *stimbra, menna og styrkja tey til likams og sálar,*
2. *stimbra og menna teirra skapandi og virkandi evni og bøta um teirra møguleikar í hesum sambandi,*
3. *stimbra og menna teirra samleika sum føroyingar, norðbúgvar og heimsborgarar,*
4. *menna førleikar hjá teimum at liva og virka í einum fólkaræðiligum samfelag, og at*
5. *menna tolsemi og virðing hjá teimum fyri medmenniskjum og mannarættindum úti sum heima."*

Í leiðreglunum eru dømi um verkætlanir, og eftir hesum at døma er ilt at fáa eyga á verkætlanir og tiltøk, ið ikki kunnu fáa stuðul:

at stuðla ítrótt, sum frammanundan ikki fær stuðul á fíggjarlógini, at menna førleikar hjá børnum og ungum at liva og virka í einum fólkaræðiligum samfelag, at stimbra teirra tolsemi og virðing fyri medmenniskjum, at stimbra listarlig, skapandi, mennandi og útinnandi evni, sang, tónlist, sjónleik, skaldskap og bókmentir, filmslist, videolist o.a. Landsstýrismaðurin kann, tá umstøðurnar tala fyri tí, víkja frá ásetingunum í reglugerðini.

Vit hava kannað útgjaldingar í 2001, og hava heft okkum við, at stuðul verður latin feløgum/felagsskapum, ið eisini hava fingið stuðul av veddingarpengunum umvegis FUR ella ÍSF, til dømis:

- Oyggjaleikanevndin 110 t.kr.
- ÍSB 51 t.kr.
- CISV 20 t.kr.
- KFUM & KFUK 20 t.kr.
- FUR 15 t.kr.
- Blái Krossur Føroya 12 t.kr.

Oyggjaleikanevndin hevur eisini fingið 47 t.kr. frá Nordisk Ministerråd umvegis ÍSF.

Nógv onnur feløg/persónar fáa stuðul frá fleiri játtanum. Til dømis hevur eitt meginfelag fingið stuðul frá:

- játtanini "Stuðul til onnur endamál"
- játtanini "Tiltøk fyri børn og ung"

- játtanini "Tónleikur og sangur"
- Mentanargrunni Landsins
- Jólamerkjagrunninum

Sum dømi hevur ein verkætlan við tilknýti til eitt lokalfelag fingið stuðul frá:

- játtanini "Tiltøk fyri børn og ung" frá Mentamálaráðnum,
- meginfelagnum, ið fær stuðul frá aðrari játtan undir Mentamálaráðnum,
- Mentanargrunninum,
- tryggingarfelag.

Verkætlanin fekk so nógvan stuðul, at tað leyp av. Ætlanin var at nýta "yvirskotið" til eina nýggja verkætlan.

9.4.5 ÍSB

Inntøkurnar hjá ÍSB í 2001 eru 784 t.kr., sum kunnu verða greinaðar soleiðis (t.kr.):

- 150 av játtanini á fíggjarlógini til ÍSB*),
- 125 av veddingarpengunum umvegis ÍSF,
- 107 í landskassastuðli umvegis ÍSF,
- 51 av veddingarpengunum umvegis "Tiltøk fyri børn og ung",
- 24 frá Nordisk Ministerråd umvegis ÍSF,

- 119 frá stuðulsfelag ÍSB og MBF,
- 106 aðrar inntøkur, lutaseðlar o.a.,
- 58 frá Føroya Lívstrygging,
- 40 frá Tórshavnar Býráð,
- 4 frá Føroya Sparikassa.

*)Játtanin t.kr. 150 á fíggjarlógini ber heitið "ÍSB". Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur, at játtanin er stuðul til ein ítróttarráðgeva. Av roknskapinum sæst, at lønarútreiðslurnar til ítróttarráðgeva í 2001 eru 242 t.kr.

Útreiðslurnar hjá ÍSB í 2001 eru 745 t.kr., sum kunnu verða greinaðar soleiðis (t.kr.):

- 315 lønir,
- 238 luttøkugjøld, ferðir og uppihald,
- 144 venjingarlegur, búnar, ítróttarútgerð, skrivstovuhald, umsiting o.a.,
- 48 limagjøld.

9.4.6 Fótbóltssamband Føroya

Fótbóltssamband Føroya hevur í 2001 fingið 900 t.kr. í stuðli av játtanini 7.24.6.04 "Fótbóltssamband". Harafturat hevur Fótbóltssambandið fingið 93 t.kr. frá ÍSF og 600 t.kr. av veddingarpengunum umvegis ÍSF.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2001 stendur, at Fótbóltssambandið er savnandi felagsskapur fyri fótbóltin, skipar fyri kappingum o.t., stuðlar og mennir fótbóltin og umboðar Føroyar í altjóða høpi.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2001 stendur eisini, at av játtaða stuðlinum eru 300 t.kr. ætlaðar til bóltvenjarastuðul. Mentamálaráðið hevur onga váttan um, at 300 t.kr. eru brúktar til ásetta endamálið.

Av roknskapinum sæst, at Fótbóltssambandið hevur veitt Grunninum Tórsvølli lán 5 mió.kr. Grunnurin Tórsvøll hevur í 2001 fingið 2 mió.kr. í stuðli av játtanin 7.24.6.11. "Graslíkisvøllir og grasvøllir".

9.4.7 Viðmerkingar

Finansstyrelsen flytir veddingarpeningin til Løgmálaráðið/Gjaldstovuna, sum sendir peningin víðari til Sp/f Ítróttarvedding. Sp/f Ítróttarvedding flytir síðani peningin, frádrigið umsitingarútreiðslur, til:

1. Mentamálaráðið, ið játtar stuðul til feløg og einstaklingar,
2. ÍSF, ið býtir partar av peninginum út til undirliggjandi feløg,
3. FUR, ið býtir partar av peninginum út til undirliggjandi feløg.

Vit ivast í, um nøkur meining er í, at stuðulin fer um eitt partafelag, og m.a. verður nýttur til at fíggja umsitingina av partafelagnum.

Eftir okkara tykki er tað ikki skilagott, at 2 landsstýrismenn/aðalráð hava ábyrgd av veddingarpengunum. Tá ið Mentamálaráðið sjálvt umsitur ein part av pengunum, og hinir partarnir fara til endamál, sum hoyra undir Mentamálaráðið, hevði tað verið greiðari, um Mentamálaráðið hevði alla ábyrgdina.

Sum víst á omanfyri, er í § 7 B í donsku veddingarlógini ásett, at *"Det enkelte ressortministerium og hjemmestyrene fastsætter nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision med hensyn til midler, som efter §§ 6 B-6 I fordeles til private organisationer."* Í Danmark hevur t.d. Undervisningsministeriet í Bek.nr. 15/1999 "om regnskabsaflæggelse for og revision af tilskud til støtte af ungdomsformål" sett krøv um m.a. fyrisitingargrannskoðan (forvaltningsrevision). Fyrisitingargrannskoðan er tann "fíggjarligi kritiski" parturin av grannskoðanini, og fevnir um metingar av, um ein stovnur/felag hevur loyst sínar uppgávur á ein sparnan og virknan hátt, og um úrslitini svara til endamálið og fyritreytirnar fyri játtanini.

Okkum kunnugt hevur føroyska heimastýrið ikki ásett *"nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision,"* hóast tað er ásett í frammanfyrinevndu ríkislóg. Løgtingið setti ongar tílíkar reglur í Ll. nr. 34/1999 um "Ítróttarvedding v.m.", og heldur ikki er heimilað/álagt landsstýrismanninum at áseta tílíkar reglur. Eftir okkara tykki er hetta ikki nøktandi. Tað áliggur vanliga landsstýrismanni í rímiligan mun at føra eftirlit og seta reglur. Ein landsstýrismaður hevur mótvegis Løgtinginum ábyrgdina av, at ein játtan á fíggjarlógini, eisini tær sum meginfeløg o.o. umsita, verður umsitin rætt, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt.

Sum neyvari lýst í frágreiðing okkara undir Løgmansfyrisitingini "Alment um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting", hevur løgmaður heitt á Fíggjarmálaráðið um at seta ein arbeiðsbólk við starvsfólki úr miðfyrisitingini at bøta um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting. Vit hava mælt til, at arbeiðsbólkurin eisini fær litið upp í hendi at viðgera trupulleikarnar viðvíkjandi lóggávu og umsiting av veddingarpeninginum.

Løgmálaráðið hevur í februar 2003 víst á, at arbeiðsbólkurin, ið settur er at endurskoða veddingarlógina, skal gera eitt uppskot til eina føroyska landsveddingarskipan. Tað merkir sostatt, at støða eisini skal verða tikin til málið um Ítróttarvedding.

9.5 "Politiskt virksemi og upplýsing" (GL 2001/2 02 1-1)

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 varð grannskoðanin av játtanini til "Politisk virksemi og upplýsing" umrødd undir "útbúgving og gransking o.a."

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001), sum Løgtingið samtykti 12. mars 2002, varð víst á, at tørvur var á at bøta um lógina, so greiðari reglur og heimildir vórðu ásettar í lógini.

14. januar 2003 legði landsstýrismaðurin í lógarmálum uppskot fyri tingið um nýggja løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing, har skotið verður upp at herða eftirlitsreglurnar.

9.6 Eftirkannan av lógaruppskotum og kunngerðum (GL 1998/2 02 9-2)

Í frágreiðingini í februar 2002 vístu vit á, at ein av arbeiðsuppgávunum hjá Løgmansskrivstovuni/løgdeildini er: "Eftirkanning av uppskotum til lógir og kunngerðir". Í rundskrivi 24. januar 2000 um "Mannagongd um lógaruppskot o.a., sum verða at leggja fyri Løgtingið", er m.a. ásett, at Løgmansskrivstovan/løgdeildin skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar at "viðgera" øll lógaruppskot. Síðani verða lógaruppskotini latin løgmanni, við átekning um, at løgdeildin hevur viðgjørt tey.

Í rundskrivi 29. februar 2000 "um lógarsmíð", verða krøv sett til lógaruppskot, m.a. við støði í ásetingunum í § 37 í tingskipanini. Vit spurdu m.a., hvat tað merkir, at eitt lógaruppskot er áteknað "viðgjørt", og vit bóðu eisini um avrit av møguligum innanhýsis reglum og mannagongdum.

Løgmaður kunnaði í desember 2001 um, at ongar innanhýsis mannagongdir og reglur um sjálvt innihaldið í eftirkanningini vóru tøkar; men arbeitt varð við at fáa hóskandi reglur og vegleiðingar o.a. til vega.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) vísti Løgtingið 12. mars 2002 á, at tað hevði stóran týdning, at arbeiðið viðvíkjandi eftirkannan av lógaruppskotum og kunngerðum varð væl skipað. Løgtingið mælti somuleiðis til, at tað tilfar, sum verður lagt fyri tingið, verður málsliga betur greitt úr hondum.

Løgmaður hevur í august 2002 boðað frá, at nýggj mannagongd er gjørd, og er hon sett í verk á Ólavsøku 2002. Talan er um rundskriv nr. 2 frá 6. mars 2002, "um lógaruppskot o.a. at leggja fyri Løgtingið". Í nýggju reglunum er ikki ásett, at eftirkannað uppskot skulu vera áteknað "viðgjørt", men løgdeildin/Løgmálaráðið skal lata lógaruppskotini aftur til aðalráðini við viðmerkingunum til rættingar.

Í rundskrivinum stendur eisini, at avvarðandi aðalráð evna lógaruppskotini til, rættlesa tey og seta tey upp. Harafturat er tað avvarðandi aðalráð, ið letur Løgtinginum uppskotini og fær beinleiðis afturmeldingar frá Løgtingsskrivstovuni.

Áðrenn nýggju mannagongdirnar vórðu settar í gildi, stílaði Løgmansskrivstovan fyri evnisdegi fyri øllum starvsfólkum í miðfyrisitingini, ið á ein hvønn hátt hava at gera við lógaruppskot. Endamálið við evnisdegnum var m.a. at skapa eina felags fatan av nýggju reglunum og av týdninginum av, at lógararbeiðið bæði í innihaldi, málsligum sniði og viðgerðartilgongd annars eru á einum høgum og einsháttaðum dygdarstøði.

Í § 3, stk. 2, í K. nr. 114/1996 "um roknskaparverk landsins o.a.", er ásett, at lógaruppskot, kunngerðir og rundskriv, sum viðvíkja landsins roknskaparverki, skulu verða løgd fyri Fíggjar- og búskapardeildina/Føroya Gjaldstovu at góðkenna. Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan hevur víst á, at aðalráð hava ikki virt hesa áseting, og sambært Gjaldstovuni kann tað føra til óskil á roknskaparøkinum og vera við til at bróta niður tað, sum bygt er upp.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at í rundskrivinum um "Mannagongd um lógaruppskot o.a.", og í rundskrivi 29. februar 2000 "um lógarsmíð", eru ásetingar og krøv til lógaruppskot, m.a. við støði í ásetingunum í § 37 í tingskipanini. Einki varð tó nevnt um § 3, stk. 2, í roknskaparkunngerðini.

Í rundskrivi nr. 2 frá 6. mars 2002, "um lógaruppskot o.a. at leggja fyri Løgtingið" er nú ásett, at lógaruppskot, sum viðvíkja landsins roknskaparverki, eisini skulu verða løgd fyri Føroya Gjaldstovu at góðkenna.

9.7 Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum (GL 2001/1 02 – 2)

1. januar 2002 kom í gildi Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum". Kapittul 8 í lógini snýr seg um trygdarskipanir. Sambært § 31, stk. 7, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um trygdartiltøkini, nevnd í stk. 3 og 5. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið kunnaði landsstýrismaðurin Løgtingið um, at: *"Ásett verða nøkur generell krøv til trygdarskipanir. Ætlanin er, at hesi krøv verða tilskilað í einari kunngerð, sum landsstýrismaðurin ásetir sbrt. stk. 7. Trygdartiltøkini skulu tryggja eitt nóg gott trygdarstøði, har umhugsni verður tikið til vandan, viðgerðin hevur við sær, og slagið av upplýsingum, sum verða viðgjørdar, í mun til kostnaðin og tað tøkniliga støði, ið er kravt. Dátuábyrgdarin hevur skyldu til at viðlíkahalda trygdartiltøkini."*

Sambært § 47 í Ll. 73/2001 fekk lógin gildi frá 1. januar 2002. Sambært § 48 skuldu skráir sambært lógini um evnisskráir hjá almennum myndugleikum og lógini um privatar skráir v.m. í seinasta lagi 6 mánaðir eftir gildiskomu lógarinnar lúka treytirnar í hesi lóg.

Í juli 2002 spurdu vit, nær fráboðaða kunngerðin frá landsstýrismanninum fer at verða lýst, og um landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur havt samskifti við landsstýrismannin í vinnumálum um trygdartiltøkini, sum ætlanin er at áseta í kunngerðini.

Í august 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at í juni 2002 varð uppskot til kunngerðina sent Dátueftirlitinum til viðmerkingar, og uppskotið var latið Vinnumálaráðnum til viðmerkingar. Kunngerðin var gjørd við grundarlagi í altjóða góðkendum standardum innan góðskustýring, og kunngerðin byggir á grundreglurnar í enska standardinum BS-7799, "A code of practice for information security management". Hetta er standardur, sum onnur lond eisini nýta. Óformelt samskifti hevði verið við onkrar av limunum í KT-forum, og teir høvdu eisini fingið uppskotið til viðmerkingar.

Dátueftirlitið hevði gjørt vart við, at av trygdarávum fóru eingi loyvi at verða givin, fyrr enn kunngerðin var lýst. Tí helt landsstýrismaðurin, at málið hevði skund, og at ikki kundi verða bíðað eftir arbeiðinum í KT-forum. Landsstýrismaðurin var av teirri fatan, at Vinnumálaráðið skuldi gera almennar reglur fyri málsøkið KT-trygd, og lógardeildin skuldi gera serligar reglur fyri viðgerð av persónsupplýsingum, við serligum atliti at trygdini hjá tí skrásetta, sbrt. aðalmálinum í persónsupplýsingarlógini. Sambært landsstýrismanninum varð bíðað eftir viðmerkingum frá Vinnumálaráðnum, áðrenn síðsta hond varð løgd á arbeiðið við kunngerðini, sum væntandi fór at verða lýst um mánaðarskiftið august/september 2002.

Í februar 2003 boðaði Løgmálaráðið frá, at uppskot til trygdarkunngerð er gjørt, og at kunngerðin væntandi fer at verða lýst seinni í mánaðinum.